

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2

LØGTINGS-TIDINDI

1954

Løgtingstíðindi

1954—55

TÓRSHAVN 1955

LANDSPRENTSMIÐJAN

INNIHALD

EYKATINGIÐ APRÍL—MAI 1954

bls.

Tingsetingin ... ...

LANDBÚNAÐARMÁL

Løgtingslóg um fuglaveiðu v. m. 58

LÁNSÁBYRGDIR OG LANDSKASSALÁN

Løgtingslóg um ábyrgd fyri láni til umbygg. av trolara til farmaskip 128

SAMFERÐSLUMÁL

Heimsáttmáli um ferðslu 103

SJÓVINNUMÁL

Broyting í vrakingarlógini 29
Broyting í sjólógini 29
Lóg um veð í veiðu 35
Manning av skipum 36
Broyting í reglunum um sjómarkið undir Føroyum 70

VINNUMÁL

Broyting í aftanlatingarlógini 27
Løgtingslóg um vinnu v. m. 100
Frammíhjárættindi fyri føroyskum koli 100
Løgtingslóg um lærlingaviðurskifti 106

VETRARTINGIÐ 1954/55

Tingmenninir 131
Tingsetingin 131
Tingnevndir 133
Gransking av valbrøvum 135

ALMANNAMÁL

Býti av Føroya parti av studningi til aldursheim 136
Hækking í skaðabótum vanlukkutrygginginnar 235
Broyting í rúsdrekkalógini 279

LANDSFYRISITINGIN

Val av løgmanni og landsstýrismonnum 150
Landsstýrismál 219
Normeringsløgtingslóg 276

FÍGGJARMÁL

Fíggjarløgtingslóg 1955/56 135
Decisión av landskassans roknskapum 167
Álíkning á kommununum 1955 227
Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 1955/56 230
Studningur til endurnýggjan av skipaflotanum 238
Avtøka av Fátækragrunni løgtingsins 261
Skattur til landskassan 263
Bensingjald 270
Kanning av lóggávuni um innflutningsgjøld 272
Studningur til heimaútróður 274

HEILSUMÁL

Broyting í læknaskipanini í Norðoynm 159
Kgl. fyriskipan um sóttverju v. m. 181

KIRKJUMÁL

Kirkja í Dali 244

KOMMUNAL MÁL ... ...

Broyting í hundaskattinum 212

LANDBÚNAÐARMÁL

Keyp av royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi 195

LÁN OG LÁNSÁBYRGDIR

Lán til s.s »Oyrnafjall« 148
Bátalán 198
Nýtsla av landsskattaeftirstøðu til keyp av farmaskipi 209
Rakstrarlán til Føroya búnaðarfelag 224
Lántøka til trolarakeyp 227
Ríkislán til endurnýgging av skipaflotanum 232
Lán til Arbejdernes Trawlerdrift 248
Lán frá Kredit foreningen af Kommuner i Danmark 258
Lán til uppbygging av vinnulívinum 264

SAMFERÐSLUMÁL

Vegir og lendingar 199

SJÓVINNUMÁL V. M.

Broyting í vrakingarlógini 138
Lønarviðbót fiskimanna 150
Uppsøgn av 1901 sáttmálanum um sjómarkið 151

Viðbót til minstuløn ella viðbót til fiskapris 169
Broyting í stýri lønjavningargrunsins 217
Sunnudagshvíld í føroyskum skipum 245
Toskaroynd í Eysturdýpinum 252
Nevnd til viðgerðar av málinum um fiskimarkið 259

SKÚLAMÁL V. M.

Flaggdagurin sum skúlafrídagur 278
Dr. phil. Jakob Jakobsens legat 226

VAL V. M.

Fólkatingsvallóg fyri Føroyar 213
Val av álitismonnum og nevndum 254

VINNUMÁL V. M.

Løgtingslóg um vinnu v. m. 146
Landshandil 215
Einarættur til innfluttning av cplnm 246
Afturlatingartíðir fyri krambúðir 268

Fastar nevndir og aðrar.

Sí bls. 22.

Fíggjarnevndin: M. Holm, P. Petersen, A. Sørensen, A. Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, J. P. Davidsen og J Kalsoy.

Tiltaksmenn: Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, S. Danielsen, Tr. Samuelsen, P. M. Dam og J. F. Øregaard.

Umsóknanevndin: P. Petersen, O. F. Joensen og J. F. Øregaard.

Landsstýrismálanevndin: M. Holm, H. Iversen og E. Waag.

Sjómarksmálanevndin: Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, D. P. Danielsen, P. M. Dam, Tr. Samuelsen, Jens Chr. Olsen og J. Kallsoy.

Lógarnevndin: M. Holm, P. Petersen, J. P. Henriksen, E. Waag og Tr. Samuelsen.

Siglingarnevndin: R. Long, P. Petersen, S. P. Zachariasen, J. F. Øregaard og Jens Chr. Olsen.

Fiskivinnunevndin: Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, P. M. Dam, J. F. Øregaard og Jens Chr. Olsen.

Bátnaðarnevndin: A. Sørensen, P. Petersen, J. P. Davidsen, J. F. Øregaard og Søren Danielsen.

Ólavsøkutingið var saman í 40 dagar og hevði 31 fundir og endaði 10. september 1954.

Eykatingsetan apríl-mai 1954.

Ár 1954, 30. apríl var løgtingið sett.

Varatingformaður J. F. Øregaard legði fram kunngerð løgmanns d. 28. s. m. har hann eftir § 7 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan í sermálum hevur boðsent tingmonum til eykatingsetu til viðgerðar av tingmáli:

Uppískoyti til løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna við seinni broytingum.

Tingmenninir vóru teir somu sum í vetrartinginum 1953/54.

Loyvi at víkja frá tíðarfreistunum eftir tingskipanini var givið við 17—0.

1. Viðbót til minstuløn fiskimanna.

Ár 1954, 30. apríl legði løgmaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum og skjølum:

Uppskot til

løgtingslóg um uppiskoyti til løgtingslóg nr. 18 frá 29. marts 1952 um broyting í løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna sum broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 7. marts 1952 og løgtingslóg nr. 5 frá 19. marts 1954.

§ 1.

At gera lønjavningargrunnin føran í 1954 at veita eina viðbót til minstulønir eftir galdandi reglum, soleiðis at samlaða minstalønin kemur upp í kr. .....kr. um mánaðin hjá monnum undir ...ár og kr. .....um mánaðin hjá monnum, sum mynstringardagin hava fylt ... ár, verður ein eykaskattur útskrivaður til grunnin fyri fíggjarárið 1954/55 uppá ... % av øllum inntøkum, sum í fíggjarárinum koma undir landsskatt.

Hesin eykaskattur kemur undir somu reglur sum landsskattur og fellir til gjaldingar við helmingi 1. oktober og helmingi 1. december 1954.

Skatturin, ið verður kravdur inn um Føroya gjaldstovu fyri seg avmarkar landskassans ábyrgd fyri hesi viðbót.

lagtingslov om tillæg til lagtingslov nr. 18 af 29. marts 1952 om ændringer i lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 om fiskernes afregning og lønreguleringsfond som ændret ved lagtingslov nr. 11 af 7. marts 1952 og lagtingslov nr. 5 af 19. marts 1954.

§ 1.

For at sætte lønreguleringsfonden i stand til for året 1954 at yde et tillæg til mindsteindtægten i henhold il gældende bestemmelser således, at den samlede mindsteindtægt andrager indtil kr. ..... om måneden for mænd under ... år og kr. .....om måneden for mænd, der på udmønstringsdagen er fyldt...år, udskrives en overordentlig skat til fonden for finansåret 1954/55 på ...% af alle indtægter, som i finansåret er pligtige at svare skat til landskassen.

Denne overordentlige skat er undergivet reglerne for landsskat og forfalder til betaling med halvdelen 1. oktober og halvdelen 1. december 1954.

Skatten der opkræves særskilt af Færøernes oppebørselskontor begræn-

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og fær gildi fyri alt árið 1954.

ser landskassens garanti for nævnte tillæg.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks og får gyldighed for hele året 1954.

Viðmerkingar:

Á fundi í landsstýrinum 22. apríl 1954 var ynski fiskimannafelagsins at fáa tingið saman til at royna at finna burturúr hesum (at loysa flotan úr havn) so skjótt sum yvirhövur til ber.

Svarskriv landsstýrisins frá sama degi er soljóðandi:

»Eftir áheitan frá formanni Föroya Fiskimannafelags hava hesir av nevnd felagsins: Erlendur Patursson, G. Hentze, Skopun, A. Vesturskarð, Kaldbak, Frederik Hansen, Söldarfirði og Andreas Jensen, Sörvági, verið til fundar í landsstýrinum í dag kl. 14, har nevndin gav frágreiðing frá stöðuni og bar fram m. a. ynski um at fáa tingið saman at finna ein veg burtur úr verandi fiskivinnusteðgi.

So statt skal landsstýrið úttala:

Eftirsum tað av fiskimannafelögunum 2. marts 1954 lýsta verkfall er ein rættarkonflikt, sum hevur fingið viðgerð í Föroya rætti og skotin burtur haðani og síðani av útgerðarmannafelögunum skotin inn til viðgerðar hjá fasta valdgerðarrættinum í Köbenhavn, sum 17. í hesum hevur sagt upp úrskurð, at verandi fiskivinnusteðgur er ólógligur, og at Föroya fiskimannafelag skal loyva símum limum at fara til skips beinanvegin, heldur landsstýrið hvörki seg ella tingið hava nakra heimild at taka dagar partanna millum og kann heldur ikki geva seg til at miðla partanna millum, so leingi verandi ólógligu viðurskifti valda.

Men beinanvegin sum verandi ólógligu viðurskiftu eru av, sigur landsstýrið seg tilreiðar at fáa partarnar saman til viðgerðar av lönarviðurskiftum fiskimanna í tráð við ta avtalu, sum liggur undir verandi sáttmálum, og um at royna at sleppa fiskimonnum undan möguligari endurgjaldsskyldu eftir gerðadómi.

Landsstýrið ynskir at skila til, tá talan er um nýjáttanir úr landskassanum, at landsstýrið er bundið av galdandi fíggjarlóg, og so sum longu sagt monnunum á fundinum, sær landsstýrið seg ikki í löturi fört fyri at gera uppskot til inntökulógir, sum kunnu veita stórar nýjáttanir úr landskassanum.«

23. apríl sendir Föroya fiskimannafelag út soljóðandi lýsing:

»Til Föroya lögtingsmenn!

Í brævi í dag hevur Föroya landsstýri borið seg undan at fremja ynski Föroya fiskimannafelag um at kalla tingið saman til at kanna möguleikarnar fyri at loysa verkfallið á fiskiflotanum.

Eftir lögtingslög nr. 1 frá 13. mai 1948, 7. grein, 4. petti, hevur lögmaður skyldu til at kalla tingið saman, tá í minsta lagi helmingurin av tingmonnunum krevja tað, sostatt hevur Föroya fiskimannafelag á hvönn einstakan tingmann at krevja tingið saman nú beinan vegin og ikki seinni enn 24. í hesum.«

7 tingmenn sendu so lögmanni áheitan um at fáa tingið inn.

26. apríl flýddi fundarstjóri fiskimannafelagsins Joab Gleðisheygg landsstýrinum soljóðandi fundarsamtykt:

»Fiskimenn úr öllum sýslum norðanfjörðs staddir á fundi í Tórshavn 26. apríl krevja einmælt at Föroya lögting kemur saman alt fyri eitt til at viðgera verkfallið á fiskiflotanum, soleiðis at landsins fiskimenn kunnu fara til skips fyri lön, sum teir kunnu liva av.«

Svar landsstýrisins frá sama degi er soljóðandi:

»Eg vátti at hava fingið handað av umboðsmonnum Föroya fiskimannafelags v/formanninum Erlendi Patursson soljóðandi fundarsamtykt: (smbr. omanfyri).

Hetta krav havi eg telefonisk gjört lögmanni kunnugt, sum eftir galdandi lóg er hann, sum kann stevna tinginum til eykatingsetu.

Stöða lögmanns til hetta krav er, at hann heldur seg ikki kunna stevna tinginum til fundar, so leingi sum tað ólögliga verkfallið heldur fram, so sum boðað frá í skrivi 22. apríl 1954 og í fjarriti í dag, men at hann beinanvegin sum verkfallið er av vil stevna tinginum til fundar, ella tá helmingur tingmanna krevur tað.«

27. apríl sendi Föroya arbeiðarafelag lögmanni soljóðandi skriv:

»Tá tað nú av Föroya fiskimannafelag er heitt á okkum umboðum fyriFöroya arbeiðarafjøld um at ganga teimum á møti í krav teirra til tingmenn og landsstýri um at taka stöðu til verkfallið, soleiðis at teir fáa ta hjálp teim törvar fyri at fáa livilig kor.

Tá tað nú er gingin long tíð síðan verkfallið var lýst, so at menn eru troyttir, og roknað kann verða við at einki av fiskiförinum fer avstað, rokna vit við at tað lemjir landið soleiðis, at tað verður ikki liviligt, hvörki fyri fiskimannin ella fyri onnur.

Henda okkara áheitan verður gjörd av teirri orsøk, at tað eru nógvir fiskimenn komnir til Havnar, og týðir tað teirra rættvísu kröv og síggja vit tað soleiðis, at eingin kann svara fyri, hvat kann henda, um so er, at öll kröv verða avvíst.

Vit vilja tí biðja tygum um at ganga fiskimannunum á möti í krövum teirra.

At kalla tingið saman beinavegin, soleiðis at teir kunnu fáa sína minstulön tryggjaða ca. kr. 800 um mánaðin.

Vegna umstöðurnar mugu vit krevja tygum um svar innan ein tíma.«

28. apríl sendi Havnar handverkarafelag lögmanni soljóðandi skriv:

»Á fundi, hildin í dag 28. apríl 1954, var samtykt at heita a háttvirda Föroya lögmann, at kalla saman Føroya løgting, til tess at ganga fiskimonnum á möti fyri at böta um kor teirra.«

Svar løgmanns frá 28. apríl er soljóðandi (sent kl. 17,45):

»Í brævi frá 27. apríl 1954 — móttikið 28. apríl kl. 9,30 — hevur Føroya arbeiðarafelag heitt á løgmann um at fáa tingið inn heinanvegin til tryggingar av eini tilskilaðari hægri minstuløn fiskimanna.

Løgmaður ger felagnum kunnugt, at hann er tilreiðar at fáa tingið inn og seta fram lógaruppskot til tryggingar av einari eykaviðbót til galdandi minstuløn fiskimanna, men treytin er, at tingið fær tann arbeiðsfrið, sum tað eigur, og sostatt má løgmaður krevja, at verandi arbeiðsstøðgur á sjógvi og landi er hildin uppat í dag, samstundis sum boðsendingin til tingmenninar fer út.«

Føroya arbeiðarafelag og Føroya fiskimannafelag tóku við hesum treytum løgmanns og avlýstu verandi vinnusteðg á sjógvi og landi, og løgmaður sendi so tingmonnum boðsending.

Samsvarandi hesum hevur landsstýrið sett fram uppskot til lóg um viðbót til galdandi minstulønir.

Til metingar um, hvussu mikil peningur fer at tørva til hesi endamáls frama vil Føroya fiskimannafelag geva yvirlit yvir tær avrokningar, sum felagið hevur havt í hondum í 1953.

Haraftrat hevur lønjavningargrunnurin givið fylgjandi yvirlit yvir veitta lønjavning:

1947	- - 403	menn	.....	tilsamans kr.	332.475,00
1948	— 197	—	.....	— -	142.790,00
1949	— 376	—	.....	— -	307.000,00
1950	— 725	—	.....	— -	700.449,00
1951	— 960	—	.....	— -	607.215,00
1952	— 608	—	.....	— -	580.125,00
1953	— 350	- -	.....	— -	278.331,00

Lønarviðbótin fyri seinasta ár hevur verið kr. 500,00 til fiskimenn, sum mynstringardagin eru yvir 16 ár.

Eftir tí sum grunnurin upplýsir, er tað ógjørligt at geva eina haldgóða meting av tí meirkostnaði til núgaldandi viðbót, eftirsum grunnurin bert fær avrokningar, ið liggja niðanfyri kr. 500,00 um mánaðin.

Men eftir leysligari meting verður hetta yvirlit givið:

Mettur meirkostnaður av viðbót vegna ymiskar minstulønir fiskimanna:

Í 4 mánaðir av árinum:

1500	manns	100 kr.	um	mán.	= 1500×400	=	600.000,00 kr.
2000	—	200 -	—	—	= 2000×800	=	1.600.000,00 —
2200	—	300 -	—	—	= 2200×1200	=	2.640.000,00 —

Her er roknað við, at kr. 500,00 eftir verandi minstuløn hvílir í gomlu skipanini. Roknað er tí bert við útreiðslunum, sum koma aftrat ella omanfyri kr. 500,00.

Grunnurin hevur sent landsstýrinum yvirlit yvir nøkur skip, sum liggja væl yvir núgaldandi minstuløn. Yvirlitið umfatar 17 skip, har av summi hava verið meira enn ein túr. Hetta fylgir við sum skjal.

Eftirsum skattleggjandi inntøka fyri 1954/55 er ætlað til kr. 53.000.000,00
við frádrátti av inntøkum undir kr. 2.000,00 kr. 6.000.000,00

kr. 47.000.000,00

verða procentstigini í ymiskum hæddum sum her tilskilað:

1 %	av 47.000.000,00	= kr.	470.000,00
2 %	— 47.000.000,00	= -	940.000,00
3 %	— 47.000.000,00	= -	1.410,000,00
4 %	— 47.000.000,00	= -	1.860.000,00
5 %	— 47.000.000,00	= -	2.350.000,00

Hetta verður fyri hesar inntøkur (í kr.):

	1 %	2 %	3 %	4 %	5 %
2.000	20	40	60	80	100
3.000	30	60	90	120	150
4.000	40	80	120	160	200
5.000	50	100	150	200	250
6.000	60	120	180	240	300
7.000	70	140	210	280	350
10.000	100	200	300	400	500
15.000	150	300	450	600	750
20.000	200	400	600	800	1000

Við hesum verður málið lagt fyri tingið.

Upplýsingar frá Lønjavningargrunninum:

Fiskiskapur í 1953 (bestu skipini).

17 skip: 28 túrir.	tíð pr. túr	avrokning pr. mann meðal	avr. pr. mann pr. mánað
1.	66	3317,00	1500,00
2.	66	2963,00	1330,00
3. 2 túr.	50	3100,00	1800,00
4. 3 túr.	66	3277,00	1500,00
5.	52	1652,00	960,00
6.	42	1113,00	795,00
7.	42	1270,00	930,00
8.	42	1417,00	1000,00
9.	61	3500,00	1715,00
10.	61	4150,00	2040,00

11.	1	túr	93	3146,00	1000,00
12.	1	—	46	1200,00	810,00
13.	2	—	31	660,00	631,00
14.	1	—	51	1564,00	920,00
15.	2	—	51	1660,00	977,00
16.	1	—	37	2711,00	2200,00
17.	2	—	32	2622,00	2500,00
18.	2	—	40	3054,00	2250,00
19.	3	—	37	3012,00	2520,00
20.	4	—	44	2692,00	1860,00
21.	1	—	54	1136,00	631,00
22.	1	—	85	2902,00	1020,00
23.	1	—	86	2396,00	820,00
24.	2	—	65	2149,00	1000,00
25.			60	2071,00	1035,00
26.			84	2000,00	810,00
27.			155	3229,00	602,00
28.			155	3340,00	812,00

Upplýsingar frá Føroya Fiskimannafelag:

1. Gjört falt 2 túrar. Vinnan annan túr 1390 kr. í 67 dagar.
2. Gjört falt 2 túrar. Vinnan fyrsta túr 1005 kr. í 60 dagar, og 2072 kr. fyri sildatíðina.
3. Gjört falt 1 túr. Vinnan 4250 kr. Við líni í Grønlandi.
4. Gjört falt 2 túrar. Vinnan 900 kr. og 810 kr. við snøri.

5. Gjört falt 9 túrar við línu til fsfisk og til sildaveiði:
   1. túr 31 dagar 770 kr. 2. túr 17 dagar 985 kr.
   3. túr 24 dagar 528 kr. 4. túr 368 kr. (línuveiða).
   5. túr 26 dagar 860 kr. 6. túr 12 dagar 902 kr. (sildaveiða).
   7. túr 14 dagar 1081 kr. 8. túr 20 dagar 1022 kr. (sildaveiða).
   9. túr 15 dagar 72 kr. (sildaveiða).

6. Gjört helst 2 túrar. Vinnan fyrsta túr. 1785 kr. í 85 dagar.
7. Gjört helst 1 túr. Vinnan fyrsta túr 2500 kr. í 88 dagar.
8. Gjört 2 túrar. 61 dagar 1178 kr. 79 dagar 1255 kr.
9. Gjört helst 4 túrar. 29 dagar 1042 kr. 10 dagar 1302 kr. (sild).
   23 dagar 681 kr. 53 dagar 697 kr. —
10. Gjört 1 túr við snøri og 4 túrar til sildaveiði.
    925 kr. í 80 dagar við snøri. 469 kr. í 24 dagar í sild.
    640 kr. í 12 dagar í sild. 682 kr. í 22 dagar í sild.
    571 kr. í 19 dagar í sild.

11. Fyrsti túrur snøri. Annar túrur til sildaveiði.
    1616 kr. í 92 dagar. 2562 kr. í 81 dagar.
12. 2185 kr. í 76 dagar, snøri. 2063 kr. í 78 dagar snøri.
13. 846 kr. í 47 dagar snøri. 723 kr. í 42 dagar snøri.
14. 1266 kr. í 70 dagar, snøri. 1019 kr. 42 dagar, snøri.
15. 1216 kr. í 62 dagar snøri. 739 kr. í 55 dagar, snøri.
16. 963 kr. í 55 dagar, snøri. 716 kr. í 33 dagar, snøri + sild.

17. 660 kr, 632 kr, 798 kr, 436 kr, síldaveiða.
18. 124 kr, 872 kr, 377 kr, 594 kr, 636 kr, síldaveiða.
19. 1842 kr. í 56 dagar, 1882 í 34 dagar, 491 í 18 dagar,
    581 kr. í 18 dagar, 672 kr. í 19 dagar, 674 í 19 dagar,
    729 kr. í 20 dagar.
20. 2801 kr. í 44 dagar, 2292 kr. í 47 dagar, 1987 kr. í 55 dagar,
    1807 kr. í 49 dagar.
21. 369 kr. í 58 dagar, 869 kr. 86 dagar, snöri.
22. 650 kr. í 55 dagar snöri, 1419 kr. síldaveiða.
23. 625 kr. í 37 dagar 1175 kr. í 48 dagar snöri.
24. 2045 kr. í 84 dagar, síldaveiða,
    1474 kr. í 68 dagar, 847 kr. í 61 dagar snörisveiða.
25. 202 kr. 610 kr, 357 kr, 636 kr, 367 kr, síldaveiða.
26. 2149 kr, 168 kr, trollveiða ókend tíð.
27. 1614 kr. ókend tíð.
28. 710 kr. í 76 dagar, 850 kr. í 62 dagar snöri.
29. 360 kr. 1 snöristúr.
30. 1662 kr. í 45 dagar, saltfiskaveiða.
    1273 kr, 581 kr, 1079 kr, 291 kr, síldaveiða í 77 dg.
31. 870 kr. í 72 dagar, 85 kr. í 29 dagar, línuveiða,
    3478 kr. í 95 dagar, síldaveiða,
32. 1282 kr, í 45 dagar, 1512 kr. í 40 dagar, línuveiða,
    4137 kr. í 99 dagar, síldaveiða,
33. 1100 kr, 91 dagar, línuveiða í Grönlandi,
    2198 kr. í 78 dagar, síldaveiða,
34. 793 kr. í 55 dagar, 247 kr. í 28 dagar línuveiða,
    3095 kr, í 93 dagar síldaveiða.
35. 55 dagar 624 kr, 28 dagar 38 kr, línuveiða,
    98 dagar 4003 kr, síldaveiða,
36. 72 dagar 2690 kr, síldaveiða,
37. 56 dagar 705 kr, snörisveiða,
38. 66 dagar 874 kr, snörisveiða,
39. 80 dagar 1979 kr, línuveiða, 85 dagar 3376 kr, síldaveiða,
40. 71 dagar 1495 kr, snörisveiða,
41. 72 dagar ialt 635 kr, 468 kr, 247 kr, 383 kr, 625 kr, síldaveiða,
42. 75 dagar áalt, 542 kr, 469 kr, 496 kr, 705 kr, síldaveiða,
43. 14 dagar 272 kr, við torskagörnum,
44. 14 dagar 402 kr, við torskagörnum,
44. a. 135 dagar 3741 kr, við línu í Grönlandi,
45. 62 dagar 2321 kr, 102 dagar 1202 kr, lítið trolskip,
    20 dagar 104 kr, lítið trolskip,
46. 70 dagar, 1010 kr, snörisveiða,
    28 dagar 337 kr, 33 dagar 812 kr, síldaveiða,
47. 61 dagar 910 kr, 19 dagar 14 kr, línuveiða,
    35 dagar 1207 kr, 18 dagar 663 kr, 17 dagar 332 kr,
    20 dagar 430 kr, síldaveiða,

48. 54 dagar. 1037 kr. 20 dagar 54 kr. 56 dagar 2073 kr. línu.
    17 dagar 825 kr. 17 dagar 455 kr. sildaveiða.
49. 1417 kr. ein sildatúr.
50. 1096 kr. ein sildatúr.
51. 2052 kr. ein sildatúr.
52. 3502 kr. ein sildatúr.
53. 1. túr ókent. 2. túr 40 dagar 3054 kr.
    3. túr 43 dagar 2692 kr. annað ókent.
54. 1. túr 36 dagar 2712 kr. 2. túr 31 dagar 2622 kr.
    3. túr 52 dagar. 2522 kr. 4. túr 44 dagar 2520 kr.
55. 1. túr 50 dagar 1565 kr. 2. túr 50 dagar 1660 kr. trolveiða.
    3. túr 1653 kr. sildaveiða.
56. 46 dagar 1199 kr. 30 dagar 657 kr. trolveiða.
    90 dagar 934 kr. 969 kr. 815 kr. 570 kr. sildaveiða.
57. 53 dagar 1136 kr. línuveiða í Grønlandi.
    100 dagar sildaveiða. 419 kr.. 754 kr. 838 kr. 740 kr. 782 kr. 662 kr. sildaveiða.
58. 86 dagar 2902 kr. sildaveiða.
59. 85 dagar 2395 kr. línuveiða í Grønlandi.
    90 dagar 802 kr. 942 kr. 371 kr. 848 kr. sildaveiða.
60. 92 dagar 3147 kr. línuveiða. 90 dagar 3099 kr. sildaveiða.
61. 75 dagar. 1797 kr. snörisveiða + 1 túr.
62. 76 dagar 1653 kr. snörisveiða + 1 túr.
63. 58 dagar 1569 kr. 45 dagar 1733 kr. snörisveiða + 1 túr.
64. 1. túr 40 dagar snöri til sjálvdrátt frá 953 kr. til 1594 kr.
    2. túr 44 dagar snöri til sjálvdrátt frá 703 kr. til 1264 kr.
65. Ókend tíð sildaveiða 709 kr. 553 kr. 605 kr.

1. viðgerð 1. mai og málið beint til fíggjarnevndina.

4. mai legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Alit

Tað stendur öllum tingmonnum greitt, at ov stórur partur av okkara fiskimonnum fær ov lítlan vinning burtur úr arbeiði sínum. — Hetta kann stava frá ov lítlari veiðu, ringum sáttmálum ella samansetti av nógvum faktorum, ið allir minka um rentabilitetin í fiskivinnuni.

Av tí at sáttmálatingingarnar endaðu úrslitaleysar, má hetta seinra — órentabil drift — helst liggja sannleikanum nærmast. — Er hetta tí ikki ein spurningur, sum loysast kann við skili eftir einum tíma ella einum degi, soleiðis sum kravt varð. Men við tí lógaruppskoti, sum landsstýrið legði fyri tingið tann 30. apríl, og sum fíggjarnevndin hevur viðgjört verður hesin spurningur bráðfengis loystur soleiðis sum Føroya fólk gjøgnum sínar fagfelagsnevndir hevur kravt.

Kravið er kr. 800,00 í minstu løn um mánaðin til hvønn mann, sum mynstringardagin hevur fylt 18 ár. — Hvat henda skipan kemur at kosta, er ilt at siga nakað vist um.

Eftir tilfari frá lönjavningargrunninum og fiskimannafelagnum ætlaði landsstýrið meirakostnaðin fyri eina lutfallsliga siglingartíð uppá 4 mánaðir soleiðis:

1500 mann 100 kr. um mánaðin = 1500×4= 600.000 kr.
2000 mann 200 kr. um mánaðin = 2000×800 = 1.600.000 kr.
2200 manns 300 kr. um mánaðin. = 2200×1200 = 2.640.000 kr.

Við árinum 1951 í huga, tá 960 manns við lutfallsligari siglingartíð uppá 4½ mánaða lógu undir kr. 439.00 um mánaðin í inntöku, skuldi mynd landsstýrisins ikki verið nógv av dökk. Tó var í 1951 eingin stórvegis sildaveiða, og um hon eydnast sum í 1953, verður myndin heldur ljósari.

Fiskimannafelagsins vegna hevur Ingvar Jacobsen sett útreiðslurnar soleiðis upp:

»Vegna ábeitan verður hervið upplýst, hvat vit ætla útreiðslurnar til, um minstalönin hjá föroyskum fiskimonnum verður uppsett til kr. 800,00 um mánaðin í árinum 1954.

Roknað er við tíðini 1. mei til 1 november, tó biðið var um at tíðin var roknað 1. marts till 1. november, men hesir tveir mánaðirnir marts og apríl verða mettir til at vera sjálvbjargnir, soleiðis at skilja, at tey skip, sum eru úti hesa tíð, annaðhvört ikki koma undir hækkaða minstulön ella eisini koma tey inn undir niðanfyri standandi yvirlit.

3 stórir trolarar í tíðini 1. mai—1. nov. eingin minstalön kr.		0,00
16 smærri trolarar í tíðini 1. mai—1. juli 400 manns à kr. 400,00	—	160.000,00
16 smærri trolarar í tíðini 1. juli—1. nov. 320 manns à kr. 300,00	—	96.000,00
Viðmerking 1 til trolarar		
5 smá trolfør til saltfiskaveiði 85 manns à kr. 600,00 fyri tíðina 1. mai—1. aug.	—	51.000,00
3 smá trolfør í tíðini 1. august—1. november 50 manns à kr. 1200,00	—	60.000,00
2 smá trolfør í tíðini 1. aug.—1. nov. 34 manns á sildav.	—	0,00
1 skonnert fyri alla tíðina 30 manns	—	0,00
60 snörisskip alt.		
30 skip 550 manns í tíðini 1. mai—1. aug. à kr. 900,00	—	495.000,00
30 skip 550 manns í tíðini 1. mai—1. aug. meðal omanfyri kr. 800,00		0,00
10 skip 180 manns í tíðini 1. mai—1. aug. teir óheldigastu av omanfyri nevndu 30 skipum til 0 kr.	—	54.000,00
At flyta		916.000,00

20 skip 200 manns í tíðini 1. aug.—1. nov. sildaveiða à kr. 200,00	—	40.000,00
10 skip 120 manns í tíðini 1. aug.—1. nov. sildaveiða	—	0,00
30 skip 600 manns í tíðini 1. aug.—1. okt. til saltfiskaveiðu à kr. 300,00	—	180,000,00
30 línuskip í Grönlandi 1. mai—1. aug. 600 manns omanfyri kr. 800,00	—	0,00
30 línuskip til sildaveiði 1. aug.—1. nov. 600 manns	—	0,00
10 skip úr øllum flotanum, sum vanliga liggja á minstulön, 200 manns à kr. 1500,00	—	300,000,00
	kr.	1.436.000,00

Viðmerking 1.

Her er roknað við, at allir smærri trolarar fara á sildaveiði í tíðini 1. aug.—1. nov, og at teir koma undir minstulön fyri kr. 96.000,00 sum omanfyrinevnt. Fara harafturímóti einstakir til saltfiskaveiðs á hesum tíðarskeiði, má roknast við munandi størri lönarviðbót.

Viðmerking 2.

Útróðramenn í Grönlandi eru ikki viðtiknir her, tí vit hava ongar møguleikar at meta vinnuna hjá hesum monnum.

Viðmerking 3.

Hetta yvirlit er gjört eftir árinum 1953 sum fyridømi, og so er tað sum farið er av 1954 eisini tikið við, tað ein veit um.

Fyrivarni verður sjálvandi tikið fyri, um skipini fara í aðra vinnu enn roknað er við. Og eisini eru royndarfiskitúrar ikki tiknir við.

Afturat hesum tali koma útreiðslurnar til útróðramenn í Grönlandi.

Söga útróðramanna í Grönlandi er so skiftandi, at útreiðslur grunnsins til hetta endamál eru ringari at skráseta enn útreiðslurnar til skipsfiskivinnuna, men ætlandi fara tær ikki upp um kr. 200.000,00.

Lönjavningargrunnsins árliga inntøka er um kr. 450.000,00 og ognirnar um kr. 200.000,00.

Stöðið undir Fiskimannafelagsins ljósu mynd er sildin. Vit skulu eftir hesi ætlan veiða væl meira enn seinasta ár. Hann ið gevur sær far um, hvussu skiftandi úrtökan úr sildini er, torir ikki hava fult álit á hesa veiðu, og má tí fíggjarnevndin, fyri at lönjavningargrunnuriu skal lúka tær treytir, sum lógin áleggur, mæla tinginum til at fáa til vega úti við *kr. 1,5 mill.* til hetta endamál.

Nevndin hevur hugsað um man ikki kann fáa henda pening til vega uttan at áleggja beinleiðis skatt t. d. við at áleggja útflutningsgjald á allan fisk og við at skarva av fíggjarlógini, men nevndin er komin til tað úrslit, at ikki er ráðiligt við nýggjum gjøldum á fiskivinnuna at gera hana enn minni rentabla, og u mman av fíggjarlógini skaðaleysir kundi skarvað kr. 1500,00 av her og kr. 5000,00 har — nakað sum valla kann gerast — so munar tað púrt eitki.

So statt má fíggjarnevndin mæla tinginum til at áleggja öllum skattaborgarum, sum seinasta ár hövdu yvir kr. 2000,00 í skattaskyldugari inntöku, ein eykaskatt uppá 3 %. — Um allur hesin eykaskattur gongur inn, vil hann geva kr. 1.410.000,00. Tað er ikki at ivast í, at hann lættliga gongur inn, tí Föroya fólk hevur gjögnum sínar fagfelagsnevndir við ólögligum verkfalli og kravgongum kravt tær útreiðslur, sum hetta lógaruppskot ber við sær.

Fyri at hesin peningur skal røkka til og gera meira gagn enn skaða, má afturat lógini við reglugerð skipast so fyri at:

a. Lönjavningargrunnirin ongantíð avroknar minstulön eftir einum fiskaprísi, sum liggur lægri enn tann prísur, sum prísásetingarnevndin hevur lýst fyri tað tíðarskeið umsökjarans fiskur varð seldur.
b. Lönjavningargrunnurin í útrokningini av minstulön roknar við upp til kr. 5,00 í kostútreiðslum pr. dag pr. mann.

Av tí úrtöka fiskimanna hesi seinastu árini hevur verið so misjövn, kundi nevndin havt hug til at skotið upp, at øll uppgerð umsøkjaranna vórðu gjøllla kannað, áðrenn minstalønin varð útroknað; men tað stendur nevndini greitt, at hetta arbeiðið verður so stórt, at tað gerst ikki av tí mannað, grunnurin ræður yvir, men stikkprövar eiga at verða gjördir.

Sum áður skrivað fer dastið av fiskiflotanum helst á sildaveiðu. Um tað verða líka so nógvir manns við hvörjum skipi sum seinasta ár, verður vandi fyri, at mannspartarnir verða so smáir, at teir ikki rökka kr. 800,00 um mánaðin, og verður so fíggjarliga stöði tikið undan hesi skipan. Tað ber ikki til við lóg at avgera hvussu stór manningin skal vera við hesum skipi, men nevndin mælir til, at heitt verður á skiparar og útgerðarmenn, at teir manna skipini soleiðis:

Skip 30—50 t 7—8 manns.
Skip 50—100 t 12—14 manns.
Skip 100—250 t 15—16 manns.
Trolarar 20 manns.

So statt setur fíggjarnevndin fram hetta

Uppskot.

1. Mælt verður lögtinginum til at samtykja landsstýrisins uppskot

til

lögtingslóg um uppískoyti til lögtingslóg nr. 18 frá 29. marts 1952 um broyting í lögtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lön javningargrunn fiskimanna sum broytt við lögtingslóg nr. 11 frá 7. marts 1952 og lögtingslóg nr. 5 frá 19. marts 1954.

lagtingslov om tillæg til lagtingslov nr. 18 af 29. marts 1952 om ændringer i lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 om fikernes afregning og lönreguleringsfond som ændret ved lagtingslov nr. 11 af 7. marts 1952 og lagtingslov nr. 5 af 19. marts 1954.

soleiðis broytt:

§ 1.

Fyri at gera lönjavningargrunnin föran fyri í tíðarskeiðinum 1. marts til 15. okt. 1954 at veita eina viðbót til minstulönir eftir galdandi reglum, soleiðis at samlaða minstalönin kemur upp í kr. 800,00 um mánaðin hjá monnum, sum mynstringardagin hava fylt 18 ár, verður ein eykaskattur útskrivaður til grunnin fyri fíggjarárið 1954/55 uppá 3 % av öllum inntökum, sum í fíggjarárinum koma undir landsskatt.

Hesin eykaskattur kemur undir somu reglur sum landsskattur og fellir til gjaldingar við helmingi 1. oktober og helmingi 1. december 1954.

Skatturin, ið verður kravdur inn um Föroya gjaldstovu fyri seg, avmarkar landskassans ábyrgd fyri hesi viðbót.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 1.

For at sætte lönreguleringsfonden i stand til for tiderummet 1. marts til 15. oktober 1954 at yde et tillæg til mindsteindtægten i henhold til gældende bestemmelser således, at den samlede mindsteindtægt andrager kr. 800,00 om måneden for mænd, der på udmönstringsdagen er fyldt 18 år, udskrives en overordentlig skat til fonden for finansåret 1954/55 på 3 % af alle indtægter, som i finansåret er pligtige at svare skat til landskassen.

Denne overordentlige skat er undergivet reglerne for landsskat og forfalder til betaling med halvdelen 1. oktober og halvdelen 1. december 1954.

Skatten, der opkræves særskilt af Færöernes oppebörselskontor, begrænser landskassens garanti for nævnte tillæg.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

II. Álagt verður landsstýrinum at seta saman — stjórn lönjavningargrun sins til nýtslu — reglugerð samsvarandi álitinum.

2. og 3. viðgerð 4. mai 1954.

Uppskot nevndinnar I samtykt 23—0.
Uppskot nevndinnar II samtykt 23—0.

2. Løgtingslóg um vinnuligar ósemjur.

Ár 1954, 4 mai legði lögmaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

lögtingslóg um vinnuligar ósemjur.

§ 1.

Eingin streika ella lockout má setast í verk fyri tað fyrsta, men allar ósemjur arbeiðara og arbeiðsgevara ella fiskimanna og útgerðarfelags ímillum skulu gerast av eftir fylgjandi reglum.

§ 2.

Sum streika er at skilja hvör felagsbundin ella ikki felagsbundin kollektivur arbeiðs- ella vinnusteðgur hjá einum ella fleiri arbeiðsgevarum ella útgerðarmonnum innanfyri eina ella fleiri vinnugreinir við ti endamáli at nýta arbeiðis- ella vinnusteðgin sum tvingsil móti arbeiðsgevara ella útgerðarmanni.

Sum lockout er at skilja hvör avskeiðing av øllum arbeiðandi innanfyri eina ella fleiri vinnugreinir hjá einum ella fleiri arbeiðsgevarum ella útgerðarmonnum við ti endamáli at nýta avskeiðingina sum tvingsil mót arbeiðandi.

§ 3.

Tá galdandi sáttmálar fara úr gildi ella verða sagdir upp, og eisini tá ósemja kemur upp um lønar- ella arbeiðisviðurskifti, har eingin sáttmáli er gjørdur, skulu viðkomandi feløg ella virki beinanvegin taka upp tingingar um sáttmálarnar ella um arbeiðistreytirnar.

Lagtingslov om uoverensstemmelser i arbejdsforhold.

§ 1.

Ingen strejke eller lockout må indtil videre iværksættes, men alle uoverensstemmelser mellem arbejdere og arbejdsgivere om løn- eller arbejdsforhold skal afgøres efter nedenstående regler.

§ 2.

Som strejke betragtes enhver organiseret eller uorganiseret kollektiv arbejdsnedlæggelse eller arbejdsstandsning hos en eller flere arbejdsgivere eller redere indenfor et eller flere fag eller beskæftigelser med det formål at anvende arbejdsnedlæggelsen som et tvangsmiddel i forhold til arbejdsgivere eller redere.

Som lockout betragtes enhver udelukkelse af samtlige arbejdere inden for et eller flere fag hos en eller flere arbejdsgivere eller redere med det formål at anvende udelukkelsen som et tvangsmiddel i forholdet til arbejderne.

§ 3.

Når bestående overenskomster udløber eller opsiges, samt når uenighed opstår om løn- eller arbejdsforhold, hvor ingen overenskomst er oprettet, skal vedkommende organisationer eller virksomheder straks optage forhandling om overenskomsterne eller arbejdsbetingelserne.

Fæst semja ikki í lag, skal málið skjótast til semingar eftir reglunum í lóg frá 31. marts 1928 »om mægling i arbejdsstridigheder« sum broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 22. december 1951. Um so er, at seming er ikki komin í lag, tá 14 dagar eru liðnir frá fyrstu tinging partanna millum, skal ósemjan gerast av við voldgift eftir fylgjandi reglum.

§ 4.

Krav um voldgiftsavgerð skal sendast landsstýrinum skrivliga, og heldur tað, at treytirnar fyri voldgiftsavgerð eru tilstøðis, fær tað skjótast uppnevnt voldgiftsnevnd uppá 5 limir eftir fylgjandi reglum:

1. Innanfyri eina av landsstýrinum fyrisetta freist skulu fylgjandi feløg ella felagsbólkar hava tilsøgn hvør at velja 1 lim til voldgiftsnevndina. Har fleiri feløg eru tilskilaði undir sama bólki, skal tilsøgnin sendast tí ella teim feløgum, nærmast mugu ætlast at umboða viðkomandi part.
   a) Føroya Fiskimannafelag, Suðuroyar fiskimannafelag, Føroya skipara- og navigatørfelag, Føroya motorpassarafelag, Føroya maskinistfelag.
   b) Føroya arbeiðarafelag, handverkarafelag.
   c) Føroya reiðarafelag, Felag føroyskra trolaraeigara.
   d) Føroya arbeiðsgevarafelag, handverksmeistarafelag.
2. Hevur eitt ella fleiri av teim omanfyri nevndu feløgum ikki uppnevnt lim innanfyri fyrisetta tíð, verður viðkomandi uppnevndur av landsstýrinum.

Dersom enighed ikke opnås, skal sagen henvises til mægling efter reglerne i lov af 31. marts 1928 om mægling i arbejdsstridigheder som ændret ved lagtingslov nr. 79 af 22. december 1951. Såfremt mægling ikke har ført til noget resultat efter forløbet af 14 dage efter forligsmandens første forhandling med parterne, skal arbejdsstriden afgøres ved voldgift efter nedenstående regler.

§ 4.

Begæring om voldgiftsafgørelse skal indgives skriftligt til landsstyret, og skønner dette, at betingelserne for voldgiftsafgørelse er opfyldt, foranlediger det snarest nedsat et voldgiftsnævn på 5 medlemmer efter følgende regler:

1. Inden en af landsstyret fastsat frist opfordres nedennævnte foreninger eller foreningsgrupper til hhver at udpege et medlem af voldgiftsnævnet. Hvor flere foreninger er nævnt i samme gruppe, skal opfordringen stiles til den eller de foreninger, der nærmest må antages at repræsentere vedkommende part.
   a) Føroya fiskimannafelag, Suðuroyar fiskimannafelag, Føroya skipara- og navigatørfelag, Føroya motorpassarafelag, Føroya maskinistfelag.
   b) Føroya arbeiðarafelag, håndværkerforening.
   c) Føroya reiðarafelag, Felag føroyskra trolaraeigara.
   d) Føroya arbeiðsgevarafelag, håndværksmesterforening.
2. Udpeger en eller flere af de nævnte organisationer ikke et medlem inden den fastsatte frist, ud-

3. Skjótast tilber fær landsstýrið teir soleiðis uppnevndu limir til fundar undir landsstýrisins forsæti ella uttan fyri Tórshavn undir forsæti av einum av landsstýrimum valdum persóni til val av formanni nevndarinnar.
4. Formaður nevndinnar verður valdur av teim 4 uppnevndu limunum soleiðis, at hann, sum hevur fingið minst 3 atkvøður, er valdur. Landsstýrið ella tiltaksmaður tess hevur ongan atkvøðurætt.
5. Fæst ongin meiriluti til val av formanni nevndinnar, gevur landsstýrið ella tiltaksmaður tess sorinskrivaranum frásøgn beinanvegin um tað, sum fram er farið, og sorinskrivarin ella ein av honum valdur persónur tekur tá við sum formaður.

§ 5.

Voldgiftsnevndin tekur avgerð skjótast tilber og sigur upp endaligan úrskurð.

§ 6.

Tær í lóg nr. 536 frá 4. okt. 1919 »om den faste voldgiftsret« við seinni broytingum fyrisettu reglur um mannagongd og rættindi voldgiftsrættarins koma eisini til nýtslu hjá ti í § 4 skipaðu voldgiftsnevnd við teim her tørvandi linkingum. Útreiðslur voldgiftsnevndinar ber landskassin.

§ 7.

Brot móti hesum reglum og undanburður at eftirkoma úrskurðum voldgiftsnevndinnar koma undir sáttmálabrot, og teir persónar ella virki, sum taka lut í ólógligu streikuni ella lockoutini, koma undir bót, sum fer í landskassan. Málini fara fram sum løgreglumál.

3. De således udpegede 4 medlemmer indkaldes snarest muligt af landsstyret til et møde under landsstyrets eller udenfor Tórshavn eventuelt af en af dette udpeget persons ledelse til valg af formand af nævnet.
4. Formanden for nævnet vælges af de udpegede 4 medlemmer, således at den person, der opnår mindst 3 stemmer, er valgt. Landsstyret eller dettes stedfortræder har ikke stemmeret.
5. Opnås der ikki flertal for valg af en person som formand for nævnet, underretter landsstyret eller dettes stedfortræder sorenskriveren om det passerede, og sorenskriveren eller en af denne valgt person fungerer da som formand.

§ 5.

Voldgiftsnævnet træffer snarest muligt afgørelse i sagen ved afsigelse af endelig kendelse.

§ 6.

De i lov nr. 536 af 4. okt. 1919 om den faste voldgiftsret fastsatte regler om voldgiftsrettens fornetningsgang og beføjelser kommer med de fornødne lempelser til anvendelse på det i henhold til § 4 nedsatte voldgiftsnævn. Udgifterne ved voldgiftsnævnets virksomhed afholdes af landskassen.

§ 7.

Overtrædelse af nærværende bestemmelser samt undladelse af at efterkomme voldgiftsnævnets kendelse betragtes som overenskomstbrud, og de i den ulovlige strejke eller lockout deltagende personer eller virksomheder straffes med bøder, der tilfalder landskassen. Sagerne behandles som politisager.

§ 8.	§ 8.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrið loyvir sær at vísa til viðmerkingar landsstýrisins til lógaruppskotið í tingmáli nr. 1/1954 og viðmerkingar lögmans undir framløgu av nevnda lógaruppskoti.

Við hesum loyvir landsstýrið sær at leggja málið fram á ting.

1. viðgerð 4. mai og málið beint til figgjarnevndina og sama dag legði figgjarnevndin fram soljóðandi álit og broytingaruppskot:

Álit.

Figgjar nevndin hevur havt uppskotið til viðgerðar.

Meirilutin (A. Djurhuus, Tr. Samuelsen, M. Holm, A. Sørensen og Th. Petersen) vil mæla tinginum til at samtykja landsstýrisins uppskot við teimum broyttingum, ið eru hjálagdar álitinum. Meirilutin heldur, at tað er neyðugt at skapa veg til at kunna loysa enahvørja ósemju, sum kemur, uttan arbeiðssteðg, tí steðg í vinnulívinum tolir samfelag okkara ikki.

Minnilutin (javnaðar- og sjálvstýrisflokkurin) kann ásanna, at neyðugt er at fáa arbeiðsfrið í landinum, men vil ráða til at arbeiða víðari við málinum og taka tað uppaftur á Ólavsøku.

Minnilutin (Davidsen og Kallsoy) setur fram hetta

Uppskot

Málið verður uppaftartikið á komandi Ólavsøkutingi.

Broytingaruppskot

Til § 1 í lógaruppskotinum:

1. Í føroyska tekstinum næstniðastu reglu verður skotið inn millum »ímillum« og »skulu«: »um løn- ar og arbeiðisviðurskifti«.	Í danska tekstinum triðjuniðastu reglu verður skotið inn milum »arbejdsgi- vere« og »om« »fiskere og redere«.

Til § 3 í lógaruppskotinum:

2. Í føroyska tekstinum í 2. stk. millum »tinging« í triðjuniðastu reglu og »partanna« verður skotið inn: »semingsmansins«.	Í danska tekstinum í 2. stk. fyrstu reglu verður »uenighed« broytt til »enighed«.

Til § 4 í lógaruppskotinum:

3. Í føroyska tekstinum í 3. stk. í triðjuniðastu reglu verður skotið inn millum »Tórshavn« og »undir«: »eventuelt«.	

2. og 3. viðgerð 4. mai 1955.

Uppskot landsstýrisins við broytingum nevndinnar samtykt 15—1.

Eykatingið stóð í 5 dagar og hevði 6 fundir. —

Ólavsøkutingið 1954

Ár 1954, ólavsøkudag kl. 13 var Føroya løgting sett. Tingformaðurin, sum valdur var í seinastu tingsetu Joh. M. Fr. Poulsen lýsti, at Ólavsøkutingið 1954 var sett sambart skriv løgmannsins frá 14. juli 1954.

Tingmenninir eru hesir:

Hákun Djurhuus, Klakksvík, ff.
Einar Weag, Klakksvík, jv.
S. P. Zachariasen, Klakksvík, sj.
O. F. Joensen, Klakksvík, sb.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Jens Chr. Olsen, Toftum, sb.
Johan M. F. Poulsen, Strondum, sb.
J. F. Øregaard, Gøtu, jv.
Johan Kallsoy, Eiði, sj.
Fr. Bláhamar, Vestmanna, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
Sámal Ellefsen, Miðvágur, ff.
D. P. Danielsen, Miðvágur, tf.
Søren Danielsen, Miðvágur, sb.
Thorstein Petersen, Tórshavn, ff.
R. Long, Tórshavn, ívalf. v. ff.
Tr. Samuelsen, Tórshavn, sb.
Hanus við Høgadalsá, Tórshavn, tf.
J. P. Henriksen, Tórshavn, jv.
Anth. Sørensen, Húsavík, ff.
J. P. Davidsen, Sandur, jv.
P. M. Dam, Tvøroyri, jv.
J. H. Danbjørg, Porkeri, jv.
Andreas Djurhuus, Vágur, sb.
Martin Holm, Tórshavn, ff.

Tingformaðurin legði fram skriv frá Hinum føroyska fólkaflokkinum og sambandsflokkinum, d. 29. julj 1954, hareftir teir eru gingnir saman um val av tingformanni.

So fór val fram av formannskapi.

Eftir uppskoti var Joh. M. Fr. Poulsen valdur formaður og J. F. Øregaard valdur varaformaður.

Til tingskrivarar vóru valdir: Fr. Bláhamar og E. Waag.

Tingformaðurin bað tingmenn rópa eitt níggjufalt hurrá fyri kongi og eitt trýfalt hurrá fyri Føroyum.

1. Millumlandasáttmáli um aldursrentu.

Ár 1954, 2. august legði R. Long landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot við fylgisskjali:

Í skrivi frá 10. marts 1954 hevur socialministeriið biðið ríkisumboðsmannin fyrileggja landsstýrinum spurningin, um tað er samt um, at millumlandasáttmáli nr. 13 frá 27. august 1949, Danmarkar, Finlands, Íslands, Noregs og Svøríkis ímillum um sínamillum veiting av aldursrentu skal eisini vera galdandi í Føroyum (sbr. § 1, stk. 2 í lóg nr. 146 frá 31. marts 1949 um aldursrentu.

Landsstýrið hevur í skrivi frá 30. s. m. givið sítt viðmæli, men við tí fyrivarni, at málið fyrst verður lagt fyri tingið.

Sostatt loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri tingið.

Eintök av sátt málum fylgja við í avriti.

Konvention nr. 13 af 27. august 1949, Danmark, Finland, Island og Sverige om gensidig ydelse af aldersrente.

Art. 1.

De kontraherende lande forpligter sig til at yde aldersrente til statsborgere fra et andet af de kontrahenende lande i overensstemmelse med forskrifterne i denne konvention.

Lige med statsborgere i et af landene stilles i denne konvention den, som tidligere har været statsborger i vedkommende land, og som ikke har fået statsborgerret i noget andet land.

Art. 2.

Ved aldersrente efter denne konvention forstås den aldersrente og dertil hørende tillægsydelser, som ydes i henhold til den i vedkommende land til enhver tid gældende almindelige sociale forsikringslovgivning. Private og kommunale pensionsordninger samt andre pensionsordninger for begrænsede grupper af befolkningen omfattes ikke af konventionen.

Art. 3.

Med hensyn til aldersgrænse og andre betingelser for at få og bevare aldersrente samt til aldersrentens størrelse og beregning, gælder opholdslandets regler.

Dog må pågældende for at få ret til aldersrente i opholdslandet have opholdt sig der uafbrudt i mindst 5 år, umiddelbart før begæring bliver fremsat. Midlertidig fraværelse fra opholdslandet i denne tid kommer ikke i betragtning.

Art. 4.

Udgifterne ved aldersrenter efter denne konvention skal fuldt ud bæres af opholdslandet.

Art. 5.

Denne konvention medfører ingen indskrænkning i de kontraherende landes ret til at give almindelige bestemmelser om udlændinges ret til at opholde sig i vedkommende land. Sådanne bestemmelser må dog ikke åbne mulighed for, at denne konvention omgås.

Art. 6.

Denne konvention skal ratificeres, og ratifikationsdokumenterne skal snarest muligt deponeres i det norske udenrigsministerium.

Konventionen træder i kraft den første dag i den måned, som ligger to fulde kalendermåneder efter datoen for deponeringen af ratifikationsdokumenterne.

Art. 7.

Ønsker noget af de kontraherende lande at opsige konventionen, skal skriftlig meddelelse herom tilstilles den norske regering, som straks skal underrette de andre kontraherende lande herom og om den dato, da meddelelsen blev modtaget.

Opsigelsen gælder alene det land, som har meddelt den, og har gyldighed fra den 1. januar, som indtræffer mindst 6 måneder efter at den norske regering har modtaget meddelelse om opsigelsen.

Til bekræftelse heraf har de respektive befuldmægtigede undertegnet nærværende konvention.

Udfærdiget i Oslo den 27. august 1949 i et eksemplar på dansk, finsk, islandsk, norsk og svensk. Konventionen skal forblive deponeret i arkivet til det norske udenrigsministerium, som skal sende en bekræftet kopi til hver af parterne.

1. við gerð 4. august og 20. august legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur við hesum máli lagt fyri løgtingið spurningin um millumlanda sáttmáli frá 27. august 1949 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki um veiting av aldursrentu eisini skal vera galdandi í Føroyum.

Sbr. § 1, stk. 2 í lóg nr. 146 frá 31. marts 1949 um aldursrentu kann ríkisstýrið við viðmæli frá Føroya landsstýri gera undantak frá treytunum um heimarætt og hústað, fyri statsborgarar úr londum ella landspørtum, ið sínamillumsáttmáli fest í lag við.

Landsstýrið hevur í skrivi frá 30. marts 1954 til socialministeriið givið sítt viðmæli, men við fyrivarni, at málið verður lagt fyri løgtingið.

Lógarnevndin, ið hevur havt málið til viðgerðar, mælir løgtinginum til at samtykkja viðmæli landsstýrisins um at millumlandasáttmálin eisini verður galdandi í Føroyum.

2. viðgerð 23. august 1954.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

---

2. *Broyting í toll-lógini.*

Ár 1954, 4. august legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld o. m.

§ 1.

Uppí § 1 verður skoytt sum nýggjur bólkur: Sápa v. m. (til toiletbrúk undantikin). (smbr. nr. 44).
Bleyt sápa, skúripulvur, stongsápa, flótandi og sjálvvirkandi vaskievni, sápuspønir og tílík vaski- og reinsi-

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m. v.

§ 1.

I § 1 tilføjes som ny gruppe:

Sæbe m. v. (undtagen til toiletbrug). (smbr. nr. 44).
Blød sæbe, skurepulver, stangsæbe, flydende og selvvirkende vaskemidler samt sæbespåner og lignende vaske-

evni, sápuspønir og tílíkk vaski- og reinsievni, soda tó undantikin, av virðinum 5 %.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

og rensemidler dog undtagen soda, af værdien 5 %.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

A/S Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik hevur í skrivi frá 11. januar 1954 sent landsstýrinum umsókn um ymsar broytingar í galdandi toll-lóg soleiðis, at innflutningur av bleytari sápu og vaskievni kemur undir toll, so usm øll onnur lond hava, fyri at minka innflutningin til frama fyri heimaframleiðsluna av nevndu vørum og harvið økt arbeiði í landinum. Eftir hagtali fyri 1952 er innflutningurin av sápu og sápuvørum uppi í einum 6—700.000 kr. og bert toiletsápan er undir tolli.

Sum grund flytir felagið eisini fram, at felagið hevur so stóra sápufabrikk, at hon er før fyri at framleiða alla ta sápu og vaskievni yvirhøvur, sum nýtt verður í Føroyum og er útgjørd við nýggjum og nýmótans maskinum, men henni tørvar eina størri framleiðslu, men sum er, er hon kortini før fyri at halda teir prísir, sum útlendsk sápa v. m. hevur í løtuni, men ein munalig øking í framleiðsluni vildi gjørt ta ómøguligt at seta prísin munandi niður.

Í ummæli sínum sigur gjaldstovan, at bleyt sápa hevur 3 oyru per kg í Danmark, ongan her, pulv. soda hevur ongan toll í Danmark, ongan her, stongsápa hevur 3 oyru per kg í Danmark, ongan her, toiletsápa o. l. 2 kr. pr. kg í Danmark, 15 % her, barbersápa hevur 12,5 oyru per kg í Danmark, 15 % her, barbercreme hevur 3,50 kr. pr. kg í Danmark, 15 % her, flótandi vaskievni 3 oyru pr. kg í Danmark, ongan her, sjálvvirkandi vaskievni 3 oyru pr. kg í Danmark, ongan her, sápuspønir 3 oyru pr. kg í Danmark, ongan her, skócreme 20 oyru pr. kg í Danmark, 5 % her.

Ongin framleiðslutollur er á her nevndu vørum í Danmark.

Landsstýrið hevur síðani heintað sær ummæli frá ríkisstýrinum um eina broyting í toll-lógini nakað sum her tilskilað kann koma í stríð við reglurnar í millumlandasáttmálanum (GATT).

Uttanríkisdeildin sigur í ummæli sínum frá 11. mai 1954, at neyvan fer nakað av teimum londum, sum eru undir nevnda millumlandasáttmála, at gera atfinningar, um so er, at gjøldini fara ikki munandi upp um tey, sum fyrisett eru í danskari toll-lóggávu.

Landsstýrið loyvir sær so statt at seta fram lógaruppskot samsvarandi.

1. viðgerð 6. august og máliðbeint til figgjarnevndina.

3. *Broyting í afturlatingarlógini.*

Ár 1954, 4. august legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av miðlertidige bestemmelser nr. 41 frá 11. december 1942 om ændring i anordning nr. 442 af 21. november 1923 om lukketid for butikker og lagre m. v.

§ 1.

Miðlertidige bestemmelser nr. 41 frá 11. december 1942 om ændring i anordning nr. 442 af 21. november 1923 om lukketid for butikker og lagre m. v. verður avtikin.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ophævelse af midlertidige bestemmelser nr. 41 af 11. december 1942 om ændring i anordning nr. 442 af 21. november 1923 om lukketid for butikker og lagre m. v.

§ 1.

Midlertidige bestemmelser nr. 41 af 11. december 1942 om ændring i anordning nr. 442 af 21. november 1923 om lukketid for butikker og lagre m. v. ophæves.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Undir krígnum var tað torført at útvega tær vørur, sum kioskir høvdu loyvi at selja eftir kgl. fyriskipan nr. 442 frá 21. november 1923 um afturlatingartíðir fyri handlar v. m. og fútin helt seg ikki hava heimild eftir hesi lóg at veita undantaksloyvi og tessvegna samtykti tingið bráðfongisreglurnar nr. 41 frá 11. december 1942 (smbr. løgtingstíðindi 1942, bls. 160).

Eftir hesum reglum fingu kioskir loyvi at selja fylgjandi vørur aftaná tær fyrisettu afturlatingartíðirnar: tubbakk, blomstur, leikur, konfekt, chocolatu, sukurvørur, sodavatn, veikt øl, kaffi, te, køkur og frukt.

Handilsfeløgini hava reist spurningin um broytingar í afturlatingartíðunum, harundir avtøku av nevndu bráðfongisreglum.

So sum fútin sigur í ummæli sínum, eru grundirnar fyri nevndu bráðfongisreglum ikki tilstøðis longur, eftirsum allar vanligar kioskvørur eru at fáa sum fyrr, men tá ið henda regla varð givin, vóru bert 2 kioskir í Havn, men í tíðini aftaná kríggið er talið av kioskum vaksið nógv bæði í og uttanfyri Havnina, soleiðis at ein stórur partur av smásöluhandlinum er á hondum kioskeigarunum, og serliga er tað tubbaks- og sukurvøruhandilin, sum er ein berandi partur í umsetningi teirra, og tað kemst ikki uttanum, at skulu tær vørur, sum koma undir nevndu reglu, takast frá teimum,

sum hava kioskloyvi, verður tað ein munandi skerjing í vinnulíkindum teirra.

Tórshavnar býráð hevur í ummæli sínum mælt til, at nevnda bráðfongis kunngerð verður avtikin.

Landsstýrið loyvir sær at seta lógaruppskot fram samsvarandi, men eftirsum afturlatingartíðir handla v. m. í mongum førum eru fyrisettar í sáttmála innanfyri tær í lógini fyrisettu tíðunum, heldur landsstýrið sum er ikki vera grund til at seta fram uppskot til broytingar her.

1. viðgerð 6. august og 24. august legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur sett fram uppskot til løgtingslóg um avtøku av Midlertidige bestemmelser nr. 41 frá 11. december 1942 om ændring i anordning nr. 442 af 21. november 1923 om lukketid for butikker og lagre m. v., ið gav kioskum loyvi til aftaná vanliga afturlatingartíð at selja, fyriuttan tær vanligu »kioskvørur« (bløð, postkort, brævpappír, blýantar, pennar, blekk, frímerkir,) eisini tubbakk, blomstur, konfekt, chokolatu, sukurvørur, sodavatn og líknandi tostadrykkir, kaffi, te, køkur og frukt.

Tað skyldaðist teim óvanligu viðurskiftum undir krígnum, at hesar bráðfongisreglur vórðu settar í gildi.

Tá viðurskiftini nú eru broytt, hava handilsfeløgini sett fram krav um avtøku av hesum bráðfongisreglum.

Lógarnevndin hevur viðgjørt málið.

Nevndin ásannar, at viðurskiftini eru broytt, síðani bráðfongisreglurnar vórðu settar í gildi, soleiðis at tað nú ikki longur skuldi verið neyðugt at lata tær galda framvegis. Nevndin kann tí mæla til, at bráðfongisreglurnar verða avtiknar.

Tó heldur nevndin, at tey kioskloyvir, ið eru givin, síðan lógin kom í gildi og enn eru í brúk, framvegis eiga at standa við, soleiðis at tey ikki falla burtur, um bráðfongisreglurnar verða avtiknar, og skjýtur nevndin uppá, at uppskot landsstýrisins verður broytt samsvarandi.

Uppskot

Lögtingið samtykkir uppskot landsstýrisins við fylgjandi broyting:

Í § 1 aftaná »avtikin« og »ophæves« verður sett sum nýtt petti í tí føroysku tekstini:

»Tey kioskloyvir, ið eru givin sambart Midlertidige bestemmelser nr. 41 frá 11. december 1942 og sum nú vera nýtt, koma ikki inn undir hesa lóg.«

Og í tí donsku tekstini:

»De i henhold til Midlertidige bestemmelser nr. 41 af 11. december 1942 givne kiosktilladelser, der stadig er i brug, berøres ikke af denne lov.«

2. viðgerð 26. august og 3. viðgerð 31. august 1954.

Uppskot landsstýrisins við broytingum lógarnevndinnar samtykt 16—0.

---

4. *Broyting í vrakingarlóggávuni.*

Ár 1954, 3. august legði løgmaður fram soljóðandi framløguskriv:

Eftir § 10, 2. stk. í løgtingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 um fiskavraking skal lógin leggjast fyri aftur tingið í tingsetuni 1954/55.

Landsstýrið hevur biðið yvirvrakarin, Føroya Fiskasølu, Føroya sildasølu og Føroya fiskimannafelag um ummæli við møguligum uppskoti til broytingar at seta fram fyri tingið og landsstýrð hevur nýtt høvið samstundis at biðja ummæli til galdandi løgtingslóg um sildavraking nr. 20 frá 27. januar 1950, men enn eru ongi ummæli komin.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri tingið og vil senda tinginum ummæli, so hvørt sum tey koma landsstýrinum í hendi.

1. viðgerð 5. august og málið beint til fiskivinnunevndina.

---

5. *Broyting í sjólógini.*

Ár 1954, 5. august legði løgmaður fram soljóðandi uppskot:

kgl. anordning for Færøerne om ændringer i søloven, jfr. lovbekendtgørelse nr. 319 af 1. december 1937 og lov nr. 230 af 7. juni 1952.

I medfør af § 314 i bekendtgørelse nr. 319 af 1. december 1937 sættes lov nr. 230 af 7. juni 1952 i kraft på Færøerne i følgende affattelse:

§ 1.

1) § 27 affattes således:

»Skibsføreren skal ombord have alle fornødne skibspapirer samt et eksemplar af denne lov og de i henhold dertil udstedte forskrifter.«

2) § 34 affattes således:

»I det antal og mod den betaling som landsstyret fastsætter, er skibsføreren pligtig at medtage sådanne skibsførere eller sømænd som har krav på fri hjemrejse efter sømandslovens § 26 eller for hvis hjemrejse dansk konsul eller myndighederne i Grønland skal sørge, til bestemmelsesstedet eller til anden havn, som skibet skal anløbe under rejsen. Uden betaling er han pligtig at medtage sådanne afdøde skibsføreres eller sømænds aske og ombord efterladte ejendele, forsåvidt det kan ske uden ulempe.

Under forudsætning af gensidighed kan landsstyret udvide disse bestemmelser til at gælde også for fremmede skibsførere eller sømænd, deres aske og ombord efterladte ejendele.«

3) I §35, stk. 1, ændres »dampskibe« til »maskindrevne skibe«.

Til samme paragraf føjes som nyt stykke:

»På ethvert skib, der skal være forsynet med radioanlæg, føres

4) § 36, stk. 1, 1. pkt., affattes således:

endvidere en radiodegbog (radiojournal).«

»Skibsdagbogen føres af skibsføreren eller under hans tilsyn og medansvar af en styrmand, maskindagbogen under skibsførerens tilsyn og medansvar af maskinchefen eller tillige under dennes tilsyn og medansvar af en maskinmester og radiodagbogen under skibsførerens tilsyn og medansvar af radiotelegrafisten.«

5) Til § 37 føjes som nyt stykke:

»Om radidagbogens indhold og førelse gælder, hvad derom er særligt foreskrevet.«

6) I § 40, 2. stk. indskydes efter ordene: »stedets dommer« »eller udenfor Thorshavn stedets sysselmand.«

7) Sølovens tolvte kapitel får til overskrift: »Om straf for forseelser og påtale deraf.«

Kapitlet affattes således:

§ 285. Sörger skibsføreren ikke for at have et eksemplar af denne lov og af de i henhold dertil udstedte forskrifter ombord, strafes han med bøde.

§ 286. Forsømmer skibsføreren, en styrmand, maskinchefen, en maskinmester eller radiotelegrafisten at overholde sine forpligtelser med hensyn til skibs-, maskin- eller radiodagbogen, straffes han med bøde eller hæfte.

§ 287. Vægrer skibsføreren sig ved at tage skibsførere eller sømænd, deres aske eller deres efterladenskaber med skibet som fastsat i henhold til § 34, straffes han med bøde.

§ 288. Undlader skibsføreren i tilfælde som nævnt i § 40 at gøre anmeldelse til søforklaring som der bestemt, straffes han med bøde.

§ 289. Foranlediger skibsföreren grundstødning, forlis eller anden søulykke ved grov fejl eller forsømmelse i tjenesten, straffes han med bøde eller hæfte.

Det samme gælder, dersom skibsføreren gentagne gange ved fejl eller forsømmelse foranledigr en sådan begivenhed.

Under skærpende omstændigheder kan tillige ved dommen retten til at føre skib frakendes ham enten for en vis tid eller for bestandig.

Frakendes nævnte ret ham, skal det bestemmes ved dommen, hvorvidt han kan gøre tjeneste som styrmand. Anklagemyndigheden indsender hans sönæringsbevis og udskrift af domme til landsstyret. Er det bestemt, at han kan gøre tjeneste som styrmand, meddeler landsstyret ham fornødent sønæringsbevis.

Landsstyret kan tilbagegive frakendt ret til at føre skib, når to år er forløbet fra domsafsigelsen.

§ 290. Forsømmer skibsføreren i tilfælde af skibssammenstød at overholde sine forpligtelser efter § 223 eller § 223 a., straffes han med bøde eller hæfte.

§ 291. Gør skibsføreren sig skyldig i sådan grov eller oftere gentagen fejl eller forsømmelse med hensyn til forpligtelser efter denne lov, som ikke omfattes af nogen af de foregående bestemmelser, straffes han med bøde eller hæfte.

§ 292. Hvad dette kapitel bestemmer vedrørende skibsføreren, gælder også den, der er trådt i skibsførerens sted.

§ 293. I sager angående forseelser som nævnt i § 289 kan påtale ikke rejses, forinden erklæring af landsstyret er indhentet. Er tab af menneskeliv eller betydelig skad foranlediget, kan påtale ikke heller frafaldes, forinden sådan erklæring foreligger.

§ 294. Sager efter dette kapitel hører under søret.

§ 295. Bøder efter dette kapitel tilfalder landskassen.

§ 2.

Iøvrigt er søloven gældende for Færøerne med de modifikationer, som følger af lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre.

§ 3.

Denne anordning træder i kraft den 1. januar 1955 og samtidig ophæves kgl. anordning nr. 203 af 4. nov. 1892.

1. viðgerð 11. august og 24. august legði lógarnevndin fram sonce

Nevndarálit

Landsstýrið hevurlagt fyri løgtingið Forslag til kgl. anordning for Færøerne om ændringer i søloven, jfr. Lovbekendtgørelse nr. 319 af 1. december 1937 og lov nr. 230 af 7. juni 1952.

Í § 314 í lógarkunngerð nr. 319 frá 1. december 1937 verður sagt, at setan í gildi av hesi kunngerð av sjólógini, hvarí tað við kgl. anordning kunnu gerast tær broytingar fyri Føroyar, sum eru neyðugar, verður at fastseta við kunngerð frá handils- og sjófartsministeriinum.

Uppskotið er annars ein á jourføring av sjólógini.

Lógarnevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 26. august og 3. viðgerð 31. august 1954.

Uppskot landsstýrisins samtykt 20—0.

---

6. *Tvungin tuberklarannsókn.*

Ár 1954, 2. august legði R. Long landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot við fylgisskjali:

Eftir § 4 í lóg nr. 405 frá 21. november 1939 sum broytt við lóg nr. 185 frá 10. mai 1950 um tvungna tuberklarannsókn av skipsfiskimonnum skal lógin fyri aftur í ríkisdagssetuni 1954/55.

Málið var fyri í tingsetuni 1949 (smbr. tingtíðindi 1949 bls. 200).

Landsstýrið loyvir sær so statt at leggja málið fyri tingið og mæla til at endurnýggja lógina, sum hon er.

Eintak av lógini fylgir við sum skjal.

1939, 21. Nov. — Lov for Færøerne Nr. 405 om TVUNGEN TUBERKULOSEUNDERSØGELSE AF FISKERSKIBES MANDSKAB. (Som ændret ved Lov Nr. 185 af 10. Maj 1950).

1. Enhver, der som Fører, Fisker eller i anden Egenskab er beskæftiget om Bord paa et paa Færøerne hjemmehørende Fiskerfartöj, eller som af anden Grund befordres om Bord i saadant Fartöj, skal mindst een Gang om Aaret fremstille sig til Lægeundersøgelse paa Færøernes Tuberkulosestation. Enhver, der er beskæftiget eller som af anden Grund befordres om Bord paa en paa Færøerne hjemmehörnde Hvalfangerbaad, samt enhver, der er beskæftiget paa en af Hvalstationerne paa Færøerne, skal hvert Aar inden Hvalsæsonens Begyndelse ligeledes fremstille sig til Lægeundersøgelse paa Færøerns Tubrkulosestation.

2. Forinden et Fiskerskib eller en Hvalfangerbaad hjemmehörende paa Færøerne forlader færøsk Havn for at gaa paa Fiskeri (Hvalfangst) skal det paases — for Førerens Vedkommende af Rederen (Skibsejeren) og iøvrigt af Føreren —, at enhver ombordværende er forsynet med saadan Attest som omhandlet i § 1, Stk. 2, udfærdiget ikke over eet Aar før Afsejlingsdagen. Samme Regel gælder saafremt en paa Færøerne bosiddende Person tages om Bord i anden Havn. Det paahviler den ansvarlige Leder af en Hvalstation at paase, at de paa Stationen beskæftigede er forsynet med Attest som omhandlet i § 1, Stk. 2, udfærdiget indenfor de sidste 12 Maaneder.

3. Overtrædelse af denne Lovs § 2 straffes, for saa vidt ikke höjere Straf er forskyldt med Bøde, der tilfalder Færøernes Landskasse.

4. Denne Lov træder i Kraft den 1. December 1939 og underkastes Revision i Rigsdagssamlingen 1954-55.

Uppskot

Lóg nr. 405 frá 21. november 1939 sum broytt við lóg nr. 185 frá 10. mai 1950 verður endurnýggjað við hesi broyting:

»Denne lov træder i kraft straks og underkastes revision i folketingssamlingen 1958/59«.

1. viðgerð 4. august og 24. august legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Av tí at lóg nr. 405 frá 21. november 1939 sum broytt við lóg nr. 185 frá 10. maj 1950 um tvungna tuberklarannsókn av skipsfiskimonnum eftir § 4 í fyrrnevndu lóg skal fyri aftur í ríkisdagssetuni 1954-55, hevur landsstýrið lagt málið fyri løgtingið.

Landsstýrið mælir til at endurnýggja lógina óbroytta.

Málið varð beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur biðið landslæknan og yvirlækna Magnussen um ummæli í málinum, og báðir mæla til at seta lógina í gildi aftur í óbroyttum standi.

Viðvíkjandi tí við 1. viðgerð av málinum reista spurningi um at lata tuberklarannsókn fara fram eisini aðrastaðni enn í Havn, úttalar landslæknin, at tað er umráðandi, at kanningin *altíð* verður gjørd av fullkønum manni, t. v. s. av yvirlæknanum ella næsta hjálparmanni hansara á tuberklastöðini. Yvirlækni Magnussen sigur, at hann hevur gjøgnumlýst skipsfólk bæði á Tvøroyri, í Vági og í Klakksvík, men tað vísir seg altíð, at ein stórur partur av skipsfólki fer ikki til gjøgnumlýsingar fyrr enn teir koma til skipið, og tá skipini skulu avstað, eru tey ikki fullmannað við

eftirkannaðum fólki, og so fara tey alíkavæl til Havnar. Hann heldur ikki, at tað er neyðugt at broyt lógina. Kanningar aðrastaðni enn í Havn kunna sum fyrr fara fram, sjálvt um lógin verður óbroytt.

Nevndin mælir annars til at biðja landsstýrið umhugsa spurningin um, hvussu teir skulu hjálpast fíggjarliga, sum ikki koma til skips vegna tess, at teir ikki standa kanningina ígjøgnum, og skjótast gjørligt leggja uppskot hesum viðvíkjandi fyri tingið.

Nevndin mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. august og 3. viðgerð 31. august 1954.

Uppskot landsstýrisins samtykt 21—0.

---

7. *Dagpeningur frá Føroya Vanlukkutrygging*

Ár 1954, 3. august legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í kgl. fyriskipan fyri Føroyar nr. 161 frá 29. marts 1939 »om forsikring mod følger af ulykkestilfælde«.

lagtingslov om ændring i kgl. anordning for Færøerne nr. 161 af 29. marts 1939 »om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.«

§ 25 í kgl. fyriskipan nr. 161 frá 29. marts 1939 verður broytt soleiðis:

»Dagpeningurin fyri árið 1955 er kr. 6,00 um dagin. Partvísur dagpeningur verður ikki veittur.«

§ 25 i kgl. anordning nr. 161 af 29. marts 1939 ændres således:

»Dagpenge udgør for året 1955 kr. 6,00 daglig. Delvis dagpenge ydes ikke.«

Viðmerking:

Løgtingslóg nr. 26, 14. oktober 1953 um dagpening frá Føroya vanlukkutrygging er bert galdandi hetta árið út.

So statt loyvir landsstýrið sær at seta fram uppskot um at endurnýggja lógina fyri komandi ár.

1. viðgerð 5. august,2. viðgerð 10. og 3. viðgerð 13. august 1954.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

8. Lóg um veð í veiðu.

Ár 1954, 3. august legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Midlertidig lov for Færøerne om pantsætning af fangst.

§ 1.

Enhver, der driver fiskeri, skal kunne give underpant i fangsten i året 1955 til sikkerhed for betaling af gæld, der er stiftet til udrustning og drift af fiskerfartöjer.

§ 2.

Det ifølge vedkommende pantebrev skyldige beløb kan inddrives ved udpantning og forfalder til betaling senest den 31. december 1955. Panteretten bortfalder, såfremt begæring om udpantning ikke er indgivet til sorenskriveren inden den 1. april 1956.

§ 3.

Varer, leveret til udrustning mod pant i fangsten i overensstemmelse med denne lov, kan ikke for andre tilgodehavender gøres til genstand for arrest, udlæg eller anden retsforfølgning.

§ 4.

Efter udløbet af april måned 1956 udsletter sorenskriveren (dommeren) de i henhold til denne lov tinglæste pantebreve, uden fremsættelse af begæring i så henseende er fornøden.

§ 5.

Tinglæsning såvel som aflæsning og udslettelse, der sker i medfør af denne lov, kan finde sted uden gebyr til statskassen.

§ 6.

Denne lov, der kun gælder for Færøerne, træder i kraft straks.

Viðmerking:

Ríkislóg nr. 324 frá 10. december 1953 er bert galdandi fyri hetta árið. So statt loyvir landsstýrið sær at seta fram uppskot til ríkislóg fyri komandi ár.

1. viðgerð 5. august, 2. viðgerð 10. og 3. viðgerð 13. august 1954.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

9. *Manning av skipum.*

Ár 1954, 2. august legði R. Long landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum og skjølum:

Uppskot

til

løgtingslóg um manning av føroyskum skipum.

Inngangur og orðskiljingar:

Tonn: Brutto registar tonn.
Bátur: Far uppí 8 tons.
Minni far: Far millum 8 og 20 tons.
Skip: Far frá 20 tonsum og uppeftir.
Heimasigling: Sigling innanfyri 100 sjómíl úr landi.
Norðhavssigling: Sigling norðanfyri 53° norður breidd.
Óskerd sigling: Sigling á øllum høvum.
Hestakraft (H.K.): Merkt maskinhestakraft.

1. partur.

§ 1.

Bátar mugu ikki fara longur enn 30 sjómíl úr landi og krevst ikki mynstring av manning ella skiparabræv at føra teir.

Minni før mugu ikki fara útum heimasigling, og umframt at halda vanligu lógarreglur skulu tey hava mynstraða manning og skipara við heimaskiparabrævi.

Í serstøkum førum kann landsstýrið veita undantaksloyvi frá siglingarleiðunum í hesi grein.

lagtingslov om bemanding af færøske skibe.

Indledning og definitioner:

Ton: Brutto register ton.
Båd: Fartöj op til 8 tons.
Mindre fartöj: Fartöj mellem 8 og 20 tons.
Skib: Fartöj på 20 tons og derover.
Kystfart: Sejlads indenfor 100 sømil fra land.
Fart på Nordatlanten: Sejlads nord for 53° nordlig bredde.
Vindskrænket fart: Sejlads på alle have.
Hestekraft (H.K.): Den indicerede maskinhestekraft.

1. kapitel.

§ 1.

Både må ikke gå længere fra land end 30 sömil og der udkræves ikke udmönstring af mandskab eller fører med sønæringsbevis.

Mindre fartöj må ikke gå udover kystfart og foruden at opfylde lovens almindelige regler skal de have udmønstret mandskab og en fører med sønæringsbevis som kystskipper.

I særlige tilfælde kan landsstyret dispensere fra fartsområderne i denne paragraf.

§ 2.

Á hvørjum føroyskum skipi skal vera skipari við sjóyrkisbrævi soleiðis:

Skipsførarabræv, tá ið skipið er yvir 400 tons á øllum leiðum og á øllum skipum í óskerdari sigling og á øllum ferðamannaskipum yvir 100 tons uttanfyri heimasigling.

Skiparabræv í Norðhavssigling við skipi undir 400 tons.

Heimaskiparabræv á minni førum.

§ 3.

Hvørt føroyskt skip yvir 1000 tons skal hava stýrimenn sum her tilskilað:

Í óskerdari sigling: 2 stýrimenn við stýrimannsbrævi.

Í Norðhavssigling: 1 stýrimann við stýrimannsbrævi, 1 stýrimann við bestamansbrævi. Flytur skip vanliga meir enn 12 ferðafólk, skulu báðir stýrimenninir hava stýrimansbræv.

Hvørt skip millum 150 og 1000 tons skal hava stýrimenn sum her tilskilað:

Í óskerdari sigling: 1 við stýrimansbrævi, 1 við bestamansbrævi.

Í Norðhavssigling: 2 við bestamansbrævi.

Í heimasigling: 1 við bestamansbrævi. Flytur skipið vanliga meir enn 12 ferðafólk skulu stýrimenn hava stýrimansbrævi í allari sigling.

Á hvørjum skipi undir 150 tons uttanfyri heimasigling skal vera ein stýrimaður við bestamansbrævi og tað sama í heimasigling, um skipið ætlast at gera longri túr enn 3 dagar.

Á hvørjum skipi kunnu umframt setast fleiri stýrimenn, um tørvur er til tess, tó ikki við minni yrkisbrævi enn frammanundan er kravt, tó so at við skipi undir 150 tons kann maður við heimaskiparabrævi vera undirstýrimaður.

§ 2.

På hvert færøsk skib skal der være en fører med sønæringsbevis således:

Skibsførerbevis, når skibet er over 400 tons indenfor alle fartsområder og på alle skibe i vindskrænket fart og på alle passagerskibe over 100 tons udenfor kystfart.

Skipperbevis i fart på Nordatlanten på skibe under 400 tons.

Kystskipperbevis på mindre fartøjer.

§ 3.

Hvert færøsk skib over 1000 tons skal have styrmænd som nedenfor anført:

I vindskrænket fart: 2 styrmænd med styrmandsbevis.

I fart på Nordatlanten: 1 styrmand med styrmandsbevis, 1 styrmand med bedstemandsbevis. Befordrer skibet sædvanligvis mere end 12 passagerer, skal begge styrmændene have styrmandsbevis.

Hvert skib mellem 150 og 1000 tons skal have styrmænd som nedenfor anført:

I vindskrænket fart: 1 med styrmandsbevis, 1 med bedstemandsbevis.

I fart på Nordatlanten: 2 med bedstemandsbevis.

I kystfart: 1 med bedstemandsbevis. Befordrer skibet sædvanligvis mere end 12 passagerer skal styrmændene have styrmandsbevis indenfor alle fartsområder.

På hvert skib under 150 tons uden for kystfart skal der være 1 styrmand med bedstemandsbevis og ligeledes i kystfart, ifald rejsens varighed er beregnet til mere end 3 dage.

På hvert skib kan der herudover ansættes flere styrmænd, hvis det skulle være nødvendigt, men ikke med mindre sønæringsbeviser end foran foreskrevet, dog skal en person med kyst-

§ 4.

Á hvørjum føroyskum skipi við meira enn 900 hestakraft (H.K.) maskinu skulu vera í minsta lagi 2 maskinistar við maskinistabrævi av 2. stigi.

Hvørt skip við millum 300 og 900 hestakraft (H.K.) maskinu skal hava í minsta lagi 1 maskinist við maskinistabrævi av 2. stigi og 1 við maskinpassarabrævi.

Hvørt skip við millum 200 og 300 hestakraft (H. K.) maskinu skal hava í minsta lagi 1 maskinist við maskinpassarabrævi.

Hvørt skip við millum 120 og 200 hestakraft (H.K.) maskinu skal í minsta lagi vera mannað við 1 maskinisti við motorpassarabrævi, tó so, er tað ferðamannafar, krevst maskinistur við motorpassarabrævi, tá ið maskinkraftin er meir enn 50 hestar (H.K.).

Á hvørjum skipi kunnu umframt setast fleiri maskinmenn enn her nevnt, um tørvur er til tess, tó ikki við minni yrkisbrævi enn frammanundan er kravt.

skipperbevis kunne udmønstres som understyrmand.

§ 4.

På hvert færøsk skib med over 900 hestekraft (H.K.)) maskine skal der være mindst 2 maskinister med maskinistbevis af 2. grad.

Hvert skib med maskineri mellem 300 og 900 maskin hestekraft (H.K.) skal mindst have 1 maskinist med maskinistbevis af 2. grad, og 1 med maskinpasserbevis.

Hvert skib med maskineri mellem 200 og 300 hestekraft (H.K.) maskine skal have mindst 1 maskinist med maskinpasserbevis.

Hvert skib med maskineri mellem 120 og 200 hestekraft (H.K.) maskine skal mindst være bemandet med 1 maskinist med motorpasserbevis, dog hvis det drejer sig om passagerfartøj, udkræves en maskinist med motorpasserbevis, når maskinkraften er over 50 hestekræfter (H.K.).

På hvert skib kan der desuden ansættes flere maskinister end her anført, hvis det skulle findes nødvendigt, dog ikke med mindre beviser end foran foreskrevet.

§ 5.

Á hvørjum skipi yvir 1500 tons, og er tað ferðamannaskip tá yvir 500 tons, skal vera radio-telefon og telegrafstöð, við minst 1 radiotelegrafisti at røkja støðina.

Er skipið minni enn ávikavist 1500 og 500 tons, skal tað hava góðkenda radiotelefonstøð, sum kann røkjast av skipara ella stýrimanni (smbr. kunngerð nr. 26 frá 25/7 1947 og nr. 70 frá 21/12 1949).

§ 5.

På hvert skib over 1500 tons og hvis det er passagerskib over 500 tons, skal der være radiotelefon og radiotelegrafstation med mindst 1 radiotelegrafist til betjening af stationen.

Er skibet under henholdsvis 1500 og 500 tons, skal det have godkendt radiotelefonstation, som kan betjenes af fører eller styrmand (jfr. kundgørelse nr. 26 af 25/7 1947 og nr. 70 af 21/12 1949).

§ 6.

Hvört føroyskt skip mannað við meiri enn 8 monnum, ið hava fast tilhald umborð, skal hava kokk við kokkabrævi.

§ 7.

Hvørt føroyskt skip skal hava tørvandi manning til tryggingar av mannalívi á sjónum og sigling, soleiðis at tviskiftisvakt í minsta lagi kann verða gingin. Dekksmannatalið verður fyrisett í sáttmála ella eftir avgerð og ábyrgd skiparans.

§ 8.

Maskinistunum til hjálpar skulu vera hjálparmaskinistar, smyrjarar ella kyndarar, nóg mikið til at alt maskinverkið kann verða trygt umgingið og at í minsta lagi kann verða gingin tviskiftisvakt, tó fyri kolkyndarar trí skiftisvakt. Tal teirra verður annaðhvørt at gera av eftir sáttmála ella undir skiparans ábyrgd og avgerð.

2. partur.

§ 9.

Ongin má vera yngri enn 14 ár, ið mynstrar út við føroyskum skipi, og er hann kolkyndari ella kollempari, tá í minsta lagi 18 ár.

Landsstýrið kann fyriseta reglur, hareftir sjóvinnuligt yrki við føroyskum skipi verður treytað av, at viðkomandi við læknakannan finnist skikkaður til tílíkt.

Fyri deksmenn, stýrimenn og skiparar skal skiljast millum sigling við fiskiskipi (skip, ið við egnum reiðskapi útvegar sær farm) og við farmaskipi (skip, ið flytur farm av øllum slagum), samsvarandi hesum geva sjó-

§ 6.

Hvert færøsk skib, der er bemandet med over 8 mand, der har fast ophold ombord, skal have kok med kokkebevis.

§ 7.

Ethvert færøsk skib skal have den af hensyn til sikkerheden for menneskeliv på søen og skibets betryggende drift fornødne besætning, således at der i det mindste kan holdes toskiftet vagt. Antallet af dæksmænd fastsættes ved overenskomst eller af føreren under dennes ansvar.

§ 8.

Til maskinisternes assistance skal der ansættes hjælpemaskinister, smørere eller fyrbødere i så stort antal, som er påkrævet af hensyn til maskineriets betryggende betjening og således, at der i det mindste kan holdes toskiftet vagt og for fyrbødernes vedkommende treskiftet vagt. Deres antal fastsættes ved overenskomst eller af føreren under dennes ansvar.

2. kapitel.

§ 9.

Personer, der ikke er fyldt 14 år må ikke gøre tjeneste på færøsk skib. Personer, der ikke er ifyldt 18 år, må ikke gøre tjeneste som fyrbødere eller kultempere.

Landsstyret kan fastsætte regler, hvorefter adgangen til sønæring på færøsk skib betinges af, at vedkommende ved lægeundersøgelse findes skikket til pågældende tjeneste.

For dæksmænd, styrmænd og skippere skal der skelnes mellem tjeneste på fiskeskibe (skib, der med egne redskaber skaffer sig last) og på fragtskibe (skibe, der befordrer ladning af enhver art) og i overensstemmelse hermed skal der udstedes sønæringsbevi

yrkisbrøv fyri stýrimenn og skiparar rættindir til fiskiskap ella farmasigling, tá ið niðanfyri nevndu siglingarkrøv eru uppfylt.

Prógvar maður at hava 1/3 av tí fyrisettu siglingartíð við farmaskipi og teir 2/3 við fiskiskipi, kann viðkomandi sjóyrkisbræv fáa viðmerking um, at tað gevur rættindir bæði við farma- og fiskiskipi.

§ 10.

Fyri at kunna mynstra sum kønur deksmaður krevst, at maðurin er minst 18 ár og hevur siglt minst 12 mánaðir sum deksmaður. Fyri at kunna mynstra sum deksmaður krevst, at maðurin er minst 17 ár og hevur siglt minst 12 mánaðir sum ungur deksmaður. So skjótt sjómansskeið sum umtalað í § 2 í lóg um sjómansskúlar og sjómanslæru, verður treytað, skal ungur deksmaður hava verið minst 3 mánaðir av tí treytaðu siglingartíðini á sjómansskeiðinum, áðrenn hann kann mynstra sum deksmaður.

§ 11.

Heimaskiparabræv fæst, tá ið maður hevur fylt 21 ár, hevur heimarætt, og tey seinastu 5 árini er ikki dømdur ella hevur sitið av 4 mánaða fongsil ella meira, arbeiðshús ella trygdarvarðhald, (tó kann landsstýrið í serligum førum veita undantaksloyvi frá hesi treyt), hevur fingið læknaváttan sum fyrisett av landsstýrinum fyri sjón og hoyring, hevur minst 36 mánaða mynstraða siglingartíð aftaná at hava fylt 15 ár, harav minst 12 mánaðir sum kønur deksmaður og í mesta lagi 24 mánaðir við minni fari og hevur staðið heimaskiparaprógvtøku.

Lýkur maður hesar treytir, og hevur siglt í mesta lagi 12 mánaðir av tí í stk. 1 fyrisettu siglingartíð við minni

ser til styrmænd og skippere med adgang til fiskeri eller fragtfart, når vedkommende opfylder nedennævnte krav til sejlads.

Godtgør vedkommende, at 1/3 af den foreskrevne sejlads falder på fragtskib og 2/3 på fiskeskib, kan vedkommende sønæringsbevis forsynes med påtegning om adgang til såvel fragtfart som fiskeri.

§ 10.

For at udmønstre som befaren dæksmand udkræves, at vedkommende er fyldt 18 år og er faret til søs i mindst 12 måneder som dæksmand. For at udmønstre som dæksmand udkræves, at vedkommende er fyldt 17 år og har faret på søen i mindst 12 måneder som ungmand. Såsnart søfartskursus som omtalt i § 2 i lov om navigationsundervisning bliver krævet, skal ungmænd have været mindst 3 måneder af den krævede sejlads på nævnte søfartskursus, forinden han kan udmønstre som dæksmand.

§ 11.

Bevis som kystskipper kan opnås når vedkommende er fyldt 21 år, har indfødsret, og i de sidste 5 år ikke har været idømt eller har udstået straf af fængsel i 4 måneder eller derudover, arbejdshus eller sikkerhedsforvaring, (dog kan landsstyret under særlige omstændigheder tilstå afvigelser herfra), har bestået en af landsstyret foreskrevet syns- og høreprøve, har faret til søs i mindst 36 måneder efter det fyldte 15. år, deraf mindst 12 måneder som befaren dæksmand og højst 24 måneder i mindre fartøj og har bestået kystskipperprøven.

Når vedkommende opfylder disse betingelser og har faret til søs i højst 12 måneder af den i stk. 1 foreskrevne

fari og umframt staðið skiparapróvtøkuna, fær hann yrkisbræv sum bestimaður.

§ 12.

Skiparabræv fæst, tá ið maður hevur fingið skiparaprógv, lýkur tær í § 11, 1. stk. fyrisettu persónligu treytir og hevur siglt sum stýrimaður í minsta lagi 18 mánaðir, harav skal minst helmingur hava verið sum 1. ella einasti stýrimaður við skipi og í minsta lagi skal hálv stýrimanstíðin verið út um heimasigling.

Skipsførarabræv fæst, tá maður hevur fingið stýrimansprógv, heldur tær í § 11, stk. 1, fyrisettu persónligu treytir og hevur siglt sum stýrimaður í minsta lagi 24 mánaðir, harav skal minst helmingur hava verið sum 1. ella einasti stýrimaður við skipi og í minsta lagi hálv stýrimanstíðin hava verð út um heimasigling.

§ 13.

Fyri at kunna mynstra sum radiotelegrafistur krevst at hava staðið roynd, sum millumlandareglur fyriseta fyri radiotelegrafistar.

§ 14.

Fyri at kunna mynstra sum kokkur krevst at hava verið til skips í minst 12 mánaðir, at hava fylt 17 ár og at hava staðið kokkaroynd.

§ 15.

Í øllum førum skal eitt her umrøtt prógv av hægri stigi geva øll rættindi, sum tilsvarandi av lægri stigi.

§ 16.

So leingi læra og prógvtøka fyri maskinistar, maskinpassarar og motorpassarar er ikki føroyskt sermál, eru viðkomandi reglur í ríkislóggávuuni

sejltid på mindre fartøj foruden at have bestået skipperprøven, erholder han sønæringsbevis som bedstemand.

§ 12.

Sønæringsbevis som skipper opnås når vedkommende har bestået skippereksamen, opfylder de i § 11, stk. 1 foreskrevne personlige betingelser, og har faret til søs i mindst 18 måneder, hvoraf mindst halvdelen som 1. eller eneste styrmand på skib og mindst halvdelen af styrmandstiden skal have været udenfor kystfart.

Sønæringsbevis som skibsfører opnås, når vedkommende har bestået styrmandseksamen, opfylder de i § 11, stk. 1, foreskrevne personlige betingelser og har faret til søs i mindst 24 måneder, af denne tid skal mindst halvdelen have været som 1. eller eneste styrmand på skib og mindst halvdelen af styrmandstiden udenfor kystfart.

§ 13.

For at kunne udmønstre som radiotelegrafist udkræves, at han har bestået en prøve som efter mellemfolkelige regler foreskrives for radiotelegrafister.

§ 14.

For at kunne udmønstre som kok udkræves, at han har faret til søs i mindst 12 måneder, at han er fyldt 17 år og har bestået kokkeprøven.

§ 15.

I alle de heromhandlede tilfælde, skal bevis af højere grad give adgang til tilsvarende af lavere grad.

§ 16.

Sålænge undervisningen og eksamensordningen for maskinister, maskin- og motorpassere ikke er særanliggende, kommer de bestemmelser i

framvegis í nýtslu (smbr. »Lov om sønæring af 28. februar 1916 med senere ændringer«) tó so at fyri at kunna mynstra sum maskinpassari, skal maður eisini hava fingið motorpassaraprógv og hava siglt sum hjálparmaður í minsta lagi helmingin av fyrisettu siglingartíðini við skipi við motori yvir 120 H.K.

§ 17.

Landsstýrið hevur heimild til eftir tilmæli frá viðkomandi yrkisfelag at veita manni, sum undir seinna heimsbardaga hevur ført skip við undantaksloyvi til Vesturgrønlands atgongd til at kunna fáa skiparaprógv eftir hesi lóg.

§ 18.

Henda lóg kemur í gildi 1. september 1954, tó soleiðis, at landsstýrið fær heimild í kunngerð at fyriseta, nær treytin í § 10 um sjómansskeið og í § 14 smbr. § 6 um kokkaroynd skal koma í gildi.

rigslovgivningen fortsat i anvendelse, (jfr. »Lov om sønæring af 28. februar 1916 med senere ændringer), dog således, at der for at kunne udmønstre som maskinpasser må vedkommende tillige have bestået motorpasserprøven og have faret til søs mindst halvdelen af den foreskrevne sejltid som medhjælper på skib med motor over 120 H. K.

§ 17.

Landsstyret er bemyndiget til efter indstilling af vedkommende fagforening at meddele personer, der under sidste verdenskrig har sejlet med dispensation som fører af skib til Vestgrønland adgang til at kunne erhverve sønæringsbevis som skipper i medfør af denne lov.

§ 18.

Denne lov træder i kraft 1. september 1954, dog således, at landsstyret bemyndiges til ved kundgørelse at fastsætte tidspunktet for ikrafttrædelsen såvidt angår betingelserne i § 10 søfartskursus og § 14 jfr. § 6 om en kokkeprøve.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot til lóg um manning av føroyskum skipum hoyrir so nær saman við lógina um sjómansskúlar og sjómanslæru, sum samtykt varð á seinasta tingi, at siglingarlóggáva okkara er ikki nútímaførd, fyrr enn tann í hesum uppskoti tilætlaða lóggáva er framd. Kravið um meira tíðarhóskandi lærdóm fyri yvirmenn á føroyskum skipum, hevur gjørt tað neyðugt eisini at lógfesta tey ræsttindi, hesi nýggju prógv skulu kunna geva, og út frá lóggávuni hesum viðvíkjandi í grannalondum og í samráð við siglingarkønar menn er hetta uppskot gjørt.

§ 10 um skiljan ímillum ungar dekksmenn, deksmenn og kønar deksmenn er orsakað av tí í § 5 í lógini um sjómansskúla og sjómanslæru nr. 8 frá 19. marts 1954 tilskilaða sjómansskeiði, og er sett uppí hetta lógaruppskot eins og nevnda § 5 í nevndu lóg fyri at javnføra lóggávu okkara við tilsvarandi lóggávu í Norðurlondum.

§ 14 um mynstringarkrav fyri kokkar á skipum við meir enn 8 monnum (smbr § 6 í hesum lógaruppskoti) er orðað út frá sama sjónarmiði sum § 10.

Av tí, at bæði kokkaskúli og serlig sjómansskeið fara at kosta landskassanum væl av peningi, verða hesi ikki sett á stovn uttan neyðugt peningajáttan frá løgtinginum, og er tí í § 18 tilskilað landsstýrinum heimild til, tá ið hesar peningajáttanir eru givnar, við kunngerð at seta treytirnar í § 10 og § 14 í gildi.

Málinum er viðlagt avskrift av skrivi frá Føroya skipara- og navigatørfelag, sum hevur havt lógaruppskotið til ummælis og frá Føroya maskinistfelag, sum hevur ynskt lógfest, »at maskinpassarar, sum áðrenn 1/1 1944 høvdu rætt at vera meistarar um borð á føroyskum trolarum og øðrum veiðiskipum, skulu framvegis hava hendа rætt, hóast nevndu skip hava meira enn 500 H.K.«

Vísandi til § 16 í hesum lógaruppskoti, har tilskilað er, at so leingi læra og prógvtøka fyri maskinistar, maskinpassarar og motorpassarar er ikki føroyskt sermál, eru viðkomandi reglur í ríkislóggávuni framvegis í nýtslu, má heimastýrið haldast ikki at kunna lóggeva hesum viðvíkjandi, men landsstýrið vil um tað verður ynskt senda ríkisstýrinum brævið frá maskinistfelagnum.

FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

Tórshavn, 16. juni 1954.

Føroya Landsstýri
her.

Í brævi dagfest 19. februar hevur Føroya Landsstýri sent uppskot til løgtingslóg um sjómanaskúla og sjómanslæru og løgtingslóg um manning av føroyskum skipum til gjøgnumlesingar og møguligt ummæli.

Felagið loyvir sær at svara, at tað heldur tað ikki vera beint, at mark verður sett fyri, hvar fiskiskipari við fiskiskipi hevur loyvi at fiska, og at mark verður sett fyri, hvørjum skipi hann hevur loyvi at fiska við.

Fyri skiparar við núgaldandi prógvi er einki mark fyri skipastødd, og teir hava heimild til at sigla longur suðureftir, enn uppskotið gevur.

Tann prógvtøka, sum nú verður sett í gildi, gevur størri lærdóm enn hin gamla, og felagið heldur tað tí vera líkindi til, at økið fyri sigling hjá manni við hesum prógvi verður óavmarkað, og skipastøddin somuleiðis óavmarkað. — Víst verður eisini til skriv av 1/1 1953 til Føroya Løgtings har talað verður um »at skipa siglingarlæruna soleiðis, at upprættað verður ein serlig fiskiskiparalæra bert fyri fiskiskiparar, har teir kunnu fáa tann lærdóm, einum krevst fyri lívstíð, á *einum* skúlaskeiði.«.

Víst verður á, at ensk fiskiskiparalæra kallað »skipper full« gevur rætt til óavmarkaða sigling við óavmarkaðari skipastødd. — Norðmenn hava eina líknandi prógtöku, sum gevur óavmarkaða sigling við óavmarkaðari skipastødd til fiskiskap.

Felagið heldur eisini, at maður við skiparabrævi skal hava loyvi til at sigla farmasigling við føroyskum skipi upp til 500 tons í europeiskum farti.

Eisini má hugsast um teir menn, ið hava tikið fiskiskiparaprógv, og ikki hava tikið grønlandsprógv. Møguleiki má verða fyri hesar menn at fáa loyvi at taka grønlandsprógv ella at fáa serprógv fyri hesa eksamen uppá styttri tíð, soleiðis at nøkur av teimum fakum, sum teir hava havt, falla burtur.

Hesa viðmerking sendi eg sum formaður í felagnum. Eg havi ikki havt bøvi til ta tosa við allar nevndarlimirnar enn, men so hvørt, sum eg fái fatur á teimum, skal spurningurin leggjast fyri teir, og um teir hava aðra meining, skal landsstýrið fáa tað at vita.

Við hávirðing

Ole Jacob Jensen.

FØROYA MASKINISTFELAG

Tórshavn, 3. juni 1954.

Føroya Landsstýri,
her.

Tá ið felagið hevur fingið at vita, at ætlanin er at leggja fram uppskot um broytan av lógini um siglingarlæruna, loyvir felagið sær at koma við uppskoti um, at broytan verður gjørd um rættin til at vera maskinmeistari um borð á trolarum og øðrum veiðuskipum, ið hava meir enn 500 hk.

Fyrstu ferð, prógv varð tikið í Føroyum fyri maskinmeistarar, var í 1943; áðrenn ta tíð vóru bert tikin maskin- og motorpassaraprógv. Tey fyrstu árini aftan á hetta vóru eingir vansar fyri maskinpassarar at fáa pláss um borð á trolarum, tí eingir vóru settir at fara upp um 500 hk., og nevnda prógv gav loyvi til at vera 1. og 2. meistari upp til hesa hædd. Síðani eru hk á trolarunum nærri fastlagdar, og eru tað ikki so fáir, sum nú hava yvir 500 hk. Teir, sum áður høvdu havt loyvi til at vera meistarar, máttu nú søkja um serloyvi, og hetta gekst ofta trupult og var torført at fáa.

Fyri at sleppa undan at søkja um serloyvi og fyri at líkastilla teir, sum áðrenn 1943 høvdu tikið maskinpassaraprógv, loyva vit okkum at biðja háttvirda landsstýrið um at framseta broytingaruppskot, sum vit kundu

hugsað okkum kom at ljóða sum so: Maskinpassarar, sum áðrenn 1/1 1944 høvdu rætt til at vera meistarar um borð á føroyskum trolarum og øðrum veiðuskipum, skulu framvegis hava henda rætt, hóast nevndu skip hava meira enn 500 hk.

Henda umsókn er framkomin av teirri grund, at teir menn, ið hetta kemur at umfata, eru flestir blivnir so gamlir, at teir ongar møguleikar nú hava fyri at taka tað almenna maskinistprógvið.

Við hávirðing

f. FØROYA MASKINISTFELAG

S. Hoydal

1. viðgerð 4. august og 2. septemberlegði siglingsmálanevndin fram soljóðandi

Nevndarumhugsan við fylgisskjølum:

Uppskotið til lóg um manning av føroyskum skipum er orsakað av, at hetta lóganumráði er komið undir heimastýrið, og er nevndin í tí mesta samd við fyrisetingarnar í uppskotinum og heldur, at henda lóg sum heild tikið vil føra góðan og neyðturviligan bata við sær. Eitt er tó, sum semja hevur ikki fingist um í nevndini at mæla til óbroytt, nevniliga siglingarrættindini hjá fiskiskiparum.

Eftir tí núgaldandi lóg hava menn, sum hava fingið yrkisbræv sum fiskiskiparar av fyrsta stigi (upp á longdarprógvið) *rætt* at føra fiskiskip av óavmarkaðari stødd um allan sjógv, sum hiðan verður søktur. Eftir hesum lóganuppskoti verður *skiparabrævið*, sum skal kunna fáast upp á nakað meiri læru og meiri sigling, bert at geva rætt til at føra fiskiskip undir 400 t í sigling norðan fyri 53° norður breidd. Hesum hevur skiparafelagið funnist at í brævi, sum er viðlagt málinum, eins og tingmenn høvdu hesa atfinning á munni undir fyrstu tingviðgerð. Nevndin hevur hesum viðvíkjandi hatt samráðing við skiparar og fyristøðumannin fyri siglingarprógvtøkuni, og verður her víst til bræv frá Jógvan á Dul, prógdómara, sum av tí tað var ikki framlagt saman við tingmálinum, verður kunngjørt tingmonnum sum skjal til hesa nevndarumhugsan saman við úrdrátti úr røðu, sum norski stjórin fyri fiskiskiparalæruna, Hans Tambs Lyche, hevur flutt fyri stuttum.

Tað sjónarmið, sum uppskotið til føroyska manningarlóg leggur til grund fyri tí ætlaðu fyriseting, at skiparabræv skal geva rætt til at føra

fiskiskip (eins og farmaskip) í Norðurhavssigling undir 400 tons, men at til störri far og og sigling suður um 53° norður breidd krevst skipsførarabræv, ið krevur stýrimansprógv og neyðturviliga siglingartíð, er tað sama sum hevur eyðkent nútíma mannagongdina í siglingarlóggávuni í øllum okkum kendum londum, ið er tann, at so við og við sum førinj verða dýrari og tey virði, sum skiparin kemur at standa til svars fyri, verða so mangar ferðir størri enn áður, verða treytirnar til yrkisbræv tíl at føra tey at tyngjast. Kanska ikki allir reiðarir hjá okkum enn standa aftan fyri hesum kravi, men fángevarar og tryggingarfeløg um allan heim leggja mesta dent á, at hesarj leið verður fylgt.

Tá ið núgaldandi donsk lóggáva síðan 1927 gevur fiskiskipara av fyrsta stigi við longdarprógvi rætt at føra fiskiskip av øllum støddum um alt atlantshav norðan fyri 35° norður breidd og um ishavið, varð ikki hugsað um fiskifør av tí stødd og tí dýrleika, sum nútíma fiskifør koma til. Tá ið nú keypikostnaðurin kemur upp á einar 4 milliónir, varð tá roknað við nøkrum hundrað túsund krónum. Viðvíkjandi dýrleikanum av farminum, sum hesi skip føra til landa, er tann sami munur millum nú og tá. Víst verður her til ta leið, týsk lóggáva er farin, til tær so nógv tyngri treytir, bretar tey seinnu árini hava lagt á skiparabrøvini og til tær ætlanir, sum danir og norðmenn hava í næstum at tyngja ógvuliga munandi um sínar treytir fyri at føra stór og dýr før til langfara fiskiskap.

Hóast ein meginluti í nevndini hevur verið hugaður at mæla tinginum til at samtykkja § 2 í lógaruppskotinum sum hon er, er nevndin, eftir at samráðingar við uttannevndar menn er farin fram, samd um at lata hetta seðga eina tíð og vil mæla til at koma skiparafelagnum á møti við at taka ta í § 2 nevndu avmarking av skipastøddini til fiskiskap burtur.

Viðvíkjandi føraratreytir fyri ferðamannaskp heldur nevndn, at fyrisetingin í § 2, ið loyvir manni við skiparabrævi at føra ferðamannaskip upp í 400 tons í heimasigling er ov lin og mælir til at markið verður sett við 150 tons.

Vðvíkjandi grein 1 verður mælt til at avtaka treytina um mynstraða manning fyri minni før og bert treyta skipara á fiskiskipum í heimasigling.

Sum fjórða broytng verður mælt til millum tær persónligu treytirnar, sum álagdar verða fyri at kunna fáa yrkisbræv sum heimaskipari, skipari og skipsførari, eisin at krevja edrúiligheitsprógv á sama hátt sum hetta verður kravt av bilstjórum.

Sum fimta broyting verður mælt til í § 17 at tilskila landsstýrinum heimild til í serstøkum førí at veita manni við skiparabrævi, sum hevur prógvað dugnaskap og álitisemi í skiparastarvi sínum, frammíhjáloyvi at føra fiskifar av einihvørjari stødd suður til 35° norður breidd.

Viðvíkjandi tí av skiparafelagnum framsetta ynski, at veita mannum, sum hava tikið setiskiparaprógv, høvi til í staðin fyri tað higartil verandi longdarprógvð at taka eykaprógv, sum skal kunna veita teimum somu rættindir sum tað nýggja skiparaprógvið, hevur landsstýrið greitt frá, at henda komandi vetur og helst eisini annan veturin verður slíkt skeið

at fara fram á Føroya Sjómansskúla, og setur tí nevndin onki uppskot fram hesum viðvíkjandi.

Nevndin heldur tað vera beint at skila til, at lógin virkar ikki aftur eftir og hevur tí sett lógarregluna inn í § 18.

Nevndin setur so statt fram hetta

Broytingaruppskot.

Tingið samtykkir landsstýrisins uppskot til lóg um manning av føroyskum skipum (tingmál nr. 9/1954) við hesum broytingum:

ad § 1: Stk. 2 verður orðað soleiðis:
Minni før mugu ikki fara útum heimasigling. Fiskiskip í heimasigling skulu hava skipara við skiparabrævi (smbr. §4).
Mindre fartøjer må ikke gå udover kystfart. Fiskeskibe i kystfart skal have fører med sønæringsbevis som skipper (jfr. § 4).

ad § 2: Í øðrum stykki verður í tí føroyska tekstinum í staðin fyri orðini »100 tons uttan fyri heimasigling« og í tí danska tekstinum í staðin fyri orðini »100 tons uden for kystfart« sett »150 tons«.

Triðja stykkið í somu grein verða í tí føroyska tekstinum orðini »við skipi undir 400 tons« broytt til »við fiskiskipi av einihvørjari stødd og farmaskipi undir 400 tons«, og í tí danska tekstinum orðini »skibe under 400 tons« forandret til »fiskeskibe af enhver størrelse og fragtskibe under 400 tons«.

ad § 11: Ífyrsta stykki verða í tí føroyska tekstinum millum orðini »sjón og hoyring« og »hevur mínst« sett orðini »hevur edrúiligheitsprógv« og í tí danska tekstinum millum tilsvarandi orð sett orðini »har edruelighedsattest«.

ad § 17: Sum annað stykki verður í tí føroyska tekstinum sett: »Landsstýrið verður í serstøkum førj heimilað at veita manni við skiparabrævi, sum hevur prógvað dugnaskap og álitissemi í skiparastarvi sínum og hevur viðmæli frá felagi sínum, framíhjáloyvi at føra fiskifar av einihvørjari stødd suður til 35° norður breidd, og í danska tekstinum: »Landsstyret bemyndiges til i særlige tilfælde at meddele en person, der har sønæringsbevis som skipper og som har udvist duelighed og pålidelighed som skipper og er anbefalet af sin forening, dispensation til at føre fiskefartøj af enhver størrelse sydpå til 35° n. b.«.

ad § 18: Í aðru reglu fer út:
Í føroyska tekstinum: »1. september 1954« og í staðin sett: »beinanvegin«.
Í danska tekstinum: »1. september 1954« og í staðin sett: »straks«.

ad § 18: Sum nýtt stk. 2 verður sett:
Henda lóg skerjir ikki tey sjóvinnisbrøv sum fingin eru eftir eldri lóggávu.

Denne lov gør ingen indskrænkninger i de sønæringsbeviser, der er erhvervet i medfør af ældre lovgivning.

JÓGVAN Á DUL
Tórshavn

Tórshavn, hin 15.7 1954.

Føroya Landsstýri,
her.

Vísandi til bræv J. 1950 No. 111—55[8] frá Føroya Landsstýri verður hervið bræv frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag unnmælt, so sum biðið er um.

Tá Skiparafelagið sigur »at tað heldur tað ikki vera beint, at mark verður sett fyri, hvar fiskiskipari við fiskiskipi hevur loyvi at fiska, og at mark verður sett fyri, hvørjum skipi hann hevur loyvi at fiska við«, tá tykist hetta mær at ganga tvørtur ímót í øllum hevdvunnum prinsippum og allari vanligari praksis alla staðir.

Heldur ikki kann eg siga meg samdan við Skiparafelagið, at upprættað verður ein serlig fiskiskiparalæra *bert* fyri fiskiskiparar, tí tað vil so gera neyðugt, at vit upprætta eina serliga læru fyri teir menn, ið ætla at sigla sum yvirmenn við farma- og ferðafólkaskipum. Beinari meini eg er, at samskipa ta teoretisku útbúgvingina mest møguligt, samstundis sum vit leggja mest vekt á tað, sum er okkara primera behov. Vóru vit eitt størri samfelag, sum Ongland ella Týskland, so var laga manni. Og viðvíkjandi tí, at tað skal vera neyðugt, »at skiparar skulu fáa tann lærdóm, teimum krevst fyri lívstíð á *einum* skúlaskeiði«, so dugi eg ikki at síggja, at tað sum ein regul hevur nakran fyrimun — tvørturímóti, hugsi eg. Og at byrja við vil eg absolut mæla til, at vit taka tað í tveimum stigum, og tað av mongum orsøkum, um so okkurt er, sum kann tala fyri, at alt verður lært í einum. Vit síggja til dømis, at fleiri størri reiðaríir (nú hugsi eg um útheimin) og bar íroknaði fiskivinnufeløg frá tíð til aðra seta sínar yvirmenn á skipinum á skúlabonkin.

Prinsipielt meini eg tað vera ógvuliga skeivt, at vit skulu leita eftir tí og bert adoptera tað, sum er lættast og lættast í øðrum londum. Sum nú til dømis »Skipper full« í Onglandi, hví tá ikki samstundis vísa á ta praktisku venjing (sigling), teir hava, og tann navigatións-teoretiska kunnleika, sum tykist tað mær, ikki stendur aftari, enn tað, sum krevst av einum skandinaviskum »Skibsfører«. Og »at Norðmenn hava eina líknandi prógvtøku«, ið altso gevur somu rættindir, jú — tað hava teir, men tá skal maðurin hava staðið stýrimannaprógvtøkuna, tí fiskiskipararoyndin gevur bert loyvi til at føra *fiskiskip* upp til 500 tons, og tað bert norðan fyri 30' n. br. og væntast kann í næstu framtíð, at teir fara at krevja hópin meir, sum framgongur av hesum fyrilestri, sum fyrrverandi konsulentur fyri »Fiskarfagskolarne« harra Hans Tambs-Lyche helt stutt síðan.

Viðvíkjandi tí sokallaða »Grønlandsprógvinum« var kanska beinast, at undantak varð gjört, so at prógvtøka fór fram eina ferð ella hægst tvær ferðir afturat.

Til eftirtanka fari eg at loyva mær at skoyta hetta uppí.

Tað er ein veruleiki, at týskararnir eru teir, ið krevja mest av sínum yvirmonnum á fiskiskipum — hæði handlaligt og andaligt — og vita vit, at teir hava tann mest nýmótans fiskiflota, síðan hann so gott sum allur er nýggjur, og viðvíkjandi yvirmonnunum sigur sami harra Tambs-Lyche í fyrilestrinum, sum vist er til, hetta: »Der er ikke tvivl om, at de større tyske fiskebåtenes officerer har en meget grundig og en meget allsidig uddannelse. Sandsynligvis er den for sitt formål den beste, som finnes i dag.«

Og um dagarnar sat eg og tosaði við stjóran fyri heimsins størsta trolarareiðari, harra Raeder í Týsklandi, og segði hann millum annað, at heir høvdu eina *ógvuliga góða tíð aftan fyri seg*, altso fyri tí parti av árinum, ið farin er, í form av nógvum fiski og nógvum peningi, og at teir skuldu hava tríggjar nýggjar trolarar í august. Eg kundi ikki lata vera við at hugsa, at tað var eitt vist samband millum »den for sitt formål den beste, som finnes i dag« og »eina ógvuliga góða tíð aftan fyri seg«.

Fyri at summera upp: eg havi ongan hug til ella vil ikki mæla til, at alt skal gerast sum lættast, tað stendst ikki gott av tí. Skal virkast til bata fyri allar partar á hesum øki, mugu vit hælda fast við tað, vit hava vunnið, og samstundis royna at koma eitt langt stig víðari fram.

Við hávirðing

Jógvan á Dul

Úrdrag úr fyrilestri hildin 18. 8. 52
av Hans Tambs-Lyche.

(Utviklingslinjer i fiskeriundervisningen i Norge).

.....I denne fremstilling har jeg forsøgt at få frem noe av den utviklingen innenfor fiskeriundervisningen, som har ført oss dit, vi står i dag. Det er ikke min sag å söke å trekke de enkelte linjerne videre. I løpet af hele denne uken vil de forskjellige spörsmålene, som er aktuelle, bli drøftet. Min opgave har været at søke å gi en historisk og samfunnsmæssig bakgrunn for de diskusjonerne, som kommer til at følge.

Men om *ett punkt* av *prinsipiell viktighet* vil jeg gerne si noen ord i denne forbindelse. Det er oppnevnt en komite, som skal ta for seg de erfaringer, som er høstet i de 12—13 årene, høvedsmannslinjen må ha vært i virksomhet. Dens oppgave er — kort sagt — å bygge videre på komiteinnstillingen av 1936.

Så vidt jeg forstår blir hovedproblemet for den komiteen å finne frem til en form, som gjør det mulig å skape en selvstendig fiskeskipperutdannelse — uavhengig av handelsmarinens behov. Det blir ikke lett, og det er mange spørsmål, som rejser seg i den forbindelse.

Dels gjelder det at føre navigasjonsutdannelsen noe videre enn i dag, men uten at avskke oplæringen i fiskerifagene. Det krever antagelig utvidelse av skoletiden, men på den annen side gjelder det også å skaffe muligheter for en enda bedre rekruttering til skolene enn nå.

Og en utvidet rekruttering til skolene kan ikke forenes med en utvidelse av skoletiden.

En vei ut av dette er *en spaltning av* fiskeriopplæringen i *to trinn*. Ett ett-årig kurs som nå — kanske med større vekt på de tekniske fag, og en 18 måneders eller *2-årig linje med fulle navigasjonsrettigheter på alle hav* og noe mer fiskerifag enn i dag. Men begge trinn må være selvstendige i den forstand, at de gir klart definerte rettigheter, som ikke kan fås på annen måte. ... ...

2. viðgerð 3. september og 3. viðgerð 6. september 1954.

Uppskot landsstýrisins við broytingum nevndinnar samtykt 17—0.

10. Fíggjarløgtingslóg 1955-56.

Ár 1954, 24. august legði løgmaður fram uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1955/56.

---

11. Býti av Føroya parti av løn jarðamøðra.

Ár 1954, 4. august legði R. Long landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um býti av Føroya parti av løn jarðamøðra.

§ 1.

Føroya partur av føstu løn jarðamøðra eftir nýggju skipanini verður býttur í helvt millum landskassan og viðkomandi kommunur.

Býtið millum einstøku kommunurnar av parti teirra verður gjørt í mun til fólkatalið eftir seinastu fólkateljing, um ikki annar sáttmáli fyriliggur.

Landskassin leggur fyri fyrst kommununanna part út. Seinast 1. juli á hvørjum ári verður gjørt upp, hvussu nógv tær einstøku kommunurnar skulu gjalda landskassanum aftur fyri farna fíggjarárið. Komunurnar skulu afturrinda sín part seinast 1. december.

§ 2.

Frí hús ella húsaviðbót og telefonfelagagjald bera kommunurnar.

lagtingslov om fordeling af Færøernes andel af jordemødrenes løn.

§ 1.

Færøernes andel af jordemødrenes faste lön efter den nye ordning fordeles med halvdelen til landskassen og halvdelen til vedkommende kommuner.

Fordelingen mellem de enkelte kommuner af deres andel sker i forhold til folketallet efter sidste folketælling, med mindre ikke anden overenskomst foreligger.

Landskassen udlægger midlertidigt komunernes andel. Senest hvert års første juli udregnes, hvor meget de enkelte kommuner skal tilbagebetale landskassen for det foregående finansår. Kommunerne skal tilbagebetale deres andel senest 1. december.

§ 2.

Fribolig eller boliggodtgørelse samt telefonabonnement afholdes af kommunerne.

§ 3.	§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við brævi frá 22. oktober 1952 legði landsstýrið uppskot fyri løgtingið til nýggja jarðamøðraskipan. Uppskotið varð samtykt, smbr. løgtingstíðindi 1952, bls. 60 og kgl. fyriskipan nr. 247 frá 28. august 1953.

Eftir § 12 ber ríkiskassin helmingin av útreiðslunum eftir § 4 og § 16 og eftir § 13 verður Føroya partur at býta millum landskassan og tær einstøku kommunur.

So statt loyvir landsstýrið sær at leggja lógaruppskot fram samsvarandi.

1. viðgerð 9. august og 18. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Við fyriskipan nr. 247 frá 28. august 1953 var sett í gildi nýggja jarðamøðraskipanin. Útreiðslurnar til hesa skipan verða býttar í helvt millum Føroyar og ríkiskassan. Føroya partur av føstu løn jarðamøðra verður býttur í helvt millum landskassan og avvarandi kommunur.

Samsvarandi hesum hevur landsstýrið sett fram lógaruppskot, ið sigur, at í fyrstu syftu leggur landskassin út part kommunanna, og seinast 1. december skulu kommunurnar afturrinda landskassanum peningin fyri farna fíggjarárið. Um kommunurnar, sum hava felags jarðamóður, ikki hava gjørt sáttmála um býtið sínamillum, skulu útreiðslurnar skiftast eftir fólkatalinum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið og er samd um at seta tað í verk fyri fíggjarárið 1954/55.

Tó er minnilutin (J. Kallsoy og J. P. Davidsen) ikki samdur við meirilutan um býtið kommunanna millum. Minnilutanum dámar betur, at har, eingin sáttmáli er millum kommunurnar, skulu útreiðslurnar skiftast soleiðis, at helvtin verður í mun til skattainntøkuna og helvtin eftir fólkatalinum.

Sostatt setur fíggjarnevndin fram hesi

Uppskot

I. Meirilutin (M. Holm, A. Djurhuus, P. Petersen, Joh. M. Fr. Poulsen og A. Sørensen):

Løgtingið samtykkir landsstýrisins uppskot til løgtingslóg um býti av Føroya parti av løn jarðamøðra óbroytt.

II. Minnilutin (J. Kallsoy og J. P. Davidsen):

Løgtingið samtykkir landsstýrisins uppskot til løgtingslóg um býti av Føroya parti av løn jarðamøðra við tí broyting, at § 1, 2. petti verður orðað soleiðis:

Býtið millum einstøku kommunurnar av parti teirra verður framt við helvtina í mun til skattaskylduga inntøku og helvtina í mun til fólkatalið eftir seinastu fólkateljing, um ikki annar sáttmáli fyriliggur.

Fordelingen mellem de enkelte kommuner af deres andel foretages med halvdelen i forhold til skattepligtig indtægt og halvdelen i forhold til folketallet efter sidste folketælling, med mindre anden overenskomst ikke foreligger.

2. viðgerð 20. august og 3. viðgerð 26. august 1954.

Uppskot landsstýrisins var sett undir atkvøðu við navnakalli:

Ja atkvøddu: Fr. Bláhamar, P. Petersen, M. Holm, J. Kallsoy, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, H. Iversen, Jens Chr. Olsen, S. Ellefsen, A. Sørensen, H. Djurhuus, R. Long, Søren Danielsen og Johan Poulsen.

Nei atkvøddi: J. P. Davidsen.

Atkvøddu ikki: P. M. Dam, S. P. Zachariasen, J. F. Øregaard, O. F. Joensen og J. P. Henriksen.

Burturstaddir: J. H. Danbjørg, Th. Petersen, E. Waag og Hanus við Høgadalsá.

Uppskotið samtykt 14—1.

Uppskot minnilutans fall 5—0.

---

12. Býti av Føroya parti í studningi til aldursheim.

Ár 1954, 5. august legði R. Long landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um býti av Føroya parti í studningi til aldursheim.

lagtingslov om fordeling af Færøernes andel af tilskud til alderdomshjem.

§ 1.

Eftir § 17 í lóg nr. 146 frá 31. marts 1949 um aldursrentu verður fyrisett, at landskassin frá 1. apríl 1953 og fyri tað fyrsta ber 1/3 í teim endurrindingum, sum aldursheim fáa eftir teim takstum, sum ríkisumboðsmaðurin í samráð við landsstýrið góðkennir eftir § 13, 2. stk. í aldursrentulógini.

§ 1.

I henhold til § 17 i lov nr. 146 af 31. marts 1949 om aldersrente bestemmes, at landskassen fra 1. april 1953 og indtil videre udreder 1/3 af de refusioner, der ydes alderdomshjem på grundlag af de takster, som rigsombudsmanden efter samråd med landsstyret godkender i medfør af § 13, stk. 2 i aldersrenteloven.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Higartil hevur studningur úr ríkiskassanum verið veittur aldursheimunum eftir einum kostdegi uppá kr. 2,50 per kostgangara og haraftrat hevur løgtingið síðani 1941 veitt 9/10 av muninum millum kr. 2,50 og kr. 4,00 ella kr. 1,35 per kostdag, (smbr. løgtingstíðindi 1941, bls. 155, 1942 bls. 75, 1944 bls. 108, 1946 bls. 71 og 1947 bls. 69).

Í skrivi frá 29. juni 1954 hevur ríkisumboðsmaðurin sagt landsstýrinum frá, at Tórshavnar býráð í skrivi frá 30. januar 1954 hevur sent inn umsókn um, at kostdagur aldursheimsins í Tórshavn verður settur upp frá kr. 2,50 og til somu hædd sum tilskilað í umfarsriti socialministarans frá 21. marts 1953.

Eftir hesum umfarsriti eru takstirnir fyrisettir fyri roknskaparárið 1952/53 og fyri tað fyrsta til kr. 9,25 fyri Keypmannahavn, Frederiksberg og Gentofte kommunur, kr. 7,75 fyri keypstaðir v. m. og kr. 7,00 fyri hinar kommunurnar og fyri 1953/54 eru takstirnir eftir umfarsriti socialministarans frá 17. mai 1954 kr. 10,00, kr. 8,25 og kr. 7,75.

Ríkisumboðsmaðurin hevur síðani ynskt sær ummæli landsstýrisins til uppskot hansara um at fyriseta ein takst frá 1. apríl 1953 og fyri tað fyrsta uppá kr. 7,75 per kostdag.

Í skrivi frá 3. í hesum hevur landsstýrið tikið undir við uppskoti ríkisumboðsmansins, eftirsum henda almenna útreiðsla, sum ikki er broytt

síðanj 1941 eins og útreiðslurnar til aldursrentu, avlamisrentu og harnastyrk, eigur at verða javnað, soleiðis at endurrindingin svarar betri til kostnaðin og í skrivi frá 8. julj 1954 hevur ríkisumboðsmaðurin góðkent kr. 7,75 per dag fyri tað fyrsta.

Kostdagatal aldursheimanna hevur verið soleiðis:

Tórshavnar aldursheim 1/1 1951 — 31/3 1952: 6.913
1/4 1952 — 31/3 1953: 6.493

Tvøroyrar aldursheim 1947: 2.887
1948: 2.630
1949: 2.368

So statt loyvir landsstýrið sær at seta fram uppskot til løgtingslóg samsvarandi.

1. viðgerð 9. august og málið beint til fíggjarnevndina.

---

13. Broyting í reglunum um innflutning av den. spritti.

Ár 1954, 26. august legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um innflutning av denaturoraðum spritti.	*lagtingslov om indførsel af denaureret sprit.*
§ 1.	§ 1.
Denaturerað spritt kann bert flytast inn av teim, sum hava fingið ella fáa landsstýrisins loyvi til sølu av hesi vøru.	Denatureret sprit kan kun indføres af den, som har fået eller får landsstyrets tilladelse til forhandling af denne vare.
§ 2.	§ 2.
Landsstýrið fær heimild at fyriseta reglur um skamtan av denaturoraðum spritti.	Landsstyret bemyndiges til at træffe bestemmelse om rationering af denatureret sprit.

§ 3.

Brot móti reglunum í hesi lóg og kunngerð, sum givin er eftir henni koma undir bót eins og ólógliga innfluttar nøgdir ella virði teirra koma undir konfiskatión. Bót og konfiskatiónsvirði fara í landskassan.

§ 3.

Overtrædelse af denne lovs bestemmelser og de i medfør af loven givne bekendtgørelser straffes med bøde hvorhos de ulovlig indførte kvanta eller dets værdi konfiskeres. Bøde og konfiskationsværdi tilfalder landskassen.

§ 4.

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 1955 og samstundis fara »midlertidige bestemmelser nr. 4 af 7. februar 1941 om indførsel af denatureret sprit« úr gildi.

§ 4.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1955 og samtidig træder ud af kraft midlertidig bestemmelse nr. 4 af 7. februar 1941 om indførsel af denatureret sprit m. v.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi reglum hevur landshandilin havt einainnflutningin av denatureraðum spritti síðani 1941 eins og søla av denatureraðum spritti hevur verið skamtað síðani (smbr. kunngerð nr. 5 frá 7. februar 1941). Landshandilin hevur eisini havt skamtingina í hondum.

Í løgtingsmáli nr. 11/1953 (tingtíðindi 1953, bls. 20) er samtykt, at landshandilin missur sín einarætt til innflutning av ymsum vørum 1. oktober og skal hælda uppat 1. januar 1955.

So statt verður neyðugt at umskipa innflutningin av denatureraðum spritti.

Einasti almenni stovnur, sum kundi tikið sær av hesum, er landsapotekið, men m. a. húsaviðurskiftini eru ikki til tess í løtuni, hvørki í Tórshavn ella hjá útapotekunum. Ársinnflutningurin liggur um 35.000 litur og mesta nøgdin á goymslu liggur um 20 tonnur í senn.

Tað er onki loynimál, at henda lóggáva rekir endamál sítt illa í løtuni eins og rúsdrekkalógin ger tað.

Landsstýrið hevur so statt valt tann vegin at mæla tinginum til at broyta galdandi skipan fyri innfluninginum soleiðis, at landshandilsins einainnflutningsrættur verður latin teimum sum hava ella fáa loyvi frá landsstýrinum at handla við denatureraðum spritti.

1. viðgerð 28. august og 2. september legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landshandilin hevur síðani 1941 havt einainnflutningin av denatureraðum spritti og hevur eisini havt skamtingina í hondum.

Sambart løgtingssamtykt frá 1953 missur landsbandilin sín einarætt til innflutning av vørum 1. oktober 1954 og skal halda uppat 1. januar 1955.

Landsstýrið hevur tí sett uppskot fram til løgtingslóg um innflutning va denatureraðum spritti, ið gongur út uppá at lata einainnflutningsrætt landshandilsins til teirra, sum hava ella fáa loyvi frá landsstýrinum át handla við denatureraðum spritti.

Málið er beint í lógarnevndina.

Uppskot landsstýrisins svarar til ta skipan, ið var áðrenn landshandilin í 1941 fekk einainnflutningsrætt.

Tað er ivaleyst so, at eftiransingin verður betur og lættari, um bert ein ella fáir hava innflutningin í hondum.

Meirilutin (M. Holm, Poul Petersen og T. Samuelsen) skjýtur tí upp, at uppskot landsstýrisins verður broytt soleiðis, at einainnflutningsrætturin verður latin til hægst 3 av landsstýrinum settum persónum.

Minnilutin (J. P. Henriksen og E. Waag) setur eingi uppskot fram.

Samsvarandi hesum framførda setur meirilutin í nevndini fram fylgjandi

Uppskot

Løgtingið samtykkir uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um innflutning av denatureraðum spritti, tó við fylgjandi broyting:

§ 1 í uppskotinum gongur út og í staðin verður sett sum nýggj § 1 í tí føroysku tekstini:

»Denaturerað spritt kann bert flytast inn av upp til 3 av landsstýrinum settum persónum.«

Og í tí donsku tekstini:

»Denatureret sprit kan kun indføres af indtil 3 af landsstyret udpegede personer.«

2. viðgerð 3. september og 3. viðgerð 4. september 1954.

Uppskot landsstýrisins við broyting nevndinnar var sett undir atkvøðu við navnakalli:

Ja atkvøddu: Fr. Bláhamar, P. Petersen, M. Holm, T. Samuelsen, A. Sørensen, H. Djurhuus, R. Long, Søren Danielsen og Johan Poulsen.

Atkvøddu ikki: J. Kallsoy, Einar Waag og D. P. Danielsen.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg, P. M. Dam, S. P. Zachariasen, Th. Petersen, J. F. Øregaard, J. P. Davidsen, J. P. Henriksen og H. við Høga dalsá.

Uppskotið samtykt 14—0.

14. Løgtingslóg um fuglaveiðu v. m.

Ár 1954, 6. august legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um fuglaveiðu v. m.

1. bólkur.

Um veiðurættindi.

§ 1.

Á sjónum út at sjómarkinum undir Føroyum er veiðurætturin við teim avvikum, sum tilskilaði eru í hesi lóg, opin fyri einum hvørjum, sum hevur danskan heimarætt.

§ 2.

Uppi á landi eigur grundeigarin veiðurættin. Viðvíkjandi veiðurætti er hann, sum situr við embætisjørð ella kongsjørð javnbjóðis grundeigara.

Veiðurættin á vøtnum og áum hevur hann ella hava teir, sum eftir galdandi lóggávu hava ræði á vøtnunum.

Hjúfelag er, og samtykt ella fyrndarrættur ger ikki avvik, hava eigararnir javnbjóðis veiðurætt. Samtykt um nýtslu av veiðurætti í felag kann gerast á granastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiða bert kann fara fram í minni mun ella yvirhøvur ikki.

Allir eigarar hava atkvøðurætt á grannastevnu um samtykt um veiðu í felag.

Einsæris burturlating av veiðurætti kann bert fara fram fyri uppí 10 ár í senn.

Friðing yvirhøvur ella partvís innangarðs í eini bygd, har fleiri eigarar

lagtingslov om fuglefangst m. v.

1. kapitel.

Om fangstrettigheder.

§ 1.

Jagtretten på søterritoriet ved Færøerne er med de i denne lov fast satte undtagelser fri for enhver, som har dansk indfødselsret.

§ 2.

Jagtretten til lands tilkommer grundejeren. Lige med grundejeren betragtes med hensyn til jagtretten besiddere af tjenestejord og fæstere af kongsjord.

Jagtretten på indsøer og vandløb tilkommer den eller dem, der i medfør af den gældende lovgivning udøver rådighededen over vandet.

På fællig har, hvor ikke vedtægt eller sædvane medfører afvigelse, enhver ejer lige jagtret. Vedtægt om jagtens udøvelse på fællig kan oprettes på grandestævne. I sådan vedtægt kan fastsættes, at der i et fællig kun til dels eller slet ikke må jages.

Stemmeberettigede på grandestævne angående vedtægt om jagt på fællig er samtlige ejere.

Særskilt overdragelse af jagtretten kan kun ske for indtil 10 år ad gangen.

Hel eller delvis fredning for jagt af en bygds indmark, hvori der er

eru, kann bert fremjast á grannastevni. Atkvøðurætt um samtyktina hevur einhvør eigari innangarðs og kongsbøndur. Til gylduga samtykt krevst yvir helmingur av atkvøðugevandi persónum, sum umboða minst helmingin av skattamarkatalinum, sum atkvøðurætt hevur.

§ 3.

Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, bava eigararnir í tí gamla, matrikuleraða bønum í tí bygd, har bjørgini liggja, fuglaveiðurættin í bjørgum, urðum og líkum fuglalandi, herundir rættin til omanfleyg.

Rættin til at taka hellufugl hevur hvør maður í tí bygd, sum bjørgini eigur, men eingin uttanbíggjamaður.

Sama rætt sum eigari til fuglaveiðu hevur hann, sum situr við embætisjørð ella kongsbóndi.

§ 4.

Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, verður landpartur av fuglaveiðu í bjørgum, urðum og líknandi fuglalandi býttur eftir markatali (§ 3).

Á sama hátt verða útreiðslur av veiðuni býttar, herundir keyp og umsiting av törvandi amboðum.

§ 5.

Samtykt um fuglaveiðu í bjørgum, urðum og líkum fuglalandi í felag kann gerast á grannastevni samsvarandi reglunum í grannastevnulógini.

flere lodsejere, kan vedtages på grandestævne. Stemmeberettigede ved vedtægtens affattelse er enhver af indmarkens ejere og kongsfæstere.

Til gyldig beslutning kræves over halvdelen af de stemmegivende personer, som repræsenterer mindst halvdelen af det stemmeberettigede skattemarketal.

§ 3.

Hvor ikke særlige retsforhold medfører afvigelse, tilkommer retten til fuglefangst i bjerge, urer og lignende steder, herunder retten til »omanfleyg« ejerne af den gamle matrikulerede indmark i den bygd, på hvis grund fuglepladsen ligger. Ret til at tage »hellefugl« tilkommer enhver beboer af den bygd, hvortil pladsen, hvor fuglen sidder, hører, men ingen udenfor bygden boende.

Lige med ejere betragtes med hensyn til ret til fuglefangst besiddere af tjenestejord og fæstere af kongsjord.

§ 4.

Hvor ikke særlige retsforhold medfører afvigelse, deles indtægt ved fuglefangst i bjerge, urer og lignende steder mellem de fangstberettigede (§ 3) efter marketal.

I same forhold deles udgifter ved fangsten, derunder til anskaffelse og vedligeholdelse af de til fangsten nødvendige redskaber.

§ 5.

Vedtægt om fuglefangst i bjerge, urer og lignende i fælles liggende steder kan oprettes på grandestævne overensstemmende med de i lov om grandestævne gældende regler.

2. bólkur.

Um friðing av veiðulendum v. m.

§ 6.

Fuglabjørg, urðar, hólmar ella tílík lendi og æðuvarp kunnu friðast eftir krevjing frá veiðurættharara ella eigara við somu løgfylgju sum eftir § 14, um Føroya yvirpolitirættur (smbr. lóg nr. 174 frá 11. mai 1935, pt. 148), eftir at sýn er hildið, finnur lendi nýtuligt sum fuglaland ella æðuvarp.

§ 7.

Hann, sum ynskir okkurt av teim í § 6 nevndu lendum friðað, skal senda yvirpolitirættinum skrivliga krevjing um friðing, innihaldandi gjølla tilskiling av viðkomandi lendi.

Rætturin skal so av eintingum fyri rokning krevjarans í tað blað, sum løggilt er til upptøku av almennum kunngerðum í Føroyum, seta kunngerð í 3 ferðir, um at menn á einum nærri tilskilaðum, vanligum tingi, tó ikki fyrr enn 1 mánað aftaná seinastu kunngerð í blaðnum, verða uppnevndir eftir § 6 at meta um frama friðinginnar. Kunngerðin eigur eisini at setast í ta almennu kunngerðartalvuna smbr. lóg nr. 59 frá 1. apríl 1912, í teim bygdum, sum liggja innanfyri 15 km fjarleika eftir sjónum frá ytsta marki viðkomandi lendis og eisini í øðrum bygdum, har menn hava serliga interessu í veiðu nærindis viðkomandi lendi. Bert kunngerðin í blaðnum er treyt fyri gildi uppnevninginnar.

Haraftrat setur rætturin fund til eiðfestingar av sýninum og tekur málið til úrskurðar.

Á tí fyrisetta tinginum skal rætturin siga frá, áðrenn uppnevningin

Kapitel 2.

Fredlysning af fangstpladser m. m.

§ 6.

Fuglebjerge, urer, holme, eller lignende steder samt ederfuglevarp kan på begæring af enhver fangstberettiget eller ejer fredlyses med den i § 14 omhandlede retsvirkning, når sådant sted af Færøernes overpolitiret (jfr. lov nr. 174 af 11. maj 1935, pkt. 148) efter optaget skøn findes egnet til fugleplads eller ederfuglevarp.

§ 7.

Den, der ønsker et af de i § 6 nævnte steder fredlyst, har skriftligt til overpolitiretten at indgive begæring om fredlysning, indeholdende en nöje beskrivelse af det pågældende sted.

Reten har da af egen drift for rekvirentens regning i det til offentlige bekendtgørelser for Færøerne autoriserede blad 3 gange at lade indrykke en bekendtgørelse om, at der til et nærmere angivet ordinært ting, mindst en måned efter sidste bekendtgørelse i avisen, vil blive udmeldt mænd til i henhold til § 6 at afgive skön om fredlysningens hensigtsmæssighed. Bekendtgørelsen bør endvidere opslås i den offentlige kundgørelsestavle, jfr. lov nr. 59 af 1. april 1912, i de bygder, der ligger indenfor 15 kilometers afstand, regnet ad søvejen, fra det pågældende steds yderste græuse, samt desuden i andre bygder, hvis beboere skønnes at have særlig interesse i jagten i nærheden af det pågældende sted. Kun bekendtgørelsen i avisen er en betingelse for udmeldelsens gyldighed.

Endvidere berammer retten et retsmøde til skønsforretningens afhjemling og sagens optagelse til kendelse.

fer fram, hvønn hann ætlar at uppnevna, og at fodra tey møtandi, sum kunnu sýna nóg mikla interessu í spurninginum, at seta fram atfinningar sínar móti uppnevningini og viðmerkingar um friðingina ella um mál henara.

Annars koma reglurnar í kap. 19 í rættargongulógini um sýn og meting í nýtslu.

§ 8.

Teir uppnevndu sýnismenninir skulu skila til í sýninum, um tað í krevjingini tilskilaða lendi, alt sum tað er, ella nakað av tí, eigur at friðast, og um markini, um so er, at tey eru ikki tilskilaði í lógini, harinnanfyri skjóting v. m. eigur at vera forboðin. Sýnið skal fara fram eftir 3 daga fyrivarni til krevjarin ella um fleiri eru, til ein teirra.

§ 9.

Yvirpolitirættirin ger málið av við úrskurði, sum bert kann skjótast inn til hægri avgerð við loyvi rættarmálaráðharrans smbr. lóg frá 11. mai 1935, pt. 148.

Yvirpolitirættirin sendir sorinsskrivaranum útskrift av tí uppsagda úrskurðinum til tinglesingar og sendir eisini krevjaranum og viðkomandi sýslumanni eina útskrift hvør.

Friðingin kemur í gildi, so skjótt sýslumaðurin eftir lóg nr. 52 um broyting í reglunum um tinghald í Föroyum frá 1. apríl 1896 § 3 á grannastevni hevur friðað viðkomandi lendi.

§ 10.

Uppnevning, friðing í rættinum, tinglesing og bókaførsla fer fram uttan rættargjald.

Ved det fastsatte ting har retten, førend udmeldelsen sker, at meddele, hvem den agter at udmelde, og at opfordre de mødende, der kan angive antagelig interesse i spørgsmålet, til at fremkomme med deres indsigelse mod udmeldelsen og bemærkning om fredlysningen eller dennes omfang.

De i lov om rettens pleje kap. 19 om syn og skøn indeholdte regler bliver i øvrigt at anvende.

§ 8.

De udmeldte skønsmænd har i skønsforretningen at udtale sig om, hvorvidt det i begæringen betegnede sted helt eller delvis bør fredlyses, samt om de grænser, for så vidt disse ikke er angivet i loven, indenfor hvilke skydning m. m. bør være forbudt. Skønsforretningen afholdes efter 3 dages varsel til rekvirenten eller, hvis der er flere, en af disse.

§ 9.

Overpolitirettens afgørelse af sagen sker ved en kendelse, der kun kan påankes med justitsministeriets tilladelse, jfr. lov af 11. mai 1935, pkt. 148.

Overpolitiretten tilstiller dommeren udskrift af den afsagte kendelse til tinglæsning og tilstiller ligeledes rekvirenten og vedkommende sysselmand en udskrift hver.

Fredningen træder i kraft, så snart sysselmanden i overensstemmelse med lov nr. 52 om forandring i bestemmelserne om afholdelse af ting på Færøerne af 1. april 1896 § 3 ved grandestævne har fredlyst de pägældende steder.

§ 10.

Udmeldelse, fredlysning i retten, tinglæsning og protokollering sker betaling af retsafgift.

§ 11.

Í hvørjari sýslu skal sýslumaðurin á hvørjum ári við upplesing á grannastevni kunngera tey lendi í sýsluni, sum friðaði eru eftir reglunum í hesum bólki og skila til mark teirra.

§ 12.

Tá 10 ár eru liðin frá friðingini, kann einhvør, sum kann sýna serliga interessu í friðing ella veiðu nærindis viðkomandi lendi, krevja spurningin um friðingina inn fyri yvirpolitirættin av nýggjum.

Viðgerð av tílíkum máli fer fram eftir reglunum í §§ 7—10. Um neyðugt skulu teir, sum møttu undir tí upprunaligu friðingini, hava serstaka frásøgn í málinum.

Um so er, at friðingarúrskurður verður avtikin ella broyttur, skal yvirpolitirætturin stíla fyri tørvandi tinglesing ella avlesing.

§ 13.

Tær eftir lóg nr. 52 frá 1. apríl 1896 § 3 um broyting í reglunum um tinghald í Føroyum fyriskettu árligu friðingar ella avtøkur av tílíkum á tingi detta burtur.

§ 14.

Undir friðaðum bjørgum má eingin skjóta á sjónum uærri enn 2 fjórðingar úr næsta punkti á landi í tíðini frá 15. marts til 31. august.

Undir friðaðari urð má eingin skjóta í sama tíðarskeiði nærri enn hálvfjórðing, mett sum omanfyri.

Í sama tíðarskeiði má eingin heldur skjóta innanfyri tey mark, sum tilskilaði eru í sýni eftir § 8.

§ 11.

I ethvert syssel skal sysselmanden årlig kundgøre ved oplæsning ved grandestævne de i sysselet beliggende, overensstemmende med nærværende kapitel fredlyste steder med angivelse af de fastsatte grænser.

§ 12.

Når 10 år er forløbet efter fredlysningen, kan enhver, der kan påvise særlig interesse i fredlysningen eller jagten i nærheden af det pågældende sted, forlange spørgsmålet om fredlysningen indbragt for overpolitiretten påny.

Med hensyn til sagens behandling gælder reglerne i §§ 7—10. Om fornødent vil der om sagen være at give de under den oprindelige fredlysningssag mødte særlig underretning.

I tilfælde af fredlysningskendelsens ophævelse eller forandring, foranlediger overpolitiretten den fornødne aflæsning eller tinglæsning.

§ 13.

De i lov nr. 52 om forandring i bestemmelserne om afholdelse af ting på Færøerne af 1. april 1896 § 3 forehævelser af sådanne ved reten bortfalder.

§ 14.

skrevne årlige fredlysninger og op-

Ved fredlyst fuglebjerg må ingen i tiden fra 15. marts til august måneds udgang skyde på søen indenfor en afstand af 2 sømil, regnet fra nærmeste punkt af fuglebjerget.

Ved fredlyst ur må i samme tidsrum ingen skyde på søen indenfor en afstand fra uren af ½ sømil, regnet på ovennævnte måde.

I det ovennævnte tidsrum må ej heller skydes indenfor de grænser, som i

So leingi Mikineshólmur er friðaður, sum hann er, má eingin skjóta undir honum nærri enn 2 fjórðingar úr hólminum í tíðini frá 25. januar til 25. oktober.

Eingiu má skjóta nærri æðuvarpi enn hálvfjórðing í tíðini frá 1. mai til 31. august.

Henda regla skal tó ikki forða honum, sum veiðurætt hevur, uppi á landi at skjóta kráku, ravn, likku ella annan fugl, sum kann verða æðuni til skaða.

Innanfyri tey í hesi grein nevndu mark og tíðarskeið er forboðið at órógva fuglin av ótørvandi óljóði frá skipspípum ella øðrum gangi.

§ 15.

Fuglaveiða og skjóting yvirhøvur er forboðin á sunnu- og halgidøgum.

Tað er forboðið persónum undir 16 ár at røkja fuglaveiðu.

3. bólkur.

Um forbodnar veiðuhættir.

§ 16.

Tað er forboðið at fanga fugl uppi á landi við snaru, lokki ella kunstugum ljósi. Hetta kann tó nýtast til tøku av líra. Eisini er tað forboðið at søkja fugl í fuglalandi soleiðis, at búfuglurin kemur undir avvoyðing.

Lundi má hvørt takast við stong, tó kann landsstýrið undir serligum umstøðum loyva drátt. Tílíkt loyvi kann

henhold til § 8 er angivet ved skønsforretningen.

Så længe Myggenæsholm som helhed er fredlyst, må i tiden fra 25. januar til 25. oktober ingen skyde indenfor 2 sømils afstand fra holmen.

Ved fredlyst ederfuglevarp nå i tiden fra 1. maj til august måneds udgang ingen skyde indenfor ½ sømils afstand fra varpet.

Sidstnævnte bestemmelse skal dog ikke være til hinder for, at den jagtberettigede på landjorden skyder krager, ravne, sildemåger eller andre for ederfugle skadelige dyr.

Indenfor de i denne paragraf omhandlede grænser og tidsrum er det forbudt ved unødvendig tuden med skibsfløjten eller anden unødvendig støj at forstyrre fuglenes fred.

§ 15.

Jagt og fuglefangst skal være forbudt på søn- og helligdage.

Det skal være forbudt personer under 16 år at drive jagt.

Kapitel 3.

Forbudne fangstmåder.

§ 16.

Det skal være forbudt at fange fugle på landjorden ved hjælp af udspredte garn eller med udsatte kroge eller ved kunstigt lys. Sidstnævnte kan dog bruges ved fangst af skrofens unge (lira). Endvidere skal det være forbudt i fuglepladserne at drive fangst på en sådan måde, at fuglepladsernes faste bestand af fugle derved udsættes for varig formindskelse.

Lunden må kun fanges ved flejning; dog skal der, hvor særlige for-

bert gevast 3. hvørt ár í sama fuglalandi.

hold gør sig gældende, af landsstyret kunne meddeles tilladelse til at fange lunden ved »dnættur«. Sådan tilladelse kan dog kun meddeles til fangst hvert 3. år på samme fugleplads.

4. bólkur.

Um friðing av villini fugi v. m.

§ 17.

Uppi á landi yvirhøvur, eisini á vötnum, á firðum, víkum og sundum og á sjónum yvirhøvur út at sjómarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu, sum ikki er tilskilaður í hesi grein (smbr. §§ 14 og 16):

....

Kapitel 4.

Fredning af vilde fugle m. v.

§ 17.

alle ferske vande, i fjorde, vige og sunde samt på havet, så langt søterritoriet går, skal alle fugle, som ikke er angivet i denne paragraf (jfr. §§ 14 og 16) være fredet mod jagt og fangst:

....

§ 18.

Tann í frammanfyri standandi grein fyrisetta friðing umfatar eisini pisur, egg og reiður. Tó skal tað verða loyvt veiðurættharara at taka líra.

§ 18.

Den i forrige paragraf påbudte fredning omfatter tillige det fredede vildts yngel, æg og reder. Dog skal det være den jagtberettigede tilladt at tage skrofens unger.

§ 19.

Loyvt er at skjóta haru í tíðini 1. november til 31. december, báðar dagar viðroknaðar.

Innanfyri tilskilað umráði (oyggj ella part av henni) kann haran friðast eftir avgerð landsstýrisins fyri eitt ella tvey ár ísenn eftir umsókn frá søknarstýri og eftir at øll søknarstýri í oynni hava givið ummæli í málinum.

Landsstýrið letur tær eftir hesi grein fyrisettu friðingarreglur kunngera í tí blað, sum løggilt er til almennar kunngerðir í Føroyum.

§ 19.

Det skal være tilladt at skyde hare i tiden 1. november til 31. december begge dage medregnet.

Indenfor et bestemt begrænset område (en ø eller en del af en ø) kan harene helt fredes efter landsstyrets bestemmelse for et eller to år ad gangen efter andragende fra et kommunalforstanderskab, og efter at der er indhentet erklæring om sagen fra samtlige kommunalforstanderskaber på vedkommende ø.

Landsstyret foranstalter de i denne paragraf fastsatte fredningsbestemmelser kundgjort i det til offentlige bekendtgørelser på Færøerne autoriserede blad.

§ 20.

Tað er forboðið at bjóða út, selja ella flyta inn feska haru í tíðini frá 8. januar til 2. november, báðir dagar viðroknaðir.

§ 21.

Landsstýrinum skal vera heimilað í vitskapligum ella almennyttigum endamáli at geva tilskilaðum monnum tíðarfrestað undantiksloyvi frá reglunum í §§ 17 og 18 smbr. § 19.

§ 20.

Det er forbudt at falbyde, sælge eller indføre ferske harer i tiden 8. januar til 2. november, begge dage medregnet.

§ 21.

Landsstyret skal være bemyndiget til i videnskabeligt eller almennyttigt øjemed at indrømme bestemte personer på begrænset tid fritagelse for bestemmelserne i §§ 17 og 18 jfr. § 19.

5. bólkur.

Um sektir og ákæru.

§ 22.

Einhvør, sum uttan heimild veiðir fugl í bjørgum, urðum, hólmum ella ella æðuvarpi, æutin við byrsu ella á annan hátt verður sæddur í ella skjýtur inn í friðað lendi, veiðir har hann eftir hesi lóg ella annars eftir grannastevnuviðtøku ikki hevur veiðurættindi ella á tílíkum støðum uttan heimild gongur við byrsu í bö ella haga ella á annans veiðilendi tekur upp tað, sum sært er á egnum veiðulendi, kemur undir sekt.

Undir sekt kemur eisini hann, sum annars brýtur nakra forboðsreglu eftir hesi lóg ella nakra samtykt ella reglu sum gjørd er eftir henni.

Kapitel 5.

Straf og påtale.

§ 22.

Enhver, der uberettiget jager i fredlyst fuglebjerg, ur, holm eller ederfuglevarp enten med skydevåben eller på anden måde, færdes eller skyder ind i fredlyst fugleplads, driver jagt på noget sted, hvor jagtret ifølge denne lovs bestemmelser eller ifølge vedtægt på grandestævne ikke tilkommer ham, eller som uden hjemel færdes med jagtredskaber på sådant sted i ind- eller udmark, eller som på fremmed jagtområde bemægtiger sig vildt, som han har såret på eget område, straffes med bøde.

Ligeledes med bøder straffes den, der iøvrigt overtræder nogen af de i denne lov indeholdte forbudsregler eller nogen i henhold til denne lov oprettet vedtægt eller foreskreven bestemmelse.

§ 23.

Tað verður at skilja sum skerpandi, at ólóglig veiða er útint av fleiri í felag, at hon er útint á sunnu- ella halgidegi, at rænt verður í fuglalandi og at

§ 23.

Det betragtes som skærpende omstændighed, at den ulovlige jagt er udøvet af flere i forening, at den ulovlige jagt er udøvet på søn- eller helligdage, at ræven er taget i fuglelandet og at

viðkomandi fyrr hevur gjørt seg sekan í veiðumisbroti.

Um so er, at nakað er veitt ella dripið í ólógligani veiðu kemur viðkomandi undir eykasekt.

§ 24.

Sektir, sum standast av misbroti eftir hesi lóg, fara í kommunala hjálparkassan í tí sókn, har misbrotið er útint uppi á landi ella við skjóting ella ótørvandi óljóði á sjónum nærindis friðaðum fuglalandi (smbr. § 14) ella hartil viðkomandi fuglaland liggur.

Er misbrot útint á sjónum undir øðrum umstøðum fer sektin v. m. í hjálparkassan í tí sókn her í landinum, har hin seki býr. Er hann í slíkum føri búsettur uttanfyri Føroyar, fer sektin í landsfátækrakassan.

Tann seki skal haraftrat endurrinda virði av tí hann hevur veitt á landi (vøtnum), um so er haun ikki kann lata eigaranum tað í feskum standi.

§ 25.

Er veiðumisbrot útint av børnum undir 14 ár við foreldra vitandi ella teim sum eru í foreldra stað, koma tey undir at hava útint misbrotið sjálvi.

Tað sama er eisini galdandi, tá tey frá børnunum taka ímóti fongi av ólógligari veiðu.

Menn sum loðsar ella kønir menn, sum sigla fremmand skip inn, hava skyldu at siga skiparanum frá galdandi forboðum móti skjóting ella ótørvandi óljóði nærhendis friðaðum bjørgum, urðum, hólmum ella aðu-

dage, at æg er indsamlet på steder, hvor fugle bygger kolonivis, og at den pågældende forhen har gjort sig skyldig i jagtforseelse.

Er der ved den ulovlige jagt fanget eller dræbt vildt, vil den pågældende være at idømme en tillægsbøde.

§ 24.

Bøder, der udredes for overtrædelser af denne lov tilfalder, når forseelsen er begået på landjorden eller ved skydning eller unødvendig støj på søen ved fredlyst fuglepiads (jfr. § 14) den kommunale hjælpekasse i det sogn, hvor forseelsen er begået, eller hvortil vedkommende fuglepiads ligger.

Er forseelsen begået til søs under andre omstændigheder, tilfalder bøden m. v. hjælpekassen i det sogn, her i landet, hvor den skyldige hører hjemme. Er lovovertræderen i sidste fald bosat udenfor Færøerne, tilfalder bøden landsfattigkassen.

Den skyldige skal derhos erstatte værdien af de på landjorden (herunder ferske vande) dræbte eller fangne vildt, for så vidt det ikke ufordærvet kan afleveres til vedkommende.

§ 25.

Er jagtforseelse begået af børn under 14 år med vidende af forældre eller dem, der træder i forældres sted, anses disse, som om de selv havde begået den ulovlige handling.

Det samme gælder, når disse af børn modtager udbytte af ulovlig jagt.

Det skal være pligt for de personer, der som lodser eller kendte mænd bistår fremmede skibe, at gøre skibsføreren opmærksom på de bestående forbud mod skyden, unødvendig tuden m. m udenfor fredlyst fuglebjerg, ur, holm, eller ederfuglevarp. Har

varpi. Ger hann ikki tað kemur hann sjálvur undir tey misbrot sum útint verða, meðan hann er umborð.

Mál um misbrot eftir hesi lóg, fara fram sum løgreglumál og fremjast, sjálvt um eingin hevur kravt tað.

§ 26.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og samstundis fer lóg nr, 101 frá 4. apríl 1928 broytt við lóg nr. 108 frá 15. marts 1939, kunngerð nr. 35 frá 20. marts 1942, og kunngerð nr. 25. frá 24. september 1945 úr gildi.

lodsen forsømt dette, bliver han at straffe for de overtrædelser af nævnte forbud, som begås af personer ombord, inden han har affærdiget dette.

Sager angående overtrædelser efter denne lov behandles som politisager, og forfølges selv om ingen begæring herom fremkommer.

§ 26.

Denne lov træder i kraft straks og samtidig ophæves lov nr. 101 af 4. april 1928, ændret ifølge lov nr. 108 af 15. marts 1939, kundgørelse nr. 35 af 20. marts 1942 og kundgørelse nr. 25 af 24. september 1945.

Viðmerkingar:

Sum tað sæst av tingmáli nr. 6/1951 samtykti tingið at biðja landsstýrið gera tørvandi uppskot til broytingar í lógini um fuglaveiðu v. m. frá 4. apríl 1928, soleiðis a friðingin verður høvuðsreglan, meðan tey fuglaslög, sum undantikin skulu vera frá friðing, skulu tilskilast í lógini samsvarandi fyrisetingum fyri THE INTERNATIONAL COMMITTEE FOR BIRD PRESERVATON, sum Føroyar eru limir í.

Lóguruppskot samsvarandi hesum var so lagt fram á Ólavsøkutingi 1952 (smbr. tingmál nr. 3/1952) og tikið uppaftur í 1953 (smbr. tingmál nr. 3/1953), men uttan nakra endaliga viðgerð.

Landsstýrið loyvir sær aftur nú at leggja lógaruppskotið fram fyri skjótast til ber at fáa hesa lóggávu so sum omanfyri tilskilað í princippinum samsvarandi millumlanda reglum.

Fyri at eingin misskiljing skal vera í § 17, ynskir landsstýrið, at tingið tekur avgerð um hvørji fuglaslög skulu vera undantikin friðing fyri alt árið ella árstíðir og loyvir sær at vísa til, hvussu Ísland hevur skipað seg í síni lóg um fuglaveiðu og fuglafriðing nr. 63 frá 27. apríl 1954.

§ 8 í íslendsku lógini er soljóðandi:

1. Á Íslandi skulu allar villtar, fuglategundir, að undanskildum theim tegundum, er taldar eru í 2. málsgr., vera friðaðar allt árið.

2. Á eftirgreindum árstímum skal heimilt að veiða thær tegundir, sem her eru taldar:

a. Allt árið: kjói, svartbakur (veiðibjalla), brafu.
b. Frá 15. ágúst til 19. mai: skúmur, silfurmáfur, lítli svartbakur, stóri hvítmáfur, lítli hvítmáfur, hettumáfur, rita, álka, stuttnefja, langvía, teista, lundi.
c. Frá 20. ágúst til 31. oktober: grágæs, blesgæs, heiðagæs, margæs, helsingi.
d. Frá 1. september til 31. október: urtönd, grafönd, skúfönd, duggönd, hrafnsönd.
e. Frá 1. september til 29. februar: stokkönd, rauðhöfdaönd, hávella.
f. Frá 20. ágúst til 31. marz: týll, súla, dílaskarfur, toppskarfur.
g. Frá 20. ágúst til 20. apríl: lómur, sefönd (florgoði), stóra toppönd (gulönd), lítla toppönd.
h. Frá 15. október til 22. december: rjúpa.

3. Friðun sú, sum fólgin er í ákvæðum 1. og 2. málsgr., tekur einnig til eggja og hreiðra theirra fugla, sem njóta algerðrar eða tímabundinnar friðunar, nema øðruvísi sé ákveðið í lögum thessum.

So statt loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri tingið.

1. viðgerð 11. august og 1. september legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Sum tilskilað í viðmerkingunum til lógaruppskotið samtykti tingið í 1951 at biðja landsstýrið gera uppskot til broytingar í lógini um fuglaveiðu v. m. frá 4. apríl 1928, soleiðis at friðingin verður høvuðsreglan meðan tey fuglasløg ella fuglar, sum undantikin skulu vera frá friðing skulu tilskilast í lógini samsvarandi fyrisetingunum fyri THE INTERNATIONAL COMMITTEE FOR BIRD PRESERVATION, sum Föroyar eru limir í.

Landsstýrið legði fram lógaruppskot samsvarandi á ólavsökutingi 1952 (smbr. tingmál nr. 3/1952) og aftur í 1953 (smbr. tingmál nr. 3/1953).

Málið hevur ikki fingið endaliga viðgerð og tessvegna hevur landsstýrið lagt málið framaftur í hesi tingsetu og biðið tingið taka avgerð um, hvørji fuglasløg ella fuglar skulu verða undantiknir friðingini (smbr. § 17).

Málið var til 1. viðgerð 11. august og beint til búnaðarnevndina.

Nevndin er samd um at mæla tinginum at samtykkja lógaruppskotið við fylgjandi broytingum:

Uppskot

Í § 14, stk. 1, 4. reglu verður skotið inn:

Í føroyska tekstinum millum »landi« og »í« »og hálvfjórðing hvørjimegin við« og í danska tekstinum millum »fuglebjerget« og »i« »og ½ sømil til hver side«.

§ 15, stk. 2 fer út.

§ 17, stk. 2, verður orðað soleiðis:

Sum skilað til niðanfyri skal vera loyvt at veiða ella skjóta hesar fuglar ella fuglaslög:

a) *alt árið:* kráku, ravn, kjógva, smyril, lomviga, álku, skarv, ógvellu, havhest, súlu og öll másasløg, tó rytu bert á sjónum.
b) 1. *september—15. marts:* lunda.
c) bláðúgvu á egnum lendi innangarðs.

Som nedenfor anført skal det være tilladt at fange eller skyde følgende fugle eller fuglearter:

a) *hele året:* krage, ravn, struntjæger, dværgfalk, lomvi, alk, skarv, havlit, mallemuk, sule og alle mågearter, den tretåede måge dog kun på søen.
b) *1. september—15. marts:* lunden.
c) fjeldduen på egen grund i indmark.

2. viðgerð 2. september.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá J. F. Øregaard o. fl.:

Broytingaruppskot

Gr. 17, stk. 2. b) í staðin fyri 1. september—15. marts lunda, verður sett: lundi alt árið,

og í donsku tekstini: lunden hele året.

3. viðgerð 4. september 1954.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá R. Long og fleiri:

Broytingaruppskot

Í nevndaruppskotinum til orðing av § 17, stk. 2, pt. a, gongur út orðið *ógvella* og í danska tekstinum orðið *havlit*.

Broytingaruppskot frá J. F. Øregaard og fl. til § 17, stk. 2, b, og nevndinnar c fullu 6—0.

Broytingaruppskot frá R. Long o. fl. til § 17, stk. 2, a samtykt 19—0

Uppskot nevndinnar við broytingum nevndinnar + c samtykt 20—0

---

15. Broyting í reglunum um sjómarkið undir Føroyum.

Ár 1954, 31. juli legði lögmaður fram soljóðandi uppskot við fylgisskjölum:

Í lögtingsmáli nr. 76/1951 · tingtíðindi 336 · · samtykti tingið at biðja landsstýrið fyrireika málið um broyting í reglunum um sjómarkið undir Føroyum og at reisa tað sum skjótast.

Aftur í tingsetuni 1952 var málið til viðgerðar — sí tingtíðindi bls. 46 — og varð tá samtykt at biðja landsstýrið halda fram við samráðingunum um tað føroyska sjómarkið.

Undir hesari tingviðgerð varð tað lagdur serligur dentur á, ikki at siga sáttmálan við bretar upp, men royna við samráðingum at fáa tað størst møguligu víðkan av sjómarkinum.

Sambart hesar tingsamtyktir hevur landsstýrið havt umboðsmenn í teim samráðingum, sum eru farnar fram við bretar um broytan av konventiónini av 24. juni 1901.

Hesar samráðingar eru nú komnar so langt, at sáttmáli nú kann fáast í lag um eina munandi víðkan av sjómarkinum.

Bretar hava ynskt, at ein slíkur sáttmáli verður inngingin fyri í minsta lagi 25 ár, meðan tað frá dansk-føroyskari síðu er hildið fast uppá, at ein slíkur sáttmáli skuldi ganga inn sum lið í 1901 sáttmálanum. Sum eitt kompromis hava bretar so gingið inn uppá ein 10 ára sáttmála.

Uppskotið til broyting í konventiónini av 24. juni 1901 er soljóðandi:

1. 1. The exclusive right of fishery of Faroe-islanders and other Danish citizens under art. II of the Convention shall in future apply to the area indicated below, all the arcs mentioned to be drawn at a radius of 3 miles from low water mark of the mainland or offlying rooks (drying).

North Coast.

From the arc centered on MYLING along the common tangent to that arc and the arc round RIVTANGE. From the intersection of this tangent with the common tangent between the arcs round RIVTANGE and KADLUR, the limit round along the tangent, thence following the arc off KADLUR, thence along the common tangent of the arc off KADLUR and the arc off the outermost drying rock off ENNEBERG. Along the arc round ENNEBERG and the common tangent between this arc and that round NORDBERG in FUGLØ. Thence along the arc round NORDBERG, along the common tangent between that arc and that off the north east point of FUGL Ø.

East Coast

Along the arc round the north east point of FUGLØ, to its intersection with the arc round BISPEN, thence along that arc and the common tangent of this arc and that round the most easterly point of SVINØ.

Thence along the arc round the most easterly point of SVINØ and the common tangent between it and the arc round the south easterly point of SVINØ. Along the arc round the south easterly point of SVINØ and the common tangent between it and the arc round SKOREN. From the intersection of this tangent and the common tangent between the arcs round SKOREN and the easterly point of NOLSØ, the limits is formed by this tangent, until its intersection with the common tangent between the arc round he eastern point of NOLSØ and the arc round the eastern FLESERNE, thence along this common tangent.

Thence along the arc round the eastern FLESERNE to its intersection with the arc round the MUNKEN ROCK.

West Coast.

Along the arc round the MUNKEN ROCK and along the common tangent between this arc and the arc round the south western islet off FAMARASUND. Thence along the latter arc and the common tangent between that arc and the arc round BERGSTANGE. Thence along the arc round BERGSTANGE and along the common tangent between that arc and the arc round KOBBETANGE, to the position 61°. 35', O.N.; 7°, 05' O.W. From this position the limit follows a straight line to the position 61°, 04', O. N.; 7°, 46', O. W. round the outermost rock off MYGGENAES. Thence along the arcs round the rocks off HOLM at the western end of MYGGENAES

North West Coast.

1. From the arc off the most northerly rock off HOLN, along the west coast of . ØMØSTRETAOI ETAOIN SHRDLU ETAOI ETAO TAT tangent to this arc and MYLING (not the arc), up to three miles from the west coast of STRØMØ. Thence as a tangent from this point to the arc round MYLING and continuing round that arc, to the point of origin.

2. The fishing limits indicated above will be applied to all foreign fishing vessels.

3. Any British fishing vessel will be allowed to mend its nets in recognised harbours in the Faroe Islands when at anchor or moored, on condition that it is established by the local authhorities that the fishing nets were stowed away before they were taken out again in harbour for mending, and provided that similar rights are accorded to Faroese fishing vessels in British ports.

II. 1. Rættindi til einans hjá føroyingum og øðrum donskum borgarum at reka fiskiveiðu sbr. grein II í sáttmálanum verða í framtíðini at galda á tí niðanfyri tilskilaða øki. Allir teir nevndu bugar verða drignir upp við 3-miles radius frá fjørumarki á meginlandinum ella teimum útfyri liggjandi turru skerum.

Norðurstrondin.

Frá buganum við centrum á MÝLINGI fylgjandi tí felags tangentinum til hendla buga og bugan runt um RIVTANGA. Úr skurðapunktinum hjá sama tangenti við felagstangentin millum bugarnar runt um RIVTANGA og KALLIN fylgir markið hesum tangenti og síðani buganum um KALLIN, haðani framvið felagstangentinum til bugan um KALLIN og bugan frá teimum ytstu turru útskerum niðanfyri ENNIBERG. Framvið buganum runt um ENNIBERG og tí felags tangentinum millum henda buga og tann runt um NORÐBERG í FUGLOY. Haðani framvið buganum runt NORÐBERG, fylgjandi felags tangentinum millum henda bugan og tann við landnyrðingsoddan á FUGLOY.

Eysturstrondin.

Fylgjandi buganum runt um landnyrðingsoddan á FUGLOY til hagar hann rakar bugan runt um BISPIN, síðani framvið hesum sama buga og tí felags tangentinum til hendla buga og bugan runt um eysturoddan á SVÍNOY.

Haðani fylgjandi bugan runt eysturoddan á SVÍNOY og felags tangentinum millum hann og bugan runt um landsynningsoddan á SVÍNOY og felags tangentinum millum hann og bugan runt um SKORINA. Frá skurðarpunktinum hjá hesum tangentinum við felags tangentin millum bugarnar runt um SKORINA og eysturoddan á Nólsoy. Hesin tangentur er mark inntil hann rakar felags tangentin millum eysturoddan á NÓLSOY og bugan runt um FLESJARNAR eystanfyri og síðani fylgjandi hesum felags tangenti.

Haðani framvið buganum runt um FLESJARNAR eystanfyri til skurðarpunktið við ein buga runt um MUNKIN.

Vesturstrondin.

Fylgjandi buganum runt um MUNKIN og síðani tí felags tangentinum millum henda huga og bugan runt um útsynningsdrangin útfyri FÁMAIRASUNDmillum henda buga og bugan runt um BERGSTANGA. Haðani fylgjandi buganum runt um *Bergstanga* og framvið felags tangentinum millum henda buga og bugan runt um KOBBATANGA til støðuna 61° 35' 0", norður og 7° 05' 0" vestur. Frá hesi støðu fylgir markið eini beinari linju til støðuna 61° 51' 5" norður og 7° 23' 4" vestur og fram til støðuna fyri einum buga á 6°2 04' 0" norður og 7° 46' 0" vestur runt um tað ytsta útskeri við MYKINES, haðani fylgjandi bugunum runt um drangarnar við HÓLMIN á vestara enda á MYKINESI.

Útnyrðingsstrondin.

Úr buganum um norðasta drangin við HÓLMIN framvið tangentinum til henda bugan og í MÝLING (ikki bugan) til 3 miles úr vestursíðuni á STREYMOY. Haðani sum ein tangentur frá hesum punkti til bugan runt MÝLING og síðani framlongdur runt henda bugan til frumstøðuna.

2. Fiskiveiðuøkið, sum greitt er frá omanfyri, verður mark móti øllum fremmandum fiskiveiðuførum.

3. Øllum bretskum fiskiførum verður loyvt at umvæla gørn sína í viðurkendum føroyskum havnum antin fyri ankar ella fortoyning, treytað av at myndugleikarnir á staðnum hava vissað seg um, at gørnini vóru burturstúgvaði, áðrenn skipið kom inn um sjómarkið og áðrenn tey verða tikin fram aftur til umvælingar í havn, og treytað av, at somu rættindi verða veitt føroyskum fiskiførum í bretskum havnum.

Annars sæst munurin millum gamla og nýggja sjómarkið best á tí sjókorti, sum fylgir við.

Landsstýrið er av tí fatan, at ein slíkur sáttmáli uttan at binda okkum í framtíðini gevur okkum tann fyrimun framum eina uppsögn av sáttmálanum, at vit beinan vegin fáa eitt rættuliga stórt sjóøki friðað fyri fremmanda fiskiskap.

Gingu vit harafturímóti tann vegin, at siga sáttmálan upp, so gingu í hvørt fall 2 ár, áðrenn vit vóru leysir, og uttan tá at hava nakað sum helst stílað fyri, at bretar ella aðrar tjóðir vildu góðtaka eina skipan av sjómarkinum, sum vit kravdu.

Nú stendur tað okkum í boði beinanvegin at víðka sjómarkið munandi og gjøgnum eina royndartíð uppá 10 ár at fáa prógv fyri, hvussu nógv ein víðkan av sjómarkinum tíðir fyri okkara heimafiskiskap.

Táið vit frá føroyskari síðu — hóast sterk ynski hin vegin — ikki hava viljað eina víðking av sjómarkinum einsæris, so er hesin vegur hildin í treysti til, at úrslit, sum fugin eru av tinginum vilja ikki elva av sær tílík móttrýst frá bretskari síðu, sum kunnu skerja okkara samvinnu við Bretland, fyrst og fremst sum fiskimarknaðarland, sum føroyingar meta so nógv.

Tað bretska stýrið hevur eisini givið sína virðing til kennar, at Føroyar valdu tingingarvegin í hesum máli.

Vísandi til tað, sum er ført fram, skal landsstýrið mæla tinginum at góðtaka uppskotið til sáttmála.

Aftaná at framlöguskrivið er liðugt og skrivað hevur ríkisstýrið í telegranimi í dag boðað frá, at bretar seta fram broytingaruppskot til uppskotið um vesturlinjuna í sjómarkinum og um broyting í rættinum til at bøta um reiðskapin. Telegramið er soljóðandi:

»FISKERIGRÆNSE MELLEM KOBBETANGE OG MYGGENÆS FORESLÅS ANGIVET SÅLEDES COLON THENCE ALONG ARC AROUND BERGSTANGE AND ALONG COMMON TANGENT BETWEEN THAT ARC AND THE ARC ROUND KOBBETANGE TO A POSITION 247 DEGREES 3.05 MILES FROM THE POINT STOP FROM THIS POSITION THE LIMIT FOLLOWS A STRAIGHT LINE TO POSITION 253½ DEGREES 13,1 MILES FROM NORTHERN POINT OF TROLDHOVED OFF SANDØ THENCE AS A STRAIGHT LINE TO POSITION ON ARC ROUND THE OUTERMOST ROCK OFF MYGGENÆS WHICH IS 236 DEGREES 3.3 MILES FROM MYGGENÆS LIGHTHOUSE STOP THEN THE LIMIT FOLLOWS ARCS ROUND ROCKS OFF HOLM AT WESTERN END OF MYGGENÆS STOP DANSK MODFORSLAG HERTIL ER FØLGENDE COLON THENCE ALONG THE ARC ROUND BERGSTANGE AND ALONG THE COMMON TANGENT BETWEEN THAT ARC AND THE ARC ROUND KOBBE-TANGE TO A POSITION 61 DEGREES 35 MINUTES, ON COLON 7 DEGREES 04, 9 W. (247 DEGREES 3.05 MILES FROM KOBBETANGE) STOP FROM THIS POSITION THE LIMIT FOLLOWS A STRAIGHT LINE TO A POSITION 61 DEGREES 51 MNUTES 5 N COLON 7 DEGREES 23 MINUTES, 4 W (253½ DEGREES 13.1 MILES FROM NORTHERN POINT OF TROLDHOVED OFF SANDØ) THENCE AS A STRAIGHT LINE TO THE POSITION ON THE ARC ROUND THE OUTERMOST ROCK OFF MYGGENÆS AT 62 DEGREES 03 MINUTES, 9 N COLON 7 DEGREES 45 MINUTES, 95 W (WHICH IS 236 DEGREES 3.3 MILES FROM MYGGENÆS LIGHT-HOUSE) STOP THEN THE LIMIT FOLLOWS THE ARCS ROUND THE ROCKS OFF HOLM AT THE WESTERN END OF MYGGENÆS STOP TO STOP 1 AFSNIT OM TILLADELSE TIL REPARATION AF NET I KLARERINGSHAVNENE HENSTILLES DET AT DET FRA FÆRØSK SIDE STILLEDE KRAV OM AT DET SKAL VÆRE KONSTATERET AF VEDKOMMENDE FÆRØSKE MYNDIGHEDER AT FISKENETTENE HAR VÆRET STUVET BORT INDEN DE BLEV TAGET FREM TIL REPARATION FRAFALDES STOP SOM BEGRUNDELSE HERFOR HAR MAN FRA BRITISK SIDE ANGIVET AT

DET PÅ GRUND AF DE LOKALE FORHOLD PÅ FÆRØERNE OFTE VIL VÆRE VANSKELIGT AT KOMME I FORBINDELSE MED VEDKOMMENDE MYNDIGHED TIL AT FORETAGE EFTERSYNET OG DETTE VIL UTVIVLSOMT IKKE MINDST GÆLDE I TILFÆLDE AF STORM OG UVEJR HVOR DER NETOP VIL VÆRE BRUG FOR TILLADELSEN TIL AT REPARERE NETTENE I KLARERINGSHAVNENE STOP (DET MÅ VÆRE EN SIMPEL KONSEKVENS AF OPGIVELSEN AF ET SÅDANT KRAV AT OGSÅ FÆRØSKE FISKERE DER ØNSKER AT REPARERE DERES NET I ANERKENDTE BRITISKE HAVNE FRITAGES FOR EN TILSVARENDE INSPEKTION) STOP OPMÆRKSOMHEDEN HENLEDES PÅ AT DER IKKE ER TALE OM AT OPGIVE KRAVET OM AT FISKENETTENE SKAL HAVE VÆRET STUVET BORT MEDENS SKIBET PASSEREDE DET FÆRØSKE FISKERIOMRÅDE FØR ANKOMSTEN TIL KLARERINGSHAVNENE MEN KUN OM OPGIVELSEN AF ET KRAV OM AT DET SKAL HAVE VÆRET KONSTATERET AF MYNDIGHEDERNE AT NETTENE OGSÅ VIRKELIG HAR VÆRET STUVET BORT INDN DE BLEV TAGET FREM I HAVNENE FOR AT BLIVE REPARERET STOP TRE STOP I AFSNITTET OM FISKERIGRÆNSENS ANVENDELSE OVERFOR ALLE FREMMEDE FISKEFARTØJER ØNSKES EN TILFØJELSE OM AT BRITISKE FISKE FARTØJER IKKE SKAL UNDERKASTES NOGEN MINDRE GUNSTIG BEHANDLING END DEN DER TILSTÅS FISKEFARTØJER FRA ET HVILKET SOM HELST ANDT FREMMED LAND STOP FIRE STOP SOM IKRAFTTRÆDELSESDAG FORESLÅS FØRSTE SEPTEMBER IDET ENGLÆNDEREN ØNSKER BETEMT DATO STOP FEM STOP DER FORESLÅS OPTAGET I NOTEVEKSLINGEN EN UDTRYKKELIG BESTEMMELSE OM AT BRITISKE FISKEFARTØJER IKKE SKAL UNDERKASTES NOGEN MINDRE GUNSTIG BEHANDLING END DEN DER TILSTÅS FISKEFARTØJER FRA ET HVILKET SOM HELST ANDET FREMMED LAND STOP DERUDOVER ENKELTE RENT REDAKTIONELLE ÆNDRINGER STOP SKRIVELSE MED BILAG FØLGER MED NÆSTE LEJLIGHED MEN FORANSTÅENDE SENDES AF HENSYN TIL LAGTINGETS BEHANDLING AF SAGEN.

AFSKRIFT

Analyse fra udenrigsministeriet

over

Den af den mellemfolkelige domstol i Haag under 18. december 1951 afsagte dom i retstvisten mellem Norge og Storbritannien om den norske fiskerigrænse

— og dommens betydning for Danmark.

1. *Forhistorie.*

Allerede i det 17. århundrede blev der fra dansk-norsk side klaget over det britiske fiskeri i de norske farvande med det resultat, at britiske fiskere i tiden fra 1616—18 til 1906 afholdt sig fra at fiske i disse farvande.

Derpå tog det britiske fiskeri ved Norge pāny til, hvorfor den norske regering begyndte at træffe forholdsregler til afgrænsning af det område, inden for hvilket det skulde være forbudt fremmede at fiske. I 1911 blev et britisk fiskefartøj, der havde krænket disse forholdsregler, opbragt, hvorefter der indledtes forhandlinger mellem Norge og Storbritannien om sagen. Forhandlingerne genoptoges i 1924 uden resultat.

I en kgl. resolution af 12. juli 1935 om fastsættelse af den norske fiskerigrænse i området nord for 66° 28' 8" nordlig længde blev basislinierne for det norske söterritorium i det pågældende område derefter nøjagtigt fastslået.

I den nævnte resolution af 12. juli 1935 udtaltes det i præamblen, at de i resolutionen indeholdte bestemmelser om fiskerigrænsen er i overensstemmelse med gammel national hævd og med ældre kgl. resolutioner fra 1812, 1869, 1881 og 1889, samt at de er fastlagt i overensstemmelse med stedets goegrafiske forhold til værn for kystbefolkningen.

Om selve fastlæggelsen af grænselinien siges det, at den skal gå parallelt med rette basislinier trukket mellem nærmere angivne faste punkter på hovedlandet, øer eller skær, hvis indbyrdes afstand varieres fra 18 til 44 sømil.

I den kgl. resolution af 22. februar 1812, til hvilken resolutionen af 12. juli 1935 henviser, fastsættes udstrækningen af det norske søterritorium til 4 sømil regnet fra de længst borte fra hovedlandet liggende øer og holme, der ikke overskylles af havet.

Den kgl. resolution af 1812 indeholder intet om, hvorledes basislinierne mellem de pågældende øer og holme skulle drages, men den fortolkedes således, at basislinierne skulle være rette linier trukket mellem de fjernest liggende øer og holme, der ikke til stadighed overskylles af havet.

Dette fremgår blandt andet af de to kgl. resolutioner af 16. oktober 1869 og 9. september 1889, til hvilke der ligeledes henvises i resolutionen af 1935. De to resolutioner beskriver basislinien for søterritoriet på visse

nærmere angivne steder i den norske skærgård som rette linier mellem bestemte punkter. Samme fortolkning af rglen i resolutionen af 22. februar 1812 gjordes gældende fra norsk side i 1929 overfor Folkeforbundet og blev lagt til grund i en norsk højeretsdom i 1934.

1935 blev der påny ført forhandlinger mellem Norge og Storbritannien om stridsspørgsmålene. Man nåede imidlertid ikke til enighed, og et stadig stigende antal opbringelser af britiske fiskefartøjer bevirkede slutteligt, at Storbritannien den 28. september 1949 indstævnde Norge for den mellemfolkelige domstol i Haag, med henblik på at få de i den norske kgl. resolution af 12. juli 1935 indeholdte bestemmelser erklæret folkeretsstridige.

II. *Dommens indhold.*

Ved indstævningen anmodede Storbritannien domstolen om

a) dels at træffe afgørelse om, hvilke folkeretlige principper der skulle lægges til grund ved fastlæggelsen af de basislinier, ud fra hvilke den norske regering er berettiget til at beregne udstrækningen af sit fiskeriterritorium, samt i fornødent omfang at fastslå de pågældende basislinicrs »beliggenhed«,
b) dels at ville tilkende Storbritannien erstatning for de af norske myndigheder foretagne uretmæssige opbringelser af britiske fiskefartøjer.

Under retsforhandlingen henstillede Storbritanniens repræsentant, at retten fastslog, at grænserne for Norges søterritorium — i forhold til Storbritannien — skulle drages efter følgende principper:

1. at Norges søterritorium ikke må overstige 4 sømil,
2. at søterritoriets ydergrænse følgelig ikke må have en afstand af mere end 4 sømil fra basislinien.
3 at basislinien for søterritoriet er dels lavvandsmærket, forsåvidt angår land, der til stadighed er tørt, dels skillelinien for nationalt vand,
4. at søterritoriets ydergrænse, når det drejer sig om holme, skær o. l., der kun er tørre ved lavvande, og som er beligende inden for en afstand af 4 sømil fra land, der til stadighed er tørt, eller fra skillelinien for nationalt vand, kan udstrækkes indtil en afstand af 4 sømil fra den yderste kant af sådanne holme, skær o. lign.,
5. at Norge af historiske årsager har ret til som nationalt vand at betragte alle fjorde og sunde, som omfattes af det folkeretlige bugtbegreb; dette gælder hvadenten fjordenes og sundenes mundinger er over eller under 10 sømil i bredde.
6. at det folkeretlige bugt-begreb omfatter sådanne tydelige indskæringer i kysten,hvis bredde og dybde forholder sig således til hinanden, at der er tale om andet og mere end en kurve på kyststrækningen,

7. at tværmålslinien i bugten skal trækkes mellem de to naturlige geografiske »entrance points«, der er beliggende der, hvor den pågældende indskæring ophører at have karakter af en bugt,
8. at man ved et egentligt (legal) stræde forstår ethvert geografisk stræde, der forbinder to områder af det åbne hav,
9. at Norge af historiske grunde har ret til som søterritorium at betragte alle fjorde og sunde, der har karakter af egentlige stræder,
10. at territorialgrænsen i Vestfjorden går på et nærmere angivet sted,
11. at Norge som følge af sin historiske ret til fjordene og sundene er berettiget til at betragte det mellem skærgården og det norske hovedland liggende vandareal som nationalt vand eller søterritorium, alt eftersom de pågældende fjorde og sunde falder ind under bugt- eller strædebegrebet,
12. at Norge ikke — over for Storbritannien — kan have nogen ret over vande, som ikke omfattes af de foran anførte principper, idet sådanne vande må betragtes som åbent hav,
13. at den norske kgl. resolution af 12. juli 1935 ikke er gældende over for Storbritannien i det omfang, den betragter visse vandarealer, der ikke omfattes af det under 1—11 anførte, som norsk nationalt eller territorialt vand.

Norges påstand gik ud på primært, at de i det nævnte norske dekret af 12. juli 1935 indeholdte bestemmelser ikke er folkeretsstridige, og subsidiært at Norge under alle omstændigheder har en historisk begrundet ret til de vandarealer, som ligger inden for de i dekretet fastsatte grænser.

I den af den mellemfolkelige domstol afsagte dom udtales det indledningsvis, at det af Storbritannien under pkt. 1 og 2 anførte, der handler om selve udstrækningen af søterritoriet, kunne lades ude af betragtning, da det ikke var dette spørgsmål, retssagen drejede sig om, og da Storbritannien endvidere under retssagen havde anerkendt Norges krav på et søterritorium på 4 sømil.

De øvrige af Storbritannien opstillede »principper« har dommen kun taget stilling til i det omfang, de måtte betragtes som relevante for afgørelsen af selve det omstridte spørgsmål: de ved 1935-resolutionen fastlagde basisliniers retsmæssig — eller retsstridighed.

Storbritannien hævdede som oven for nævnt (pkt. 3), at basislinien for beregningen af det norske søterritorium måtte være lavvandsmærket.

Domstolen kunne tiltræde, at lavvandsmærket — i modsætning til højvandsmærket — måtte anvendes som udgangspunkt ved beregningen af søterritoriets udstrækning. Dette blev ej heller bestridt af Norge hvorfor stridsspørgsmålet indskrænkedes til at gælde anvendelsen af lavvandsmærkeprincippet ved fastlæggelsen af basislinien for søterritoriet.

Det britiske krav (pkt. 4) om, at øer, skær o. lign., der kun er tørre ved lavvande, for at kunne benyttes ved fastlæggelsen og basislinien ikke måtte ligge mere end 4 sømil fra land, fandt domstolen det ikke nød-

vendigt at tage stilling til, efter at Norge havde godtgjort, at ingen af de øer m. v. af den her omhandlede karakter, som var benyttet ved fastlæggelsen af basislinien, ligger mere end 4 sømil fra land.

Dommen fastslår derefter, at det er skærgårdens lavvandsmærke, og ikke hovedlandets lavvandsmærke, der skal benyttes ved fastlæggelsen af det norske territorialfarvands udstrækning.

Tre metoder kan benyttes til fastlæggelse af søterritoriets udstrækning ved hjælp af lavvandsmærke-princippet:

1. Den simpleste metode (»tracé paralléle«) består i, at den yderste grænse for søterritoriet drages fuldstændig parallelt med kystlinien i alle dens detailler. Denne metode kan imidlertid efter domstolens opfattelse ikke anvendes på en skærgårdskyst, og Storbritannien opgav da også under retssagen sit krav om denne metodes anvendelse og krævede i stedet
2. den såkaldte »courbe tangente« — metode anvendt.
   Den mellemfolkelige domstol mente sig imidlertid ikke bundet til denne metode, der ikke kan siges at være fastslået i folkeretten men fastslog derimod,
3. at adskillige stater havde fundet det påkrævet at anvende »the straight base-lines' method« ved beregningen af deres søterritorier, og at ingen andre stater havde protesteret mod anvendelsen af dette prindip, der går ud på at trække rette linier mellem egnede punkter, fastsat efter lavvandsmærket. Den omhandlede metode anvendtes bl. a. i den hensigt at afgrænse søterritoriet på en mere enkel måde. Over for Storbritanniens påstand om, at Norge kun havde ret til at anvende rette linier som basislinier ved bugter, fastslog domstolen, at rette linier som basislinier for søterritoriet kan anvendes ikke blot ved bugter, men også imellem skærgårdens ødannelser.

Dommen vender sig dernæst mod den britiske påstand om, at Norge udelukkende af historiske årsager har ret til at betragte fjorde og sunde, der har karakter af bugter, og hvis tværmålelinie overstiger 10 sømil, som nationalt vand (pkt. 5). Denne påstand indebærer efter domstolens opfattelse, at Storbritannien betragter reglen om 10-sømile grænsen som skillelinie i bugter mellem nationalt og territorialt vand som en almindelig folkeretlig regel. Det understreges imidlertid i dommen, at skönt 10-milereglen ikke kan siges at have opnået anerkendelse som almindelig folkeretlig regel. En enkelt domner, (Read) var dog af den opfattelse, at 10-milebugtgrænsen er folkeretlig sædvane (se dommens side 76). Under alle omstændigheder kan 10-milereglen ikke anvendes overfor Norge, eftersom dette land altid har sat sig imod dens anvendelse på den norske kyst.

Fra britisk side blev det endvidere i analogi med bugt-reglen hævdet, at længden af de basislinier, der trækkes mellem de forskellige områder af den norske skærgård, ikke måtte overstige 10 sømil.

Heroverfor fastslås det i dommen, at de forskellige landes praksis

i så henseende ikke har formået at nedfælde sig i en fast regel. Rent bortset fra, om de enkelte basislinjr må være mere end 10 sømil lange, kan det tænkes, at disse linier i det enkelte tilfælde vil kunne trækkes på forskellige måder. I sådanne tilfælde vil den pågældende stat selv bedst være i stand til under hensyn til de lokale forhold at afgøre, hvor linierne skal drages.

Som følge heraf kunne domstolen ikke give Storbritannien medhold i, at Norge, hvad angår dragningen af basislinien for søterritoriet, har anvendt en metode, der afviger fra de folkeretlige regler herom. Tværtimod er det domstolens opfattelse, at Norge netop har anvendt disse regler på sit særlige tilfælde, og at den i den kgl. resolution af 12. juli 1935 beskrevne metode til afgrænsning af det norske fiskeriterritorium ikke er i strid med folkeretten (dommens side 19—20).

Det hedder videre i dommen, at den omstændighed, at domstolen ikke kan anerkende de af Storbritannien opstillede »principper« som udtryk for gældende folkeret, ikke er ensbetydende med, at der ikke gælder visse folkeretlige grundsætninger, som en stat skal følge ved afgrænsningen af sit søterritorium. Afgrænsningen af søterritoriet har altid en folkeretlig side; den kan ikke udelukkende ske efter kyststatens forgodtbefindende; ganske vist må selve afgrænsningn af søterritoriet nødvendigvis ske i form af en ensidig akt fra kyststatens side, thi kun kyststaten er kompetent til at foretage den; men afgrænsningens retmæssighed i forhold til andre stater må afgøres efter folkerettens regler. Som vejledende grundsætninger anføres i så henseende, at basislinien som hovedregel skal følge kystliniens almindelige retning, men man må endvidere lægge vægt på, om der består en større eller mindre naturlig sammenhæng mellem visse vandarealer og de landområder, som skyder sig ind imellem sådanne vandarealer. Dette sidste gælder i ganske særlig grad, når der er tale om en i geografisk henseende så usædvanlig kyst som Norges. Endelig må man også lægge vægt på en omstændighed af ikke-geografisk karakter, nemlig de særlige økonomiske interesser, som kan knytte sig specielt til et bestemt område, og hvis tilstedeværelse og vigighed klar har lagt sig for dagen gennem lange tider.

Det blev under retssagen fra norsk side anført, dels at den kgl. resolution af 12. juli 1935 hviler på en traditionel metode for dragning af basislinier for søterritoriet, dels at denne metode er i fuld overensstemmelse med folkeretten. Domstolen har nærmere undersøgt hvori den anvendte norske metode består, samt hvorvidt den i resolutionen af 1935 er anvendt på en måde, der er stemmende med folkeretten. Resultatet af disse undersøgelser blev, *at* Norge (som nærmere udviklet foran s. 2) i det 19. og 20. århundrede (i hvert fald fra 1869) til stadighed har anvendt samme metode ved fastlæggelsen af basislinien for søterritoriet, som har fundet udtryk i resolutionen af 1935), nemlig dragning af rette linier mellem de yderste punkter af skærgården, selv om afstanden mellem punkterne er mere end 10 sømil, *at* ingen andre stater gjorde indsigelser heroverfor, bortset fra Storbritannien, der imidlertid først i 1933 fremkom med en formel protest, *at* den norske metode er dikteret af de særlige geografiske forhold i den

norske skærgård, samt *at* den pågældende metode i den norske kgl. resolution af 1935 er bragt til anvendelse på en måde, der ikke er stridende mod folkeretten, idet basislinierne følger kystliniens almindelige retning.

Dommen konkluderer herefter i

1. at selve den i den norske kgl. resolution af 1935 anvendte metode til fastsættelse af det norske fiskeriterritoriums udstrækning ikke strider mod folkeretten (10 stemmer for, 2 imod),
2. og at heller ikke de enkelte ved resolutionen fastlagte basislinier er folkeretsstridige (8 stemmer for, 4 imod).

Fem af den mellemfolkelige domstols domere har benyttet sig af den dem i henhold til domstolsstatuten tilkommende ret til at afgive en særlig erklæring indeholdende deres specielle synspunkter:

a. Dommer Hackworth har indskrænket sig til at erklære sig enig i dommens konklusion, men alene ud fra den betragtning, at Norge efter hans opfattelse har godtgjort af historiske grunde at være berettiget til at afgrænse sit söterritorium som sket ved kgl. resolution af 1935.

b. Dommer Alvarez, der var enig i dommens konklusion, erklærede som sin opfattelse bl. a., at enhver stat er berettiget til selv at træffe bestemmelse om udstrækningen af sit søterritorium og måden, hvorpå søterritoriets udstrækning skal beregnes under forudsætning af, at bestemmelserne træffes på en rimelig (reasonable) måde, uden at andre staters velerhvervede rettigheder krænkes, og uden at almindelige interesser lider skade derved. Når denne opfattelse lægges til grund, skulle det være overflødigt at drøfte spørgsmålet om basislinier, rette linier, 10-sömils tværmålslinier for bugter o.s.v., således som sket i dommen. Den norske kgl. resolution af 1935 er ikke folkeretsstridig, thi den strider ikke mod positive folkeretsregler og heller ikke mod folkerettens almindlige principper, idet den ved resolutionen fastslåede afgrænsning af søterritoriet er rimelig, og krænker ikke andre staters velerhvervede rettigheder så lidt som almindelige interesser.

c. Dommer Hsu Mo var enig i, at den i den norske kgl. resolution af 1935 anvendte metode til afgrænsning af søterritoriet ikke er folkeretsstridig, men fandt, at visse af de ved resolutionen fastlagde basislinier var i strid med folkeretten. Han kom til dette resultat ud fra den betragtning, at den i resolutionen af 1935 anvendte metode isoleret set er i strid med folkerettens almindelige regler, der går ud på, at søterritoriets udstrækning skal beregnes fra kystliniens lavvandsmærke; men de for tilfældet særlige geografiske og historiske forhold bevirker, at metoden alligevel må anses for folkerets-

mæssig. Heraf følger efter dommer Hsu Mos mening, at det afgørende for spørgsmålet om de enkelte basisliniers retmæssighed ikke så meget er, om de er udtryk for en rigtig anvendelse af metoden, men derimod om det - henset til forholdene i de enkelte tilfælde — kan anses for nødvendigt og rimeligt, at basislinierne er placeret, som fastsat i resolutionen af 1935. Og det er efter dommer Hsu Mo's opfattelse ikke tilfældet, for så vidt angår enkelte nærmere angivne basislinier.

d. Sir Arnold McNair var af den opfattelse, at den norske kgl. resolution af 1935 er folkeretsstridig og indebærer en krænkelse af det åbne havs frihed. Denne opfattelse begrundes bl. a. med, at søterritoriets udstrækning som altovervejende hovedregel skal regnes fra lavvandsmærket *at* subjektive momenter som økonomiske og sociale hensyn ikke kan begrunde en afvigelse fra hovedreglen, *at* det vil kunne få alt for vidtrækkende konsekvenser at lade geografiske forhold begrunde en sådan undtagelse (bortset fra bugter), idet kyster af struktur som den norske findes mange steder i verden, samt at anvendelsen af den metode til fastlæggelsen af basislinien for søterritoriet, som har fundet udtryk i resolutionen af 1935, i virkeligheden gør reglerne om søterritoriets udstrækning (3—4 sømil) illusorisk.

e. Også dommer Read var af den opfattelse, at de i den norske kgl. resolution af 1935 indeholdte bestemmelser er folkeretsstridige, fordi de afviger fra lavvandsmærkeregler. Han var endvidere ikke enig med domstolens flertal i, at det norske »system« havde været bragt til anvendelse uafbrudt i tiden, før den egentlige konflikt opstod.

Avrit av bævi frá

Daniel Nolsøe fulltrúa, cand. jur., København,

dagf. 7 12 1953, til P. M. Dam fólkatingsmann.

Tygum hava ivaleyst lisið greinina í »Politiken« fyri 30. november um sjómarkið — ella rættari — fiskimarkið um Føroyar. Eg varð illa við at lesa um tað bretska kompromisuppskotið, ið har nevndist, og eg havi tí loyvt mær at skriva til tygara sum føroyskan fólkatingsmann og sum formann fyri tí størsta føroyska flokkinum, ið hevur tikið støðu fyri uppsøgn av traktatini frá 1901. Eg vil royna at seta ymist fram um henda stóra

spurning, ikki tí eg á nakran hátt kenni meg sum ein serfrøðing í fólkarætti (høvdu vit føroyingar bert átt fleiri sovorðnar í løtuni), men tí at eg havi saknað greiðar upplýsingar um málið í teim føroysku bløðunum. Kanska kann eg draga okkurt fram av týdningi.

Tað er óivað mangur maður, ið spyr okurt sum so: Væl vita vit, at norðmenn hava 4 sjómíl, roknað út frá beinum basislinjum, og væl hava íslendingar, sum vist hava lyndi at vera heldur framfýsnir, førkað teirra fiskimark líka langt út. Men føringar sum hampiligir menn at fara upp í hendа leikin? Danir eins og flestir aðrir hava jú bert 3 sjómíl. Eiga vit so at kanna okkum meira og gera onglendingum og skotum, ið eru vinmenn okkara, ónáðir, okkum sjálvum kanska til stóran skaða, hvør veit?

Jú, vit hava góða grund at fylgja norðmonnum og íslendingum í hesum máli. Teir og vit hava frá gamlari tíð havt eins serstøðu á havinum. Norðmenn hava ongatíð mist hana, íslendingar royna at vinna hana aftur, og vit hava skyldu at gera tað sama, ikki minst fyri teim komandi ættarliðum.

Tað mesta tilfarið havi eg tikið burtur úr hesum bókum: Arnold Ræstad: Kongens strømme, historiske og folkeretslige undersøkelser angående søterritoriet (Oslo 1912), — Gunnlaugur Thorðarson: Landhelgi Íslands með tilliti til fiskveiða (Reykjavík 1952), — og Toralv Øksnevad: Norges fiskerigrense, mundtlige referater av prosedyren og dommen i Haag. — Eg havi eisini lisið sjálvan dómin í sakini millum Bretland og Noreg, men havi hann tíverri ikki við hondina. Bókin hjá Ræstad er eitt standardverk og tann bókin, ið varð oftast nevnd í Haag av báðum pørtum (sjá t. d. Øksnevad s. 6, 11, 16, 18 og 19). Bókin hjá G. Thorðarson varð góðtikin sum doktardisputatsur við Sorbonne í Paris. Og bóklingurin hjá Øksnevad er útvarpsreferatir, sum hann undir sakini sendi heim til Noregs. Eg sendi tygum tær báðar seinast nevndu bøkurnar, so tygum evt. kunnu sláa upp, har síðutøl eru nevnd. Hína bókina havi eg tíverri bert til láns.

Heilt upp í 16.—17. øld var mannahugsan, at Grønland var landfast við Novaja Semlja, og at hendа oyggin var landføst við Bjarmaland (Norðurrusland). Man helt við øðrum orðum, at norduratlantshavið lá í eini bukt. Botnurin í hesi buktini var tann »Trøllabotnur«, ið vit kenna úr kvæðunum. Teir gomlu norsku kongarnir — og seinni teir dansk-norsku kongarnir — kannaðu sær harradømi yvir allari »buktini« og setti bann ella forboð fyri, at útlendingar fiskaðu við Noreg ella tey norsku krónlondini, t. d. Ísland og Føroyar og í teirri eldri tíðini eisini Norðurskotland og tær skotsku oyggjarnar. Skotland hevði eisini seinni fiskibann fyri útlendingar — ivaleyst sum ein leivd frá teirri norsku tíðini (Ræstad s. 23). Alla aðrastaðni í Europu — kanska við undantak av Svøríki — var fiskiveiða heilt inn til strondina frí fyri hvønn mann, innlending sum útlending. Soleiðis var tað til dømis í Danmark og Onglandi. Ræstad skrivar (s. 22—23): Forklaringen må søkes i, at fiskerierne i Norge og Skotland spillede en gansk anden rolle for befolkningen end i Danmark og i England. Der var i Norge og på de skotske øer i modsætning til, hvad tilfældet var i de to andre lande, en virkelig fiskerbefolkning — en befolkning, som av na-

turen var henvist til at søke en væsentlig del av sit utkomme på havet. At drive fiskeri var ikke for denne befolkning en binæring, som det var for danskerne, eller en industri blandt andre industrier, som det var for visse engelske byer, Bristol, Hull o. fl., i den senere middelalder. Sjøbruke var i deres husholdning nødvendigvis sidestillet med jordbruket.« Fyri at taka eitt dømi frá Danmark, so luttóku danir, sviar og týskarir lið um lið í teirri tiltiknu skánsku sildaveiðuni í tíðarbilinum frá ca. 1200 til seinast í 16. øld. Í 15. og 16. øld fóru útlendskir fiskimenn, fyrst og fremst onglendingar og skotar, at leita upp til Íslands og Føroya og eystur til norsku strondina. Hetta førdi við sær eitt ótal av skarpskeringum millum teir eingilsku og teir dansk-norsku kongarnar, sum alla tíð hildu fast við tað gamla norska fiskibannið, og ferð eftir ferð varð hetta bannið eisini góðkent av onglandskongum. Fiskiveiðan við tær donsku strendurnar hevur harafturímóti at siga ongatíð fört til internationalar konfliktir. Um ca. 1600 fóru teir dansk-norsku kongarnir at avmarka tann partin av sjónum uttan um Ísland og Føroyar, sum útlendingar ikki máttu fiska á (Sjóterritorium nevni eg hereftir »landhelgi« og »sjóterritorium viðvíkjandi fiskiveiði« fyri »fiskihelgi«). Í brævi av 1603 frá Chr. IV til Jákup I av Bretlandi (Onglandi og Skotlandi) var fiskihelgin við Ísland sett til 2 míl ((8 sjómíl); eftir brævinum skuldu onglendingar í framtíðini halda seg burtur frá norsku strondini, Vardøhus og Føroyum. Í 1615 skrivaðu Føroyingar til Chr. IV, at »her under landet forsamler sig en hel hob engelske og skotske skibe, flere end nogen tid været haver, og her under landet bruger deres fiskeri, ikke ude på havet, som under Island brugeligt er, men de løber og driver inde under landet på landsens grunde og fiskeklakker, og udi så mange måder bortrøver den fattige næring og Guds gave, som vi fattige folk ellers med vores små både kunde opfiske« (Ræstad s. 213 og N. Andersen s. 225—226). Í 1617 skrivaðu teir til kongin, at »en stor hob skotske skibe haver nu på 2 eller 3 års tid forsamlet sig under Eders Nådes land og øer og med deres små ski heseiler og ror igjennem landet og ind udi alle fiorder og havner, fisker og opriver inden fjord og uden fore den fattige næring, som vi fattige folk med vores små både på sådanne steder søge kunde, så vel som på alle vores fiskeklakker og grunder, hvorhen, så snart de ser os, udi så mange måder med vores små båder sidder og fisker, de strax løbe udi hobetal« (Ræstad s. 213 og N. Andersen s. 234—235). Ræstad skrivar í hesum sambandi: »Færingerne støtter sig, som det vil ses, til den gamle norske opfatning, at de pladser i sjøen, hvor de pleiede at drive fiske, var deres, landets, grunder og fiskeklakker.« Chr. IV vendi sær til Jákup I, og úrslitið varð, at skotska ráðið í navni bretska kongsins setti forboð fyri skotskum fiskimonnum at fiska við Føroyar innanfyri sjón av landi, »av tí, at henda fiskiveiðan bert var fyri undirsáttunum hjá tí dansk-norska konginum«. Annars er tað mest úr Íslandi, at man frættir um brot av fiskibanninum. Í eini hvalaveiðu-koncessión frá 1631 varð fiskihelgin við Ísland sett til 4 míl (16 sjómíl). Ræstad heldur tað vera líkindi til, at góðkenningin av tí føroyska fiskibanninum hevur elvt Chr. IV til at víðka 2 míla markið við Ísland út til 4 mil. Hann skrivar

(s. 217): »Dernæst hadde saken angående det skotske fiskeri under Færøerne har et over forventning gunstigt forløp. Det har måske ikke stået ganske klart for Chr. IV, at der var en ikke uvæsentlig forskjel mellem Færøspørgsmålet og Islandsspørgsmålet, forsåvidt som han i det ene tilfælde hadde med engelske, i det andet tilfælde med skotske fiskere at gøre. De engelske fiskere hadde nu engang gjennem lange tider vænnet sig til at gå ud fra, at fiskeri i havet ved Island var frit. De skotske Færøfiskere var derimot fra sit hjemland fortrolige med indskrænkninger i utlændingers fiskefrihet. Chr. IV har indset, at det norske herredømme i Nordhavet i dette tilfælde bedst opretholdtes ved fastsættelse av en zone, hvori fiskeriet var forbeholdt undersåterne. Denne zone burde jo fastsættes på samme måde for Færöerne og Island. Men da var tomilsgrænsen jo for snæver. Skotterne hadde for Færøernes vedkommende anerkjendt synsviddegrænsen, og firemilsgrænsen faldt på det nærmeste sammen med synsvidden.« Hetta 4 míla markið kom at vera galdandi í hvussu so er í gott 200 ár (G. Thorðarson, ið skrivar um Ísland, heldur tað vera galdandi enn). Um Ræstad hevur rætt — og eg haldi tað vera mikið trúligt — er tað teimum føringum, ið skrivaðu til kongin í 1615 og 1617 at takka fyri, at 4 míla markið kom í gildi við Ísland og Føroyar. Hetta fiskimarkið varð í komandi árum nevnt í handilsprivilegium og instruksum til orlogsskip — stundum galdandi bæði fyri Ísland og Føroyar, stundum bert fyri annað landið. Í friðstraktatini millum Danmark-Noreg og Svøríki í 1679 stendur: »Doch blifwa dhe särskildte frijheter som Kongl. M:tt af Danemarck haffwer gifwit sine undersåtare på Ferrøe og Issland, så väl som fiskerijet på dhe norske custer, hvilcke allene dhese undersåtare efterlåten är ... uthi dheras fulla krafft, så at dhem härutinnan ingalunde skall skee förnär (Ræstad s. 240). Við tær donsku strendurnar høvdu sviar, sum áður sagt, frá gamlari tíð fiska frítt eins og aðrir útlendingar. Í hvussu so er til seinast í 17. øld varð Danmark vitjað av fremmandum fiskimonnum (Ræder s. 240).

Ca. 1750 kom 1 míla (4 sjómíla) markið fram í ljósmála í norðanlondum, fyrst sum neutralitetsmark, seinni sum alment sjómark (Ræder s. 329). Aftaná eitt kaper-sakarmál gjørdi dansk-norski kongurin soljóðandi resolutión: Vi ville allernådigst have fastsat som regel i alle de tilfælde, hvor spørgsmålet er om bestemmelsen af Vor territorial-høiheds grændse ud i søen, at denne skal regnes indtil den sædvanlige sømils afstand fra den yderste øe eller holm fra landet, som ikke overskylles af søen«. Ved »Sømil« meinast her 1 gl. míl ella 4 sjómíl. Resolutiónin varð ikki prentað, og Ræstad ivast ikki í, at hon bert sipar til neutralitetsmarkið, ikki til fiskimarkið (s. 344). Ca. 1830 varð 1 míla (ella 4 sjómíla) markið vorðið alment sjómark í Noregi (Øksnevad s. 19 í neðra): Í seinastu helvt av 19. øld vóru basislinjur drignar ymsastaðis við strond ina í Noregi og við kgl. resolutión av 1935 fram við allari strondini. Dómurin í Haag sigur, sum kunnugt er, at henda resolutiónin ikki stríðir móti fólkarættinum.

Nakað um somu tíð, sum 4 sjómíla markið verður tað vanliga í Norðanlondum, fara fleiri av hinum londunum, t. d. Stórbritannia, U. S. A.

og Frakland, at nýta eitt ¾ míl (ella 3 sjómíla) mark. Hetta markið styðjar seg á eina fólkarættsliga teori um, at sjómarkið eigur at liggja so langt úti, sum kanónirnar bera frá landi (»kanónskotsvíddina«). Til dømis verða 3 sjómíl avtalað sum fiskihelgi fyri Stórbritanniu og Frakland í traktat frá 1839, ið er fyrimynd fyri Norðursjóvarkonventiónini frá 1882.

Ræstad hevur ávíst — og tað er óivað høvuðssjónarmiðið í hók hansara — at 4 sjómíla markið í Norðanlondum einki hevur við »kanónskotsvíddina« at gera, sjá t. d. s. 329: »Enmilsregelen hadde således fæstnet sig i dansk-norsk praksis længe før kanonskudsregelen og trekvartmilsregelen opnåede gyldighed i Europa og Amerika« — og s. 340: »Det vil fremgå ... ... , at enmilsgrænsen i Danmark-Norge ikke som trekvartmilsgrænsen i Storbritannien og Amerikas forenede stater hadde sin historiske og theoretiske forudsætning i kanonskudsvidden. Enmilsgrænsen blev ... anvendt som grænse for det neutrale farvand i Norge allerede 1745, altså før kanonskudsvidden hadde fundet anvendelse i den folkeretslige praksis som almindelig grænse for det neutrale kystfarvand. Det er først efter 1750, at kanonskudsvidden sees anvendt i de europæiske traktater og neutralitetsbestemmelser som grænse for det neutrale farvand langs ubeskyttede kyster. De dansk-norske bestemmelser 1745—1810 indeholder ingensteds med en stavelse nogen hentydning til, at det er kanonskudsvidden, som ligger til grund for enmilsgrænsen; tvertimod gir kancellicirkulære 18. august 1810 uttryk for den kjendsgjerning, at avstanden fra land var længere efter enmilsregelen end efter kanonskudsregelen.«

Men hvussu gekk tað so við landhelgini við Ísland og Føroyar í hesi tíðini? Í nógv ár aftaná resolutiónina frá 1812 — heilt upp í 1850 ára-talið — fingu donsk inspektiónsskip, ið send vóru á inspektiónsferð upp í Norðuratlantshavið, framvegis instruks um, at landhelgin var 4 míl (16 sjómíl). Danska stjórnin vísti av, at 1 míla markið var ov trongt sum fiskimark har uppi og royndi sum longst at »sigla millum skers og báru«, sum C. Thorðarson tekur til orða. Men tíverri fekk henda sigling ein bráðan enda. Vindurin úr Onglandi og Fraklandi tók at harðna, »seglini fullu á bunka niður, og togini gingu sundur«. Í 1859 læt danska uttanríkisministeriið kunngera fyri bretsku og fronsku stjórnini, at 4 sjómíls markið eftir resol. 1812 skuldi nýtast sum fiskimark við Ísland (Ræstad s. 335, C. Thorðarson s. 58). Og 7. apríl 1865 skrivaði justitsm. (í einum internum brævi) til uttanríkismin., at landhelgin við Ísland átti at vera 3 sjómíl, av tí at Frakland og Stórbritannia, sum høvdu so nógv at siga á sjónum, høvdu landhelgi uppá 1 lieu ella 1 league, ið bert svarar til 3 sjómíl, ikki 4 sjómíl sum hin gamla danska mílin (G. Thorðarson s. 62—63). Í 1882 kom so Norðursjóvarkonventiónin millum Stórbritannien, Týskland, Belgiu, Danmark og Holland. Fiskimarkið varð harí sett til 3 sjómíl. Og við traktatini av 1901 vóru Ísland og Føroyar tiknar við. Hví tær komu við, og hví tær ikki komu við alt fyri eitt, veit eg ikki. Mær vitandi stendur einki um hetta í »Rigsdagstidende«. So undarligt tað ljóðar, letur spurningurin um skerjingina av tí gamla fiskimarkinum ikki til at hava verið umroddur á Ríkisdegnum og heldur ikki lagdur fyri íslendska Altingið ella, so vítt eg

veit, fyri føroyska løgtingið, sjálvt um málið hevði almiklan týdning fyri Ísland og Føroyar, men lítlan týdning fyri restina av ríkinum. Hetta hendi frammanundan »systemskiftinum« í Danmark. Noreg fekk fleiri áheitanir um at undirskriva Norðursjóvarkonventiónina, men vildi ikki geva eftir (Ræstad s. 361).

Skotland, ið kom saman við Ongland í 1603, hevur síðan havt somu støðu í hesum máli sum Ongland. Tó er tað vist møguligt, at finna leivdir av teirri gomlu skotsku serstøðuni, í »Encyklopedia Britannica«, annaðhvørt bind 20 s. 286c (rubrikkin Trawling) ella bind 23 s. 428 d (rubr. Territorial waters) stendur: »The Trawling in Prohibited Areas Prevention Act 1909 prohibits the landing and selling in Great Britain of fish caught by beam and other trawling in prohibited areas adjoining Scotland.« Eg haldi meg minnast hava lisið, at hetta sipar til arealir uttanfyri 3 sjómílamarkið, sum Bretar sjálvir ikki mugu trola á, og sum útlendingar væl mugu trola á, men um teir gera tað, sleppa teir ikki at landa í Stórbritanniu. Um hetta er beint, so royna Skotar enn at verja fiskimiðini úti á havinum, uttan fyri mark. Men vit hava eitt nógv betri dømi um hetta, sjá Øksnevad s. 24: »Meget interessant er det, at en representant for Orkenøyene og Shetland i 1939 tok til orde i Underhuset, for at få bestemmelser til vern for kystfisket og anbefalte det norske systemet. Og en nemnd, som Scottish Counsil on Industry etter regeringens anmodning nedsatte, foreslo, at trålfiske skulle forbys ved Orkenøyene, Shetland og Stornoway-kysten (norðurendin av Skotlandi) i en avstand av 3 sjømil fra land regnet fra rette grunnlinier på opp til 27 sjømil; med andre ord, man anbefalte det norske system på en kyststrekning, som kan sammenlignes med Norges. Men naturligvis kunne den britiske regering ikke følge denne indstillingen; all den stund den hevder, at systemet står i strid med mellemfolkelige lover. Det er allikevel meget interessant, at så kvalifiserte representanter for de skotske fiskernes interesser har sagt så klart fra.«

Ísland uppsegði 3. oktobir 1949 traktatina frá 1901, og hon fór úr gildi 3. oktober 1951, men íslendingar støðgaðu við at flyta markið út, til Haag-dómurin var fallin. Øksnevad skrivar s. 6, at hin bretski advokaturin í Haag, Sir Eric Beckett »brakte Island en hyllest, fordi dette landet hadde gått med på å vente, til det faldt dom i tvisten mellem Storbritannia og Norge.« Eg nevni hetta, tí at nógv heima halda, at tað er ein óvinarlig gerð at uppsiga eina traktat, og at uppsøgnin hevur elvt illstøðu millum landsstýrini í Stórbritanniu og Íslandi. Eg veit ikki av, at tað bretska landsstýrið hevur viðtikið nakrar atgerðir móti íslendingum av hesi grund, — tað sæst jú eisini nú, at eingin lóg ella tílíkt setur forboð fyri landing av íslendskum fiski í Stórbritanniu.

Grønland hevur ikki havt somu søguligu støðu í hesum máli sum Noreg, Ísland og Føroyar. Í 18. øld varð sett forboð fyri handli við Grønlendingar innan fyri 4 mil (16 sjómíl) frá landi, men nakað fiskiforboð sum í hinum londunum hevði man ikki (Ræstad s. 239).

Øksnevad skrivar s. 7: »Sir Eric Beckett ... sa ..., at det er tydeligt, at den norske regjering har gjort de mest omfattende og energiske anstren-

gelser over hele verden for å finne hvert grann av støtte, som kan opdrives for den norske teori.« — Tað er heldur einki at ivast í, at tað arbeiðið, sum Norðmenn gjørdu bæði frammanundan og undir sakini, var ómetaliga stórt. Basislinjurnar vóru drignar av eini kommissión, sum arbeiddi við hesum málinum í nógv ár. Øll kend fiskimið vóru kortløgd og navngivin fyri at vísa, hvussu langt, ið Norðmenn høvdu fiskað út frá landi frá gamlari tíð (Øksnevad s. 34 og 52). Og sjálvt um Noreg sum sjófarandi land átti góðar specialistar í sjórætti og fólkarætti, tóku Norðmenn ein útlending sum høvuðsadvokat fyri seg, kanska tann besta, teir kundu fáa, professor Berquin úr Belgiu (sjá um hetda Øksnevad s. 18, 19, 23, 26 og 30). Ein norskur juristur nevndi fyri mær eitt dømi um, hvussu nógv ið Norðmenn gjørdu út av sakini: Bretar høvdu eitt kvøld stilla ein spurning um svenska sjómarkið. Ein norðmaður fleyg um náttina upp til Stockholms, vakti uttanríkisministara Undén, hesin vakti ríkisarkivarin, og spurningurin varð loystur. Eg trúgvi eisini, at Íslendingar hava búgvað seg væl út. Ísland er millum tey lond, sum bóðu Haag-dómstólin um kopiir av procedyrini. Hesi lond eru: Canada, U. S. A., Venezuela, Cuba, Belgia, Ísland og Svøríki. Tað hevur sjálvsagt tann størsta týdning at kenna øll argumentir hjá Bretum og øll mótargumentir hjá Norðmonnum.

Og so vil eg venda aftur til greinina í »Politiken«. Referatið av kompromisuppskotinum kann ikki vera beint. Um grunnlinjur skulu galda sum fiskimark, missa vit jú strekkir, sum vit nú eiga, til dømis sunnan fyri Munkin.

Eg haldi tað vera principielt skeivt at royna at fáa ein *kompromis*sáttmála við Ongland og í hvussu so er skeivt at gera tað nú, áðrenn avfjarðað er í Íslandssakini. Um eg havi skilt ávísirnar rætt, stríðast Bretar og Íslendingar nú bert um Faxaflóan. Eg haldi meg hava lisið um eitt semjingsuppskot frá Bretum, hvarefitir teir vilja góðkenna hinar grundlinjurnar og 4 sjómíla markið. Hví ikki fara tann vegin, sum hesin dómurin vísur á, at seta markið sjálvir, við møguleika fyri broyting av dómstólinum? — Sir Eric Beckett endaði sína procedyru við at siga (Øksnevad s. 45): »Der er ikke noe annet sted enn i denne salen, hvor en mellomfolkelig tvist kan bli behandlet og avgjort *udelukkende på grunnlag av selve sakens rettslige stilling, uten at det tas noen utenforliggende hensyn.*«

1. viðgerð 3. august og 6. september legði sjómarksmálanevndin fram soljóðandi

Álit
við fylgisskjølum:

Málið er beint í serliga 7-manna nevnd. Í hennj sita: fyri fólkaflokkin Fr. Bláhamar og S. Ellefsen, fyri sambandsflokkin Jens Chr. Olsen og Tr. Samuelsen, fyri javnaðarflokkin P. M. Dam, fyri gamla sjálvstýri J. Kallsoy og fyri tjóðveldið D. P. Danielsen. Nevndin hevur býtt

segí ein meiriluta og tveir minnilutar. Minnilutin (D. P. Danielsen) setur fram serligt álit, meðan hin minnilutin (P. M. Dam og J. Kallsoy) vísa til skriv til nevndina, dagfest 25. august 1954, undirskrivað av løgtingsmonnunum P. M. Dam, J. P. Davidsen, J. H. Danbjørg, Einar Waag, J. Fr. Øregaard, Johan Kallsoy og J. P. Henriksen, ið er teirra uppskot.

Uppskotið frá landsstýrinum er sent øllum feløgum, sum hava við fiskivinnuna at gera, til umælis. Hesu hava vegna tess at limirnir hesa tíð av árinum nógvir eru burtur, ikki kunna givið nakað endaligt svar frá sær. Tó hava Vágs Útróðrafelag og Føroya Motorpassarafelag mótmælt uppskotinum.

1. *Meirilutin* (Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, Jens Chr. Olsen, Tr. Samuelsen):

Í hesum máli eru tveir vegir at fara. Annar er at siga upp sáttmálan frá 1901, og so saman við Danmark seta tað sjómark, sum vit halda okkum kunna prógva at eiga rætt til og kunna verja yvir fyri øðrum tjóðum. Hesin vegurin er ikki farandi sum er, bert tí vit halda okkum hava eitt nóg so væl grundað ynski, men krevur hann gjølligar kanningar av øllum, sum kann tala fyri cini broyting. Til hesar kanningar krevjast løgfrøðingar við serkunnleika til fólkarættslig viðurskifti, og vil tað óivað hjá teimum taka rúma tíð, áðrenn teir kunnu siga, hvat fiskimark teir halda okkum eiga rætt til. Fyrrenn hesar kanningar eru lidnar, kann ikki dømast, um hesin vegurin er hann, sum gevur best úrslit. Ísland hevur valt at ganga uppsagnar-vegin. Einki vist kann tó sigast í dag, um tað fiskimark, Ísland hevur sett, verður fólkarættsliga viðurkent.

Hin vegurin og hann, sum gingin er higartil í hesum máli, er at samráðast við tað land, hvørs fiskimenn fiska næst strondum okkara, í hesum føri Bretland. Úrslitið av hesum kanningum er uppskotið, ið landsstýrið hevur lagt fram, sum tað er broytt í skrivum frá uttanríkisministerinum 27. og 31. juli í ár, viðløgd sum skjøl. Eftir uppskotinum verður fiskimarkið yvirhøvur roknað 3 fjórðingar út frá beinum grundlinjum. Hesin mátin førir við sær vissar fyrimunir, serliga vestanfyri í mun til tað fiskimark, sum er í dag.

Meirilutin er av teirri áskoðan, at málið um fiskimarkið er ov lítið kannað til, at vit kunnu siga upp 1901-sáttmálan. Tað er heldur ikki greitt, um útlit er fyri, at uppsøgn vil geva okkum størri fyrimunir enn tað uppskot, sum her liggur fyri. Á hin bógvin er tað greitt, at tað fyriliggjandi uppskotið til sáttmála ber tann fyrimun í sær, at fiskimarkið beinan vegin verður víðkað — helst vestanfyri — í mun til tað núverandi mark, og meirilutin heldur, at tað er ikki klókt at lata hesar møguleikar fyri at fáa víðkað markið nú beinan vegin gleppa okkum úr hondum. Men samstundis eigur tað at verða gjört greitt fyri Bretum, at vit ikki við at ganga sáttmálavegin nú skerja okkara juridisku og fólkarættsligu rættindi viðvíkjandi fiskimarkinum. Nýggi sáttmálin skal galda í 10 ár. Hóast hetta

er stutt áramál í einari landssøgu, so er hættisligt í hesum máli at binda seg fyri fleiri ár. Meirilutin heldur tó, at síðani Bretar ikki fáast longur við samráðing, eiga vit at taka við uppskotinum og fáa teir fyrimunir, sáttmálin veitir okkum beinan vegin. Hesi árini, vit eru bundnir av sáttmálanum, kunnu takast sum royndarár fyri, hvønn týdning tað kann fáa fyri heimafiskiskapin, at fiskimarkið verður víðkað.

Tí eigur yvir fyri Bretum at verða tikið uppaftur greitt fyrivarni, um at vit ikki við at gang asáttmálavegin geva frá okkum møguligan rætt til rúmari fiskimark. Sum sagt frammanundan víkja Bretar ikki frá kravinum um tey 10 árini. Skuldi tað í hesum tíðarskeiði hent, at nýggj sjónarmið fingu fólkarættsliga viðurenning, ella avtalur landanna millum kundu ført við sær fyrimun fyri Føroyingar, um vit ikki vóru bundnir av sáttmálanum, er rímuligt, náttúrligt og neyðugt at samráðast við Bretar.

Frá gamlari tíð hevur verið sagt um Føroyingar, at vit hava hjallin á sjónum. At so hevur verið, prógva tey óteljandi fiskimiðini, ið navn- og ýtisfest liggja um oyggjarnar úr landi og einar 16—20 fjórðingar til havs. Av hesum heimligu fiskileiðum eru vit Føroyingar fyri ein stóran part troðkaðir, tí tað oyðandi veiðitólið — trolið —, ið fremmandir fiskimenn hava tráðroynt við, hevur minnkað so nógv um heimafiskiveiðuna, at okkara fiskimenn ongan annan møguleika hava havt fyri at vinna til lívsins uppihald enn at fara til fjarar fiskileiðir, í Hvítahavið, til Grønlands, undir Ísland ella hava verið noyddir at rýma av landi.

Fiskivinnan er ikki bert høvuðsvinnan hjá okkum Føroyingum, men at kalla tann vinna, ið Føroyingar allir liva av. Tað er tí ein sjálvfylgja, at spurningurin um fiskimarkið er aðalspurningurin hjá øllum Føroyingum. Vit noyðast tí at liggja framvið og verja, hvat ið kann nøra um okkara fiskilíkindi. Tað er tí náttúrligt, at vit Føroyingar, so skjótt sum møguleikar verða til tess, vilja hava lut í teimum fyrimunum, ið nýggj sjónarmið viðvíkjandi setan av fiskimarkinum kunnu geva.

Vert er í hesum sambandi at vísa á, at tað er nevndini kunnugt, at tað bæði frá dansk-føroyskari og bretskari síðu undir samráðingunum í London sterkt er bildið fram, at tað fiskimark, sum partarnir semjast um, ikki skapar præcedens fyri komandi samráðingum ella møguligari trætu, men bert skal takast sum ein praktisk roynd, bæði fyri hvønn týdning ein friðing fyri troli kann fáa, og hvussu langt kann komast samráðingarvegin.

Ein spurningur, sum er nær skyldur við hetta mál, er spurningurin um friðing av gýtingargrunnunum. Flestu fiskisløgini undir Føroyum eru støðuføst. Her aftrat kemur, at fiskur ætlandi ikki kemur uttanifrá til føroysku grunnarnar. Føroyski fiskurin er við øðrum orðum serligt fiskaslag. So lítið fiskaøki sum tað við Føroyar vil tí vera ógviliga viðbreki fyri at vera tráðroynt, serliga við troli, sum tekur allan fiskin á staðnum. Hvussu stóran týdning ein friðing hevur, prógva hesi tøl: Í 1946 fingu trolararnir 235 kg fyri hvønn troltíma ella 3 ferðir so nógv sum seinast í treduvunum, men longu í 1952 er talið komið niður í 122 kg. Dyggasti mátin at bøta um hesi viðurskifti er at friða um smáfisk og yngul. Hetta kann møguliga gerast tann vegin at seta minsamark fyri fisk, ið kann seljast,

men hetta er ikki nokk, eftirsum tann fiskur, ið verður tveittur í havið aftur, longu er deyður. Tann vegurin kann eisini roynast, at gera meskarnar í trolunum størri, men stórur partur av tí fiski, sum fer gjøgnum meskarnar, er antin deyður ella so illa løstaður, at hann ikki er førur fyri at liva. Einasti mátin, ið til fulnar fremur endamálið, er at friða allan trolfisk á støðum, har smáfiskurin og yngulin er.

Meirilutin heldur tað tí vera av minst líka so stórum týdningi sum at økja um fiskimarkið, at gýtingargrunnarnir verða friðaðir fyri troling, og eiga tí tær samráðingar, sum hilduar eru um friðingina, at halda fram skjótast møguligt.

Fyri at vit kunnu fáa fulla nyttu av, at fiskamarkið verður gjørt rúmari, og smáfiskur og yngul uttan fyri markið verður vardur móti troling, tá gýtingargrunnar verða friðaðir, eins og línufiskiskapur Føroyinga verður vardur, er neyðugt, at sjóverjan er so útbygd bæði við skipum og manning, at hon er før fyri at verja tey rættindi, vit vinna og eiga.

Meirilutin mælir tí til, at tingað verður við ríkisstýrið um, at sjóverjan verður so umskipað, at Føroyingar fáa rætt til við egnum skipum at taka lut í hesum.

Bretar hava ført áheitan fram um bøtingarrætt av troli á føroyskum sjóøki og í føroyskum havnum, og hevur landsstýrið sambart pkt. 3 í uppskoti lagt hesa áheitan fyri tingið. Eisini frá øðrum tjóðum hava áheitanir um framíhjárætt í sambandi við teirra fiskivinnu við Føroyar fyrr verið havdar á lofti, men í slíkum málum hava vit Føroyingar altíð sýtt, og eru vit tí í hesum føri noyddir av prinsipiellum orsøkum at taka somu støðu.

11. *Minnilutin* (P. M. Dam, J. Kallsoy):

Óneyðugt er at siga, at víðkan av sjómarki okkara er eitt lívsmál fyri Føroyar. Tað eru allir Føroyingar samdir um.

At vit eiga ein náttúrligan fyrstarætt til mið og grunnar okkara eru allir samdir um við, eisini uttan fyri Føroyar.

Hvussu hin løgfrøðisligi rættur okkara liggur í hesum máli, eru leikmenn sjálvandi ikki førir at avgera. Her vísa vit til rit Daniel Nolsøes løgfrøðings viðvíkjandi okkara rættarstøðu í málinum. Hon tykist at vera sterk, sterkari enn hjá flestum øðrum Norðurlanda tjóðum. Hon er í øllum førum eins sterk og hin íslendska rættarstøðan í sjómarksmálinum Tað er tí eyðsæð eitt hampakrav bæði yvir fyri Dønum og Bretum, at skipað verður soleiðis fyri, at vit, í hvussu er, tá ið drátturin um sjómarksmálið er avtornaður, sita við ikki minni sømdum enn Íslendingar. Henda ásannan er marksetandi fyri støðu okkara til fyriliggjandi uppskot til sátumála.

Tá ið nú Íslendingar eru í somu skóm sum vit, bæði veiðiliga og rættarliga yvir fyri Bretlandi, og tá ið teir hava gjørt tey stig, sum eru neyðug fyri at fáa greiðu á sjómarkstrætuni við Bretland, halda vit, at

tað ber til hjá okkum og Bretum at sleppa undan ósemju við at koma til sættis um, at Føroyingar í ongum føri skulu verða fyri verri býti enn Íslendingar sjómarksmálinum viðvíkjandi.

III. *Minnilutin* (D. P. Danielsen):

Hin 1. marts 1952 legði Tjóðveldisflokkurin fyri tingið soljóðandi skriv:

»Við teirri vend í huga sum komin er í altjóðarættin um sjómarkið aftaná dómin í Haag og ósemjuna millum norðmanna og bretlendinga og við teim avleiðingum í huga, sum av hesum dómi kunna koma at standast, mælir flokkurin til at allir spurningar í hesum máli sum kunna hugsast at fáa týdning fyri Føroyar og føroyska fiskiveiði serstakliga, nú beinanvegin verða tiknir upp til umhugsunar og samráðingar við avvarandi stjórnarvøld.«

Hin 12. august 1952 legði flokkurin fyri tingið hetta uppskot til samtyktar:

»Føroya løgting biður donsku ríkisstjórnina beinan vegin siga upp »En mellem Hans Majestæt Kongen af Danmark og Hans Majestæt Kongen af det forenede Kongerige Storbritannien og Irland angående Ordningen af deres respektive Undersåtters Fiskeri i Havet omkring Færøerne og Island udenfor Søterritoriet afsluttet Konvention«, undirskrivað 24. juni 1901.«

Støða Tjóðveldisflokksins er framvegis tann, at omanfyri nevndi sáttmáli verður uppsagdur beinanvegin.

Hesin sáttmáli varð samtyktur av donskum og bretskum myndugleikum. Men Føroya fólk og Føroya løgting vóru ikki eftirspurd.

Enn hevur eingin vist á, hví slíkur sáttmáli er neyðugur. Hann setur okkum í eina serstøðu mótvegis Bretlandi, sum fólkarættarliga sæð er skilaleys. Tí vit reka ikki fiskiskap við strendir Bretlands. Og samtykkir tingið uppskot landsstýrisins, koma vit í eina ógreiða støðu mótvegis øðrum tjóðum, ið reka fiskiskap undir Føroyum. Tí hesar tjóðir verða ikki beinleiðis bundnar av sáttmálabroytingunum.

Tað er ábyrgdarleys gerð mótvegis øðrum tjóðum, ið fiska undir Føroyum at samtykkja eitt uppskot, sum gevur bretskum veiðiskipum serrættindi til at arbeiða fiskireiðskap í føroyskum havnum. Tað er óhugsandi, at Bretar á nøkrum øki vildu givið okkum serrættindi, sum teir sýta øllum øðrum tjóðum, t. d. tollfríar landingar í Bretlandi.

Tað er almannakunnugt, at spurningurin um sjómark og fiskirætt-indi er so nógv frammi nú landanna millum, sum ongatíð áður. Miklar og avgerandi broytingar eru tí væntandi á hesum fólkarættarliga øki í næstu framtíð. Men vit frásiga okkum rættin til at fylgja við í hesum framtaki, um vit nú binda okkum til Bretlands í 10 ár.

Nevndin hevur sent málið til útróðrarfeløgini í Klakksvík, Skopun og Vági, og til øll fiskivinnufeløgini. Øll feløgini hava svarað aftur, at øll ráða tey frá at samtykkja sáttmálauppskotið.

Altjóðarrætturin viðurkennir ta høvuðsreglu, at avvarandi land sjálvt og einsamalt setur mark um síni fiskihelgi, eftir søguligum, fíggjarligum og geografiskum sjónarmiðum. Ikki fyrr enn farið er longur út, enn hesi sjómark heimilda, er fólkarætturin brotin.

Siga vit sáttmálan upp nú, hava vit tvey ár til at finna fram til tað sjómark, sum gagnar okkum best, so rúmt sum altjóðarrætturin loyvir.

Til tess at finna fram til hetta mark, verða vit at ráðføra okkum við fólkarættarkønar menn úr ymiskum londum. Slíkum monnum til handa verða vit atsavna mest møguligt av føroyskum tilfari, søguligum, hagfrøðisligum og fiskafrøðisligum. Slíkt tilfar samanhildið við tað, sum er til skjals í fólkarættarligum ritgerðum og hjá altjóðardómstólinum, serstakliga viðvíkjandi trætuni millum Noreg og Bretland, skal avgera, hvar mark okkara verður sett í fyrstu syftu. Men ikki ein sáttmáli millum Danir og Bretar.

Sum nevnt eru broytingar og meira samskipaðar reglur væntandi á hesum fólkarættarliga øki. Tað er tí væl hugsandi, at siga vit sáttmálan upp nú, liggja allir hesir spurningar greiðari og einfaldari, tá uppsagnarfreisturin er úti. Tíðin arbeiðir við okkum. Í hvussu er kunna vit vænta, at íslendska sjómarkið, sum so nógv verður tikið til undir viðgerðini av hesum máli, tá er komið í fasta legu.

Men sjómarkið má verjast. Og royndirnar hava sýnt, at Danir verja tað ikki fyri okkum. Tí er tað neyðugt, at spurningurin um eina føroyska sjóverju verður tikin til viðgerðar á tingi og skjótast gjørligt. Vit eru førir fyri at gera hetta arbeiðið sjálvir. Og vit hava ráð til tess, tí verður markið vart, vinna vit útreiðslurnar av verjuni aftur margfaldaðar.

Annar spurningur, ið er nær skyldur hesum máli, er spurningurin um friðan av gýtingargrunninum. Løgtingið samtykti í 1949 at friða vissar landgrunnar í gýtingartíðini, treytað av at eisini onnur lond, ið fiska undir Føroyum, vilja friða teir. Enn hevur einki spurst burturúr hesari lóg. Tað er av størsta týdningi hjá okkum, at Føroyar altíð eru umboðaðar á altjóðafundum, har slík mál koma til viðgerðar, og at okkara umboðsmenn royna tað, teir eru mentir at verja okkara áhugamál á hesum øki.

Uppskot

A. *Frá minnilutanum* (D. P. Danielsen):

Føroya løgting biður donsku ríkisstjórnina beinan vegin siga upp »En mellem Hans Majestæt Kongen af Danmark og Hans Majestæt Kongen af det Forenede Kongerige Storbritannien og Irland angaaende Ordningen af deres respektive Undersaatters Fiskeri i Havet omkring Færøerne og Island udenfor Søterritoriet afsluttet Konvention« dagfest 24. juni 1901.

B. *Frá minnilutanum* (P. M. Dam, J. Kallsoy):

I. Løgtingið tekur undir við tí av landsstýrinum framlagda uppskoti til sáttmála við Bretar um sjómark okkara; treytað av:
   1) at bretska ríkisstýrið bindur seg til, at vit Føroyingar viðvíkjandi sjómarki okkara skulu fáa somu sømdir, sum Íslendingar verða at fáa við altjóðadómstólin í Haag, um trætan millum Bretar og teir verður løgd fyri hann, tó ikki minni enn uppskotið gevur, og
   2) um ikki trætan áðrenn 2 ár kemur fyri altjóðarættin, skulu Bretar verða bundnir til at viðurkenna, at hitt føroyska sjómarkið verður sett soleiðis, sum teir viðurkenna ella tolerera tað sjómark, sum Íslendingar seta sær.

II. Heitt verður á danska ríkisstýrið um at taka upp samráðingar við rætta viðkomandi og skorða á nú heimanvegin at fáa friðað gýtingargrunnar okkara fyri trolfiskiskap.

III. Álagt verður landsstýrinum at samráðast við danska ríkisstýrið um at fáa sjómarksverjuna við Føroyar skipaða soleiðis, at Føroyingar hava rætt til við egnum førum at taka lut í sjóverjuni við Føroyar, samstundis sum heitt verður á ríkisstýrið um at leggja doyðin á at gera sjóverjuna dyggari í hvørjum, so fremmand fiskiskip eingi líkindi hava at reka ólógligan fiskiskap her undir landi okkara.
Góðtaka Bretar ikki hesar treytir, dettur landsstýrisuppskotið burtur, og skila vit okkum so rætt til at taka annað stig til greiðu av sjómarksmálinum.

C. *Frá meirilutanum* (Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, Jens Chr. Olsen, Tr. Samuelsen):

1. Uttan harvið at ganga undir nakað, sum skerja kann okkara søguligu rættindi og rættindi eftir millumlanda rætti til rúmari fiskimark undir Føroyum, samtykkir løgtingið landsstýrisins uppskot

til sáttmála við bretska ríkisstýrið við undantak av 3), men undir tí forútseting, at danska ríkisstýrið vil gera stig til tingingar við Bretland um nýggja viðgerð, um so er og so skjótt grundreglur viðvíkjandi fiskimarki eru samtyktar á millumlanda grund ella í bilateralum skipanum, sum høvdu givið Føroyum størri søndir enn sáttmálin gevur, um so er, at tær vóru galdandi í løtuni.

II. Ríkisstýrið verður biðið um at skunda mest møguligt undir friðingiua av várgrunnum okkara fyri troling.

III. Landsstýrinum verður heimilt at taka upp tingingar við danska ríkisstýrið við tí í hyggju at fáa sjóverjuna umskipaða soleiðis, at Føroyingar fáa rætt við egnum skipum at taka lut í henni, samstundis sum ríkisstýrið verður biðið um at leggja allan dent á at gera sjóverjuna so dygga sum gjørligt, so fremmand fiskifør ongi líkindi fáa at røkja ólógligan fiskiskap innan fyri sjómarkið ella skaða føroyskan línufiskiskap úti á grunnunum uttan fyri mark.

IV. Landsstýrið fær heimild í samráð við fíggjarnevndina at veita tær útreiðslur úr landskassanum, sum fara at standast av luttøku í sjóverjuni.

AVRIT

UDENRIGSMINISTERIET

København, den 27. juli 1954.

Under henvisning til tidligere brevveksling vedrørende spørgsmålet om en ændring af den færøske fiskerigrænse og af konventionen af 24. juni 1901 mellem Danmark og Storbritannien om ordningen af danske og britiske undersåtters fiskeri i havet omkring Færøerne, senest skrivelse herfra af 7. d. m. — Statsministeriets j. nr. 82—17—017, meddeler Udenrigsministeriet, at der nu foreligger svar fra den herværende britiske Ambassade på den henvendelse, som man underhånden rettede dertil angående de her udarbejdede udkast til notevekslingen med dertil hørende protokol.

Det fremgår af Ambassadens svar, at det britiske Udenrigsministerium i det væsentlige har kunnet godkende de pågældende udkast. Foreign Office har dog ønsket at stille enkelte ændringsforslag med hensyn til formuleringen, hvoraf nogle er af ren sproglig art. Man vedlægger 2 eksemplarer af en her affattet notits, indeholdende en gengivelse af de britiske ændringsforslag, forsynet med nogle i Udenrigsministeriet nedfældende bemærkninger til forslagene.

Af ændringsforslagene er der særlig grund til at fremhæve følgende i notitsen under A. no. 3), 5), 6) og 7) omtalte:

3) Fiskerigrænsen i Vest mellem Kobbetange og Myggenæs foreslås angivet på en anden måde end i det danske udkast.
5) Det henstillei, at man opgiver kravet om, at det, forinden det tillades et fiskefartøj at reparere beskadigede net i de færöske klareringshavne, af vedkommende myndighed skal have været konstateret, at fiskenettene har været stuvet bort under fiskefartöjets ophold indenfor fiskerigrænsen.
6) Der foreslås optaget i notevekslingen en udtrykkelig bestemmelse om, at britiske fiskefartøjer ikke skal underkastes nogen mindre gunstig behandling end den, der tilstås fiskefartøjer fra et hvilket som helst andet fremmed land.
7) Der foreslås angivet en bestemt dato for notevekslingens ikrafttræden.

Man vedlægger et udkast til notevekslingen og protokollen, således som de fremtræder med de engelske ændringsforslag.

I anledning af det under 3) nævnte forslag om en ændret angivelse af fiskerigrænsen i Vest har Udenrigsministeriet indhentet den i afskrift vedlagte erklæring af 26. d. m. fra Direktøren for Søkort-Arkivet. — Afskrift af en skrivelse, som man herefter har sendt den herværende britiske Chargé d'Affaires a. i., vedlægges ligeledes.

Under henvisning til foranstående og til det i bilagene indeholdte udbeder Udenrigsministeriet sig en udtalelse i sagen.

Til Statsministeriet.

AVRIT

UDENRIGSMINISTERIET den 31. juli 1954.

Under henvisning til tidligere brevveksling vedrørende spørgsmålet om en ændring af den færøske fiskerigrænse og af konventionen af 24. juni 1901 mellem Danmark og Storbritannien om ordningen af danske og britiske undersåtters fiskeri i havet omkring Færøerne — senest skrivelse herfra af 30. d. m., Statsministeriets journal nr. 82—17—01z — meddeler udenrigsministeriet, at man dags dato fra den herværende britiske Ambassade har modtaget underretning om, at man fra britisk side vil kunne godkende det seneste danske forslag til en angivelse af fiskerigræn-

sen i vest mellem Kobbetange og Myggenæs, jfr. udenrigsministeriets skrivelse af 27. juli 1954 til herværende britiske Chargé d'Affaires a. i., af hvilken skrivelse en genpart oversendtes til statsministeriet med udenrigsministeriets skrivelse af s. d.

2. og 3. viðgerð 6. september 1954.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá F. M. Dam og J. Kallsoy:

Broytingaruppskot

Undir punkt B. I, fyrsta stykki, aftaná »okkara« verður skoytt uppí: tó undantikið stykki 3.

Uppskot A (D. P. Danielsen) fall 1—0.
Broytingaruppskot ((Dam og Kallsoy) B. I. fall 6—0.
Uppskot B. (Dam og Kallsoy) I — II — III fall 7—0.
Uppskot C. ((meiralutans) I — II — III samtykt 22—0.
Uppskot C (meiralutans) IV samtykt 21—0.

---

16. Realkredittstovnurin.

Ár 1954, 31. juli legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi framløguskriv:

Í løgtingssetuni 1952 í samband við býti av Marshallpeninginum mælti fíggjarnevndin til, at 2 mill. krónur av Marshall-peninginum skuldu nýtast til ábyrgdarpening í byggilánsgrunn (realkreditt-institutt).

Síðani hevur verið arbeitt við málinum av nevnd, sum statsministeriet hevur sett. Í hesa nevnd hevur landsstýrið latið seg umboða av Hákun Djurhuus, landsstýrismanni og Johan Djurhuus, skrivstovustjóra.

Um ríkisumboðsmannin hevur landsstýrið fingið álitið frá nevnd-

ini við uppskoti 1. til lóg og 2. til samtyktir fyri realkredittstovninum, sum landsstýrið kann góðtaka og loyvir sær sostatt at leggja málið við tilmæli fyri tingið.

1. viðgerð 18. august og 26. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Tann 21. august 1953 setti ríkismálaráðið danska nevnd niður at arbeiða við stovnsetan av lánigrunni — realkredittstovni.

Arbeiði nevndarinnar fekk 1. viðgerð tann 18. august 1954. Í bóklingi, sum allir røðarar vóru væl nøgdir við, hevur nevndin savnað saman hópin av tilfarí, sum lýsir fíggjarligu viðurskiftir landsins. Eingin røðari hevði nakrar atfinnngar at gera at sjálvum lógaruppskotnum burtursæð frá § 4 — fyrisitingin — og § 12 — sínamillum ábyrgd. —

Fíggjarnevndin, sum viðgjørt hevur málið, vil tó gera hesar viðmerkingar:

Tað stendur okkum greitt, at um hesin stovnur skal eiga fulla álit teirra, sum pening eiga og kundu hugsað sær at sett hann í realkredittstovnin, má hann verða ríkin soleiðis, sum skotið upp eftir *handilsligum sjónarmiðum.* Tað er út frá hesum sjónarmiðum, at nevndin letur § 12, sum áleggur lántakarunum sínamillum ábyrgd, fara óbroytta aftur til tingið: Tað er væntandi, at henda regla, ið ikki hevur verið nýtt í Føroyum áður, verður at minka um lánavhugin.

Ilt er at siga, hvussu nógv lán verða tikin tey 2—3 fyrstu árini og hvussu nógv arbeiði verður av umsitingini, men valla verður tað stórt. Nevndin ásannar, at soleiðis sum ábyrgdarpeningurin er fingin til vega, er tað ikki órímiligt, at landsstýrið, ríkismálaráðið og Danmarks Nationalbank velja hvør sín stjóra; men tað vil vera órímiligt í minsta lagi tey 2—3 fyrstu árini at leggja tungar umsitingarútreiðslur á stovnin.

Sambart § 1 er endamál grunnsins »at opbygge reale værdier på Færøerne,« men her røkkur peningurin ikki so langt sum upprunaliga ætlað, og verður í fyrstu syftu tí bert givið lán til fiskiskip. Nevndarinnar hugsan er tann, at farmagjald til útlendsk skip fyri flutning av salti og fiski er fiskivinnuni so tungur kleppur, at um man gav lán til eitt ella tvey smá farmaskip, sum sigldu í fiskiflotans tænastu, var tað ein hjálpandi hond til allan flotan, og man »opbyggede reale værdier«.

Av tøkum ábyrgdarpeningi eru 2,4 mill. krónur og Danmarks Nationalbank hevur játtað at skoyta 2 mill. krónur uppí sum lán í 10 ár.

Tá man hevur í kvittan at læna upp til 5 ferðir ábyrgdarpeningin, kann man longu nú byrja arbeiðið við 22 mill. krónum.

Umstøður fiskiflotans og samstundis fiskimansins eru sum kunnugt so ringar, at um ikki stórar ábøtur verða gjørdar nú beinan vegin verður illa vorðið.

Fíggjarnevndin vil tí mæla til, at landsstýrið fer undir beinanvegin at gera útvegir fyri keypum av hóskandi skipum og leggja eina byggiætlan til rættis og útvega tørvandi finansiering í viðkomandi sølulandi ella byggilandi til møguliga seinni umskiftingar í realkreditstovninum.

Vísandi til tær í álitinum gjørdu viðmerkingar mælir fíggjarnevndin tinginum at samtykkja »forslag til lov om Færøernes realkreditinstitut« óbroytt.

So sum skilað til í álitinum setur fíggjarnevndin samstundis fram soljóðandi

Uppskot

Landsstýrinum verður álagt:

A. Sum skjótast at útvega tilboð uppá hóskandi skip og útvega tørvandi finansiering av møguligum keypum í sølulandi.
At leggja til rættis byggiætlan av ymiskum skipastøddum og útvega tørvandi finansieringar hjá viðkomandi skipasmiðjum ella peningastovnum, so keypi- ella byggihugaðir menn ella felög kunnu fáa álítandi upplýsingar.
B. Sum skjótast at leggja til rættis finansieringina av landskassans parti í endurnýgging skipaflotans.

2. viðgerð 27. august og 3. viðgerð 30. august 1954.

Formaðurin legði fram soljóðandi uppískoyti til nevndaruppskotið:

Uppískoyti

til uppskot í lögtingsmáli nr. 16/1954: Realkredittstovnurin.

Sum nýtt petti C í uppskotinum verður sett:

At taka upp tingingar við ríkisstýrið um til hesi skip at fáa 15 % av virðismetingini sum statslán móti 2. veðhaldi.

Uppskot nevndinnar A., B. og C. samtykt 21—0.

17. Løgtingslóg um vinnu v. m.

Ár 1954, 4. august legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi framlöguskriv:

Landsstýrið legði fram lógaruppskot í hesum máli í 1952 (smbr. tingtíðindi 1952, bls. 9), og samsvarandi løgtingssamtykt frá 27. marts 1953 legði landsstýrið málið fram aftur í 1953 (smbr. tingtíðindi 1953 bls. 5).

Heldur ikki í hesi tingsetuni fekk málið endaliga viðgerð.

So statt ynskir landsstýrið at leggja málið fyri aftur vísandi til lógaruppskotið við viðmerkingum, sum prentað er í tingtíðindi 1952, bls. 9 f. f.

1. viðgerð 6. august og málið beint til lógarnevndina.

---

18. Frammihjárættindi fyri føroyskum koli.

Ár 1954, 6. august løgdu tingmenninir fyri Suðuroy fram soljóðandi framløguskriv:

Hvalbøur, tann 20. juli 1954.

Til Føroya Løgting,
Tórshavn.

Vit undirskrivaðu kolaarbeiðarar loyva okkum hervið at heita á heiðraða løgting við bøn um, at fáa skipað so fyri, at alt tað kol, sum vit eru førir fyri at framleiða, má bliva selt fram um tað útlendska.

Sum heiðraðu tingmonnum kunnugt, hevur kolamálið verið nógv umrøtt í almennum blað, eins og samráðingar hava verið førdar við landsstýrið og prís- og valutamiðstøð, av teimum orsøkum, at vit ikki hava verið nøgdir við tann kolaflutning, sum hevur verið og er enn tann dag í dag.

Tann samráðingarfundur, sum varð hildin í Tórshavn í fjør vár við prís- og valutamiðstøðina upplýsti, at nýtslan av koli til húsbrúk í Føroyum var 20.000 tons og harav skuldi 15.000 tons vera føroyskt.

Men hertil kann viðmerkjast, at kolaútflutningurin frá Hvalbæ ífjør var 7.580 tons; men tað, at sølan ikki varð hægri, var ikki orsakað av, at tað ikki kundi framleiðast meir, men einans av teimum orsøkum, at tað

ikki var møguleiki til at kunna selja meir. Eisini skal verða lagt aftrat, at á sama samráðingarfundi varð kolaprísurin settur niður 10,00 krónur pr. ton, og førdi slíkt prísfall tað við sær, at dagløniin samstundis kom at minka munandi.

Sum kola viðurskiftini nú eru, er vinnan í miðal heilt vánalig, og skal tað tí hervið verða álvarsliga heitt á háttvirdu tingmenn, um at taka væl undir við hesi umsókn, ið er ein landasak, og sum tí nú má takast gjølla til umhugsunar.

Við hávirðing

Sigurd Vang. N. P. Mortensen. Johannes Poulsen. Th. Pauli Skålum. Napoleon Skålum. Håkon Midjord. Meinhard Mortensen. Morten Mortensen. Johan Vang. Otvald Thomsen. Jógvan Vang. Einar Olsen. Daniel Ch. Thomsen. Sigvald Hentze. Jacob Ludvig. Ole Villumssen. Erling Thomsen. Frits Eið. Jens Mohr. Eyvindsson. Peter Joensen. D. J. Sörensen. Niels J. Niclasen. Hentze Niclasen. Michael Hammer. Kaj Berg. Joen D. Hammer. Jacob Vang. Johan Randrup. Martin Jespersen. Mikkel Vang. Jens Eysturberg. Hans Toftheyggjar. Poul Johs. Nónfjall. Anton Jensen. Daniel J. Berg. Ólavur Jacobsen. Johs. Holm Jacobsen. Peter Pauli Berg. Olaf Eyvindsson. Joen Joensen.

Undirskrivaðu loyva okkum at bera omanfyristandandi mál fram á Føroya løgting við okkara besta viðmæli.

Á Føroya løgtingi, tann 31/7 1954.

P. M.Dam. M. Holm. A. Djurhuus.

Fyri J. H. Dambjørg sambart avtalu
P. M. Dam.

1. viðgerð 10. august og 24. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Tann 31. juli h. á. løgdu Suðuroyar tingmenn inn á ting áheitan frá 40 hvalbingum um at fáa minka so mikið um innflutningin av útlendskum brenni, at teir kundu fáa selt alt tað kol, sum hvalbingar kunna framleiða.

Longu við 1. viðgerð varð upplýst, at landsstýrið longu hevði gingið hvalbingum á møti. Men málið hevur kortini verið til viðgerðar í fíggjar-

nevndini, sum ásannar, *at* landsstýrið, tingmenn og valutaráð aftaná fund saman við kolainnflytarum og umboðsmonnum fyri hvalbingar avgjørdu, at innflutningurin av útlendskum brenni ikki skuldi fara upp um 10.000 tons, *at* hvalbingar tá settu kolaprísin munandi niður, *at* teir seinasta ár ikki sluppu av við tey tilætlaðu 12.000 tons og minni enn so.

Valutaráðið sigur frá, at í tíðarbilinum 1. januar 1954 til 31. juli 1954 varð innflutningsloyvi givið til 4.873 tons av koli og koksi til eitt virðið av kr. 611.804,00. Men tað sum veruliga er innflutt í hesum tíðarbili er 3129 tons av koli og koksi til eitt virði av kr. 388.857,00.

Orsøkin til hetta stóra fall í nýtsluni av brenni stavar óivað frá 1) oljukyndingum, 2) elektrifisering og 3) góðum torvterra. Sum omanfyri skrivað er landsstýrið gingið umsóknini á møti, og er tað gjørt á tann hátt, at tað saman við valutaráðnum hevur sett innflutningin av útlendskum brenni niður á 7.000 tons.

Eftir tí sum upplýst er um innflutt brenni 1. hálvár 1954 sær tað út, sum 7.000 tons er í meira lagi, men tað stendur fíggjarnevndini greitt, at trýstur man innflutningin so langt niður, at fólk á miðum vetri situr við kaldar steinar, tí suðuroyingar ikki kunna framleiða nóg mikið, ger man hvalbingum eina stóra bjarnatænastu.

Fyri at fyribyrgja hesum og at hvalbingar samstundis kunna selja alt tað kol, teir kunna framleiða, er tað neyðugt, at Roynds kolasøla eina ferð um mánaðin sigur valutaráðnum frá, hvussu nógv kol, teir liggja við á goymslu. So leingi nógv kol er á goymslu, gevur ráðið sjálvandi ikki innflutningsloyvi til útlendskt brenni.

Nógvir tingmenn halda, at um hvalbingar sigldu á smábygdir við koli og seldu í smáum, vórðu tað nógv, sum við gleði keyptu.

So statt setur fíggjarnevndin fram hesi

Uppskot

I. Álagt verður Roynds kolasølu og Rangabotni at siga valutaráðnum eina ferð um mánaðin frá, hvussu nógv kol er á goymslu.

II. Álagt verður valutaráðnum ikki at geva innflutningsloyvi til annað útlendskt brenni enn til teknisk brúk, um nóg mikið av føroyskum koli er á goymslu.

2. viðgerð 27. 3. viðgerð 30. og 31. august 1954.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

II. verður orðað soleiðis:

Tilmælt verður valutaráðnum ikki at geva innflutningsloyvi til útlendskt brenni, um nóg mikið av nýtuligum føroyskum koli er á goymslu.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Tr. Samuelsen o. fl.:

Sambart kunngerð nr. 27. frá 24. februar 1950 um inn- og útflytan av vørum kann inn- og útflutningur av vørum frá og til hin partin av ríkinum fara fram uttan loyvi við nøkrum fáum undantøkum, ið nevnd eru í kunngerðini, meðan inn- og útflutningur av vörum til og frá útlandinum bert má fara fram eftir serligum í hvørjum einstøkum føri givnum loyvi frá valutamiðstøðini.

So statt er tað valutamiðstøðin sum umsitur allan innflutning frá útheiminum, og málið átti tí at verið sent valutaráðnum til eftiransan, um so er at ætlanin ikki er at broyta omanfyri nevndu kunngerð.

Undirskrivaðu seta tí fram fylgjandi

Uppskot

Málið verður sent valutamiðstøðini til eftiransan.

Broytingaruppskotið frá Tr. Samuelsen o. f. fall 8—0.
Uppskot nevndinnar I samtykt 16—0.
Broytingaruppskot nevndinnar II samtykt 13—0.
Uppskot nevndinnar II burturdottið.

---

19. Heimssáttmáli um ferðslu.

Ár 1954, 11. august legði løgmaður fram soljóðandi uppskot við fylgisskjali:

Á vetratingi 1950, smbr. løgtingstíðindi 1950, bls. 81, legði landsstýrið fyri løgtingið uppskot um, at fyrivarni varð tikið um, at konventiónin samtykt 9. september 1949 í Geneve millum limir sameindu tjóðanna ikki varð sett í gildi í Føroyum, smbr. § 28 í konventiónini. Hetta varð samtykt av løgtinginum 8. februar 1951.

Grundin til, at mælt var frá, at konventiónin fekk gildi fyri Føroyar, var, at hon ætlandi mong ár frammyvir ikki kundi væntast at fáa týdning her.

Síðani er hent, at við løgtingslóg nr. 50, 12. november 1952, smbr. kunngerð nr. 58, 23. december s. á. eru gjørdar reglur, sum so at siga svara til reglurnar í konventiónini. Ríkisstýrið hevur tí vísandi til hesar

reglur fyrispurt, um nýggj støða er tikin til spurningin um gildi heimssáttmálans fyri Føroyar.

Landsstýrið hevur fyrilagt landfútanum málið, og hevur hann svarað, at tað ikki longur skuldi verið grund til at tikið fyrivarni fyri Føroyar aftaná, at nevndu nýggju reglur eru gjørdar fyri ferðslu, undantikið tó skjøl 1 og 2 í konventiónini, har reglurnar í Føroyum eru øðrvísi. Skjøl 1 og 2 og artk. 2 fylgja við í avriti.

Bilag I.

Yderligere bestemmelser vedrørende definitioner af motorkøretøjer og cykler.

Cykler, der er forsynet med en hjælpe-forbrændingsmotor med en cylinder-kapacitet af ikke over 50 cm^3 (engelske kubik-tommer) skal ikke betragtes som motorkøretöjer, såfremt de i deres struktur har bibeholdt hele det særpræg, der er almindeligt for cykler.

Bilag II.

Forkørselsret.

1. Når to köretøjer samtidig nærmer sig en vejskæring, hvor den ene vej ikke har forrang fremfor den anden, skal i lande med højrekørsel det køretøj, der nærmer sig fra venstre, og i lande med venstrekørsel det køretøj, der nærmer sig fra højre, holde tilbage for det andet køretøj.
2. Reglerne om forkørselsret skal ikke nødvendigvis gælde i forholdet overfor sporvogne og tog på landeveje.

Artikel 2.

1. De til nærværende konvention føjede bilag skal betragtes som en uadskillelig bestanddel af konventionen, idet dog enhver stat ved konventionens underskrift, ratifikation eller tiltrædelse eller på noget som helst senere tidspunkt kan erklære, at bilagene 1 og 2 ikke skal være gældende for vedkommende stat.
2. Enhver kontraherende stat kan når som helst give meddelelse til generalsekretæren for De Forenede Nationer om, at bilagene 1 og 2 — uanset at de tidligere i henhold til stk. 1 måtte være undtaget — fra den pågældende meddelelses dato skal gælde for vedkommende stat.

Vísandi hertil mælir landsstýrið løgtinginum til fylgjandi

Uppskot

Föroya løgting samtykkir at siga ríkisstýrinum frá, at tað fyrivarni, sum tikið varð í løgtingssetuni 1950 eftir § 28 í konventiónini eisini fær gildi fyri Føroyar, undantikið tó skjøl 1 og 2, smbr. artk. 2 í konventiónini.

1. viðgerð 13. august og 20. august legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Í 1952 samtykti løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg nr. 73 frá 19. marts 1930 um motorakfør o. a. og samsvarandi løgtingssamtyktini varð síðan sett í gildi løgtingslóg nr. 50 frá 12. november 1952, smbr. kunngerð nr. 58 frá 23. december 1952.

Við hesari lóggávu gjørdist okkara reglur viðvíkjandi útgerð motorakfarsins samsvarandi teim internationalu forskriftum. Í lógini varð tó fyrivarni tikið um at tær kravdu broytingar í útgerð akfarsins kunnu skjótast út til 1. januar 1955, um so var, at motorakfarið ikki var útflutt til ferðslu utanfyri Føroyar.

Landsstýrið hevur lagt hetta mál fyri tingið og mælt til, at konventión millum sameindu tjóðanna um ferðslu frá 9. september 1949 eisini fær gildi fyri Føroyar, tó undantikið skjøl 1 og 2, sbr. artikkul 2 í konventiónini.

Lógarnevndin hevur haft málið til viðgerðar.

Konventiónin inniheldur forskriftir um ferðslu og um útgerð motorakfaranna, ið allar hava til endamáls at tryggja einsartaðar reglur fyri internationla ferðslu. Hesar reglur svara, sum ført fram av landsstýrinum í uppskotinum, annars til reglurnar í frammanfyri nevndu lóg um motorakfør o. a.

Nevndin mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 23. august 1954.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

---

20. Løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.

Á 1954, 16. august legði R. Long landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.

lagtingslov om lærlingeforhold.

Deild 1.

Innihald lærusáttmálans.

§ 1.

1. Handverkari, ídnaðarmaður, almennur stovnur ella virki, sum tekur lærling, drong ella gentu, at læra upp í starvi sínum, skal frammanundan gera skrivligan lærusáttmála við hann, sum gjølla tilskilar, hvørjum starvi ella hvørjari starvsgrein lærlingurin skal verða upplærdur í, og lærusáttmálin skal verða góðtikin av fúta ella sýslumanni sum samsvarandi hesari lóg og samsvaraudi teim krøvum, lærusáttmálanum viðvíkjandi, sum viðkomandi starv ger, fyri at kunna standa svcinaroynd eftir fyriskipan. Lærutíðin má ikki út um 5 ár.
2. Landsstýrið fær heimild, í kunngerð at víðka gildi lóginnar til eisini at umfata handil á støðum, har líkindi eru at geva starvsliga læru.
3. Ongin kann gerast lærlingur, sum hevur ikki fylt 14 ár og er ikki lógliga skrivaður út úr skúla.

Kapitel 1.

Lærekontraktens indhold.

§ 1.

1. Enhver håndværker, industridrivende, offentlig institution eller virksomhed, der antager en mandlig eller kvindelig lærling i sin virksomhed, skal i forvejen oprette skriftlig lærekontrakt med vedkommende, der tydeligt angiver, i hvilket fag eller del af et fag lærlingen skal oplæres, og lærekontrakten skal være godkendt af landfoged eller sysselmand som værende i overens stemmelse med denne lov og med de krav til lærekontraktens indhold, som vedkommende fag stiller til opnåelse af svendeprøve ifølge regulativ. Læretiden må ikke overstige 5 år.
2. Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at udvide lovens område til også at omfatte handel på steder, hvor der er mulighed for at give en faglig uddannelse.
3. Ingen kan indtræde i lærlingeforhold, som ikke er fyldt 14 år og ikke er lovligt udskrevet af skolen.

4. Lærusáttmálaskylda er ikki fyri ørindadreingir og arbeiðisdreingir og ei heldur millum verja og ómynding.
5. Fúti og sýslumenn skulu hava til handar og ókeypis lata frá sær útfyllingarbløð til lærusáttmálar. Landskassin ber kostnaðin av útfyllingarbløðunum.

§ 2.

1. Tann, sum hevur ikki meistararættindi í starvi sínum, má ikki taka sær lærling.
   Tó kunna starvsstovnar ella iðnaðarstovnar taka sær lærlingar, hóast fyristøðumaðurin ongi meistararættindi hevur, um maður ella menn, sum hava hesi rættindi, hava starv har, og skal í lærusáttmálanum vera tilskilað, hvør ið stendur til svars fyri, at lærlingurin verður væl upplærdur, eins og broytingar, sum hesum viðvíkjandi kunna verða gjørdar í lærutíðini, skulu verða førdar uppá lærusáttmálan og verða góðtiknar av fúta ella sýslumanni.
2. Tann, sum tey seinastu 5 árini er dømdur til ella hevur sitið í fongsli í 4 máuaðir ella longur, í arbeiðshúsi ella í trygdarvarðhaldi, ella sum tey seinastu 10 árini er dømdur til ella hevur sitið í fongsli, arbeiðshúsi ella í trygdarvarðhaldi fyri brot móti 24. kapitli í straffilógini fyri straffverd viðurskiftir, sum innibera nærliggjandi vanda fyri misbrúk av starvinum sum lærumeistari, kann ikki taka lærling. Tann meistari, sum tvær ferðir í 10 ár hevur brotið lærusáttmála so grovliga, at hann er avtikin, eins og tann, sum tvær ferðir í 10

4. Lærekontrakt kræves ikke for personer, der er antaget som bude eller håndlangere, ej heller mellem værge og mindreårig.
5. Landfoged og sysselmand skal være forsynet med blanketter til lærekontrakter og udlevere dem gratis. Landskassen bekoster blanketterne.

§ 2.

1. Ingen må tage en lærling i lære, som ikke har mesterrettigheder i sit fag. Dog kan bedrifter og industrielle foretagender antage lærlinge, selvom disse bedrifters eller foretagenders leder ingen mesterrettigheder har, hvis blot en eller flere personer, der har disse rettigheder, er ansat der, og det skal være anført i lærekontrakten, hvem der har ansvaret forandringer, som desangående for lærlingens uddannelse, og kan blive gjort i læretiden, skal noteres i lærekontrakten og godkendes af landfoged eller sysselmand.
2. Den, der i de sidste 5 år er idømt eller har udstået straf af fængsel i 4 måneder eller derudover, arbejdshus eller sikkerhedsforvaring, eller som i de sidste 10 år er idømt eller har udstået straf af fængsel, arbejdshus eller sikkerhedsforvaring for overtrædelse af straffelovens 24. kapitel for et strafbart forhold, som begrunder en nærliggende fare for misbrug af hvervet som læremester, kan ikke antage lærling. Den mester, som to gange i 10 år har gjort sig skyldig i brud på lærekontrakt i en sådan grad, at den er blevet ophævet, såvel som den, der to gange i 10

ár við voldgiftsdóm er komin undir skaðabøtur til lærling fyri at hava svikið lærumeistaraskyldu sína, eins og tann, sum í sínum virki 3 ferðir hevur haft steðg, sum hevur orsakað avtøku av lærusáttmála (lockout, streiku ella tvingandi náttúruviðurskiftir undantikin), missir síni rættindir til at hava lærling.

3. Landsstýrið kann undir serligum umstøðum geva undantaksloyvi frá reglunum í § 2, stk. 2, seinna punktum.

§ 3.

1. Í lærusáttmálanum skal lærutíðin vera tilskilað; hon má ikki vera út um 5 ár. Royndartíðin, sum nevnd er í § 5, verður at rokna upp í lærutíðina.
2. Læruráðið (sí § 12) hevur myndugleika og skyldu at fyriskipa minstu og mestu lærutíð í teim ymsu størvum. Til hesar avgerðir verður ráðið at víðka við tveimum limum valdum av meistara- og sveinafeløgunum í viðkomandi starvi.
3. Lærlingur, sum tá ið lærusáttmáli verður gjørdur, hevur fylt 15 ár, skal saman við verja sínum sjálvur undirskriva sáttmálan, um hann skal vera bindandi út um hansara tjúgunda ár.
4. Tá ið lærumeistari og lærlingur (ella verji) báðir søkja um tað, er læruráðið heimilað at loyva lærutíðina niðurlagda í mesta lagi eitt ár til at veita lærlinginum høvi at luttaka í bókligum læruskeiði.

år ved voldgift er idømt erstatning til en lærling for ikke at have overholdt sine pligter som læremester, såvel som den i hvis bedrift 3 gange er forefaldet standsninger, som har givet anledning til ophævelse af lærekontrakter (lockout, strejke eller tvingende naturforhold undtaget), fortaber sin ret til at have lærling.

3. Landsstyret kan under særlige omstændigheder give dispensationer fra de i § 2, 2. stk. sidste punktum fastsatte bestemmelser.

§ 3.

1. Læretidens varighed bestemmes i kontrakten. Varigheden må ikke overstige 5 år. Den i § 5 omhandlede prøvetid er indbefattet i læretiden.
2. Lærerådet (se § 12) har myndighed og pligt til at foreskrive korteste og længste læretid i de forskellige fag. For at kunne tage en sådan afgörelse skal rådet udvides med to medlemmer valgt af mester- og svendeorganisationerne i vedkommende fag.
3. Hvis en lærling ved kontraktens oprettelse er over 15 år, skal kontrakten foruden af værgen medunderskrives af lærlingen selv, for at kunne være bindende udover hans 20. år.
4. Når læremester og lærling (eller værge) begge andrager derom, er lærerådet bemyndiget til at tillade, at læretiden afbrydes for et tidsrum af højst 1 år for at give lærlingen lejlighed til at besøge et teoretisk undervisningskursus.

§ 4.

1. Tilskilað skal vera í lærusáttmálanum, undir hvørjum lønartreytum lærlingurin skal arbeiða í lærutíðini.
   Í starvi, har felagssáttmáli tilskilar minstuløn fyri lærlingar, verður hon at rinda. Er engin minstaløn tilskilað, verður hon fyriskipað av læruráðnum, víðkað á sama hátt sum nevnd í § 3, 2. stk.
2. Fyriskipað minstaløn skal beinanvegin verða kunngjørd fútanum, sum ger sýslumenn kunnigar við hana.
3. Lærumeistari skal gjalda fyri tann í grein 11 í hesari lóg fyrisetta skúlagang. Skúlaamboð og arbeiðistilfar, sum lærumeistari skal gjalda fyri, verður av skúlanum latið lærlinginum upp í hendur. Lærlingur og foreldur (verji) hansara standa til svars fyri fingin amboð og tilfar. Lærumeistarin skal fyri lærlingin rinda rinda útreiðslurnar av sveinaroynd. Sveinastykkið eigur meistarin.
4. Í lærusáttmálanum skal vera tilskilað lærlinginum frítíð við løn. Um so er, at lærlingur fær innivist og kost hjá lærumeistara, skal seinni nevndi rinda kostarhaldspening í frítíðuni, ikki undir 2 krónur um dagin. Frítíðin skal í minsta lagi vera tvær vikur og vera í tíðarskeiðinum 2. mai til 30. september. Verða lærumeistari og lærlingur samdur um frítíð til aðra tíð, er læruráðið heimilað at veita loyvi til tess.
5. Í sáttmálanum má ikki vera tilskilað, at lærlingur, tá ið hann er útlærdur, má ikki fáa sær arbeiði

§ 4.

1. Det skal i kontrakten nøjagtig bestemmes, på hvilke økonomiske vilkår lærlingen skal arbejde i læretiden. I fag, hvor der ved kollektiv overenskomst er fastsat mindsteløn for lærlinge, skal mindst denne løn betales. Er der ikke fastsat mindsteløn, fastsættes den af lærerådet, udvidet på samme måde som nævnt i § 3, 2. stk.
2. Meddelelse om fastsat mindsteløn skal straks gøres til landfogeden, og han lader meddelelsen gå videre til sysselmændene.
3. Læremesteren skal betale for den i § 11 i denne lov foreskrevne undervisning. Det undervisningsmateriel og rekvisitter, som læremesteren skal bekoste, udleveres lærling af skolen. Lærlingen og hans forældre eller værge er ansvarlige for det modtagne undervisningsmateriel og rekvisitter. Læremesteren skal bestride udgifterne af lærlingens aflæggelse af Svendeprøve. . Svendestykket tilhører læremesteren.
4. Der skal i kontrakten optages bestemmelse om ferie med løn for lærlingen. For saa vidt lærlingen har kost og logi hos læremesteren, skal denne udrede kostpenge i ferien, ikke under 2 kroner om dagen. Ferien skal mindst være 2 uger og falde i tidsrummet 2. maj til 30. september. Bliver læremester og lærling enige om ferie til et andet tidspunkt, er lærerådet bemyndiget til at tillade dette.
5. Der må ikke i kontrakten optages bestemmelse om, at lærlinge efter overstået læretid ikke må

í viðkomandi starvi ella hava virki í tí, ella at lærlingur, tá ið hann er útlærdur, skal arbeiða hjá lærumeistaranum fyri tilskilaða løn. Onki má vera sett í sáttmálan sum beinleiðis ella óbeinleiðis tilskilar, hvussu mikið, ið latast skal í skaðabøtur fyri møguligt sáttmálabrot.

§ 5.

Teir fyrstu 12 mánaðir av lærutíðini eru at rokna sum roynd artíð partanna millum, og kunna í hesi tíðini bæði lærumeistari og lærlingur, um hann tá hevur fylt 18 ár, og annars foreldur hansara ella verji, uttan at geva grundir fyri tí, krevja sáttmálan setlan úr gildi. Um so er, er hvørgum parti heimilað skaðabøtur frá hinum, uttan so at hetta er beinleiðis treytað í sáttmálanum.

tage arbejde i det pågældende fag eller drive forretning i samme, eller om, at lærlingen efter læretidens udløb skal arbejde hos læremesteren for en bestemt løn. Der må ikke i kontrakten indeholdes bestemmelser, der direkte eller indirekte fastsætter omfanget af den erstatning, der i tilfælde af eventuelt kontraktbrud vil være at erlægge.

§ 5.

Af læretiden anses de 12 første måneder som en gensidig prøvetid, i hvilken såvel læremesteren som lærlingen, hvis han i løbet af denne tid har nået 18 års alderen, og ellers hans forældre eller værge, uden angivelse af nogen grund kan forlange kontrakten hævet. I så fald er ingen af parterne berettiget til erstatning hos den anden, medmindre udtrykkelig bestemmelse derom er indført i kontrakten.

Deild II.

Skyldur partanna móti hvørjum øðrum.

Kapitel II.

Parternes gensidige forpligtelser.

§ 6.

Lærlingur skal eftir førimuni til arbeiðsmegi og dugnaskap ganga lærumeistara til handar í starvi hansara.

§ 6.

Lærlingen skal være læremesteren til medhjælp ved arbejdet i virksomheden, så vidt som hans arbejdskraft og færdighed muliggør det.

§ 7.

1. Lærumeistari má ikki seta lærling til arbeiði, sum hann kropsliga maktar ikki, ella sum er heilsuskaðandi, eins og hann

§ 7.

1. En læremester må ikke anvende lærlingen til arbejder, som ikke står i forhold til hans kræfter eller som er skadelige for hans

bert sum undantak má seta hann til arbeiði, sum viðvíkir ikki tí starvi, hann hevur givið seg til at læra. Lærlingur má vera væl viðfarin.

2. Um lærlingur hevur innivist hjá lærumeistara, skal hann hava egnu song í hampiliga útgjørdum rúmi.

§ 8.

1. Lærumeistari hevur ábyrgd av, at lærlingur er í góðtiknum sjúkakassa; útreiðslurnar til tess, eins og til vanlukkutrygging, ber lærumeisturin.

2. Um lærlingur fær ringan og varandi skaða ella so drúgva sjúku, at lækni metir hana at skula vara út um 3 mánaðir, er lærumeistaranum heimilað at uppsiga lærusáttmálan við ávaring 2 mánaðir frammanundan, men hann er hesa tíðina skyldugur at rinda lærlinginum ta í sáttmálanum tilskilaðu løn. Um skaðin ella sjúkan berst á í seinasta ári av lærutíðini, kann lærlingurin skjóta málið inn fyri læruráðið, sum kann døma uppsøgnina ógylduga og krevja lærutíðina so mikið longda, at lærlingurin fær tikið sveinaprógv.

3. Lærumeistari er í ongum føri skyldugur vegna lærlingsins sjúku ella skaða at gjalda løn ella lata kost út yvir 3 mánaðir. Fyri tíð, sum lærlingur liggur á sjúkahúsi, verður ongin kostpeningur latin.

sundhed, ligesom han kun undtagelsesvis må anvende ham til arbejde, der ikke vedrører det fag, han har givet sig i lære i. Lærlingen har krav på god behandling.

2. Såfremt en lærling har bopæl hos læremesteren, skal han have egen seng i forsvarligt indrettet værelse.

§ 8.

1. Læremesteren skal påse, at lærlingen er medlem af en anerkendt sygekasse. Omkostningerne herved samt ved invaliditetsforsikring udredes af læremesteren.

2. Ifald der tilføjes lærlingen en betydelig vedvarende skade, eller han bliver lidende af så langvarig sygdom, at en læge skønner, at den vil vare ud over 3 måneder, er læremesteren berettiget til at opsige lærekontrakten med 2 måneders varsel, men er i denne tid forpligtet til at betale lærlingen den kontraktmæssige løn. Hvis skaden eller sygdommen indtræffer indenfor det sidste år af læretiden, kan lærlingen indanke sagen for lærerådet, som kan forkaste opsigelsen og kræve læretiden så meget forlænget, at lærlingen kan tage svendeprøve.

3. En læremester er i intet tilfælde forpligtet til på grund af en lærlings sygdom eller skade at betale løn eller yde kostpenge udover 3 måneder. For den tid, en lærling ligger på sygehus, ydes der ikke kostpenge.

§ 9.

Ongin má taka lærling í læru ella til arbeiðis, so leingi lærlingurin hevur lærusáttmála við annan mann.

§ 9.

Ingen må tage en lærling i lære eller til arbejde hos sig, så længe lærlingen har lærekontrakt med en anden.

Deild III.

Lærutíð, sveinaroynd o. a.

Kapitel III.

Læretid, svendeprøve m. v.

§ 10.

1. Lærutíðin skal verða nýtt soleiðis, at lærlingur so við og við lærir so væl sum gjørligt tað starv ella part av starvi, sum hann er tikin til læru í. Tá ið lærutíðin er úti, skal lærlingurin gera sveinaroynd í starvinum.
2. Um serlig viðurskifti í einum starvi gera tað ómöguligt ella sera torført at gera sveinaroynd, kann landsstýrið eftir tilmæli frá læruráðnum fyriskipa, at sveinaroynd verður ikki gjørd í hesum starvi.
3. Tá ið lærlingur hevur staðið sveinaroynd, gevur læruráðið honum prógv fyri tað (sveinabræv) eftir fyrisettum reglum.
4. Um eftir stykki 2 sveinaroynd kann ikki verða gjørd í starvinum, skal lærumeistari veita lærlingi lærubræv, harí vitnað verður, hvussu leingi hann hevur staðið í læru, og um hann hevur vunnið sær dugnaskap í starvinum.
5. Noktar lærlingur at gera sveinaroynd, sum hann eftir lærusáttmála er skyldugur at gera, ella hann stendur hann ikki, skal lærumeistari geva honum váttan, harí onki má vera tilskilað annað enn, hvussu leingi hann hevur

§ 10.

1. Læretiden skal anvendes således, at lærlingen efterhånden lærer det fag eller den del af faget, hvori han er antaget til oplæring, så fuldstændigt som muligt. Ved læretidens udløb skal lærlingen aflægge svendeprøve i faget.
2. Hvis særlige forhold inden for et fag gør det muligt eller særdeles vanskeligt at aflægge svendeprøve, kan landsstyret efter indstilling fra lærerådet bestemme, at der ikke aflægges svendeprøve i dette fag.
3. Når lærlingen har bestået svendeprøven, udsteder lærerådet ham bevis derfor (svendebrev) efter fastsatte forskrifter.
4. Ifald der efter stk. 2 ikke kan aflægges svendeprøve i et fag, skal læremesteren meddele lærlingen et lærebrev, hvori det bevidnes, hvorlænge han har stået i lære, og hvorvidt han har opnået dygtighed i faget.
5. Ifald en lærling nægter at aflægge svendeprøve, som han ifølge sin lærekontrakt er pligtig til at aflægge, eller han ikke består prøven, skal læremesteren udfærdige en attest, som alene må indeholde oplysning om, hvor længe

verið í læru, og at sveinaroynd er ikki gjørd.

6. Um lærumeistari hevur verið ov lítið nærlagdur at læra lærling, og hetta er orsøk til, at hann, tá ið lærutíðin er úti, stendur ikki sveinaroyndina ella kann fáa duguleikaprógv eftir stykki 4, er lærumeistarin skyldugur at veita lærlingi skaðabøtur eftir voldgiftsdóm.
7. Verður læran ikki førd at enda, kann lærlingur frá lærumeistara krevja skrivliga váttan, hvussu leingi hann hevur verið í læru.
8. Um lærumeistari í teimum í stykkjunum 4, 5 og 7 nevndu førum gevur beinleiðis skeiva váttan, verður hann at straffa eftir straffilógini av 15. apríl 1930, § 162.
9. Hvørja ferð váttan verður gjørd eftir stykkjunum 4, 5 og 7, skal tað verða gjört lærurádnum kunnugt.

§ 11.

1. Lærumeistari skal lata lærling á tryggan hátt luttaka í tí starvinum viðvíkjandi vanligu, bæði almennliga, eins væl og starvsliga, mennandi skúlagangi í einum av teim lógligu myndugleikum góðtiknum starvsskúla, um so er, at viðkomandi hevur ikki frammanundan havt tilsvarandi skúlagang. Foreldur ella verji skulu styðja lærumeistara, at henda hansara skylda kann verða útint.
2. Um stovnaður verður starvsdagskúli, skulu lærlingar frá plássum, har ongin starvskvøldskúli er, hava frammihjárætt til hansara. Skilað skal verða til í læru-

han har stået i lære, og at svendeprøve ikke er aflagt.

6. Har læremesteren ladet mangle på tilbørlig omhu for lærlingens uddannelse, og er dette grunden til, at lærlingen ikke ved læretidens udløb er i stand til at bestå svendeprøven eller kan erhverve dueligheds bevidnelse efter stykke 4, er læremesteren forpligtet til at give lærlingen erstatning efter voldgiftsdom.
7. Såfremt læreforholdet ikke føres til ende, er lærlingen berettiget til af læremesteren at forlange en skriftlig bevidnelse af, hvor længe han har stået i lære.
8. Har læremesteren i de i stk. 4, 5 og 7 nævnte tilfælde givet en vitterlig urigtig benævnelse, ifalder han herfor straf efter borgerlig straffelov af 15. april 1930, § 162.
9. Enhver bevidnelse, der udfærdiges efter stykkerne 4, 5 og 7, skal indberettes til lærerådet.

§ 11.

1. Læremesteren skal lade lærlingen på forsvarlig måde deltage i den for faget almindelige såvel almendannende som faglige undervisning i en af de lovlige myndigheder godkendt fagskole, for såvidt den pågældende ikke i forvejen har gennemgået tilsvarende uddannelse. Forældre eller værge er pligtige til at støtte læremesteren i opfyldelsen af den her omhandlede forpligtelse.
2. For så vidt der inden for et fag oprettes dagskoleundervisning, skal lærlinge fra steder, hvor der ingen faglig aftenskole er, have fortrinsret til den. I lærekontrakten skal fastslås, hvem

sáttmálanum, hvør ið gjalda skal fyri fyri dagskúlagang.

3. Starvsskúlin gevur, tá ið skúlagangurin er liðugur, næmingínum váttan av tí læru, hann hevur fingið í skúlanum.

§ 12.

Fyri sveinaroyndunum stílar læruráðið. Tað hevur 3 limir, 1 (sum er formaður) valdan av landsstýrinum, ein valdan av meistarafeløgunum og ein valdan av sveinafeløgunum. Teir báðir seinast nevndu verða valdir fyri 4 ár, annaðhvørt ár fer annar frá, fyrstu ferð eftir lutakasti. Til hetta ráð verður søkt um sveinaroynd, og tað førir allar sveinaroyndir eins og fundir sínar inn í gerðabók. Ráðið letur velja skuðimeistarar, fyriskipar tíð og stað fyri royndunum, ger roknskap yvirfyri landsstýrinum og stendur til svars fyri, at sveinaroyndirnar verða framdar á rættan hátt. Viðvíkjandi starvsumráði læruráðsins sjá annars § 3, stk. 4, § 4, stk. 4, § 8, stk. 2, § 10, stk. 2, 3, 4, 5 og 7, § 19 og § 20. Viðvíkjandi starvsumráði víðkaða læruráðsins sjá § 3, stk. 2, § 4, stk. 1, § 14 og § 19. Kostnaðurin av læruráðnum verður at rinda úr landskassanum.

§ 13.

Til at meta sveinaroyndirnar verður eftir læruráðsins fyrireikan fyri hvørt starv vald ein dómsnevnd (skuðimeistarar) við 4 limum, 2 valdum av meistarafeløgunum og 2 valdum av sveinafeløgunum. Hvørt av hesum feløgum velur 2 tiltaksmenn,

der skal betale for dagskoleopholdet.

3. Fagskolen skal ved udskrivningen give lærlingen et bevis for den undervisning, han har gennemgået i skolen.

§ 12.

Svendeprøverne afholdes af lærerådet. Det har 3 medlemmer, 1 (som er formand) valgt af landsstyret, 1 valgt af mesterorganisationerne. De to sidste vælges for 4 år; hvert andet år afgår den ene af dem, første gang efter lodtrækning. Ansögning om afholdelse af svendeprøve indgives til lærerådet, der fører protokol over alle svendeprøver såvel som rådets møder.

Rådet forestår valg af skuemestre, fastsætter tid og sted for prøverne, aflægger regnskab overfor landsstyret og er ansvarligt for, at svendeprøverne foregår på betryggende måde.

Angående lærerådets beføjelser jvf. § 3, stk. 4, § 4, stk. 4, § 8, stk. 2, § 10, stk. 2, 3, 4, 5 og 7, § 19 og § 20. Angående det udvidede læreråds beføjelser se § 3, stk. 2, § 4, stk. 1, § 14 og § 19.

Udgifterne ved lærerådet bæres af landskassen.

§ 13.

Til bedømmelse af svendeprøverne vælges i samråd med lærerådet for hvert fag en bedømmelseskommité med 4 medlemmer, (skuemestre), 2 valgt af mesterorganisationerne og 2 valgt af svendeorganisationerne. Hver af disse organisationer vælger 2

ið avloysa teir fyrr valdu, tá ið kravt verður. Dómsnevndin velur sjálv síuamillum formann, ið stílar fyri dómsstarvinum. Valið er fyri 2 ár. Ongin handverkari kann siga seg uudan vali, uttan hann í 10 ár hevur verið valdur tvær ferðir.

Útreiðslurnar av sveinaroyndunum skulu býtast millum meistara- og sveinafeløgini eftir reglum, sum landsstýrið fyriscur eftir at hava samrátt við feløgini. Sveinaroyndirnar verða mettar eftir reglum, fyriskipaðar av landsstýrinum eftir tilmæli frá tí viðkaða læruráðnum (smbr. § 3, stk. 2).

suppleanter, der i fornødent fald afløser de først valgte. Bedømmelseskommitéen vælger af sin midte formand, der forestår bedømmelsen. Medlemmerne vælges for 2 år ad gangen. Ingen håndværker kan unddrage sig valg, med mindre han indenfor et tidsrum af 10 år har været valgt i to perioder.

Udgifterne ved svendeprøverne skal fordeles mellem mester- og svendeorganisationerne efter regler, der fastsættes af landsstyret, efter at organisationerne er hørt. Svendeprøverne bedømmes efter regler, der fastsættes af landsstyret efter forslag fra lærerådet, udvidet i overensstemmelse med § 3, stk. 2.

Deild IV.

Uppathald lærunnar.

§ 15.

1. Lærusáttmáli dettur burtur:
   1) um lærumeistari ella lærlingur doyr,
   2) um lærumeistari gevst við virki sínum, ella virkið vegna fallit ella aðra orsøk — tó ikki lockout, streiku ella tvingandi náttúruviðurskiftir — verður steðgað longur enn tveir mánaðir.
2. Um virki lærumeistarans verður latið til annan vinnumann, sum eftir § 2 hevur heimild at taka sær lærling, kann lærusáttmálin halda fram við honum sum lærumeistara, um bæði hann og lærlingurin vilja tað. Er lærlingurin undir 18 ár, mugu foreldur ella verji hansara samtykkja. Hevur lærlingur fylt 15 ár, má

Kapitel IV.

Læreforholdets ophør.

§ 15.

1. Lærekontrakten bortfalder:
   1) ifald læremester eller lærling dør,
   2) ifald læremesterens virksomhed ophører eller på grund konkurs eller af anden årsag — dog ikke lockout, strejke eller tvingende naturforhold — standses for et længere tidsrum end to måneder.
2. Overdrages læremesterens virksomhed til en anden næringsdrivende, som efter § 2 er berettiget til at antage lærling, kan lærekontrakten fortsættes med ham som læremester, ifald såvel han som lærlingen ønsker det. Er lærlingen under 18 år, må hans forældre eller værge meddele samtykke dertil. Er lær-

hann eisini skriva undir sáttmálan, um lærutíðin gongur út um hansara tjúgunda ár.

§ 16.

1. Lærumeistari kann verða loystur frá sáttmálanum
   1) um lærlingur gerst leingi sjúkur ella fær varandi skaða, smbr. § 8, stk. 2,
   2) tá ið lærlingur til muns svíkur sína skyldu eftir lærusáttmálanum, t. d. noktar at akta lærumeistara,
   3) tá ið lærlingur noktar at luttaka í skúlagangi í góðtiknum starvsskúla, verður burturvístur úr skúla ella er ikki førur at fylgja við í starvsskúlanum,
   4) tá ið lærlingur kemur undir dóm til fongsil, arbeiðshús ella trygdarvarðhald fyri lógarmisbrot, gjørt við vilja.
2. Lærumeistari kann ikki verða loystur frá lærusáttmála fyri tey undir stk. 1, nr. 2, 3 og 4 nevndu viðurskifti, uttan hann nýtir sín rætt innan 2 mánaðir, eftir at hava fingið kunnleika um viðurskiftini.

   Lærlingur kann verða loystur frá sáttmálanum, um hann hevur fylt 18 ár, og um tað annars hansara vegna verður kravt av foreldrum ella verja
   1) tá ið lærumeistari kemur undir dóm til fongsil, arbeiðshús ella trygdarvarðhald fyri lógarmisbrot, gjørt við vilja,
   2) tá ið lærumeistari til muns svíkur sína skyldu móti lærlingi,

lingen over 15 år, må han tillige medunderskrive kontrakten, for så vidt lærlingeuddannelsen først kan være tilendebragt efter hans 20. år.

§ 16.

1. Kontrakten kan hæves af læremesteren
   1) ifald lærlingen får langvarig sygdom eller langvarig skade, jvf. § 8, stk. 2,
   2) når lærlingen gør sig skyldig i væsentligt brud på de ham efter lærekontrakten påhvilende pligter, herunder nægter at adlyde læremesteren,
   3) når lærlingen vægrer sig ved at deltage i undervisningen i en godkendt faglig skole, bliver bortvist fra undervisningen, eller ikke magter at følge undervisningen i fagskolen,
   4) når lærlingen idømmes fængselsstraf, arbejdshus eller sikkerhedsforvaring for en forsætlig lovovertrædelse.
2. En læremester kan ikke blive löst fra en lærekontrakt på grund af de i stk. 1, nr. 2, 3, og 4 anførte forhold, medmindre han benytter sin ret inden 2 måneder efter, at han har fået kundskab om forholdet.

   Kontrakten kan hæves af lærlingen, forsåvidt han er fyldt 18 år, og ellers forlanges af forældre eller værge på hans vegne,
   1) når læremesteren idømmes fængselsstraf, arbejdshus eller sikkerhedsforvaring for en forsætlig lovovertrædelse,
   2) når læremesteren gør sig skyldig i væsentligt brud på

3) tá ið lærumeistari ikki — í tann mun, sum vanliga má vera hildið rímiligt — ansar eftir lærlingsins medferð og siðiligheit og verjir hann fyri ringari ávirkan,

4) um virki lærumeistarans verður flutt í aðra kommunu,

5) tá ið lærlingur við foreldrum ella verja flytur í aðra kommunu,

6) tá ið lærumeistarin er burtur úr sínum virki í meir enn 3 mánaðir, og ongin starvslærdur so leingi sær um lærlingin,

7) tá ið lærumeistari tvær ferðir í 10 ár við voldgiftsdóm, smbr. § 21 er dømdur at veita lærlingi skaðabøtur, tí hann hevur verið ikki nóg nærlagdur at læra hann. Sovorðið krav má kortini verða sett fram innan 6 mánaðir frá voldgiftsdóminum. Undantiknir eru starvsstovnar ella íðnaðarstovnar, har eftir § 2, stk. 1, annar enn fyristøðumaðurin hevur ábyrgd av lærlinginum. Svíkur ein slíkur settur lærumeistari sína skyldu móti lærlingi 2 reisur í 10 ár, missir hann rættin at hava lærling,

8) tá ið lærlingur eftir sjúku ella av aðrari orsøk missir tann førleika til at gerast útlærdur í starvinum, sum hann hevði, tá ið sáttmálin varð gjørdur, ella tá ið lærlingsins framhald í læruni

sine forpligtelser mod lærlingen,

3) når læremesteren ikke — i det omfang, hvori det efter almindelig opfattelse må anses for rimeligt — våger over lærlingens opførsel og sædelige forhold og værner ham mod dårlig påvirkning,

4) ifald læremesterens virksomhed flyttes til en anden kommune,

5) når lærlingen med forældre eller værge flytter til en anden kommune,

6) når læremesteren er fraværende fra sin virksomhed i over 3 måneder, uden at læredrengens oplæring varetages af en faglig oplært person,

7) når læremesteren to gange i løbet af 10 år ved voldgift, jfr. § 21, er idømt erstatning til en lærling for at have ladet det mangle på tilbørlig omhu for lærlingens uddannelse. Sådant krav må dog fremsættes inden 6 måneder efter voldgiftsdommen.
Undtaget er bedrifter eller virksomheder, hvor efter § 2, stk. 1, en anden person end driftslederen har ansvaret for lærlingens uddannelse. Hvis en sådan person svigter sine pligter mod en lærling 2 gange i 10 år, mister han ret til at påtage sig uddannelse af lærlinge.

8) Når lærlingen ved sygdom eller af anden grund mister den evne til at opnå uddannelse i faget, hvoraf han ved kontraktens indgåelse var i besiddelse, eller når lærlin-

eftir læknaætlan ber í sær vanda fyri lív ella heilsu,

9) tá ið kvinnuligur lærlingur giftist,

10) tá ið kvinnuligur lærlingur býr hjá giftum lærumeistara, og kona hansara doyr ella samlív teirra verður slitið.

§ 18.

Út yvir tey í §§ 16 og 17 nevndu føri kunna bæði lærumeistari og lærlingur, ella verji hansara vegna, slíta lærusáttmálan, tá ið skaðabøtur eftir voldgiftsdóm eru rindaðar, smbr. § 21.

gens fortsatte uddannelse i faget efter lægens skøn medfører fare for hans liv eller helbred,

9) når en kvindelig lærling bliver gift,

10) når en kvindelig lærling er i huset hos en gift læremester, og dennes hustru dør, eller hendes samliv med ham ophører.

§ 18.

Udenfor de i §§ 16 og 17 nævnte tilfælde kan såvel læremesteren som lærlingen eller dennes værge på hans vegne hæve lærekontrakten efter at have udredet den af voldgiftsretten fastsatte erstatning, jfr. § 21.

Deild V.

Eftirlit, sektarfyriskipan o. s. fr.

§ 19.

1. Um læruráðið heldur, at viðurskiftini í einum virki ella stovni eru til hindurs fyri, at lærlingur kann verða forsvarliga lærdur, kann tað, tá ið allir limir av tí víðkaða ráði, smbr. § 3, stk. 2, semjast um tað, samtykja at taka lærurættin frá viðkomandi stovni ella eisini fyriskipa, hvussu nógvar lærlingar virkið ella stovnurin má hava.

2. Limirnir av læruráðnum og tí víðkaða læruráðnum hava undir ábyrgd av straffilógini av 15. apríl 1930, § 152, fulla tagnarskyldu teimum viðurskiftum viðvíkjandi, sum teir í starvi sínum hava fingið kunnleika til.

Kapitel V.

Tilsyn, straffebestemmelser m. m.

§ 19.

1. Hvis lærerådet anser forholdene indenfor en bedrift eller virksomhed for at være til hinder for, at en forsvarlig oplæring af lærlinge kan finde sted der, kan det, hvis alle medlemmer af det efter § 3, stk. 2, udvidede råd er enige derom, vedtage at fratage bedriften eller virksomheden ret til at antage lærlinge eller eventuelt fastsætte, hvor mange lærlinge, virksomheden må antage.

2. Medlemmer af lærerådet og det udvidede læreråd har under ansvar efter borgerlig straffelov af 15. april 1930, § 152, fuld tavshedspligt vedrørende de forhold, som de i medfør af deres hverv er kommet til kundskab om.

§20.

Hevur fútin ella sýslumaður noktað at góðtaka lærusáttmála, sum ivi er um, kann noktanin av læruráðnum ella viðkomandi parti verða løgd fyri landsstýrið, sum tekur endaliga avgerð.

§20.

Har landfogden eller sysselmanden nægtet at godkende en lærekontrakt, som der kan være tvivl om, kan nægtelsen af lærerådet eller vedkommende part forelægges landsstyret, som træffer endelig afgørelse.

§ 21.

1. Dráttur millum lærumeistara og lærling viðvíkjandi viðurskiftum nevnd í hesari lóg í § 11, § 16, stk. 1, punkt 2 og 3, § 17, punkt 2, 3, 6 og 8 og § 18, verður at gera av við voldgiftsdóm, um partarnir semjast ikki um annan avgerðarhátt. Til voldgiftsdómin velur hvør partur 2 persónar, útlærdar í starvinum. Fútin ella ein av honum settur persónur er fimti limur og er formaður. Formaðurin kallar til dómsfundar, sum kann verða útskotin tvær ferðir til at fáa málið kannað nærri, tó ikki longur enn 8 dagar hvørja ferð. Voldgiftsdómurin, ið verður tikin eftir atkvøðumeiriluta, er endaligur. Tær gjøllari reglur fyri voldgiftina verða fyriskipaðar av landsstýrinum.

2. Voldgiftsdómurin verður at útinna eftir teimum fyri rættardómi galdandi reglum. Voldgiftsdómararnir eiga onga samsýning fyri starvið. Beinleiðis útreiðslur, t. d. til gerðabók o. a., verða at býta millum partarnar.

§ 21.

1. Tvistigheder mellem læremester og lærling vedrørende forhold, der er nævnt i § 11, § 16, stk. 1, punkt 2 og 3, § 17, punkt 2, 3, 6 og 8 og § 18 skal afgøres ved voldgift, hvis parterne ikke bliver enige om en anden fremgangsmåde. Til voldgiftsretten vælger hver part 2 personer, der er oplært i faget. Landfogden eller en af ham udvalgt person er femte medlem og er formand. Formanden indkalder til voldgiftskendelse, som kan blive udsat to gange, for at sagen kan blive nærmere undersøgt, dog ikke længere tid end 8 dage hver gang. Voldgiftskendelsen, der træffes ved stemmeflerhed, er endelig. De nærmere regler for voldgiftens virksomhed fastsættes af landsstyret.
2. Voldgiftskendelsen kan eksekveres efter de for domme gældende regler. Der tilkommer ikke voldgiftsdommerne vederlag for deres hverv. Direkte udgifter, f. eks. til protokol o. a. skal deles mellem parterne.

§ 22.

1. Lærumeistari ella arbeiðsgevari, sum brýtur fyriskipanina í §§ 1—2, § 3, stk. 2, § 4, stk. 1, 3 og 4, § 8, stk. 1 og 3 og § 9, kemur

§ 22.

1. Den læremester eller arbejdsgiver, der overtræder bestemmelserne i §§ 1 — 2, § 3, stk. 2, § 4, stk. 1, 3 og 4, § 8, stk. 1

undir bót, sum skal verða rindað landskassanum.

2. Um lærumeistari uttan at hava gjørt lógligan lærusáttmála hevur havt lærling eina tíð, kann hann eisini koma undir sekt til landskassan.
3. Sama straff sum nevnt í stk. 1 — um viðurskiftini mugu ikki føra við sær strangari straff — kemur tann lærumeistari undir, sum munandi svíkur ta skyldu, sum liggur á honum eftir §§ 7–10 og 11, ella sum við órættum koyrir lærling, eins og lærlingur, sum uttan rætt rýmur úr læru. Er lærlingur undir 18 ár, og foreldur hansara ella verji eru sek í, at hann uttan rætt er rýmdur úr læru, koma tey undir straffin.

§ 23.

Sakarmál um brot móti fyriskipanunum í §§ 1—2, § 3, stk. 2, § 4, stk. 1, 3 og 4, § 8 og § 9 verða reist sum almenn rættarmál.

§ 24.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og samstundis fer lóg nr. 120 av 7. mai 1937 um lærlingaviðurskifti úr gildi.

og 3 og § 9, straffes med bøde, der tilfalder landskassen.

2. Ifald en læremester har haft en lærling i nogen tid, uden at have sørget for oprettelsen af lovlig lærekontrakt, vil han ligeledes kunne idømmes bøde til landskassen.
3. Samme straf som nævnt i stk. 1 ifalder — for så vidt forholdene ikke medfører strengere straf — den læremester, der i væsentlig grad tilsidesætter de pligter, der påhviler ham efter §§ 7 — 10 og 11, eller som uberettiget bortviser en lærling, såvel som den lærling, der uberettiget forlader læren. Er lærlingen under 18 år, og hans forældre eller værge er skyld i, at han uden berettigelse har forladt læren, rammer straffen denne.

§ 23.

Sager angående overtrædelse af bestemmelserne i §§ 1 - 2, §3, stk. 2, § 4, stk. 1, 3 og 4, § 8 og § 9 påtales af det offentlige.

§ 24.

Denne lov træder i kraft straks, og samtidig ophæves lov nr. 120 af 7. maj 1937 om lærlingeforhold.

Viðmerkingar:

Lóg nr. 120, av 7. mai 1937 um lærlingaviðurskiftir er tinglisin í Føroyum, men hevur ongan týdning fingið, tí tann parturin av henni, sum viðvíkir tvungna sveinaroynd, hevur ikki kunnað verið útintur, tí tær fyristílandi, metandi og ráðgevandi nevndir, sum lógin fyriskipar viðvíkjandi sveinaroyndum, hava ikki kunnað verið settar á stovn her, so lítið sum arbeiðissundurbýtingin er komin áleiðis hjá okkum. Av tí tann tvungna sveinaroyndin, ið sáttmálin millum lærling og læruneistara miðar ímóti,

hevur ikki kunnað fingist í lag eftir lógini, hevur heldur ikki verið fylgt hinum fyrisetingunum, sum lógin ger.

Longu í 1938 vendi Havnar handverksmeistarafelag sær til »Fællesrepræsentationen for dansk Haandværk og Industri« um meir hóskandi reglur fyri sveinaroyndum í Føroyum, men ongin endalig skipan fekst í lag og í 1940 vórðu av bardagaávum Føroyar og Danmark víst til hvørt at vera sær.

10. mai 1941 vendi Havnar handverksmeistarafelag sær til amtmannin um at seta reglur fyri sveinaroynd í Føroyum, og sama ár upplýsti fútin, at eftir galdandi lóg gjørdist hetta ikki, tí onki felaga handverksmeistarafelag var í Føroyum, og onki felag innan fyri hvørt arbeiðsstarv.

24. oktober 1942 bað Havnar handverksmeistarafelag aftur amtið um at fremja málið og 23. december 1942 mælti landsnevndin til at hiðja handverksmeistarafelagið geva uppskot til reglugerð fyri sveinaroynd.

24. mai 1943 legði meistarafelagið fram uppskot, ið miðaði ímóti at seta sveinaroyndarnevnd við 3 limum, 1 valdum av fyrisitingini og 2 valdum av meistarafeløgunum. Síðan skutu tær upp at seta dómsnevnd fyri hvørt starv við 3 limum, 1 valdum av meistarafelagnum á viðkomandi plássi, 1 av sveinafelagnum og 1 av meistarunum í sveinaroyndarnevndini.

30 juni 1943 legði fútin fram regulativ for aflæggelse af »svendeprøve under fællesrepræsentationen for dansk håndværk og industri« og mælti til at broyta lærlingalógina soleiðis, at her verður sett ein sveinaroyndarnevnd uppá 7 limir, 3 meistarar og 3 sveinar, valdir av feløgunum, og ein formaður, valdur av fyrisitingini, ella eisini 4 valdir av feløgunum og 3 av fyrisitingini, umframt menn frá viðkomandi starvi. Harnæst mælti hann til, at skuðimeistararnir verða valdir av sveinaroyndarnevndini.

20. mai 1944 úttalaði fútin, at hugur tyktist at vera fyri at fáa ein fastan handverkarastovn, sum sílar fyri sveinaroyndum og 3. juni 1944 sendi hann frágreiðing frá Havnar handverksmeistarafelag viðvíkjandi sveinaroynd, sum av fríum vilja var farin fram í Havn. Royndirnar vóru fyri bilmekanikarar, blikksmiðir, húsasmiðir, skipasmiðir og húsmálarar. Í hvørjum starvi setti meistarafelagið 2 skuðimeistarar, og tað sama gjørdi Havnar arbeiðsmannafelag, soleiðis at royndirnar í hvørjum starvi vóru mettar av 4 starvskønum monnum. Árið eftir ætlaði meistarafelagið aftur at lata sveinaroyndir fara fram. Síðan er sveinaroynd farin fram í Havn hvørt ár til 1954, í Vági 1953 og í Klakksvík 1954. Allar hesar royndir hva verið góðtiknar uttanfyri Føroyar.

7. juli 1944 úttalaði amtmaðurin, at hesar av fríum vilja gjørdu sveinaroyndir áttu at halda fram nøkur ár, soleiðis at ein endalig skipan kundi gerast út frá tí læru, sum av teimum kundi verða drigin, í samráð við sakkønar myndugleikar í Danmark, tá ið bardagin var av.

Málið var fyri á løgtingi ((tingtíðindi 1944, bls. 82–84), og samtykt varð, at biðja landsnevndina eftir samráð við amt, fúta og starvsfeløg til næstu tingsetu seta fram uppskot til neyðturviligar broytingar í lærlingalógini og reglugerð fyri tvungna sveinaroynd.

Málið hevur síðan verið viðgjørt á tingi í 1945 (tingtíðindi bls. 33—34), og í 1946 (november 1946 — marts 1947) (tingtíðindi bls. 12) og í 1947 (tingtíðindi bls. 15). Tá varð framlagt uppskot til »lóg um læruviðurskiftir« sett saman av Vilhelm Nielsen og Johan Ziska, táverandi formanni og næstformanni Havnar meistarafelags, í samarbeið við táverandi formann í skúlanevnd løgtingsins. Uppskotið helt seg í høvuðskrøvunum til lógina av 1937 um lærlingaviðurskiftir, men var gjørt so mikið einfaldari, at tað kundi hóska til arbeiðsviðurskiftini í Føroyum, og var í summum førum íslendska lóggávan hesum viðvíkjandi tikin til leiðbeiningar. Amtmaðurin hevði havt uppskotið til ummælis og hevði gjørt ymsar viðmerkingar. Skúlanevnd løgtingsins, sum umhugsaði málið, mælti til at taka málið til viðgerðar á fyrsta ólavsøkutingi, tí málið í roynd og veru náttúrligast átti at vera viðgjørt aftaná nýskipanina. Hetta varð samtykt 16. januar 1948.

Málið hevur síðani ikki verið viðgjørt á tingi, men sum tíðin hevur liðið, er tað vorðið meir og meir átroðkandi at fáa lærlingaviðurskiftini í Føroyum í lógligt tryggjað lag. Hetta landsstýrið hevur tikið málið upp av nýggjum, og tvey tey seinastu árini hava farið samráðingar fram við socialministeriið, stjóran fyri tekniska skúlagangin í Danmark, handverksráðið og við teir ymsu starvsligu myndugleikar og felagsstjórnir, sum har eru uppi í umsitingini av lærlingaviðurskiftunum og sveinaroyndunum.

Hetta hevur verið neyðugt av tvinnandi orsøk. Onnur er, at heimastýrið hevur fingið undir sítt ræði lærlingaviðurskiftini, men ikki tann tekniska skúlagangin, sum er ein partur av treytunum fyri lærlingaupplæringini og fyri sveinaroyndunum. Onnur er, at handverkarar her, eins og stýrimenn og maskinistar, ynskja, at sveinabrævið, sum skal kunna fáast í Føroyum, má vera fingið á einum grundarlag, sum ger tað viðurkent til starvsrætt í Danmark og síðan í hinum Norðurlondunum. Hesar samráðingar hava tikið langa tíð, men eru nú førdar at enda, og leggur tí landsstýrið fyri tingið uppskot til føroyska lærlingalóg, so mikið einfaldari enn tann danska, at hon hóskar til okkara starvsviðurskiftir, og tó so kravmikla, at hon leggur tær treytir á tekniskan skúlagang fyri lærlingar, eins og fyri tann starvskunnleika, sum prógvast skal við sveinaroyndina, at eftir hesari lóg verða viðurskiftini millum lærling og lærumeistara tryggjað eftir nútíma krøvum og sveinabræv, sum verður fingið eftir henni, kann verða góðtikið av starvsfeløgunum í Danmark.

Henda føroyska lærlingalógin umfatar eftir uppskotinum í 1947 bert lærlingar innanfyri handverk og ídnað, men ikki tey nógvu onnur arbeiðsumráðir og virkir, sum danska lógin av 1937 tilskilar lærusáttmálar fyri, tí samfelag okkara er enn so mikið minni útbúgvið og arbeiðið so mikið minni sundurbýtt enn í Danmark. Undir samráðingunum um hesi lógarviðurskiftir hevur ofta verið framhildið, at handilslæra átti at verið tikin undir lógina eins og í Danmark, men landsstýrið hevur ikki viljað sett so fastar reglur handilslæruni viðvíkjandi sum í donsku lærlingalógini. Í staðin er skotið upp at geva landsstýrinum heimild at gera lógina gald-

andi í handilslæruviðurskiftum á plássum, har møguleiki er fyri at veita lærlinginum tann neyðturviliga handilskunnleika.

Til tær einstøku greinirnar í lógaruppskotinum verða gjørdar hesar viðmerkingar:

ad § 2, stk. 1: »Meistararættindir« eru at fata sum rættindir eftir vinnulóggávuni. Eftirsum uppskotið til lóg um vinnu er ikki framt enn, er ikki í hesi lóg víst til hennara, men tá ið henda lóggáva vónandi skjótt er framd, verður orðið meistararættindir at lesast eftir henni. Fyri at kunna fáa meistararættindir, má maður hava fingið starvsligan lærdóm, smbr. § 17, stk. 6, har upplæringarrættindir eru knýtt til starvlærdan (faglig oplært) persón.

ad § 11, stk. 1: Lógargreinin er orðað svarandi til fyrisetingina í donsku lærlingalógini av 1937, meðan seinni donsk lóg hevur álagt skyldu til starvsligan skúlagang, sjálvt um ongin starvsskúli er á tí plássi, har meistarin hevur sín bústað ella sítt virki. Landsstýrið kann ikki mæla til tílíka skipan enn.

ad § 11, stk. 2: Skotið er upp, at lærlingar frá plássum, har ongin starvsdagsskúli er, skulu hava framíhjárætt til dagstarvskúlagang, men ikki skyldu til tess, uttan so er, at hesin skúlagangur verður kravdur sum ein treyt fyri at fáa sveinabræv í viðkomandi starvi.

ad § 11, stk. 3: Eftir 1937 lógini verður skúlagangstíðin fyrisett av handilsministaranum út frá uppskoti frá »det faglige udvalg« og lærlingaráðnum. Landsstýrið vónar, at handilsministeriið vil vera hoyriligt yvir fyri ynskjum um skúlagangstíð og lærnplanir, sum føroyska læruráðið í samráð við herverandi starvsfelag kundi viljað gjørt.

1. viðgerð 19. august og 27. august legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgteingið uppskot til løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.

Hetta er eitt gamalt løgtingsmál og viðvíkjandi tí, ið farið er fram í málinum frammanundan, verður her víst til landsstýrisins viðmerkingar til uppskotið.

Málið er beint í lógarnevndina..

Nevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við tí broyting í § 19, 1, reglu 6, at í staðin fyri »allir limir« og »alle medlemmer« kemur at standa »meirilutin« og »flertallet«.

Í § 12, 5. reglu, í donsku tekstini er dottið burtur: »og en valgt af svendeorganisationerne«.

So statt setur nevndin fram fylgjandi

Uppskot

Løgtingið samtykkir uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um lærlingaviðurskiftir við fylgjandi broytingum:

Í § 19, 1, reglu 6, gongur út »allir limir« í tí føroysku tekstini og »alle medlemmer« í tí donsku tekstini og í staðin verður sett »meirilutin« og »flertallet«.

Í § 12, 5. reglu, í tí donsku tekstini verður aftaná »mesterorganisationerne« í staðin fyri punktum sett komma og lagt aftrat: »og en valgt af svendeorganisationerne«.

2. viðgerð 30. august og 3. viðgerð 1. september 1954.

Broytingaruppskot nevndinnar samtykt 16—0.

Uppskot landsstýrisins »so broytt« samtykt 22—0.

---

21. Landsstýrismál.

Ár 1954, 20. august legði tingformaðurin fram gerðabók landsstýrisins og beindi hana til landsstýrismálanevndina.

---

22. Skattur av vinningi við skipasølu.

Ár 1954, 26. august legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot:

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í lóg nr. 76 frá 12. marts 1923 om den kommunale beskatning

§ 1.

Uppí § 9 verður skoytt sum nýtt punkt g:

Um so er, at persónur, felag o. l. sum skattaskyldu hava í Føroyum, innanfyri 5 ár eftir at hava verið skrásett sum eigari, selur skip, sum fingið er heilt ella fyri ein part beinleiðis ella óbeinleiðis við almennari peningaílegging sum t. d. úr landskassa, statskassa, vinnulánsgrunni ella Føroya kredittstovni er møguligur vinningur skattskyldugur hóast reglurna í § 10 a í hesi lóg. Vinningurin eftir hesi regln verður uppgjørdur sum munur millum søluvirði og uppruna-virði skipsins eftir frádrátti av teim avskrivingum, sum farnar eru um skipsins rakstur og við afturatlegging av møguligum rakstrartapi, sum er ikki javnað út aftur í rakstrinum. Henda regla kemur tó ikki í nýtslu, um so er at prógført verður, at vinningurin saman við parti eigaranna í sølupeninginum verður nýttur til at útvega annað skip innanfyri 3 ár frá søludegnum. Í hesum føri kann deponeraður skattur (smbr. niðanfyri) krevjast endurrindaður við 5 % p. a. í rentu frá gjaldsdegi.

Hesin eykaskattur til landskassa og kommunu verður at deponera hjá Før-

lagtingslov om ændring i lov nr. 76 af 12. marts 1923 om den kommunale beskatning.

§ 1.

Til § 9 føjes som nyt punkt g:

Såfremt en på Færøerne iøvrigt skattepligtig person, selskab m. v. inden 5 år efter at vedkommende er registreret som ejer, sælger et skib, der helt eller delvis er erhvervet ved direkte eller indirekte offentlig finansiering, som f. eks. fra landskasse, statskasse, vinnulánsgrunni eller Færøernes realkreditinstitut er en eventuel avance skattepligtig uanset bestemmelsen i denne lovs § 10 a. Avancen efter nærværende bestemmelse opgøres som forskellen mellem salgssummen og skibets anskaffelsesværdi efter fradrag af afskrivninger, der er taget over skibets drift og med tillæg af eventuelle driftstab, som ikke senere måtte være udlignet over driften. Nærværende bestemmelse vil dog ikke komme til anvendelse såfremt der føres bevis for, at avancen tilligemed ejerens andel i salgsbeløbet henyttes til erhvervelse af andet skib, inden 3 år efter salget. I dette tilfælde kan den deponerede skat (jfr. nedenfor) med 5 % p. a. fra betalingsdagen fordres tilbagebetalt.

Den ifølge foranstående bestemmelser skyldige merskat til landskasse og

oya gjaldstovu. 3 ár aftaná skipasøluna flytir gjaldstovan landskassanum og viðkomandi kommunu skattin, um so er, at viðkomandi ikki frammanundan hevur fingið nýtt skip, sum tilskilað frammanundan.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

kommune deponeres i Føroya gjaldstovu. 3 år efter skibssalget overføres skatten fra depot til henholdsvis landskasse og kommune, såfremt vedkommende ikke forinden skulle have anskaffet sig nyt skib som i foregående punkter omtalt.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Orsakað av óvanligum umstøðum í sambandi við seinasta heimsbardaga, varð givið fyrisitingini loyvi til at sýta fyri útflyting av fiskiførum. Eisini aftaná, at heimsbardagin var av, hevur útflutningsbann verið fyri før, sum hildin hava verið nýtulig í okkara vinnu. Tá undantøk hava verið gjørd av fyrisitingini hevur vanlig treyt ofta verið, at seljarin skal nýta sín part av sølupeninginum til keyp av øðrum meira hóskandi fiskifari.

Grundhugsanin undir útflutningsbanninum hevur verið, at so leingi okkum restaði fiskifør, var tað samfelagsliga skeivt at selja burturav ti lítla, vit høvdu, og ikki minst, tá talan ofta var um fiskifør, ið hitt almenna beinleiðis ella óbeinleiðis hevði hjálpt til at fingið til landið.

Nú vit standa fyri eini endurnýgging av okkara fiskiflota, ið tørvar stóra peningaíløgu bæði frá einstaklingum og tí almenna, og ein munandi partur av hesum peningi skal fáast til láns innan- sum uttanlanda móti panti í teimum nýggju førunum, er tað avgjørt neyðugt, at teir, ið seta pening til, fáa trygd fyri, at loyvt verður at selja farið hagar, ið mest fæst fyri tað, um so illa skuldi gingist, at tað rakstrarliga kom niðurundir.

Landsstýrið vil tí mæla til, at inn- og útflyting av førum verður givin leys, soleiðis at skipasýnið borgar fyri góðskuni av teimum førum, ið koma til landið. Tó má einki skip yvir 10 ár flytast inn uttan loyvi frá landsstýrinum.

Fyri samstundis at vissa, at tann peningur, ið frá tí almenna ella stovnum verður lantur til endurreising av fiskiflotanum, veruliga kemur kemur vinnuni til góðar, og verður ikki nýttur til vinningssøkjandi skipahandil, heldur landsstýrið tað vera beinast, *at ágóði, ið vunnin verður við skipasølu útyvir tann pening, ið eigari ella eigarar hava sett í farið av egnum ella læntum peningi,* og útyvir tann pening, ið er mistur av rakstrartapi, skal verða skattaður sum inntøka. Kortini verður undantak gjørt frá hesum, tá prógv er fyri, at hesin ágóði saman við øllum eigarapartinum av sølupeninginum verður nýttur til nýtt skipakeyp.

Skip, sum fingin eru við almennum láni, eru tey, ið hava fingið beinleiðis byggistudning frá tí almenna, hava fingið lán úr vinnuláns-

grunninum, úr kredittstovninum ella hava fingið lán við ábyrgd frá tí almenna.

So statt loyvir landsstýrið sær at seta fram uppskot til løgtingslóg samsvarandi.

1. viðgerð 28. august og 3. september legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Av tí teir stovnar og teir menn, sum pening seta í endurnýgging av skipaflotanum skulu hava trygd fyri, at marknaður verður fyri keypi og salgi av hesum skipum, so tey ikki orsakað av innlendskum peningatroti fella í virði, hevur landsstýrið í kvittan at taka av tað útflutningsbann, sum galdandi er fyri skip.

Fyri at byrgja fyri vinningssøkjandi skipahandli við skipum, ið heinleiðis ella óbeinleiðis eru fingin til vega við almennum peningi, hevur landsstýrið sett fram lógaruppskot, ið er viðgjørt í figgjarnevndini, sum heldur tað vera ov vágiligt at ganga so langt sum uppskotið.

Vit eiga alt ov fá skip enn, og vil nevndin tí halda, at rættast er bert at geva útflutningsloyvi til skip, sum bert ella dutvís eru finansiera av Føroya kredittstovni.

Sæð út frá einum skattaligum sjónarmiði er tað líkt øðrum skattalógum í tí, at tað kann misbrúkast; men av tí hetta bert er ein bót á gomlu skattalógina, og nýggja skattalógin væntuliga áðrenn langt umliður kemur í gildi, vil nevndin ongar broytingar í so máta gera.

Samsvarandi hesum setur figgjarnevndin fram hetta

Uppskot

Løgtingið samtykkir landsstýrisins uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg nr. 76 frá 12. marts 1923 »om den kommunale beskatning« við hesum broytingum:

I. Í § 1, fyrsta punktum gongur út:
»sum t. d. úr landskassa, statskassa, vinnulánsgrunni ella« og í staðin verður sett »frá«.

II. Í § 2 verður ístaðin fyri »beinanvegin« sett »1. januar 1955«.

I. I c 1, første stykke, udgår:
»som f. eks. fra landskasse, statskasse, vinnulånsgrunni eller« og i stedet indsættes »fra«.

II. I § 2 indsættes i stedet for »straks« »1. januar 1955«.

2. viðgerð 4. september og 3. viðgerð 6. september 1954.

Uppskot nevndinnar til § 1 samtykt 16—0.
Uppskot nevndinnar til § 2 samtykt 19—0.
Lógaruppskotið so broytt samtykt 18—0.

---

23. *Løgtingslóg um ábyrgd fyri láni til umbygging av trolara til farmaskip.*

Ár 1954, 6. september legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

§ 1.

Landsstýrið er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni uppí 300.000 kr. til umbyggingar av trolara til farmaskip.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at kautionere for lån op til 300.000 kr. til ombygning af trawler til fragtfartøj.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Undir samráðingum um nýtslu av marshallpeninginum til føroyska sjóvinnu var spurningurin frammi um umbygging av einum ella tveimum trolarum til motorskip til farmasigling. Tekningar og kostnaðarætlanir yvir umbygging og rakstur vóru gjørdar.

Tað eydnaðist ikki tá at fáa hesar ætlanir framdar, og nú hevur Peter Dahl, skipseigari og maskineftirlitsmaður, sent umsókn um lán ella ábyrgd fyri láni til tílíka umbygging av trolaranum »Eirik Jarli«, sum p.f Sjóvinnubankin eigur.

Eftir fyriliggjandi kostnaðarætlan samsvarandi tilboðnum fer umbyggingin at kosta um 250.000 kr.

Ætlanin er at byggja trolarin um í Føroyum.

Ummæli frá Lloyds umboðsmanni harra Vilhelm Nielsen fyriliggur í málinum.

Sum trygd fyri láninum býður umsøkjarin umframt 1. prioritet í »Eiriki Jarli« eisini prioritet í sínum 3 skipum:

»Cuðrun Zoegu, mett til	105.000 kr.
»Torrasól«, mett til	95.000 kr.
»Vársól«, mett til	76.000 kr.

og haraftrat so mikið í persónligum kautiónum, at landskassans veðhald fer ikki upp um helvt.

Hesi trý skipini eru heft fyri 30.000 kr.

Fíggjarnevndin hevur mælt landsstýrinum til at seta fram lógaruppskot í treysti til, at kreditstovnurin vil yvirtaka lánið ella ein meginpart av tí, tá hann er komin í gongd.

Okkara fiskivinnu tørvar hóskandi flutningsskip, tí nógvur peningur fer okkum av hondum, eftirsum allur okkara útflutningur at kalla verður røktur av fremmandum skipum.

Hesi viðmugrein til frama setur landsstýrið fram uppskot til lóg og loyvir sær at mæla tinginum at taka væl undir.

1. viðgerð 6. september og sama dag legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið hevur verið viðgjørt í fíggjarnevndini, har Tr. Samuelsen, møtti fyri Joh. M. Fr. Poulsen og J. Fr. Øregaard fyri J. P. Davidsen.

Nevndin býtti seg í ein minniluta (Øregaard og Samuelsen) og ein meiriluta (P. Petersen, A. Sørensen, J. Kallsoy, A. Djurhuus og M. Helm).

Minnilutin vil av principiellum grundum ikki mæla løgtinginum til at átaka sær ábyrgdina.

Vísandi til viðmerkingarnar mælir meirilutin til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

Uppskot landsstýrisins fall 11—0.

Vetrartingið 1954-55

december 1954—april 1955.

Ár 1954 mikudagin 8. december kl. 13. varð Føroya løgting sett. Elsti tingmaður, Hans Iversen úr Kvívík, fór í formanssessin og tók við fundarstýrinum eftir § 1 í tingskipanini. Hann lýsti, at løgtingið var sett og kunngjørdi, at løgmaður í brævi frá 1. december 1954 eftir løgtingslóg nr. 1 frá 13. ma 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum hevði boðsent tingmonnum til vetrartings.

Aldursformaðurin bað Jens Chr. Olsen og Fr. Bláhamar vera fyribils tingskrivarar.

Valbrøvini vóru kannaði eftir § 1 í tingskipanini og hesir góðkendir sum tingmenn:

Hákun Djurhuus, Klakksvík, ff.
Richard Jacobsen, Klakksvík, jv.
S. P. Zachariasen, Klakksvík, sj.
Johan Simonsen, Klakksvik, tf.
Joh. M. Fr. Poulsen, Strendur, sb.
Frederik Hansen, Søldarfirði, tf.
Olaf Ellingsgaard, Eiði, tf.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Jens Chr. Olsen, Toftir, sb.
J. Fr. Øregaard, Gøtu, jv.
Frederik Bláhamar, Vestmanna, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
Leon Joensen, Sørvági, sb.
Samuel Ellefsen, Miðvági, ff.
D. P. Danielsen, Miðvági, tf.
Richard Long, Tórshavn, í valf. við ff.
Djóni í Geil, Tórshavn, sj.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sb.
Hanus við Høgadalsá, Tórshavn, tf.
Kjartan Mohr, Tórshavn, uf.

J. P. Davidsen, Sandi, jv.
Erlendur Patursson, Tórshavn, tf.
Kr. Djurhuus, Tvøroyri, sb.
A. Djurhuus, Vági, sb.
J. H. Danbjørg, Porkeri, jv.
P. M. Dam, Tvøroyri, jv.
Knud Nygaard, Tvøroyri, ff.

Aldursformaðurin kunngjørdi, at Hin føroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) hevur 6 tingmenn, Sambandsflokkurin 7, Javnaðarflokkurin 5, Tjóðveldisflokkurin 6, Sjálvstýrisflokkurin 2 og 1 tingmaður uttanflokks.

Eftir uppskoti varð Joh. M. Fr. Poulsen valdur til formann og D. P. Danielsen til næstforman eftir lutakasti við Samuel Ellefsen.

So tók tingformaðurin formanssessin.

Eftir uppskoti var Jens Chr. Olsen valdur til tingskrivara og Frederik Hansen eftir lutakasti við Frederik Bláhamar.

Tingformaðurin bað tingmenn rópa eitt nýggjufalt hurra fyri kongi og eitt trífalt hurra fyri Føroyum.

Tingið góðkendi 3. februar 1955 Arnold Nielsen lærara úr Sumba sum varamann fyri Kr. Djurhuus so leingi sum hann situr sum løgmaður.

Sama dag góðkendi tingið Georg Lindenskov Samuelsen blaðstjóra í Tórshavn sum varamann fyri Joh. M. Fr. Poulsen, meðan hann røkir starvið sum fólkatingsmaður.

31. mars 1955 góðkendi tingið Trygve Årting sum varamann fyri Hanus við Högadalsá, meðan hann var burturstaddur og Andreas Mikkelsen í Vági sum varamann fyri P. M. Dam, meðan hann var á fólkatinginum.

1. apríl 1955 góðkendi tingið Niclas Jensen Hvalba sum varamann fyri P. M. Dam, eftirsum varamaðurin Andreas Mikkelsen var burturstaddur undir Íslandi. —

Fastar nevndir og aðrar.

Figgjarnevndin: Richard Long, Djóni í Geil, Erlendur Patursson, Hanus við Högadalsá, P. M. Dam, Joh. M. Fr. Poulsen og Andreas Djurhuus.
Tiltaksmenn: P. Petersen, Knud Nygaard, Frederik Hansen, D. P. Danielsen, J. P. Davidsen, Trygve Samuelsen og H. Iversen.

Landsstýrismálanevndin: H. Iversen, K. Nygaard, og E. Patursson,

Umsóknanevndin: P. Petersen, Leon Joensen og Fr. Hansen.

Fiskivinnunevndin: Fr. Bláhamar, S. P. Zachariasen, Jens Chr. Olsen, Richard Jacobsen og Johan Simonsen.

Lógarnevndin: Knud Nygaard, P. Petersen, D. P. Danielsen, J. H. Danbjørg og Tr. Samuelsen.

Læknamálanevndin: R. Long, S. P. Zachariasen, Tr. Samuelsen, Johan Simonsen og Richard Jacobsen.

Tryggingarmálanevndin: E. Patursson, Djóni í Geil, P. Petersen, Georg Samuelsen og J. Fr. Øregaard.

Sjómarksmálanevndin: R. Long, D. í Geil, Leon Joensen, Jens Chr. Olsen, Olaf Ellingsgaard, E. Patursson og J. H. Danbjørg.

Vørunevndin: S. Ellefsen, Fr. Bláhamar, H. Iversen, Leon Joensen, J. F. Øregaard, Fr. Hansen og H. við Högadalsá.

Havna- og veganevndin: S. Ellefsen, K. Nygaard, H. Iversen, A. Nielsen, Olaf Ellingsgaard, D. P. Danielsen og J. F. Øregaard.

Kirkjunevndin: S. Ellefsen, Fr. Bláhamar, C. L. Samuelsen, Il. við Høgadalsá og J. F. Øregaard.

Tingið sat frá 8. til 20. december 1954 og frá 3. februar til 6. april 1955 tilsamans í 63 dagar og hevði 58 fundir. —

1. Gransking av valbrøvum.

Ár 1954, 8. december legði løgmaður fram soljóðandi framløguskriv:

Viðlagt verður sent løgtinginum avskrift av valbókum løgtingsvalnevndarinnar viðvíkjandi løgtingsvalið 8. november 1954, eins og viðlagt verður í tveimum eintøkum landsskrivstovunnar endaligu uppgerð yvir løgtingsvalið og býtið av eykamandatum.

Av hesum tilfari framgongur, at Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) hevur fingið 2660, Samhandsflokkurin 3312, Javnaðarflokkurin 2518, Sjálvstýrisflokkurin 908, Tjóðveldisflokkurin 3028 og ein uttanflokkalisti í Suðurstreymoyar valdømi 323 atkvøður. Tilsamans vórðu givnar 12.749 gyldugar atkvøður av teimum 19.053, sum atkvøðurætt høvdu ella 66,9 %; til løgtingsvalið í 1950 var luttøkan 61,7 %.

Lagt verður aftrat, at fyri Vága valdømi er sjálvt valtilfarið úr Mikinesi ikki komið valnevndini í hendi vegna veður, úrslitið haðani er fjarritað valnevndini.

Smbr. bls. 131.

---

2. Figgjarløgtingslóg 1955-56.

Ár 1954, 20. december legði løgmaður fram soljóðandi framløguskriv:

Í Ólavsøkutingsetuni legði landsstýrið fram uppskot til figjarlögtingslóg 1955/56 (smbr. tingmál nr. 10/1954).

Síðani málið hevur ikki verið til viðgerðar á tingi, loyvir landsstýrið sær at leggja uppskotið aftur fyri tingið.

Fylgjandi feilur í fíggjarlógaruppskotinum 1955/56:
að § 21.8: Klakksvíkar sjómannsheim, byggistudningur, kr. 10.000,00 skal vera kr. 5000,00, verður hervið rættaður. Niðurteljingarnar mugu eisini rættast hareftir.

1. viðgerð 22. februar og 30. mars legði fíggjarnevndin fram uppskot til fíggjarløgtingslóg 1955/56 (smbr. skjal 2).

2. og 3. viðgerð 31. mars 1955.
§§ 1—15 samtyktar 15—0.
§§ 16—17 samtyktar 16—0.
§ 18 samtykt 15—0.
§ 19 samtykt 16—0.
§ 20 samtykt 15—0.
§ 21 samtykt 16—0.
§§ 22—24, 25—37 samtyktar 15—0
Lógaruppskotið í síni heild samtykt 21—0.

---

3. *Býti av Føroya parti av studningi til aldursheim.*

Ár 1955, 7. februar legði E. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um býti av Føroya parti í studningi til aldursheim.

§ 1.

Eftir § 17 í lóg nr. 146 frá 31. marts 1949 um aldursrentu verður fyrisett, at landskassin frá 1. apríl 1953 og fyri fyrst ber 1/3 í teinn endurrindingum, sum aldursheim fáa

lagtingslov om fordeling af Færöernes andel af tilskud til alderdomshjem.

§ 1.

I henhold til § 17 i lov nr. 146 af 31. marts 1949 om aldersrente bestemmes, at landskassen fra 1. april 1953 og indtil videre udreder 1/3 af de refusioner, der ydes alderdoms-

eftir teim takstum, sum ríkisumboðsmaðurin í samráð við landsstýrið góðkennir eftir § 13, 2. stk. í aldursrentulógini.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

hjem på grundlag af de takster, som rigsombudsmanden efter samråd med landsstyret godkender i medfør af § 13, stk. 2 i aldersrenteloven.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Higartil hevur studningur úr ríkiskassanum verið veittur aldursheimunum eftir einum kostdegi uppá kr. 2,50 per kostgangara og haraftrat hevur løgtingið síðani 1941 veitt 9/10 av muninum millum kr. 2,50 og kr. 4,00 ella kr. 1,35 per kostdag, (sml'br. løgtingstíðindi 1941, bls. 155, 1942 bls. 75, 1944 bls. 108, 1946 bls. 71 og 1947 bls. 69).

Í skrivi frá 29. juni 1954 hevur ríkisumboðsmaðurin sagt landsstýrinum frá, at Tórshavnar býráð í skrivi frá 30. januar 1954 hevur sent inn umsókn um, at kostdagur aldursheimsins í Tórshavn verður settur upp frá kr. 2,50 og til somu hædd sum tilskilað í umfarsriti socialministaraus frá 21. marts 1953.

Eftir hesum umfarsriti eru takstirnir fyrisettir fyri roknskaparárið 1952/53 og fyri tað fyrsta til kr. 9,25 fyri Keypmannahavn, Frederiksberg og Gentofte kommunur, kr. 7,75 fyri keypstaðir v. m. og kr. 7,00 fyri hinar kommunurnar og fyri 1953/54 eru takstirnir eftir umfarsriti socialministarans frá 17. mai 1954 kr. 10,00, kr. 8,25 og kr. 7,75.

Ríkisumboðsmaðurin hevur síðani yvirskt sær ummæli landsstýrissins til uppskot hansara um at fyriseta ein takst frá 1. apríl 1953 og fyri tað fyrsta uppá kr. 7,75 per kostdag.

Í skrivi frá 3. í hesum hevur landsstýrið tikið undir við uppskoti ríkisumboðsmansins, eftirsum henda almanna útreiðsla, sum ikki er broytt síðani 1941 eins og útreiðslurnar til aldursrentu, avlamisrentu og barnastyrk, eigur at verða javnað, soleiðis at endurrindingin svarar betri til kostnaðin og í skrivi frá 8. juli 1954 hevur ríkisumboðsmaðurin góðkent kr. 7,75 per dag fyri fyrst.

Kostdagatal aldursheimanna hevur verið: Tórshavnar aldursheim 6.034 í fíggjarárinum 1953/54 og Tvöroyrar aldursheim sama árið 1.825.

Fyri nevnda ár vil studningurin verða:

Tórshavnar aldursheim eftir lógaruppskotinum	kr.	15.567,72
eftir núgaldandi skipan	kr.	8.145,90
munur	kr.	7.421,82

Tvøroyrar aldursheim eftir lógaruppskotinum	kr.	4.708,50
eftir núgaldandi skipan	kr.	2.463,75
munur	kr.	2.244,75

So statt loyvir landsstýrið sær at seta fram uppskot til løgtingslóg samsvarandi.

Málið var fyri á seinasta ólavsøkutingi, men ikki endaliga viðgjørt (smbr. tingmál nr. 12/1954 ólavsøkutingið).

1. viðgerð 9. februar og 3. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Tórshavnar býráð hevur í skrivi frá 30. januar 1954 vent sær til ríkisumboðsmannin við bøn um at fáa kostdagin fyri aldursheimið settan upp.

Ríkiskassin hevur higartil veitt ein studning uppá kr. 2,50 pr. kostdag, men tá ríkisumboðsmaðurin og landsstýrið nú eru komin ásamt um at hækka hesa studning upp til kr. 7,75 pr. kostdag og aldursheimið í Tórshavn og á Tvøroyri hava ilt við at klára seg — mælir fíggjarnevndin so statt tinginum til at samtykkja landsstýrisuppskotið.

2. viðgerð 4. mars og 3. viðgerð 7. mars 1955.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

---

4. *Broyting í vrakingarlóggávuni.*

Ár 1954, 20. december legði løgmaður fram soljóðandi framløguskriv við skjølum:

Eftir § 10, 2. stk. í løgtingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 um fiskavraking skal lógin leggjast fyri aftur tingið í tingsetuni 1954/55.

Landsstýrið hevur biðið yvirvrakarin, Føroya fiskasølu, Føroya sildasølu og Føroya fiskimannafelag um ummæli við møguligum uppskoti til broytingar at seta fram fyri tingið og landsstýrið hevur nýtt høvi sam-

stundis a biðja ummæli il galdandi løgtingslóg um sildavraking nr. 20 frá 27. januar 1950. Tey ummæli, sum inn eru komin fylgja við í avriti.

Landsstýrið legði málið fyri ólavsøkutingið 1954, men fekk ikki endaliga viðgerð tá (smbr. tingmál nr. 4/1954) og so statt loyvir landsstýrið sær at leggja málið aftur fyri tingið.

FYLGISKJØL

FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 15. juli 1954.

Føroya Landsstýri.
her.

Sum svar uppá skriv landsstýrisins dagfest 11. mai, 30. juni og 13. juli í ár, J. 1954 No. XI—256[1 0], skal felagið við hesum gera landsstýrið kunnugt við, at mál viðvíkjandi fiska- og sildavraking ikki vanliga verða umrødd her í felagnum.

Afturímóti taka limir felagsins støðu til tílík mál í L/f Føroya Fiskasølu og í L/f Føroya Sildasølu, har teir eisini eru limir. Loyvir felagið sær tessvegna at vísa á tær avgerðir, hesum máli viðvíkjandi, ið har verða tiknar.

Við hávirðing
FØROYA REIÐARAFELAG
Johan K. Joensen

L/F FØROYA FISKASØLA

Tórshavn, 27. juli 1954.

Føroya Landsstýri,
Tórshavn.

Ávísandi bræv Landsstýrisins dagfest 30. juni og 13. juli skulu vit við hesum siga frá, at spurningurin um møguligar broytingar í vrakilógini vóru til viðgerðar á umboðsnevndarfundi í gjár.

Saurtykt var at seta nevnd til at viðgera møguligar broytingar og til at samráðast við Fiskivinnunevndina um vrakilógina og reglugerðir um vraking.

Í hesa nevnd vórðu valdir:
S. P. Petersen jun., reiðari,
Poul Hansen, heilsølumaður,
Hans O. Højgaard, reiðari,
Jens Chr. Johannesen, stjóri.

Gerið so væl at siga Fiskivinnunevndini frá hesum. Vit vilja fegin vita, nær Fiskivnnunevndn kann samráðast við okkum um spurningin.

Við hávirðing
L F FØROYA FISKASØLA
Heine á Tróni.

Klakksvík, tann 21. juli 1954.

Føroya Landsstýri,

Tá lógin um fiskavraking skal endurskoðast í komandi tingsetu og Føroya Landsstýri skrivliga hevur biðið um ummæli frá mær, skal eg hervið loyva mær at seta fram nøkur uppskot til broytingar, sum eg haldi verða neyðugar og til bata fyri lógina.

§ 1, 1. stk. eingin broyting.
§ 1, 2. stk. Á sama hátt skal allur saltfiskur, sum verður uppskipaður í Føroyum, verða mettur, flokkaður og vigaður.
§ 1, 3. stk. eingin broyting.
§ 1, 4. stk. Allur fiskur skal verða væl saltaður og umrivin seinast 3 samdøgur aftaná, at hann er saltaður. Er fskurin ikki fullsaltaður ((umrivin), tá hann verður uppskipaður, gevur vrakarin váttan um hetta, eins og hann í váttanini ásetur nærið meting, flokkan og vigan skal verða.
§ 1. 5. stk. eingin broyting.
§ 1, 6. stk. eingin broyting.
§ 1, 7. stk. eingin broyting.
§ 2. eingin broyting.
§ 3. eingin broyting.
§ 4. eingin broyting.
§ 5. eingin broyting.
§ 6. eingin broyting.
§ 7. eingin broyting.
§ 8. eingin broyting.
§ 9. eingin broyting.
§ 10. 2. stk. Henda lóg verður at endurskoða í tingsetuni 1959/60.

Broytingin av § 1, stk. 2 er gjørd fyri at fáa allan saltfisk, sum verður uppskipaður í Føroyum inn undir vraking, og má tí orðafallið »ið verður seldur sum saltfiskur« ganga út úr lógini.

Viðvíkjandi broytingini til § 1, stk. 4, skal verða viðmerkt, at tann parturin av hesum stk. í lógini, sum ikki er viðtikin í broytingaruppskotinum, eigur at falla burtur.

Við hávirðing

G. Nolsøe.

1. viðgerð 8. december og 30. mars 1955 legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Eftir § 10. 2. í løgtingslóg nr. 12, 12. januar 1950, um fiskavraking skal løgtingslógin endurskoðast í tingsetuni 1954/55. Landsstýrið hevur, áðrenn málið varð lagt fyri løgtingið, biðið um ummæli við møguligum uppskoti til broytingar frá yvirvrakara, Føroya Fiskasølu og Føroya Fiskimannafelag; ummæli yvirvrakarans, dagfest 21. juli 1954, er viðlagt framløguskrivi landsstýrisins. Nú løgtingslógin um fiskavraking skuldi endurskoðast hevur landsstýrið hildið tað vera rímiligt, at løgtingslógin um sildavraking, nr. 20, 27. januar 1950, eisini varð tikin til kanningar, og hevur tí biðið um ummæli m. a. frá Føroya Sildasølu.

Ummæli Føroya Fiskasølu, dagf. 9. marts 1955, er soljóðandi:

»Løgtingslóg um fiskavraking.

Ávísandi brævaskifti um hetta mál og fund saman við Fiskivinnunevndini loyvir Fiskasølan sær við hesum, sambært avtalu, at seta fram fylgjandi skrivligar viðmerkingar til málið. Fyrst teir meira generellu.

Vit halda fyrst og fremst, sum nevnt á fundinum, at beinast er, um persónar ella fyritøkur, sum keypa fisk innanlanda ella flyta fisk út, hava eina autorisatión.

Hetta skuldi havt tann týdning, at autorisatiónin var borgan fyri, at goymslurúm, turkihús og annað var samsvarandi teimum minstu krøvum, sum mugu stillast fyri at kunna arbeiða og viðgera eina matvøru.

Tað er okkum kunnugt, at tað í starvsreglugerð fyri vrakieftirlitsmehn er ásett, at teir skulu hava umsjón við, at lastir umborð á skipum, fiskagoymslur á landi og øll rúm, sum fiskurin verður havdur í, eru rein og verða væl umsitin, men tað er ongastaðni skilað til, nvørji minimumskrøvini eru. Halda vit tí, hetta eigur at vera gjørt.

Vit mæla til, at ein tílík kunngerð verður gjørd uppá grundarlag av teimum reglum, sum galdandi eru í Noreg og Danmark. Fyri seinast nevnda land kann vísast til lóg nr. 150, 11.mai 1954.

Tá ið vit mæla til, at útflytarar skulu hava autorisatión, er tað millum annað tí, vit halda, at ikki allir útflytarar hugsa nokk um, at tað er matvøra, teir framleiða. Verður vøran ikki framleidd, sum hon skal, eiga myndugleikarnir at kunna taka autorisatiónina frá einum sovorðnum framleiðara. Vit viðmerkja tó, at tað ikki eigur altíð at vera farið ov rigoristiskt fram, men bøtt kann vera um møgulig brek, sum eru í goymsluhúsum og tílíkum, innan fyri nærri ásetta tíð.

Umframt frammanfyristandandi generellu viðmerkingar fylgjandi viðmerkingar:

I. Innanlanda søla og keyp av fiski.

1) *Landing frá skipum.*

Fyri at siga bart út sum er, er nevndin, sum Fiskasølan niðursetti fyri at umhugsa hetta mál, ikki vorðin samd um tað uppskot, sum av og á hevur verið frammi í okkara felag, nevniliga, at tann einstaka fyritøkan

sjálv ávísti serkønar menn innan fyri virki til at vraka allan fiskin, og at vrakieftirlitsmaður — ætlandi mugu so setast fleiri, vit vildu hildið 1 í Vágum, 1 í Fuglafirði, Lorvík, Gøtu, og innasta parti av Skálafirði — eftirkannaði við stikprøvum ta vraking, sum tann einstaka fyritøkan sjálvandi má hava ábyrgdina fyri í fyrstu syftu. Grundin, til at man ikki er blivin samdur um hetta uppskot, er fyrst og fremst tann, at summir limir í nevndini vilja halda, at ein sovorðin skipan ikki fer at fungera, sum hon skal, tá talan er um keyp við landing av fiski. Harnæst hevur nakar ivi verið, um henda skipan í øllum førum var hóskandi við útflytan.

Vit hava tó hildið, at einki forgjørt er í at lata Fiskivinnunevndina vita av, at ymiskir hugsunarháttir eru. Hetta vísir — halda vit — hinumegin, at neyðugt er at umhugsa hetta mál ógviliga gjøkla, áðrenn lógin verður endurnýggjað. Tá ið talan er um keyp við landing frá skipi, halda vit framvegis, at tann dispensatiónsmøguleiki, sum finst í grein 1, petti 4, hareftir ein metan kann fara fram í staðn fyri verunliga vraking, framvegis eigur at vera í gildi, uttan mun til, um keyparin, keypari og seljari ((fiskimenninir) útpeika menn til at meta fiskin og síðan lata vrakieftirlitsmannin eftirkanna hesa metan, ella tað verður sum nú, vrakari og vrakieftirlitsmaður gera váttanina um góðsku, støddir og nøgd.

Á fundinum, sum hildin var í løgmanshøllini, vóru menn samdir um, at grein 1, petti 4, skuldi broytast so, at fiskurin skuldi vera umrivin í seinasta lagi 3 dagar aftaná hann var saltaður. Vit gang tí út frá, at hetta verður ásett í nýggju lógini.

Samstundis sum vit vísa á avrit av skrivi frá yvirvrakaranum, dagfest 24. januar, skulu vit mæla til, at í hvussu so er citt uppískoyti uppá 8 % fyri nr. 2 og 3 % fyri nr. 3 verður tikið við umfram vanliga vraking fyri tann part av fiskinum, sum yvirhøvur ikki er umrivin ella ikki umrivin á rættan hátt.

Vit eru sera væl nøgdir við, at yvirvrakarin í sama skrivi leggur dent á »allur saltfiskur ið landaður verður í Føroyum, má vrakast eftir teimum krøvum vrakaralógin tilsigur og ikki í nøkrum førum linari enn vrakað verður til export«. Vit halda, higartil hevur verið munur við landing, og tá fiskurin skuldi flytast út.

2) *Søla aftaná landing.*

Tað vil ætlandi verða heldur óvanligt við sølu av fiski, sum eina tíð hevur ligið á goymslurúmi, innanlanda. Um so er, halda vit ikki vraking er neyðug. Keyparin og seljarin mugu sína millum gera tann sáttmála, teir halda vera hóskandi. So mikið meir sum fiskurin skal vrakast aftur, tá hann fer av landinum.

II. Søla av fiski til útheimin.

1) Felagsspurningar fyri salt- og klippfisk.

Um so er, at lóggávan framvegis letur alment settar fiskavrakarar vraka, mugu vit mæla til, at fylgjandi broytingar verða gjørdar:

a) *Váttanir viðvíkjandi lastirúminum.* Vit halda ikki, tað er nokk, at tað í starvsreglugerðini verður sagt, at vrakieftirlitsmenn skulu kanna lastirúm. Vit mugu mæla til, at vrakieftirlitsmaðurin, aftaná eventuel garnering er farin fram, fyri hvørt einstakt farmaskip gevur skrivliga váttan um, at lastarúm og garnering uppfylla øll krøv samsvarandi føroyska lóggávu.

b) Vit skjóta upp, at útflytarin saman við supercargo, sum umboðar Fiskasøluna, syrgir fyri at halda talju. Tað er aldeilis óneyðugt, at útflytarin skal vinda vrakarløn fyri hetta arbeiði.

c) Ávísandi skriv yvirvrakarans av 24. januar eru vit samdir í, at tað í starvsreglugerðini verður skilað til, at vrakieftirlitsmenn hava skyldu til at taka stikprøvar, meðan vrakarnir vraka fiskin, og fiskurin verður pakkaður, soleiðis at vit ikki sum í 1954 koma út fyri tí, at stór partíir, sum eru vrakaði, verða kasseraði av yvirvrakaranum ella vrakieftirlitsmanni, hvat ið førir stórar útreiðslur við sær at vraka og pakka umaftur.

2) Saltfiskur.

Vit halda viðvíkjandi saltfiski til útheimin, at ikki er neyðugt at gera serligar broytingar, um so er, at skipanin verður tann sama sum eftir nú galdandi vrakaralóg.

Tó halda vit, at tað hevði verið ein fyrimunur, um tað í starvsreglugerðini við illustratiónum var víst, hvussu merking av fiskapakkum skal fara fram. Har eru bæði útflytarir og vrakarir ikki ansnir nokk.

3) Klippfiskur.

Samstundis sum vit vísa til grein 1, petti 7, í vrakaralógini og til starvsreglugerðina fyri vrakieftirlitsmenn og vrakarar, skulu vit siga frá, at vit ikki hava størri viðmerkingar at gera til reglugerðina. Sum oftа sagt frá halda vit, at vrakingin, kanska serliga av klippfiski, ikki er jøvn um alt landið, og mugu mæla til, at vrakieftirlitsmenn og vrakarar, meira enn higartil, fáa høvi til at virka á ymiskum plássum í landinum.

Vit taka uppaftur viðmerkingarnar um merking og útsjónd av emballagu sum fyrr nevndar undir II punkt 2. Vit skulu her vísa á, at hóast vit her á Fiskasøluni hava givið instruktión aftaná instruktión, so eru enn feløg, sum ikki merkja — serstaklga kassar við fiski — sum tey skulu.

Tær einstøku greinirnar í vrakaralógini skulu vit ikki koma nærri inn uppá, men kunnu mæla til, at tær verða óbroyttar, um so ikki er, at tingið gongur inn fyri at lata útflytarar útpeika vrakarar, og tað almenna bert setur neyðugar vrakieftirlitsmenn og yvirvrakaran.

Vit skulu sig frá, at vit fegin, um nevndin ynskir tað, vilja koma til fundar, men av tí at nakrir av nevndarlimunum aru avbygdamenn, biðja vit um at fáa boð helst nakrar dagar frammanundan.«

Tað, sum er serliga áhugavert í ummæli fiskasølunnar, er tankin, at framleiðarar og útflytarar av saltfiski og klippfiski kunnu verða góðkendir av fyrisitingini við tí fylgju, at teir innan fyri vist mark hava ábyrgdina fyri tí fiski, sum útfluttur verður, t. e., at teir sleppa undan eftirliti vrakarana, so leingi eir vísa seg verdugar heta álit.

Tað er nevndini greitt, at tað fyri framleiðarar kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur at sloppið undan útreiðslunum til vrakarar. Nevndin heldur tó, at hesin spurningur enn er ov lítið umhugsaður, og má tí mæla frá, at myndugleiki vrakaranna verður avmarkaður sum skilað til. Tað kann í hesum sambandi verða víst til, at hóast tað eftirlit, sum nú er, hava keyparar klagað yvir fiskin, serliga spaniolar. Annars heldur nevndin, at vrakarastovnurin eigur at legja størri dent á eftirlitið við lastarúmum á fiskiskipum, goymslurúmum og turkilhúsum, sbr. § 8, 1. stk., í vrakaralógini.

Viðvíkjandi sildavrakingini hevur sildasølan 24. august 1954 sent soljóðandi ummæli:

»Vísandi til áheitan landsstýrisins um møguligt upskot til broytingar í vrakaralógini og/ella reglugerðini loyva vit okkum við hesum at framføra fylgjandi:

Tað er vanlig hugsan millum limirnar, at vrakingin av síld er ov dýr, og at hon er ov óeinsartað á teim ymisku plássum, hvat kostnaðinum viðvíkur, møguliga orsakað av, at mannagongdin er ójøvn undir sjálvari vrakingini.

Vit loyva okkum tí at seta fram uppskot um, at miðað verður móti einari mannagongd, sum líkist t. d. teirri í Noregi. Har koma vrakarar ella eftirlitsmenn óanmeldaðir tilstaðar í pakkaríunum og tryggja sær, at skiljing og pakking fer rætt fram, og vrakaraváttan verður so givin á vanligan hátt. Hesir vrakarar eru løntir av statinum, og útflytarin hevur ikki annað at gjalda enn tað avgjald, sum goldið verður pr. tunnu, hvat altso hjá okkum vil verða tey 75 oyru pr. tunnu, sum goldin verða í vrakaragjald.«

Tað er ikki neyðugt at broyta løgtingslógina, um tilmæli sildasølunnar skal fremjast; hetta letur seg gera við reglugerð. Tó skal verða viðmerkt, at tað, har síld verður viðgjørd á sama kaiøki, bert skuldi verið tørvur á einum vrakara til 5 partíir.

Viðvíkjandi fiskavrakingini mælir nevndin til fylgjandi broytingar:

1. Eftir núgaldandi skipan skal fiskur, sum virkaður verður til saltfisk, verða umrivin seinast 8 dagar, aftaná hann er dripin. Síðani tað er av størsta týdningi, at ikki ov long tíð gongur ímillum, at fiskur er saltaður fyrstu ferð, og til hann er umrivin, verður sett í lógina, at fiskur skal verða umrivin seinast 3 dagar, aftaná hann er saltaður fyrstu ferð.

2. Higartil hevur tað eftir lógini verið so, at manning ella reiðari kunnu seta seg ímóti, at fiskur við uppskiping verður vigaður undir vrakieftirliti.
Nevndin er av teirri áskoðan, at tað ræður um longu við landing at fáa ásannað góðskuna, serliga nú tá ið avrokning kann krevjast við landing, og prístilskot verður latið. Saltfiskur eigur tí eins og við útflutning við landing at verða mettur, flokkaður og vigaður eftir somu reglum. Landsstýrið eigur tó í serligum førum at kunna gera undantak frá hesum.

Nevndin setur so statt fram fylgjandi

Broyting í løgtingslóg nr. 12, 12. januar 1950, um fiskavraking:

§ 1, 4. stk., verður orðað soleiðis:
Allur saltfiskur skal verða væl saltaður og umrivin seinast 3 dagar aftaná, at hann er saltaður fyrstu ferð. Fiskur, sum verður skipaður upp í Føroyum sum saltfiskur, skal, tá ið hann verður uppskipaður, verða mettur, flokkaður og vigaður sum skilað til í 1. stk. Í serligum førum kann landsstýrið gera undantak frá hesum. Er nú fiskurin ikki fullsaltaður, tá ið hann verður uppskipaður, gevur vrakarin váttan um hetta, eins og hann í váttanini skilar til, nær meting, flokkan og vigan skal vera.

§ 10, 3. stk. verður orðað soleiðis:
Henda løgtingslóg verður at endurskoða ikki seinni enn í tingsetuni 1959—60.

Ændring i lagtingslov nr. 12 af 12. januar 1950 om fiskevragning:

§ 1, stk. 4, affattes således:
Al saltfisk skal være godt saltet og omlagt senest 3 dage efter at den er saltet første gang. Fisk, der ilandbringes på Færøerne som saltfisk, skal ved ilandbringelsen vurderes, klassificeres og vejes som foreskrevet i 1. stk. Landsstyret kan dog i særlige tilfælde meddele dispensation herfra. Såfremt fisken ikke ved ilandbringelsen er fuldsaltet, giver vrageren attest herom samtidig med, at han i attesten fastsætter det tidspunkt, hvor vurdering, klassificering og vejning skal finde sted.

§ 10, stk. 3, affattes således:
Nærværende lagtingslov bliver at tage op til revision ikke senere end i lagtingssamlingen 1959/60.

2. viðgerð 1. apríl og 3. viðgerð 4. apríl 1955.

Lógaruppskot nevndarinnar samtykt við øllum 27 atkvøðum.

5. *Løgtingslóg um vinnu v. m.*

Ár 1954, 20. december legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi framløguskriv:

Landsstýrið legði fram lógaruppskot í hesum máli í 1952 (smbr. tingtíðindi 1952, bls. 9), og samsvarandi løgtingssamtykt frá 27. marts 1953 legði landsstýrið málið fram aftur í 1953 (smbr. tingtíðindi 1953, bls. 5) og á Ólavsøkutingi 1954 (smbr. tingmál nr. 17/1954).

Heldur ikki í hesi tingsetuni fekk málið endaliga viðgerð.

So statt ynskir landsstýrið at leggja málið fyri aftur vísandi til lógaruppskotið við viðmerkingum, sum prentað er í tingtíðindi 1952, bls. 9 f. f.

1. viðgerð 8. februar og 4. apríl 1955 legði lógarnevndin fram so ljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt fram uppskot til løgtingslóg um vinnur, og løgtingið hevur beint málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur sent uppskotið til ummælis hjá landfútanum, Havnar Detailhandlarafelag og Føroya Keypmannafelag, sum hava givið teirra viðmerkingar til lógaruppskotið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykja uppskot landsstýrisins við fylgjandi broytingum:

1) Í § 1 verður sett aftaná handilsumboð »fluttningur«, og aftaná handelsagenter »transportvirksomhed«.
2) Í § 3, litra 2 ganga út orðini »her í ríkinum« og »her i riget« og í staðin verður sett »í Føroyum« og »på Færøerne«.
3) Í § 3 verður sett punktum aftaná »búgvi sínum« og »sit bo«. Restin av greinini gongur út.
4) Í § 9, 2. stk. 2. reglu verður sett »og § 8« aftaná »sbr. § 5« og »jfr. § 5«.
5) Í § 13 í tí føroysku tekstini ganga út orðini »heldur skil á« og í staðin verður sett »fyrisetur,«.
6) Í § 13 verður sum nýtt stk. 4 sett í tí føroysku tekstini:
»Persónar, sum í viðkomandi handverks- ella ídnaðarvirki nýta ikki aðra hjálp enn hjúnarfelaga og heimabúgvandi børn ella barnabørn — uttan so, undantak er gjørt — hava rætt til uttan at fáa sær loyvisbræv at røkja handverks- ella ídnaðarligt virki. Í sjúkdómstilfelli kann landfútin geva loyvi til, at annar navngivin persónur verður tikin til hjálpar.
Tílíkir persónar hava rætt til frá bústaði, verkstaði, krambúð ella øðrum føstum vinnustaði at selja egna framleiðslu og lutir, sum

eru munandi broyttir av tí tilgerð, tey hava fingið í viðkomandi vinnuvegi.
Persónar, sum eftir her tilskilaðu reglu røkja vinnu uttan loyvisbræv, mugu ikki arbeiða í samvinnu«.

Og í tí donsku tekstini:
»Personer, der ikke i vedkommende håndværks- eller industrivirksomhed benytter anden medhjælp end ægtefælle og hjemmeværende børn eller børnebørn, er — medmindre undtagelse herfra er gjort — berettigede til inden erhvervelse af næringsbrev at udøve håndværksmæssig eller industriel virksomhed. I sygdomstilfælde kan landfogeden tillade, at anden navngiven person benyttes som medhjælp. Sådanne personer er berettigede til fra bolig, værksted, butik eller andet fast forretningssted at sælge egne produkter og genstande, der ved den behandling, de har været underkastet i vedkommende næringsbrug, er undergået en væsentlig forandring.
Personer, der i henhold til foranstående bestemmelse driver virksomhed uden at have næringsadkomst, må ikke arbejde i fællesskab«.

7) Í § 15 verður í 1. stk. infine sett »Landsstýrið kann gera undantak frá hesi reglu« og í tí donsku tekstini »Landsstyret kan dispensere fra denne bestemmelse«.

8) Í § 19 verður sum nýtt stk. 4 sett:
»*Felagsskapur teirra vinnurøkjandi.*
Landsstýrið kann staðfesta samtyktir hjá vinnufeløgum, sum undir hesa lóg koma, og eisini meginfeløgum teirra við tí fylgju, at samtyktir teirra ikki kunnu broytast uttan samtykki landsstýrisins«,

og í tí donsku tekstini:
»*Foreninger af næringsdrivende.*
Landsstyret kan meddele stadfæstelse på vedtægter for de under denne lov henhørende næringsdrivnde og foreninger af disse med den virkning, at vedtægterne ikke kan ændres uden landsstyrets samtykke«.

9) Í § 21 verður sett aftaná »kemur í gildi« »beinanvegin«, og í donsku tekstini aftaná »træde i kraft« »straks«.

10) Í § 21 infine verður sett sum nýtt stk.:
»Aðrar vinnur, sum koma undir hesa lóg, og sum eru tann dag, lógin verður kunngjørd, fáa loyvisbræv ókeypis í 2 mánaðir frá kunngerðardegnum« og í donsku tekstini:

»Andre erhvervsvirksomheder, som falder ind under denne lov, og som findes den dag, denne lov bliver kundgjort, kan få næringsbrev udstedt uden betaling i 2 måneder fra kundgørelsesdagen«.

2. viðgerð 4. apríl og 3. viðgerð 5. apríl 1955.

Uppskot landsstýrisins við broytingum lógarnevndarinnar samtykt 16—0.

---

6. *Lán til s.s „Oyrnafjall“.*

Ár 1954, 20. december legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um lán til s s »Oyrnafjall«.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at taka upp lán til farmaskipið »Oyrnafjall« upp í kr. 200.000,00.

§ 2.

Ilenda løgtingslóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om lån til s s »Oyrnafjall«.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån til fragtskibet »Oyrnafjall« på indtil kr. 200.000,00.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nevndin »Farmur« vendi sær til landsstýrið mittskeiðis í oktober um at gera útveg fyri einum láni til umvælingar av »Oyrnafjalli«. Útreiðslurnar eru mettar til einar kr. 200.000,00 og av hesum ber tryggingin um helvtina. Henda umvæling kom óvart við. Umvælingin verður gjørd í Kiel.

Til lýsingar av fíggjarstøðuni hevur nevndin sent landsstýrinum ymisk skjøl, m. a. rakstrarroknskapin og fíggjarstandin fyri 1953, peningastøðu skipsins í 1954 og rakstrarætlan fyri 1955.

Eftir roknskapinum fyri 1953 er kr. 147.800,60 settar til avskrivingar, meðan ársavdrátturin av ríkiskassaláninum er kr. 220.000,00, og hevur raksturin ikki í árinum kunna rindað fullan avdrátt. Av somu grund hevur ongin peningur verið at leggja í klassingargrunnin.

Eftir hesum skulu einar kr. 200.000,00 útvegast útyvir rakstrar-

inntøkurnar, um øll fallin gjøld, tó undantikið avdráttin per 11. december 1954 av ríkiskassalániunum, og umvælingin skulu rindast innan 1. januar 1955. Tá er eisini øll tryggingin goldin, tó fyri ein part í mótrokning.

»Oyrnafjall«s skuld til landskassan er kr. 803.989,92, sum eru ikki afturgoldnar.

Skipið er leigað burtur í time charter fyri 3 mánaðir við option til aðrar 3 í komandi ári fyri kr. 100.000,00 um mánaðin. Eftir hesum skuldi skipið verið ført fyri at rinda allar rakstrarútreiðslur og eisini rentur og avdráttir til ríkiskassan.

Lagt veður aftrat, at ríkskassalánið, sum var uppá kr. 2.200.000,00 var per 11/6 1954 kr. 922.079,94.

Eftir rakstrarætlanini verða kr. 100.000,00 rindaðar av umvælingini í 1955, men harafturímóti ongin peningur lagdur í klassingargrunnin. Skipið skal klassast í januar 1956.

Eftirsum hetta mál hevði miklan skund, hevur fíggjarnevndin mælt til, at landsstýrið útvegar peningin í føroyskum banka, so umvælingin kann gerast uttan ovmikið tíðartarn fyri skipið.

So statt loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri tingið til samtyktar.

1. viðgerð 9. februar og 3. mars 1955 legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Í oktober síðsta ár hevur nevndin »Farmur« vent sær til landsstýrið um at útvega eitt lán stórt kr. 200.000,00 fyri umvæling av s/s »Oyrnafjalli«.

Táverandi fíggjarnevnd hevur tann 13. oktober s. á. givið landsstýrinum heimild til at skipa fyri hesum láni og vil nevndin so statt mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisuppskotið.

Nevndin heitir samstundis á landsstýrið um beinan vegin at kanna møguleikarnar fyri at selja skipið, tá tað vísir seg at skipið ikki ber seg og stendur fyri klassing í januar 1956.

2. viðgerð 4. mars og 3. viðgerð 7. mars 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

»Landsstýrið verður biðið beinanvegin at fáa til vegar tilboð uppá sølu av s.s »Oyrnafjalli« og verður heimilað at selja skipið í samráð við tingið, ella um tað er ikki inni, við fíggjarnevndina.«

Lógaruppskotið samtykt 16—0.

Broytingaruppskotið samtykt 18—0.

7. *Lønarviðbót fiskimanna.*

Ár 1954, 20. december legði P. M. Dam løgtingsmaður fram soljóðandi framløguskriv:

Undirskrivaði Føroya javnaðarflokkur loyvir sær hervið at leggja fram til tingviðgerðar hetta

Uppskot

til lønarviðbót fiskimanna.

1. Fiskimanninum verður tryggjað eitt uppískoyti til fiskaprísin uppá 15 oyru pr. kg fyri saltfisk (og tilsvarandi fyri ráfisk og klippfisk, um fiskimaðurin avreiðir veiðupart sín sum ráfisk ella klippfisk).

Hetta uppískoyti verður fiskimaðurin at fáa, annaðhvørt fiskurin er veiddur við báti ella skipi undir Føroyum, Íslandi, Grønlandi, Hvítahavinum ella aðrastaðni, og verður goldið honum uttan mun til, um hann er mynstraður ella ikki.

2. Trygjað verður fiskimanninum eina minstuløn uppá kr. 800,00 um mánaðin.

3. Núverandi ódemokratiski toskaskattur, hvar ið byrðirnar verða lagdar eins tungar á fátæk og rík, verður umskipaður, so tey minnimentu sleppa undan hesum skatti.

(smbr. tingmál nr. 12).

---

8. *Val av løgmanni og landsstýrismonnum.*

Ár 1954, 18. december stóð val av løgmanni.
Valið fór fram skrivliga.
Kristian Djurhuus fekk 14 atkvøður,
Hanus við Høgadalsá fekk 5 atkvøður,
J. P. Henriksen fekk 4 atkvøður,
Kjartan Mohr fekk 1 atkvøðu.
So statt var Kr. Djurhuus valdur løgmaður.

Sama dag stóð val av landsstýrismonnum.
Eftir uppskoti frá løgmanni vórðu:
Hákun Djurhuus og Edw. Mitens valdir landsstýrismenn, 14 -0.

---

9. Uppsøgn av 1901 sáttmálanum um sjómarkið.

Ár 1954, 20. december lagði H. við Høgadalsá løgtingsmaður fram soljóðandi framløguskriv:

Føroya Fiskimannafelag heitir hervið á Føroya løgting at taka aftur samtykt tingsins í tingmáli nr. 15/1954: »Broyting í reglum um sjómarkið undir Føroyum«, smb. skr. tingsins 9. september í ár til okkara, og at fáa »En mellem Hans Majestæt Kongen af Danmark og Hans Majestæt Kongen af det Forenede Kongerige Storbritannien og Irland angående Ordningen af deres respektive Undersåtters Fiskeri i Havet omkring Færøerne og Island udenfor Søterritoriet afsluttet Konvention« undirskrivað 24. juni 1901, uppsagda beinan vegin.

Felagið vísir í hesum sambandi á svarskriv felagsins frá 16. august í ár til »løgtingsnevndina til viðgerðar av málinum um sjómarkið«. Í tí skrivi varð sagt, at felagið ætlaði at leggja málið fyri limir sínar tá teir komu heim aftur. Hetta er nú gjørt við almennari atkvøðugreiðslu millum limir felagsins í øllum sóknum og varð úrslitið tað, at 92 % av atkvøðunum gingu móti samtykt tingsins í sjómarksmálinum.

Somuleiðis varð á landsfundi felagsins í Tórshavn 11. og 12. í h. har yvir 100 fiskimenn vóru møttir henda einmælta samtykt gjørd:

> »Landsfundurin mótmælir at Føroya Løgting, meðan fiskimenn vóru burtur og tí ikki kundu taka støðu, tók avgerð um sjómark landsins sum kann binda okkum í 10 ár. Limir Føroya Fiskimannafelags hava nú at kalla einmælt í atkvøðugreiðslum úti á bygdunum mótmælt hesi samtykt tingsins, og krevja vit tí at hon verður afturtikin og sáttmálin frá 1901 uppsagdur heinan vegin.

1. viðgerð 10. februar og 5. apríl legði serstøk 7 mannanevnd fram soljóðandi

Nevndarálit:

Føroya Fiskimanafelag hevur heitt á tingið at taka aftur samtyktina í tingmáli nr. 15/1954 (summartingið): Broyting í reglum um sjómarkið um Føroyar, og vísir felagið til, at fiskimenn við atkvøðugreiðslu í øllum sóknum og á landsfundi í Tórshavn hava mótmælt tingsamtyktini og krevja, at hon verður afturtikin og sáttmálin frá 1901 uppsagdur beinan vegin. Málið hevur verið viðgjørt í sjeymanna-nevnd.

Undir nevndarviðgerðini hava verið til umrøðu grundsjónarmiðini fyri yvirveiði á sjónum, setan av fiskimarki og friðing av gýtingargrunnum og havleiðum, har fiskayngul heldur til.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Djóni í Geil, Leon Joensen, R. Long og Jens Chr.

Olsen) vísa til, at eftir tingsamtykt av 1. december 1952 hava farið samráðingar fram við bretska ríkisstýrið, sum hava ført til, at Bretland hevur góðtikið tað uppískoytið til sáttmálan av 24. juni 1901 millum Danmark og Bretland um fiskimarkið um Føroyar, sum var samtykt á løgtingi 6. september 1954. Eftir hesi semju eru grundlinjurnar, sum fiskimarkið verður roknað út frá, longdar, soleiðis at tær ikki sum higartil fylgja beinleiðis hvørjum innviki, men serliga vestanfyri eru fluttar so langt út, at stórur partur av Vágahavinum nú er innan fyri mark og á tann hátt vardur fyri troling. Hava vit føroyingar soleiðis ikki vunnið so nógvan sjógv til okkum sjálvar, sum vit hava vónir um at fáa, tá ið millumlanda reglurnar fyri setan av sjómarki og fiskimarki um helst ikki so langa tíð verða endaliga skipaðar, so hava vit vi ðhesi semju fingið eitt stóran fyrimun sammett við fiskimarkið frá 1901.

Tá ið hildið hevur verð fram, at tað er skeivt at hava gjørt hesa semju fyri 10 ár, so er at siga, at bæði frá føroysk-danskari og frá bretskari síðu hevur undir samráðingunum, sum hava ført til semjuna, verið hildið fram, at tað, sum partarnir komu á samt um, skuldi ikki vera rættleggjandi fyri komandi samráðingum ella fyri møguligari trætu, og ikki minka um virðið av søguligum ella vinnuligum grundum, sum vit føroyingar halda okum eiga til at kunna krevja fiskimarkið flutt so nógv longur út, enn her er talað um. Umframt var tilmæli tingsins til at góðtaka tað uppskot til uppískoyti til fiskimarkssáttmálan, sum nú eisini er góðtikið av Bretlandi, samtykt »undir tí forútseting, at danska ríkisstýrið vil gera stig til tingingar við Bretland um nýggja viðgerð, um so er, og so skjótt sum grundreglur viðvíkjandi fiskimarki eru samtyktar á millumlanda grund ella í bilateralum skipanum, sum høvdu givið Føroyum størri sømdir enn sáttmálin gevur, um so var, at tær vóru galdandi í løtunik«. Hetta fyrivarni er av donsku uttanríkisráðdeildini lagt fyri bretska ríkisstýrið, sum hevur ikki mótmælt tí, men ført samráðingarnar til enda.

Viðvíkjandi friðing av gýtingargrunnum og havleiðum, har fiskayngul og smáfiskur heldur til, so var áheitan um friðing av hesum havleiðum við Føroyar løgd fram av føroyskum sendimanni á samráðingarfundinum í London 23. til 25. november 1954, har sendimenn frá ríkjum, sum samtykt hava norðsjósáttmálan av 1946, luttóku. Áheitanin fekk góða móttøku, og vert er at viðmerkja, at Bretland longu í 1953 hevur skotið upp at fyriseta friðing av gýtingargrunnum og vakstrarleiðum sum eitt av teimum neyðturviligu tiltøkum til at verja fiskaríkidømið í havinum fyri at verða avoytt, og at Bretland á frammanundan nevnda samráðingarfundi varð biðið um at orða uppskot til friðingartiltøk innan 15. februar í ár og senda teim ymsu ríkjum undir norðsjósáttmálanum tað til umhugsunar, so tað kan verða viðgjørt á samráðingarfundi í London 3. mai 1955.

Umframt hevur aðalting Sameindu Tjóða skotið málið um friðing av áðurnevndu havleidum og *fyriskipan av millumlanda reglum fyri setan av fiskimarki* til millumlanda samráðing í matútveganarstovninum undir S. T. í Rom 18. apríl í ár og viðlagt, at miðað má verða ímóti, at heildaruppskot hesum viðvíkjandi helst má kunna legjast fram til viðgerðar á aðaltinginum í S. T. á heysti 1956.

So statt hevur, sum fram hevur verið ført enn ein orsøk til í hesum máli at ganga samráðingarvegin, tíðin arbeitt fyri okkum. Vit føroyingar hava góðar søguligar og vinnuligar grundir at føra fram fyri at kunna krevja okkara fiskimark sett so langt úti, sum millumlanda reglur, tá ið tær nú verða fyrisettar, yvirhøvur vilja loyva. Ein uppsøgn av sáttmálanum av 1901 hevði onki hjálpt okkum hesum viðvíkjandi, men við samráðing hava vit í dag vunnið ein munandi bata og hava samtíðis hvørki stygt eitt land frá okkum, sum vit hava vaksandi samvinnu við og kunna vænta at fáa lán frá til bygging av nýggjum skipum, ei heldur seinkað um okkara møguleika fyri at fáa framt okkara krav um rúmari fiskimark á millumlanda grund. Tað, sum eftir er at gera hjá okkum, er at leggja alt okkara søguliga og vinnuliga tillar til rættis, sum kann verða borið fram til okkara stuðul, tá ið fiskimark og friðingartiltøk nú kunnu væntast at verða sett á millumlanda grund, og verður tí í øðrum tingmáli í ár mælt til at heimila landsstýrið at seta nevnd hesum viðvíkjandi.

Nevndarlimurin J. H. Danbjørg hevur í nevndini sagt seg samdan við meirilutan um ikki at siga sáttmálan av 1901 upp, men er burturstaddur, nú umhugsanin verður skrivað.

Minnilutin (Olaf Ellingsgaard og Erlendur Patursson) skulu føra fram:

Í skrivi frá 15. december 1954 hevur Føroya Fiskimannafelag heitt á Føroya Løgting at taka aftur samtykt tingsins í tingmáli nr. 15/1954: Broyting í reglum um sjómarkið undir Føroyum.

Í sama skrivi verður heitt á tingið at fáa »En mellem Hans Majestæt Kongen af Danmark og HansMajestæt Kongen af Det Forenede Kongerige Storbritannien og Irland angående ordningen af deres respektive undersåtters fiskeri i havet omkring Færøerne og Island udenfor søterritoriet afsluttet konvention«, undirskrivað 24. juni 1901, uppsagda beinan vegin.

Skriv fiskimannafelagsins nevnir, at samtykt tingsins hevur verið løgd fyri limir felagsins til almenna atkvøðugreiðslu í øllum søknum við tí úrsliti, at 92 % av atkvøðunum gingu móti tingssamtyktini.

Á landsfundi felagsins í Tórshavn 11. og 12. december 1954 varð hendа einmælta samtykt gjørd viðvíkjandi sama máli:

Landsfundurin mótmælir, at Føroya Løgting, meðan fiskimenn vóru burtur og tí ikki kundu taka støðu, tók avgerð um sjómark landsins, sum kann binda okkum í 10 ár. Limir Føroya fiskimannafelags hava nú at kalla einmælt í atkvøðugriðslum úti á bygdunum mótmælt hesi samtykt tingsins, og krevja vit tí, at hon verður afturtikin og sáttmálin frá 1901 uppsagdur beinan vegin.

Høvuðsinnihaldið í samtykt tingsins 6. september 1954 í sjómarksmálinum var tað, at sáttmálin frá 1901 skuldi framleingjast við tveimum høvuðsbroytingum. Hin fyrra viðvíkti sjálvum markinum. Tað var í støðum flutt út og kom at ganga eftir brotnum linjum. Hin seinna var tann, at sáttmálin skuldi gerast óuppsigandigur í 10 ár.

Í fyrrnevnda sáttmála frá 1901, art. XXXIX stendur: Konventionen forbliver i kraft indtil udløbet af 2 år efter at en af de høje kontraherende parter har opsagt den.

Eftir hesi grein í sáttmálanum hava vit óreingiligan — og av Bretlendingum sjálvum undirskrivaðan — rætt til at siga hesum sáttmála upp. Tað kann ongatíð sigast at vera óvinagerð móti hinum partinum at siga upp gjørdan sáttmála og allraminst, tá uppsagnarfyrimælini eru tilskilað í sáttmálanum — og so klár og greið sum hesu.

Um rætt okkara í sjómarksmálinum upp gjøgnum tíðirnar verður víst á rit eftir Dánjal Nolsøe: Um fiskimarkið við Føroyar.

Um rættarstøðu okkara í dag skal hetta verða tilskilað:

Ymsir menn hava hildið, at Haagdómurin í norsk-bretsku trætuni bert viðvíkti norsku grundlinjuskipanini, og at hesum skipan tí ikki er vegleiðandi fyri, hvussu aðrar grundlinjur verða drignar. Men rætturin gekk tvørtur í móti.

»Rætturin kann ikki vera samsintur við bretsku stjórnina í tí sjónarmiði, at 'Noreg viðvíkjandi grundlinjum nú krevur viðurkenning av einari serligari skipan'. Solciðis sum víst verður seinri, er tað, sum rætturin dugir at síggja í hesum, at almenn millumlanda lóg verður nýtt uppá eitt ávíst mál.«

Í hesum sambandi er serstakliga at vísa á, at tó at 10-míla reglan er samtykt av fleiri londum, bæði í landslóg og í teirra semjingum og sáttmálum, og tó at hon hevur verið nýtt í vissum gerðardómsmálum millum hesi lond ((certain arbitral decisions have applied it as between these States), hava onnur lond tikið aðra støðu. So statt hevur 10-míla reglan ikki vunnið sømdir sum almenn millumlanda lógregla.«

Um lóggilda grundlinjuskipan segði rætturin m. a.:

»Her má verða víst til, hvussu nær sjóøkið er knýtt til landøkið. Tað er landið, sum gevur strandarríkinum (the coastal State) rætt til farvatnið uttan fyri strendur tess. Av hesum fylgir, at meðan slíkum ríki má verða loyvt at ráða sær sjálvum í vissan mun til tess at laga sína marknalinju eftir tí, sum landinum í roynd tørvar og eftir umstøðunum á staðnum, so mugu linjurnar ikki verða drignar soleiðis, at tær í størri mun víkja frá teirri vanligu strandarlinjuni.

Ett annað, ið er avgerandi og av serligum týdningi í hesum máli, er, at viss sjóarøki og landslagið, sum býtir tey sundur ella liggur rundan um tey, eru meira og minni bundin saman.

Tann veruligi spurningur, sum er reistur viðvíkjandi vali av grundlinjum, er í roynd og veru, um viss sjóarøki, sum liggja innan fyri hesar linjur, eru nóg nær samanbundin við landøkið, soleiðis at tey koma undir innlendsk farvatnsvald. Hesin tanki, sum liggur til grund fyri áseting av reglunum viðvíkjandi firðum, má verða rúmliga nýttur, tá talan er um eina strond, ið er so óvanliga háttað sum tann norska.

Loksins er ein spurningur, sum eisini má verða havdur í huga, og sum fer langt út um geografisk viðurskifti; nevniliga, tann búskaparligi týdningurin, eitt ávíst øki hevur; hesin týdningur eigur so at verða prógvaður av langari nýtslu.«

Enska ríkisstjórnin hevur upp í saman hildið fram, at ikki er heimild fyri 4-fjórðings marki frá grundlinjunum. Hetta sjónarmið byggir enska ríkisstjórnin á tí, at eftir altjóðarætti er annað mark enn 3 fjórðingar ikki lógligt.

Í hesum viðfangi kann verða víst til, at millumlanda lógarnevnd Sameindu Tjóða hevði henda spurning á lofti á sínum 6. fundi í París í juni 1954. Framsøgumaðurin í nevndini vísti í sínum áliti á tann stóra mun á lóggávuni í teim ymisku londum á hesum øki. Og aftaná drúgvan orðadrátt kom nevndin til tað úrslit, at hon kundi einast um eina ávísa longd, og hon gjørdi so av at senda málið aftur til stjórnirnar til viðmerkingar. Orðadráttur in í nevndini er serliga upplýsandi, tí hann vísur greitt, at millumlanda lóg fyriskrivar ikki 3-míla markið tíansheldur 10-míla markið, á firðum, sum varð týðuliga kastað aftur av Haag-dómstólinum. Tó at nevndin ikki var á einum máli um vissan frástand, hevði hon fleiri uppskot at bjóða fram, og í sínum áliti dagf. 5/8 1954 gevur hon yvirlit yvir tey ymisku uppskot frá nevndarlimunum. Eftirfylgjandi brot úr álitinum vísur greiniliga, at semja vantar:

»68. Viðv. spurninginum um breidd á sjóøkinum komu ymsar meiningar fram undir orðaskiftinum á teim ymisku fundum í nevndini. Hesi uppskot vórðu gjørd:

1. at einshátta mark (3, 4, 6 ella 12 míl) var ásett.

2. at breiddin á sjóøkinum varð áselt til 3 míl treytað av, at strandarríkið fekk rætt til at útinna — upp til 12 míl úteftir — tey rættindi, sum nevndin hevur viðurkent eru til í næstu beltum:

3. at breiddin á sjóøkinum skuldi vera 3 míl treytað av strandarríkið fekk rætt til at flyta sítt mark til 12 míl við fylgjandi treytum:

   I. frí sigling gjøgnum alt økið má verða tryggjað,
   II. strandarríkið kann ikki krevja framíhjáveiðirættindi fyri sínar tegnar uttan fyri tríggjar sjómíl rokнað frá grundlinjuni fyri

sjóøki tess. Uttan fyri hetta 3-míla mark kann strandarríkið áseta reglur viðv. fiskiskapi á sjóøkinum, tó so at slíkar reglur einans mugu hava til endamáls at verja um tað, sum havið gevur.

4. at tað átti at verið viðurkent, at breiddin á sjóøkinum kann verða ásett av hvørjum einstøkum ríki millum 3 og 12 míl,
5. at eitt einshátlað mark átti at verið samtykt fyri øll ríki í einum ávísum heimsparti (in a particular region),
6. at markið átti at skift frá ríki til ríki í tráð við tær serligu umstøður og søgulig rættindi, ið kann vera sermerkt fyri hvørt,
7. at grundarlagið fyri breiddini á territorialfarvatninum átti at verið tað sjóarøki, sum liggur yvir tess landgrunni (continental shelf),
8. at tað átti at verið viðurkent, at breiddin á territorialfarvatninum er treytað av ymiskum viðurskiftum, ið skifta frá tilfelli til tilfelli, og tað átti at verið samtykt, at hvørt strandarríki hevur heimild til at áseta breiddina á sínum territorialfarvatni, sum tørvur er á,
9. at breiddin á territorialfarvatninum, um tað ikki er ásett í serligum sáttmálum, átti at verið fastsett á sendimannafundi samankallaður við hesum endamáli.

69. Nevndin ásannaði, at hvørt av hesum uppskotum fór at elva mótstøðu frá summum londum. Og semja fæst tí ikki í lag, uttan so at summi lond eru sinnað at slaka nakað.

70. So statt hevði tað verið til stóra hjálp hjá nevndini í hennara starvi, um stjórnirnar í sínum viðmerkingum til hesi uppskot kundu sagt sína støðu til spurningin um breiddina á territorialfarvatninum og seta uppskot fram um, hvussu spurningurin kundi verið loystur. Nevndin vónar, at svarini frá stjórnum fara at gera tað møguligt hjá henni at seta fram veruligt uppskot í hesum máli.

71 Nevndin helt, at inntil svarini vóru fingin frá stjórnunum, skuldu viss onnur spursmál bíða, heruppií spurningurin um firðir og oyggjaflokkar, tí hesir spurningar hava samband við spurningin um breiddina á territorialfarvatninum.«

Vegna tess at 14 nevndarlimir tóku lut í hesum ráðagerðum, og at tólv ymisk uppskot komu fram viðvíkjandi, hvussu langt valdið yvir heimafarvatni skuldi røkka (the extent of coastal jurisdiction), minsta kravið var 3 míl, mestakravið var alt økið yvir landgrunninum (the continental shelf), so ber ikki til í fullum álvara at halda uppá, at 3-míla markið er fyrisett við millumlanda lóg. Íslendska stjórnin er tí fullvís í, at eins og í málinum viðvíkjandi grundlinju-skipanini, sum grundað er í reglunum frá 1952, — 4-míla markið tilskilað í hesum reglum, ikki í nøkrum føri er í stríð við millumlanda lógarreglu.«

Hvør er so rætturin nú á døgum? Frede Castberg professari, rektor á lærda háskúlanum í Oslo, fær hesa niðurstøðu burtur úr almennum reglum og burtur úr Haag-dóminum serstakliga:

»Folkeretten må anses for at overlate det til de enkelte lande at fastsette utstrekningen av sitt sjøbelte ut fra hvert enkelt lands historiske tradisjon og økonomiske behov og under hensyn til geografiske forhold. Bare hvis grensen trekkes lenger ut, enn disse momenter kan gi rimelig grunn til, er folkeretten krenket, og den internationale fastsettelse av grensen kan bli underkjent av en international domstol med kompetence i spørsmål av denne art.«

Eftir hesum, sum her er framført, kann tað av sonnum sigast, at vit Føroyingar hava gott um at halda í sjómarksmálinum. Vit hava rætt til at siga upp 1901-sáttmálan, og altjóðarætturin, serstakliga aftaná Haagdómin, gevur illa trongdum fólki sum okkum vórtir um lív. Altjóðarætturin er ikki so eintáttaður og óliðiligur, sum Bretlendingar hava vilja gjørt hann til.

Tað verða óráð nú av nýggjum at ganga undir 1901-sáttmálan og serstakliga tá nú uppsagnarfreisturin skal verða 10 ár. Minnilutin mælir tí til, at samtykt tingsins í sjómarksmálinum 6. september 1954 verður afturtikin, og at sáttmálin frá 1901 verður uppsagdur, soleiðis at vit Føroyingar kunna seta tað sjómark, sum vit hava rætt til, og sum er fólkinum lívsneyðsýn. Í hvussu er eigur eingin bindandi sáttmáli at verða gjørdur við Bretlendingar, fyrr enn Føroya fólk hevur haft líkindi til at taka støðu. Tað kann gerast á almennari fólkaatkvøðu.

Út frá tí frammanundan framførda setur *meirilutin* (Djóni í Ceil, Leon Joensen, R. Long og Jens Chr Olsen) fram hetta

uppskot.

Tingið heldur tað ikki vera beint, soleiðis sum millumlandaviðurskiftini vóvíkjandi friðing av fiskigrunnum og setan av fiskimarki nú liggja fyri, í løtuni at siga upp fiskimarkssáttmálan av 1901.

Minnilutin (Olaf Ellingsgaard og Erlendur Patursson) setur fram hetta

uppskot.

Principalt: Tingið afturkallar samtykt sína 6. september 1954 í sjómarksmálinum og krevur »En mellem Hans Majestæt Kongen af Danmark og Hans Majestæt Kongen af det Forenede Kongerige Storbritannien og Irland angående ordningen af deres respektive undersåtters fiskeri i havet omkring Færørne og Island udenfor søterritoriet afsluttet konvention«,undirskrivað 24. juni 1901, uppsagda beinan vegin.

Subsidiert: Tingið biðir donsku ríkisstjórnina um at steðga við at undirskriva og ratificera broytingarnar í 1901-sáttmálanum um sjómarkið við Bretland bagar, til Føroya fólk á almennari fólkaatkvøðu hevur havt líkindi til at lýsa vilja sín í sjómarksmálinum.

2. viðgerð 5. apríl 1955.

Uppskot minnilutans (O. Ellingsgård og E. Patursson) principalt varð sett undir atkvøðu við navnakalli:

Ja atkvøddu: Fr. Hansen, N. Jensen, S. P. Zachariasen, O. Ellingsgaard, Johan Simonsen, R. Jacobsen, E. Patursson og Trygve Árting.

Atkvøddu ikki: Jens Chr. Olsen, P. Petersen, D. í Geil, K. Nygaard, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, R. Long, J. P. Davidsen, H. Iversen, C. L. Samuelsen, Kj. Mohr, Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, H. Djurhuus og A. Nielsen.

Burturstaddir: J. F. Øregaard, J. H. Danbjørg og D. P. Danielsen.

Uppskotið fall 8—0.

Uppskot minnilutans (O. Ellingsgaard og E. Patursson) subsidiert:

Ja atkvøddu: Fr. Hansen, N. Jensen, S. P. Zachariasen, Johan Simonsen, R. Jacobsen, Kj. Mohr, E. Patursson, Tr. Árting.

Atkvøddu ikki: Jens Chr. Olsen, P. Petersen, D. í Geil, K. Nygaard, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, R. Long, J. P. Davidsen, Hans Iversen, C. L. Samuelsen, Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, H. Djurhuus, A. Nielsen

Burturstaddir: J. F. Øregaard og J. H. Danbjørg.

Uppskotið fall 8—0.

Uppskot meirilutans samtykt 15—0.

10. Broyting í læknaskipanini í Norðoyum.

Ár 1954, 7. december legði R. Jacobsen løgtingsmaður fram soljóðandi framløguskriv við skjølum:

Til Føroya Løgtings,
Tórshavn.

Eg veit, at eg eri í samljóð við øll rættvíst hugsandi menniskju, tá ið eg Norðoyinganna vegna loyvi mær at venda mær til tað báttvirda løgting um hjálp at fáa læknafløkjuna við Klakksvíkar sjúkahús loysta til vildar fyri hin stóra meirluta av fólkinum innanfyri Norðoyar læknadømi.

Mær nýtist ikki út í æsir at greina heiðraðu løgtingsmonnum, hvussu læknaviðurskiftini í Norðoyum liggja, hvat ið er fólksins vilji og brennandi ynski, tí eg veit, at læknamálð hevur verið haft so nógv á lofti bæði innantings og uttantings, at allir tingmenn kenna fult og heilt, hvat ið leikar á hjá okkum Norðingum málinum viðvíkjandi.

Til fulla loysn og greiðan av málinum loyvi eg mær at seta fram til tingsamtyktar fylgjandi

Uppskot

Broyting í læknaskipanini í Norðoyum:

1. Í teirri av løgtinginum tann 8/3 1951 samtyktu læknaskipan fyri Føroyar úttalast, at Klakksvík skal hava settan sjúkahúslækna, ið fær fasta løn og haraftrat rælt til at prakisera í bygdini.

Hetta verður skotið uppá at broyta soleiðis:

Í Klakksvík verður settur ein sjúkahúslækni, ið ikki hevur sjúkakassapraksis Samstundis verður tikin neyðug kommunulæknahjálp til at røkja sjúkakassa- og annan læknapraksis fyri Norðoyar.

2. Tingið velur 3 limir til eina serliga sjúkahússtjórn fyri Klakksvíkar sjúkahús og loysir samstundis áður av løgtinginum valdu limir í Klakksvíkar sjúkahússtýri úr starvi sínum.

p. t. Tórshavn, tann 18. december 1954.

Richard Jacobsen.

KLAKKSVÍKAR SÓKNAR KOMMUNA

Klaksvík, 27. januar 1955.

Av teirri grund, at Klaksvík er ein eftir føroyskum viðurskiftum stór bygd og læknaviðurskiftinj av ikki ókendum grundum ikki eru eftir fólksins ynski, loyvir Klaksvíkar sóknarstýri sær at heita á tað háttvirda Løgting um at broyta læknaskipanina í Norðuroyum soleiðis:

1. At Klaksvíkar sjúkahús fær eina stjórn sambart lóg nr. 76 av 15. 3. 1939
2. Í Klaksvík verður settur ein sjúkahúslækni, ið ikki hevur sjúkakassapraksis.
3. Samstundis verður settur ein kommunulækni til at røkja sjúkakassa- og annan læknapraksis fyri Norðoyar.

Við tað at læknamálið fyri Norðuroyar er framlagt sum tingmál av løgtingsmanninum Richard Jacobsen verður biðið um at fáa hetta skriv viðlagt hesum máli.

Sóknarstýrið fyri Klaksvíkar kommunu.

Til Føroya Landsstýri,
Tórshavn.

Føroya Løgting.

Háttvirdu løgtingsmenn.

Tá ið nú læknaviðurskiftini í Norðoyum ikki eru eftir fólksins ynski heita vit á tykkum um at broyta læknaskipanina í Norðoyum soleiðis:

1. At Klaksvíkar sjúkahús fær eina stjórn sambart lóg nr. 76 av 15. 3 1939.
2. Í Klaksvík verður settur ein sjúkahúslækni, ið ikki hevur sjúkakassapraksis.
3. Samstundis verður settur ein kommunulækni til at røkja sjúakassa og annan læknapraksis fyri Norðoyar.

Við virðing

Fuglovar sóknar kommuna

Á Kirkju, 1. februar 1955.

Mikladal 1/2 1955.

Føroya Løgting.

Mikladals søknarstýri loyvir sær hervið at heita á tað háttvirda løgting um at viðgera læknamálið í Norðoyum skjótast gjørligt og vóna vit, at tað verður gjørt eftir fólksins ynski.

---

17. februar legði E. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi skriv:

Lækna- og sjúkahússkipanin.

Lækna- og sjúkahússkipanin er ikki yvirtikin av heimastýrinum og er tí felagsmál.

Ríkismyndugleikarnir hava fyrisett hesa læknaskipan at galda frá 1. januar 1953; góðkend av løgtinginum 8. marts 1951:

A. Settur verður ein embætislækni fyri Føroyar: Landslæknin. Hann er ríkistænastumaður og hevur bert rætt til konsilieran praksis.
B. Settir verða 11 kommunulæknar: Tveir í Tórshavn, ein í Klaksvík, Tvøroyri, Eiði, Fuglafirði, Saltangará, Vestmanna, Miðvági, Sandi og Vági við fastari løn kr. 6.000,00. Helvtin verður goldin úr ríkiskassa og hin helvtin úr Føroyum, nú býtt javnt millum landskassa og kommunur. Kommununrnar fáa til vega hús og brenni eftir semju fyri hvørt einstakt tilfelli.
C. Á sjúkahúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri verður settur sjúkahúslækni við fastari løn og rætti til praksis bert í bygdini.

Kommunulæknarnir verða settir av ríkismyndugleikunum eftir til mæli frá landslæknanum og viðkomandi kommunu.

Samsvarandi løgtingslóg, 17. december 1952, um býti av Føroya parti av løn kommunulækna, verður Føroya partur eftir nýggju læknaskipanini býttur í helvt millum landskassan og viðkomandi kommunu. Um ikki annar sáttmáli er ella verður gjørdur, verður býtið gjørt í mun til fólkatalið eftir seinastu fólkateljing.

Viðbót, sum kommunurnar sambart sáttmála, avtalu ella gomlum brúki veita kommunulæknanum til brenni o. a., ella útreiðslur til tænastuhús v. m. tekur landskassin ikki lut í.

Kommunulæknar eru í øllum embætunum uttan í Klaksvík, har embætið hevur verið ósett síðani mai 1953.

Stýrið fyri bróstsjúkrahúsið er landsstýrið, og yvirlæknin verður settur av landsstýrinum. Løn hansara er um 37.500 kr. árliga, og harav verður goldið úr ríkiskassanum 10.000 kr.

Lóg fyri Føroyar av 15. marts 1939 um sygehuse fyrisetur:

§ 6. Hvert af sygehusene ledes af en bestyrelse, der består af 2 af indenrigsministeren og 3 af Færøernes lagting valgte medlemmer. Bestyrelsen vælger af sin midte en formand og fastsætter de nærmere bestemmelser vedrørende forretningsgangen.

§7. Sygehusene står under tilsyn af sundhedsstyrelsen og vedkommende embedslæge i overensstemmelse med de til enhver tid derom gældende regler.

Sygehusenes reglementer skal godkendes af indenrigsministeren.

Reglugerð, góðkend av amtmanninum innanríkisráðharrans vegna, 4. apríl 1941, fyri Dronning Alexandrines hospital, Klaksvíkar sjúkahús og sjúkahúsið í Suðuroy ásetur:

13. De ledende læger ved sygehusene ansættes af bestyrelserne.
14. Det underordnede lægepersonale ansættes i det antal og på de vilkår, bestyrelserne bestemmer, af bestyrelserne efter forhandling med vedkommende ledende læge.

Løgtingið velur 3 limir í stýrið fyri hvørt sjúkalnús. Lógin fyrisetur ikki, fyri hvussu langa tíð, teir verða valdir.

Limirnir, sum løgtingið velur í stýrið, hava verið hesir:

1939: A. Samuelsen, P. M. Dam og M. A. Jacobsen.
1940: A. Samuelsen, P. M. Dam og Th. Petersen.

Hesir vórðu viðvarandi limir til 1943. — 24. december 1943 fór Th. Petersen frá.

A. Samuelsen og P. M. Dam vórðu sitandi í 1944, 1945 og 1946.
1947—48: A. Samuelsen, P. M. Dam og H. D. Joensen.
1949—51: P. M. Dam, Tr. Samuelsen og N. P. Holm.
1952: P. M. Dam, Tr. Samuelsen og Robert Joensen.

Lønin hjá sjúkahúslæknanum er á Tvøroyri um 14.300 kr. og í Klaksvík um 21.000 kr. So statt er lønin hjá sjúkahúslæknanum í Klaksvík nakað hægri enn hjá læknanum á Tvøroyri.

Stýrið setti frá 1. apríl 1953 at rokna E. Rubek Nielsen, lækna, sum sjúkahúslækna við Klaksvíkar sjúkahús. Lækni Halvorsen var konstitueraður frammanundan og varð uppsagdur til 1. apríl 1953. Rubek Nielsen fór til Klaksvíkar, men varð, tó hann var lógliga settur sum lækni, forðaður í at taka við embætinum.

Útreiðslurnar til sjúkahúsini hava verið hesar fyri fíggjarárið 1953/54:

Dronning Alexandrines hospital	kr.	1.312.676,22
Klaksvíkar sjúkahús	kr.	534.351,38
Sjúkahúsið í Suðuroy	kr.	302.327,66
Bróstsjúkahúsið	kr.	340.307,65
	kr.	2.489.662,91

Inntøkurnar hava verið:		Sjúkagjøld	Ríkisstudn.	Landskassastudn.
Dron. Alexandrines hospital	kr.	126.738,10	391.887,00	717.978,71
Klaksvíkar sjúkahús	—	58.307,50	154.057,00	314.210,08
Sjúkahúsið í Suðuroy	—	31.190,65	77.848,00	192.175,26
Bróstsjúkahúsið	—	8.420,00	25.260,00	182.615,24
	kr.	224.656,25	649.052,00	1.406.979,19

Eftir lógini av 15. marts 1939 um sjúkahús letur ríkiskassin 2 kr. or. sjúkadag. Við eykafíggjarlóg varð hetta í 1952 hækkað til 9 kr. fyri fíggjarárið 1952/53, og tað sama varð samtykt fyri 1953/54, men tílík játtan er ikki givin fyri 1954/55. Danska fíggjarnevndin tykist ikki at vilja geva hesa játtan, fyrrenn skil er komið á læknaviðurskiftini í Norðoyum. Munurin millum 2 kr. og 9 kr. pr. sjúkadag verður fyri eitt fíggjarár umleið 500.000 kr.

Sjúkahúslæknar hava rætt til praksis í viðkomandi bygd, og løgtingið kann ikki einsamalt broyta henda látt í læknaskipanini.

1. viðgerð 24. februar og 31. mars legði serstøk 5-mannanevnd fram soljóðandi

Nevndarálit

Løgtingsmaður Rich. Jacobsen, Klaksvík, hevur í skrivi dagfest 18. december 1954 lagt á ting mál um broyting av læknaskipanini í Norðoyum, soleiðis at møguleiki fæst fyri at fáa læknafløkjuna við Klaksvíkar sjúkahús loysta til vildar fyri hin stóra meiriluta av fólkinum innanfyri Norðoya læknadømi.

Hildið verður fram, at trætan um læknaviðurskiftini í Norðoyum hevur verið sonógv frammi í bløðum, í samráðingum, og úti millum manna, at allir tingmenn megu haldast at vera kunnugir við hana, so tørvur er ikki at lýsa hana út í æsir. Tingmenn kenna fult og heilt hvat ið leikar á, hvussu ómetaliga stóran týdning tað hevur fyri íbúgvarnar innan fyri Norðoya

sjúkahúsdømi, at spurningurin verður greiddur, so sjúkarøktin kann fara fram á tryggan og í øllum føri fultút forsvarligan hátt.

Skotið verður uppá at gera ta broyting í læknaskipanini av 8. marts 1951, at á Klaksvíkar sjúkahúsi verður settur sjúkahúslækni, ið ikki hevur sjúkakassapraksis, og at samstundis verður skipað fyri neyðugari kommunulæknahjálp til at røkja sjúkakassa- og annan læknapraksis í Norðoyum, og at vald verður serlig sjúkahússtjórn fyri Klaksvíkar sjúkahús, samstundis sum teir áður av løgtinginum valdu limir í Klaksvíkar sjúkahússtýri verða loystir úr starvi sínum.

Í málinum liggur skriv frá Klaksvíkar søknarstýri, ið søkir um at fáa nevndu læknaskipan broytta soleiðis, *at* Klaksvíkar sjúkahús fær serliga stjórn, *at* við sjúkahúsið verður settur sjúkahúslækni uttan skyldu at røkja sjkakassapraksis, og *at* kommunulækni samstundis verður settur at taka sær av sjúkakassa- og øðrum læknastarvi í Norðoyum.

Fugloyar søknar kommuna, Svínoyar søknarstýri, Hvannasunds kommuna, Mikladals søknarstýri, Húsar søknarstýri, Kunoyar kommuna og søknarstýrið fyri Leirvíkar kommunu *hava* lagt skriv inn á ting við somu krøvum.

Frá J. S. Hansen og níggju øðrum monnum liggur skriv av 1. februar 1955. Hesir menn eru ikki samdir við ta stóru fjøldina um háttarlagið á læknastríðnum. Men eisini teir krevja myndugleikarnar at fáa enda á læknatrætuni.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Rich. Jacobsen, Joohan Simonsen og S. P. Zachariasen) heldur fram:

Uttan at koma fram við eini gjøllari lýsing av læknatrætuni, hvussu hon er íspunnin og farin fram kann sigast av sonnum, at hin stóri meirilutin í Norðoyar sjúkahúslæknadømi ynskir læknaskipanina broytta soleiðis, at tað vera kommununrnar innanfyri nevnda sjúkahúsdømi, ið verða at hava hitt avgerandi orðið viðvíkjandi setan av læknum við sjúkahúsið eins og fyri Norðoyar í síni heild.

Alt fólkið harmast yvir ólagið, ið hevur verið og framvegis er av trætuni, ið nú hevur vart í stív tvey ár, og øll tráa eftir eini endaligari loysn, so friður og semja aftur kann verða millum fólk og myndugleikar. Meirilutin heldur, at einasti vegur, ið ber at hesum endamáli, er broyta læknaskipanina soleiðis:

1) Fyri Klaksvíkar sjúkahús verður fimmannastjórn, harav tingið tingið velur tríggjar úr einum seksmannaúrvali, sum verður innstillað av kommunustýrunum innanfyri Klaksvíkar sjúkahúsdømi í felagsskapi.
2) Sjúkabúslæknin (yvirlæknin) verður ikki skyldugur at røkja sjúkakassapraksis.

Minnilutin (R. Long og Trygve Samuelsen) úttala, at teir kunna ikki hugsa sær, at frammanundan nevnda uppskot, um tað verður samtykt á tingi, skal kunna gera enda á tí óskili í Norðoyggjum í sjúkarøktarviðurskiftunum, sum nú hevur verið í o. u. 2 ár. Minnilutin setir fram hesar viðmerkingar:

1. Eftir nógv stríð og drúgvar fyrireikingar hevur tað eydnast at fáa til vegar tað samarbeiði í fyrisitingini fyri sjúkahúsrøktini í Føroyum, sum var møað ímóti við tí lækuaskipan, sum endaliga kom í gildi 1. januar 1953. Útreiðslurnar av sjúkhúsunum verða bornar í felag av landskassa og ríkiskassa. Ár um ár verða útreiðslurnar meiri og meiri og eru nú so stórar, at óráð eru at gera leyst aftur og sleppa hvørjum sjúkahúsi út á sína leið. Tað, at felags stjórn er fyri øll trý sjúkhúsini, 2 valdir av ríkisstýrinum og 3 valdir av løgtinginum soleiðis, at hvørt sjúkhúsumráði hevur sín mann har, hevur ført bæði til meira fastleika í sjúkhúsrakstrinum sum heild og til skilabetri nýtslu av tí játtaða peningastudningi og til skilagóða tilrættislegging av sjúkarøktaruppbyggingini í komandi tíð. Vit kunna tí ikki mæla tinginum til, vegna eina tíðarmerkta fløkju í einum sjúkhúsumráði, at gera til einkis hesa góðu tilrættislegging og venda aftur til tann sjálvdrátt, sum var fyrr. Um so er, at sjúkhússtjórnin skal broytast, sum skotið upp er, er hetta uppskotið heldur ikki nóg umfatandi; støða má tá eisini takast til hini bæði sjúkhúsini, og alt læknamálið takast til nýggja og dygga viðgerð.

2. Skotið verður upp, at sjúkhúslæknin skal hava yvirlæknaløn og ongan rætt at veita læknahjálp uttan fyri sjúkahúsið. Samtíðis skal vera tikin neyðug kommunulæknahjálp til Norðoyar. Upplýst er fyri nevndini, at lønarhækkanin til sjúkhúslæknan í so fall verður um kr. 15.000,00 og í staðin fyri sum nú 1 kommunulækna, mugu setast 2 kommunulæknar, sum vilja krevja tryggjað minstamark av løu, so kommununar í Norðoyggjum koma undir at gjalda uppískoytið, sum má haldast at verða um kr. 30.—40.000. Men um so verður, at landskassi, ríkiskassi og kommununar taka sær hesar útreiðslur uppá, so fær trætan ongan enda av tí. Kjarnan í ósemjuni er tann, at lækni, sum ongin hevur prógvað at vera óskikkaðan til sjúkahússtarvið, er útnevndur, og annar maður, sum ikki er útnevndur, vil ikki víkja frá sjúkhúsinum og læknaumráðinum. Tað er sjálvsagt, at sjúkhúslæknin í Klaksvík, tá ið fólkaøkingin ger tað neyðugt at skipa sjúkahúsið við yvirlækna og hjálparlækua, má geva seg undir ta neyðturviligu umskipan. Men um umskipan verður gjørd fyri at fáa ein lógliga útnevndan lækna burtur úr starvi, er at vænta, at starvsfelagar hansara vilja verja hann. Um ætlanin er, at annar lækni enn tann, sum nú er útnevndur, skal koma í starvið, má tann nú útnevndi fyrst verða uppsugdur. Nevndin hevur lagt hetta mál fyri føroyska læknafelagið, sum við formann sín hevur upplýst, at felagið, eins væl og danska læknafelagið, hevur tikið støðu til hetta mál, og um tann burturskúgvan, sum her frammanundan er nevnd, fer fram, verður svarað fyrst við blokadu av Norðoya læknaumráði og um neyðugt við blokadu av øllum læknaumráðum í Føroyum. Um so verður,

heldur minnilutin, at Føroyar sum heild koma úr øskuni í eldin, og kann tí ikki mæla til at ganga ta leið, sum meirilutin skjýtur upp.

Nevndin hevur lagt uppskotið fyri ríkisumboðsmannin til at fregnast eftir, hvørja støðu ríkismyndugleikarnir kunna væntast at vilja taka til eina umlegging av læknaviðurskiftunum í Norðoyum, soleiðis sum meirilutauppskotið miðar ímóti, og hevur hann úttalað, at ríkismyndugleikarnir higartil altíð hava vissað sær, tá ið broytingar í heilsumálum verða gjørdar, og tær fáa ávirkan á sjúkakassapraksis, at tær fara fram í samráð við læknafelagið og eru soleiðis, at ríkismyndugleikarnir kunna góðtaka skipanina sum læknliga forsvarliga.

Læknaskipanin er felagsmál og undir ríkislóggávu. Útreiðslurnar av Klaksvíkar sjúkhúsi eru í dag fyri árið 1955/56 kr. 510.000,00 við studningi uppá kr. 290.900,00 úr landskassanum og uppá kr. 151.400,00 úr ríkiskassanum. Orsakað av fløkjuni í Norðoyum hevur fíggjarnevnd fólkatingsins noktað at gjalda meginpartin av ríkisstudninginum til øll føroysk sjúkhús, ella kr. 500.000,00, so um fløkjan heldur fram, má tingið taka støðu til at hækka sínar sjúkhúsútreiðslur longu í hesum fíggjarári við nevnda peningi. Hesin peningur fæst ikki til vega uttan nýggjan skatt, og minnilutin kann tí ikki mæla tinginum til at ganga hesa leið, men sær sum einasta útveg til at fáa læknaviðurskiftini í Norðoyum aftur í rættlag, at læknin, sum uttan at vera únevndur, virkar í sjúkhúslæknasarvinum í Klaksvík, fer úr starvi.

Uppskot

frá meirilutanum (Rich. Jacobsen, Johan Simonsen og S. P. Zachariasen):

1. Í teirri av løgtinginum tann 8/3 1951 samtyktu læknaskipan fyri Føroyar úttalast, at Klaksvík skal hava settan sjúkhúslækna, ið fær fasta løn og haraftrat rætt til at praktisera í bygdini.

Hetta verður skotið uppá at broytast soleiðis:

Í Klaksvík verður settur ein sjúkahúslækni, ið ikki hevur sjúkakassapraksis. Samstundis verður tikin neyðug kommununulæknahjálp til at røkja sjúkakassa- og annan læknapraksis fyri Norðoyar.

2. Úr einum 6 manna úrvali, sum sjúkakassastýrini innan fyri

1. I den af lagtinget under 8/3 1951 vedtagne lægeordning for Færøerne udtales, at Klaksvig skal have ansat en sygehuslæge, der får fast løn og dertil får ret til at praktisere i bygden.

Dette foreslås ændret til følgende:

I Klaksvig ansættes en sygehuslæge, der ikke har sygekassepraksis. Samtidig ansættes fornøden kommunelægehjælp til at betjene sygekasse- og anden lægepraksis på Norderøerne.

2. Af et 6 mands udvalg, som sygekassebestyrelserne indenfor

Klaksvíkar sjúkahúsdømi á felagsfundi hava kosið, velur løgtingið 3 limir til eina serliga sjúkahússtjórn fyri Klaksvíkar sjúkahús, og loysir samstundis áður av løgtinginum valdu limir í Klaksvíkar sjúkahússtýri úr starvi sínum.

Klaksvigs sygehusområde i fællesskab har udvalgt, vælger lagtinget 3 medlemmer til en særlig sygehusbestyrelse for Klaksvig sygehus og fritager samtidig de tidligere af lagtinget valgte medlemmer af Klaksvig sygehusbestyrelse fra hvervet.

Uppskot

frá minnilutanum (R. Long og Trygve Samuelsen):

Tingið heitir á landsstýri og ríkisstýri um at virka til, at lóglig læknaviðurskiftir í Norðoyggjum fáast í lag sum skjótast.

2. viðgerð 1. apríl 1955.

Uppskot meiralutans 1. fall 5—0.

Uppskot meiralutans 2. fall 8—0.

Uppskot minnilutans samtykt 15- 0.

---

11. Decisión av landskassans roknskapum.

Ár 1955, 7. februar legði løgmaður fram soljóðandi framløguskriv:

Landsstýrið hevur fyrr umrøtt spurningin við statsautoriseret revisor V. Helby, hvussu reglan eigur at vera viðvíkjandi aftursvarum til tær árligu granskoðingaatfinningar og hareftir fylgjandi decisiónir. Landsstýrið var upprunaliga av tí áskoðan, at løggildi granskoðarin átti at hava decisiónsvald, men harra Helby hevur gjørt galdandi sum sína støðu, at tað eigur ikki at vera granskoðarin, men løgtingið, fíggjarnevndin ella serlig nevnd, sum eigur at hava hetta vald.

Í síni frágreiðing frá 23. november 1953 til granskoðingina av landskassans roknskapum og øðrum løgtingsroknskapum hevur Revisions- og

Forvaltningsinstitutet A/S, givið sítt ummæli, sum er samsvarandi tí, sum harra Helby hevur borið fram munnliga í landsstýrinum.

Landsstýrið tekur undir við sjónarmiðjum, sum Revisions- og Forvaltningsinstitutet ber fram, og mælir tinginum til viðgerð og samtykt av uppskoti um eina skipan, sum inniheldur fylgjandi, smbr. § 22 í løgtingslóg nr. 1, 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum.

Allar frágreiðingar frá løgtingsins egnu granskoðing og frá løggilda granskoðaranum skulu eftirkannast í landsstýrinum og tað skal stíla fyri, at aftursvar koma frá skrivstovum og nevndum v. m. sum granskoðara atfinningar viðkoma, eins og landsstýrið sjálvt hevur heimild at gera sínar viðmerkingar til granskoðara atfinningarnar. Landsstýrið kann eisini so langt tað heldur vera nyttuligt, leggja aftursvarini fyri løggilda granskoðarin til ummælis. Grannskoðarafrágreiðingarnar við aftursvarunum og møguligt øðrum upplýsingum skulu síðani av landsstýrinum sendast av tinginum valdum granskoðarum.

Teir valdu granskoðararnir eftirkanna so tær umrøddu granskoðarafrágreiðingar v. m. Teir kunnu, tá teir halda tað vera neyðugt, krevja sær aðrar upplýsingar til handa. Tá eftirkanningin er liðug, skriva teir valdu granskoðararnir uppá roknskapirnar og síðani senda teir tey við granskoðarafrágreiðingunum v. m. til decisiónsnevnd vald av tinginum. Í serligum skrivi ella í teirra uppáskriving á roknskapini skila teir valdu granskoðararnir til, hvørjar viðmerkingar eftir teirri ætlan eru av tílíkum týdningi, at avgerðin má skjótast til decisiónsnevndina, herundir koma eisini tær viðmerkingar sum ter sjálvir hava hildið neyðugt at skila til.

Tað er síðani skylda decisiónsnevndinnar at eftirkanna og taka endaliga støðu til viðmerkingarnar, sum teir valdu granskoðararnir hava gjørt og sum omanfyri tilskilað sent nevndini til viðgerðar. Nevndin hevur heimild eisini at taka til viðgerðar og avgerðar tær viðmerkingar, sum finnast í frágreiðingunum frá egnu granskoðingini ella løggilda granskoðaranum. Decisiónarnevndin hevur heimild at krevja sær til handa upplýsingar bæði frá fyrisitingini og frá granskoðingini.

Landsstýrið loyvir sær samsvarandi galdandi skipan frá 24. marts 1952 (smbr. tingtíðindi 1951, bls. 188 II—2) at mæla tinginum til at samtykkja tilmæli landsstýrisins.

1. viðgerð 16. februar 1955 og málið beint til figgjarnevndina.

12. Viðbót til minstuløn ella viðbót til fiskapris.

Ár 1955, 4. februar legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum og skjølum:

løgtingslóg um uppískoyti til løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna smbr. kunngerð nr. 16 frá 25. juni 1954.

§ 1.

Við tí endamáli at gera lønjavningargrunn fiskimanna føran fyri í tíðarskeiðinum 1. marts 1955 til 31. december 1955 at veita manningini á føroyskum fiskiskipum, skiparum eisini, og útróðramonnum til lands í Grønlandi smbr. § 7 í løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna, soleiðis sum hon er broytt, viðbót til minstuløn og/ella viðbót til fiskaprísin, verða fyri tíðarskeiðið til 31. marts 1956 tær í §§ 3 og 4 tilskilaðu eykainntøkur uppkravdar til landskassan. Av hesum inntökum verða 1,5 mill. kr. rindaðar grunninum innan 1. apríl 1956.

§ 2.

Gjølligari reglur fyri minstulønini og/ella prísviðbótini, harundir um hesar veitingar skulu koma øllum ella bert summum av teim í § 1 nevndu manningum ella monnum v. m. til góðar, verða fyrisettar av stýri lønjavningargrunsins, tó tørvar landsstýrisins góðkenning til tess.

§ 3.

Løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v. m. so sum hon er broytt fær fylgjandi broytingar:

lagtingslov om tillæg til lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 om fiskernes afregning og lønregulerings-fond jfr. bekendtgørelse nr. 16 af 25. juni 1954.

§ 1.

Med det formål at sætte fiskernes lønreguleringsfond i stand til for tiden 1. marts 1955 til 31. december 1955 at yde tillæg til mindsteløn og/el. ler tilskud til fiskepriserne til mandskabet på færøske fiskeskibe, derhos skibets fører, og bådfiskere i grønlandske farvande, jfr. § 7 i lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 om fiskernes afregning og lønregulering, således som denne er ændret, indkræves for tidsrummet til 31. marts 1956 de i §§ 3 og 4 omhandlede ekstra indtægter til landskassen. Af disse indtægter udbetales fonden senest 1. april 1956 1,5 mill. kr.

§ 2.

De nærmere regler for mindsteløn-nen og/eller tilskudet, herunder om disse ydelser skal gives til alle eller kun dele af de i § 1 omhandlede mandskabsgrupper m. v. fastsættes af lønreguleringsfondens bestyrelse; dog indkræves landsstyrets godkendelse heraf.

§ 3.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m. v. således som denne er ændret foretages følgende ændringer:

§ 4.

Tey í § 1 í bráðfongisreglum nr. 30 frá 2. september 1947 um útflutningsgjøld tilskilaðu gjøld verða isett upp í 2 oyrur pr. kg av saltfiski og 3 oyrur pr. kg av klippfiski, herumframt verður av allari sild, sum saltað er (salt-, krydrað-, sukursaltað sild o. t.) latið í útflutningsgjaldi 1 oyra pr. kg.

§ 5.

Møguligt avlop av tí eykaskattinum, sum álíknaður var eftir løgtingslóg nr. 11 frá 11. mai 1954 og av tí í § 1 tilskilaðu viðbót uppá 1,5 mill. kr. fer í ein tiltaksgrunn undir lønjavningargrunninum. Landsstýrið fyrisetur gjølligari reglur fyri tiltaksgrunnin eftir tilmæli grunsins, harundir undir hvørjum treytum, hann kann nýtast.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 4.

De i § 1 i midlertidig bestemmelse nr. 30 af 2. september 1947 om udførselsafgift omhandlede afgifter forhøjes til 2 øre af hvert kg saltfisk og 3 øre for hvert kg klipfisk, desuden svares der af al saltet sild (salt-, krydret-, sukkersaltet sild o. lign.) en eksportafgift på 1 øre pr. kg.

§ 5.

Eventuelt overskud af den ekstraskat, der blev udskrevet i henhold til lagtingslov nr. 11 af 11. maj 1954, og af det i § 1 omhandlede tilskud på 1,5 mill. kr. tilfalder en reservefond under lønreguleringsfonden. Landsstyret fastsætter efter indstilling fra fonden de nærmere regler for reservefonden, herunder under hvilke forudsætninger, der kan disponeres over denne.

§ 6.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í skrivi 31. januar 1955 (skjal 1) sigur Føroya Fiskimannafelag frá, at felagið hevur havt samráðingar við Føroya Reiðarafelag um lønarviðurskiftini á fiskiveiðiflotanum í hesum ári. Sáttmáli er gjørdur, hesin verður undirritaður og settur í gildi av pørtunum, um so er, og tá jú landsstýrið og løgting hava fingið eftirfylgjandi minstulønar-, forskots- og prísfyriskipanir í gildi:

Í tíðini 15. juli—1. november verða fiskimonnum í sildaveiðu vissaðar 800 kr. í minstuløn um mánaðin.

Øllum øðrum fiskimonnum og útróðrarmonnum, sum eftir núgaldandi skipan hava rætt til minstuløn, verða alt árið vissaðar 650 kr. í minstuløn um mánaðin.

Forskotið verður goldið við 500 kr. um mánaðin.

Partur fiskimanna av landaðum fiski fær hesar prísviðbøtur fyri nr. 1 fisk:

Torskur yvir 22" 25 oyru pr. kg
Torskur 16—22" 20 oyru pr. kg.
Torskur 12—16" 5 oyru pr. kg

Liggur miðalfiskimannaparturin fyri ein túr hægri enn 1350 kr. pr. mánað, verður ongin prísviðbót givin til tann túrin.

Fyri útróðrafisk í Grønlandi verður prísviðbótin 5 oyru pr. kg.

Føroya Reiðarafelag hevur í skrivi 1. februar 1955 (skjal 2) søkt um, at eisini reiðarunum verður veittur studningur til nr. 1 fisk soleiðis:

Saltfiskur yvir 22" 6 oyru pr. kg
Saltfiskur 16—22" 3 oyru pr. kg
Saltfiskur 12—16" 2 oyru pr. kg

Eftir gerðabók semingsmansins fyri fundin 19. januar 1955 (skjal 3) vórðu Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag samd um, at sáttmálin í tí líki, hann varð settur fram, verður undirritaður og settur í gildi, tá partarnir eru samdir um sakamálsspurningin sínamillum, og legði fiskimannafelagið afturat, at tingið veitir eina minstuløn og/ella prístilskot, sum í stødd samsvarar við studningin í fjør.

Fyrra treytin frá fundinum er lokin á fundi seinni saman við semingsmanninum 30. s. m. (skjal 4). Bindandi sáttmáli skuldi so verið, tá ið løgtingið ger útvegir fyri, at manningum á fiskiskipum verður veitt minstaløn og/ella prístilskot, sum í stødd samsvarar við studningin ífjør. Viðvíkjandi støddini av hesum studningi so skal hetta ivaleyst fatast soleiðis, at studningurin skal svara til tann eykaskatt, sum álíknaður varð eftir løgtingslóg nr. 11, 11. mai 1954 ella 1,5 mill. kr.

Skapar løgtingið rammurnar fyri studninginum ella við øðrum orðum útvegar 1,5 mill. kr. til tey nevndu endamál, er bindandi og lógligur sáttmáli partanna millum. Tær nærri reglur um sjálvan studningin eins og forskotsskipanina eiga at verða gjørdar av tí stovni, sum kemur at fyriskipa studninginum, og har báðir partar eru umboðaðir, t. e. lønjavningargrunnur skipsfiskimanna. Síðani tað almenna letur so munandi part, eigur tó landsstýrið at góðtaka studningsreglurnar.

Meðan landsstýrið mælir til, at veitt verður mannskapinum viðbót, heldur landsstýrið, at ikki umstøður verða til at veitt verður reiðarunum viðbót til fiskiprísirnar.

Útlit er fyri, at tann eykaskattur, sum álíknaður varð í 1954 eftir løgtingslóg nr. 11, 11. mai 1954, fyri at hækka minstulønina frá 500 kr. til 800 kr., verður ikki allur brúktur til hetta endamál.

Síðani grunninum til tíðir kann tørva likvidan pening, m. a. til forskotsskipanina, verður mælt til, at møguligt avlop verður lagt í tiltaksgrunn undir eftirliti landsstýrisins. Um avlop skuldi verið av tí eykastudningsskipan, sum gjørd verður í 1955, eigur hetta at ganga eftir somu reglum.

Viðmerkingar til tær einstaku greinirnar.

ad § 1:

Eftir galdandi reglum fær mannin gin á føroyskum fiskiskipum haruppií skipararnir og eftir fyriskipaðum treytum útróðrarmenn til lands

í Grønlandi minstuløn. Endamálsgreinin er tí orðað so rúmlig, at møguleiki er fyri at veita øllum teim har nevndu tær eykaviðbøtur, talan er um.

Síðani tað óivað verða fá skip, sum fara í vinnu áðrenn 1. marts, er ikki ætlanin at veita eykastuðning áðrenn henda dag. Eisini skal tann stovnur, ið fyriskipa skal lønjavningina gera ymist fyrisitandi arbeiði, áðrenn skipanin kann fremjast.

Tað er ivaleyst lønjavningargruninum neyðugt, tá ið hann skal gera stuðningsreglurnar, at hann veit hvønn stuðning úr landskassanum, hann fær, tí verður landskassin bundin til ávísa peningahædd, ella 1,5 mill. kr., sum grunnurin kann krevja til sín, um endamálið — minstaløn og/ella prístilskot ger tað neyðugt.

ad § 2:

Tað má standa lønjavningargrunninum frítt fyri út frá tí peningi, landskassin veitur honum og umstøðunum annars, at ætla, hvussu rúmligar stuðningreglurnar skulu verða.

ad §§ 3 og 4:

Tær her nevndu eykainntøkur eru ætlaðar til 1,5 mill. kr. Útflutuingsgjaldið er í dag 1 oyra fyri kg av saltfiski og klippfiski, meðan útflutningsgjald er fyri sild.

ad § 5:

Ivasamt er, hvør ið eigur avlopið av eykaskattinum, um hann ikki allur skuldi verið grunninum neyðugur at hækka minstuløninа frá 500 til 800 kr. Sum løgtingslógin nr. 11, 11. mai 1954 er orðað, hevur løgtingið formellan rætt til møguligan avlopspening.

Skjal 1.

FØROYA FISKIMANNAFELAG

Tórshavn, 31. jan. 1955.

Føroya fiskimannafelag hevur í januar í ár havt samráðingar við Føroya útgerðarmannafelag um lønarviðurskiftini á fiskiveiðiflotanum í hesum ári. Millum hesi bæði feløg eru sáttmálar gjørdir, sum verða undirritaðir og settir í gildi av pørtunum, um so er og tá ið landsstýri og løgting hava fingið eftirfylgjandi minstulønar-, forskots- og prísfyriskipanar í gildi:

> Í tíðini 15. juli—1. november verða fiskimonnum í sildaveiði vissaðar 800,00 kr. í minstuløn um mánaðin.
> Øllum øðrum fiskimonnum og útróðrarmonnum, sum eftir núgaldandi skipan hava rætt til minstuløn, verða alt árið vissaðar 650 kr. í minstuløn um mánaðin.

Forskotið verður goldið við 500 kr. pr. mánað.
Partur fiskimanna av landaðum nr. 1 fiski fær hesar prísviðbøtur:

Torskur yvir 22" 25 oyru pr. kg
Torskur 16—22" 20 oyru pr. kg
Torskur 12—16" 5 oyru pr. kg.

Liggur miðalfiskimannspartarin fyri ein túr hægri enn 1350 kr. pr. mánað, verður eingin prísviðbót givin til tann túrin.
Fyri útróðrafisk í Grønlandi verður prísviðbótin 5 oyru pr. kg.

Føroya landsstýri,
her.

Skjal 2.

FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 1. februar 1955.

Føroya Landsstýri,
her.

Sum landsstýrinum kunnugt, hava tingingar um nýggjar fiskisáttmálar farið fram millum undirritaða felag og Føroya Fiskimannafelag.

Undir hesum tingingum eru uppskot til sáttmálar gjørd, sum báðir partarnir eru samdir um, og verða hesir sáttmálar undirskrivaðir av Føroya Fiskimanafelag, treytað av, at fiskimenn fáa sum studning frá tí almenna eina peningahædd, ið er eins stór og tann, ið fiskimenn fingu í fjør.

Á hin bógvin gav Føroya Reiðarafelag lyfti um at taka við áðurnevndu sáttmálum, meðan vit eisini væntaðu, at reiðarar fingu ein almennan stuðul eins og fiskimenn. Tessvegna loyva vit okkum at biðja tað háttvirda Landsstýrið um at leggja upskot fyri tingið, sum miðar ímóti, at tann fiskur ið fellur í part reiðarans, fær niðanfyri standandi almennan prísstudning:

saltfiskur yvir 22" fær 6 oyru pr. kg
saltfiskur 16—22" fær 3 oyru pr. kg
saltfiskur 12—16" fær 2 oyru pr. kg.

Studningur skal einans verða latin til saltfisk, ið er nr. 1.

Verður samlaða veiðan hjá Føroyum í 1955 mett til 30.000 ts. í saltfiski, so má tað ætlast, at av hesum fiski fer o. u. 21.000 ts. at falla

í lut reiðarans og av hesum verður tað o. u. 17.000 ts. nr. 1 fiskur yvir 12", skipað eftir støddum á hendа hátt:

saltfiskur yvir 22" nr. 1,	3.400 ts.
saltfiskur 16—22" nr.	10.200 ts.
saltfiskur 12—16" nr.	3.400 ts.

Eftir omanfyri st andandi studningi pr. kg, verður hetta ætlað til:

saltfiskur yvir 22" nr. 1,	3.400 ts. á 6 oyru pr. kg	— kr. 204.000
saltfiskur 16—22" nr.	10.200 ts. á 3 ooyru pr. kg.	= kr. 306.000
saltfiskur 12—16" nr.	3.400 ts. á 2 oyru pr. kg.	— kr. 68.000
	studningur tils. kr.	578.000

Vegna lækandi fiskaprísir og hækkandi prísir á skipaútgerð tey seinastu árini, er tað ikki bert lønir fiskimanna, ið hava verið lækkandi, men eisini reiðararnir eru í stórum peningatroti, rentabiliteturin hevur støðugt verið versnandi. Frá í fjør er m. a. saltprísurin hækkaður við o. u. 25 %. Í bruttosáttmálanum ber reiðarin alla hesa hækking í útreiðslunum.

Skjal 3.

Somingafundur varð settur á Hotel Hafnia 19. januar 1955. Hetta var framhald av seinasta fundi. Teir somu vóru á fundi sum vóru á fundi fyrrapartin. Afturat komu Debes Christiansen og Jákup Johannesen. Samráðst varð aftur um %. Uppskotið 42 % og 34 % fyri snørisveiddan fisk og línuveiddan fisk varð samtykt av F. F. og samtykt av R. F. við tí viðmerking, at teir væntaðu at fáa part í møguligum løgtingsstudningi. Partarnir eru samdir um at sáttmálin í tí líki, hann er settur fram (skjal 1) verður undirritaður og settur í gildi tá partarnir eru samdir um sakarspurningin sínámillum og leggur F. F. afturat, at tingið veitir eina mínstuløn og/ella prístilskot sum í støddd samsvarar við studningin í fjør. Partarnir settu áðrenn fundurin endaði nevnd (somu menn sum nevndir eru í nevndaruppskotinum 17/1 1955) til at viðgera uppskot til tingið.

Fundurin settur ca. 17,30, lokin ca. 20,00.

Skjal 4.

Semingsfundur varð settur á Hotel Hafnia sunnudagin 30. januar 1955. Á fundi vóru: Fyri F. R. Johan K. Joensen, Páll á Dul, Einar Dahl, Th. Vilhelm, Debes Christiansen, Poul Hansen, S. P. Petersen, Fyri F. F.: Erl. Patursson, Andreas Jensen, Aage Vesturskarð, Frederik Hansen, Gunleif Hentze, Jákup í Jákupsstovu og varasemingsmaðurin Jóannes Rasmussen.

Sakarmálsspurningurin, ið nevndur er í semingsbókini 19. januar 1955, verður loystur á heudan hátt:

Partarnir Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag hava samtykt fylgjandi tilmæli frá undirnevndini:

Undirritaðu tingingarmenn Føroya Reiðarafelags og Føroya Fiskimannafelags mæla til at settur verður á stovn »Landsfelagsskapur fiskivinnuni til frama« sambart tey uppskot, sum Rasmus á Háskúlanum hevur sett fram í bóklingi sínum frá 1946, og mæla vit til, at Føroya Reiðarafelag letur: árliga kr. 1.000,00 og Føroya Fiskimannafelag letur: árliga kr. 1.000,000 + kr. 3.000,00 til Landsfelagsskapin.

Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag verða umboðað í nevndini við hvør sínum 3 monnum.

Vit bjóða øðrum feløgum, stovnum og persónum at koma uppí felagsskapin, og verða tey umboðað samsvarandi luttøku sína.

Tórshavn 30. januar 1955.

Sign.: Frederik Hansen, Aage Vesturskarð, Jákup í Jákupsstovu, Einar Dahl, Páll á Dul, Johan K. Joensen.

Nevndin setur uppskot fram til lógir fyri felagsskapin samsvarandi hesum uppskoti og um nevndin ikki verður samd verður semingsstovnurin (um hann játtar) at avgera trætumálini.

Í lógum felagsins skal standa henda grein: Feløgini binda seg til at gjalda tær í tilmælinum tilskilaðu peningahæddir eina ferð árliga í 30 ár hvønn 1. januar fyrstu ferð 1. januar 1956. Verður gjald ógoldið meira enn 6 mánaðir aftaná at tað er fallið til gjaldingar kann tað av einum hvørjum luttakarafelag latast til rættsliga innheinting.

Føroya reiðarafelag loysir til lóghald, sum sambart dóm danska gerðarrættarins er lagt á ognir Føroya Fiskimannafelags og F. F. rindar kr. 34.000,00 í útreiðslum viðvíkjandi hesum sakarmáli.

Við tí sum her er sagt, er so sakarmálsspurningurin lokin.

Verður sáttmálin, ið settur varð fram 19. januar 1955 ikki undirritaður, kemur hendan fundarsamtykt ikki í gildi.

Fundur lokin kl. 0,20.

Tórshavn, 31. januar 1955.

S. P. Petersen.
Páll á Dul.
Einar Dahl.
Thorstein Vilhelm.
Poul Hansen.
Jóhan K. Joensen.
Debes Christiansen.

E. Patursson.
Aage Vesturskarð.
Jens Andreas Jensen.
Gunleif Hentze.
Frederik Hansen.
Jákup í Jákupsstovu.

Jóannes Rasmussen
varasemingsmaður.

FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

Tórshavn, 4. februar 1955.

Føroya Landsstýri,
her.

Tá Føroya Skipara- og Navigatørfelag er vitandi um, at Landsstýrið setir fram uppskot á Tingi um prísviðbót á fiski, loyvir felagið sær at venda sær til Landsstýrið og biðja um, at skiparar og bestamenn verða tiknir við í uppskotinum eins og aðrir fiskimenn.

1. viðgerð 5. februar og 18. februar legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Føroya fiskimannafelag og Føroya reiðarafelag hava havt samráðingar um lønarviðurskiftini á fiskiveiðuflotanum. Sáttmáli er gjørdur, men siga feløgini frá, at hann ikki er undirskrivaður av pørtunum, men

hetta vil verða gjørt, tá løgtingið hevur tryggjað tær minstulønar- forskots- og prísfyriskipanir, ið feløgini eru vorðin samd um.

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot til løgtingslóg um uppískoyti til løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna sbr. kunngerð nr. 16 frá 25. juni 1954.

Málið var til 1. viðgerð 5. februar 1955 og varð beint til fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Andreas Djurhuus, Djóni í Geil, Ilanus við Høgadalsá, Poul Petersen, Erlendur Patursson og Trygve Samuelsen) skal føra fram:

Lógaruppskot landsstýrisins gongur út uppá at skapa tað fíggjarliga grundarlagi undir uppskotinum til hesa viðbót til galdandi minstuløn og viðbótina til fiskaprísin. Hesar viðbøtur eru ætlaðar at koma uppí 1,5 mill. kr.

Eftir lógaruppskotinum verða gjølligari reglur fyri minstulønini og prísviðbótini at fyriseta av stýri lønjavningargrunsins, tó soleiðis at tær verða at góðkenna av landsstýrinum.

Viðvíkjandi minstulønar-, forskots- og prísfyriskipaninar skal viðmerkjast, at feløgini hava skotið upp:

Í tíðini 1. august—1. november verða fiskimonnum í sildaveiðu vissaðar kr. 800,00 í minstuløn um mánaðin roknað fyri seg.

Øllum fiskimonnum og útróðrarmonnum, sum eftir núgaldandi skipan hava rætt til minstuløn, verða vissaðar kr. 650.00 í minstuløn um mánaðin, sbr. reglunum í galdandi lóg um avrokning og lønjavning fiskimanna.

Forskotið verður sett til kr. 500,00 um mánaðin.

Partur fiskimanna av landaðum fiski fær hesar prísviðbøtur fyri nr. 1 fisk:

Torskur yvir 22"	25 oyru pr. kg.
Torskur 16—22"	20 oyru pr. kg.
Torskur 12—16"	5 oyru pr. kg.

Liggur miðal fiskimannaparturin fyri ein túr hægri enn kr. 350,00 pr. mánað, verður ongin prísviðbót givin til tann túrin.

Fyri útróðrafisk í Grønlandi verður prísviðbótin 5 oyru pr. kg.

Skiparar og maskinmeistarar koma inn undir minstulønina eftir hesari lóggávu, men koma ikki inn undir reglurnar um prísviðbót til fiskaprísin.

Meirilutin heldur ikki, at útflutningsgjaldið á saltfiski eigur at setast upp.

Útflutningsgjaldið verður mett til at geva kr. 360.000,00, meðan innflutningsgjøld v. m. ætlast at geva 1,2 mill. kr.

Minnilutin (J. P. Davidsen) setur einki uppskot fram, men skal viðmerkja:

Fiskimanninum verður tryggjað eitt uppískoyti til fiskaprísin uppá 15 oyru pr. kg fyri saltfisk (og tilsvarandi fyri ráfisk og klippfisk, um fiskimaðurin avreiðir veiðupart sín sum ráfisk ella klippfisk).

Hetta uppískoyti verður fiskimaðurin at fáa, umaðhvørt fiskurin er veiddur við báti ella skipi undir Føroyum, Íslandi, Grønlandi, Hvítahavinum ella aðrastaðni, og verður goldið honum uttan mun til, um hann er mynstraður ella ikki.

Tryggjað verður fiskimanninum eina minstuløn uppá kr. 800,00 um mánaðin.

Núverandi ódemokratiski toskaskattur, hvar ið byrðirnar verða lagdar eins tungar á fátæk og rík, verður umskipaður, so tey minnimentu sleppa undan hesum skatti.

Útreiðslurnar av hesum eiga at takast av útfluttningsgjaldi sum av landsstýrinum skotið upp og restin við beinleiðis skatti á allar inntøkur yvir kr. 10.000,00.

Samsvarandi hesum setur meirilutin fram fylgjandi upskot:

Uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um uppískoyti til løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna smbr. kunngerð nr. 16 frá 25. juni 1954 verður samtykt við fylgjandi broytingum:

1. Í § 1 gauga út orðini »skiparum eisini« og í donsku tekstini »derhos skibets fører«, og verður sett sum nýtt stykki 2

íføroysku tekstini:	og í donsku tekstini:
»Skiparar og maskinmeistarar fáa ikki viðbót til fiskaprísin, men viðbót til minstulønina.«	»Skibsførere og maskinmestre får ikke andel i tilskudet til fiskeprisen, men får tillæg til mindstelønnen.«

2. § 3 verður orðað soleiðis:

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v. m., so sum hon er broytt, verða gjørdar fylgjandi hækkingar:	I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m. v., således som denne er ændret, foretages følgende ændringer:
SPIRITUOSA OG SPRITT:	*SPIRITUOSA OG SPRIT:*
Brennivín og akvavit:	*Brændevin og akvavit:*
5. 1 litur 2,00 kr.	5. 1 liter 2,00 kr.
6. 1litur 2,00 kr.	6. 1 liter 2,00 kr.
7. 1 litur 2,00 kr.	7. 1 liter 2,00 kr.

Spiritus:	
8.	1 litur 2,00 kr.
9.	1 litur 2,00 kr.
10.	1 litur 2,00 kr.
ØL:	
11.	1 litur 0,20 kr.
12.	1 litur 0,40 kr.
SKREYTVØRUR, BIJOUTERIVØRUR OG NIPSLUTIR:	
17.	av virðinum 10 %.
GLASVØRUR:	
18.	av virðinum 10 %.
LEIR-, STEINTOYS. og POSTALÍNSVØRUR:	
24.	av virðinum 10 %
KRÚT:	
32.	av virðinum 10 %.
33.*)	av virðinum 20 %
KRYDDARÍ:	
34.	1 kg 1,00 kr.
LEIKUTOY:	
35.	av virðinum 10 %.
METALVØRUR:	
41.	av virðinum 10 %.
PAPPÍR:	
42.	av virðinum 10 %
43.	hvørt spælið 2,00 kr.
LUKTILSI OG FRÍÐKANARLUTIR:	
45.	av virðinum 10 %.
SKINN OG HÚÐIR:	
47.	av virðinum 10 %.
MATVØRUR:	
48.	1 kg 0,60 kr.

*) 33. Øll sløg av friktiónstendstikkum.

Spiritus:	
8.	1 liter 2,00 kr.
9.	1 liter 2,00 kr.
10.	1 liter 2,00 kr.
ØL:	
11.	1 liter 0,20 kr.
12.	1 liter 0,40 kr.
GALANTERI- OG BIJOUTERIVARER SAMT NIPS:	
17.	av værdien 10 %.
GLASVARER:	
18.	af værdien 10 %.
LER-, FAJANCE- OG PORCELÆNSVARER:	
24.	af værdien 10 %.
KRUDT:	
32.	af værdien 10 %.
33.*)	af værdien 20 %.
KRYDDERI:	
34.	1 kg 1,00 kr.
LEGETØJ:	
35.	af værdien 10 %.
METALVARER:	
41.	af værdien 10 %.
PAPIR:	
42.	af værdien 10 %.
43.	pr. spil 2,00 kr.
PARFUMER OG KOSMETISKE ARTIKLER:	
45.	af værdien 10 %.
SKIND OG HUDER:	
47.	af værdien 10 %.
MADVARER:	
48.	1 kg 0,60 kr.

*) 33. Alle slags friktionstændstikker.

48. c.	av virðinum 10 %.	48 c.	af værdien 10 %.
49.	1 kg 4,00 kr.	49.	1 kg 4,00 kr.
TUBBAKK OG TUBBAKSVØRUR:		*TOBAK og TOBAKSVARER:*	
57.	100 stk. 2,00 kr.	57.	100 stk. 2,00 kr.
58.	100 stk. 2,00 kr.	58.	100 stk. 2,00 kr.
59.	100 stk. 2,00 kr.	59.	100 stk. 2,00 kr.
60.	100 stk. 2,00 kr.	60.	100 stk. 2,00 kr.
UR:		*UR:*	
66.	av virðinum 10 %.	66.	af værdien 10 %.
VOGNAR OG ONNUR AKFØR, EISINI VOGNSMIÐVERK:		*VOGNE OG ANDRE KØRETØJER, OGSÅ VOGNMAGERARBEJDE:*	
67.	av virðinum 10 %.	67.	af værdien 10 %.

3. Í § 3 verður sett sum nýtt stykki:

Tey í § 2 í fyribils kunngerð nr. 44 frá 28. november 1940 fyrisettu stuttleikagjøld verða hækkaði við 100 %.

Til § 3 føjes som nyt stykke:

De i § 2 i midlertidige bestemmelser for Færøerne nr. 44 af 28. november 1940 foreskrevne forlystelsesafgifter forhøjes med 100 %.

4. Í § 4 ganga út orðini:
»»2 oyru pr. kg av saltfiski og«.

I § 4 udgår ordene:
»2 øre af hvert kg saltfisk og«.

2. og 3. viðgerð 18. februar 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Johan P. Davidsen:

Fiskimanninum verður tryggjað eitt uppískoyti til fiskaprísin uppá 15 oyru pr. kg fyri saltfisk (og tilsvarandi fyri ráfisk og klippfisk, um fiskimaðurin avreiðir veðupart sín sum ráfisk ella klippfisk).

Hetta uppískoyti verður fiskimaðurin at fáa, annaðhvørt fiskurin er veiddur við báti ella skipi undir Føroyum, Íslandi, Grønlandi, Hvítahavinum ella aðrastaðni, og verður goldið honum uttan mun til, um hann er mynstraður ella ikki.

2. Tryggjað verður fiskimanninum eina minstuløn uppá kr. 800,00 um mánaðin.

Útreiðslurnar av hesum eiga at takast av útfluttningsgjaldi sum av landsstýrinum skotið upp og restin við beinleiðis skatti á allar inntøkur yvir kr. 10.000,00.

Uppskotið frá J. P. Davidsen fall 3—0.

Uppskot landsstýrisins við broytingum figgjarnevndinnar samtykt 20—0.

---

13. Kgl. fyriskipan um sóttverju v. m.

Ár 1955, 9. februar legði E. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

kgl. anordning hvorved lov nr. 67 af 31. marts 1953 om karantæneforanstaltninger mod smitsomme sygdomme sættes i kraft på Færøerne.

I henhold til den regeringen ved § 45 i lov nr. 67 af 31. marts 1953 om karantæneforanstaltninger mod smitsomme sygdomme meddelte bemyndigelse sættes den nævnte lov herved i kraft på Færøerne i følgende skikkelse.

Kapitel 1.

Lovens område.

§ 1.

Indenrigs- og boligministeren bestemmer efter forhandling med sundhedsstyrelsen, mod hvilke sygdomme de i denne anordning omhandlede karantæneforanstaltninger bringes til anvendelse for at hindre, at smitte føres ind i landet eller herfra til andre lande.

Kapitel 2.

Definitioner.

§ 2.

Stk. 1. I nærværende anordning forstås ved:

»Bagage« personlige effekter, tilhørende en rejsende eller et medlem af besætningen;

»Besætning« de personer, der gør tjeneste på et skib eller luftfartøj;

»Havn« en søhavn med international trafik;

»Isolation« adskillelse af vedkommende person eller gruppe af personer — bortset fra personer beskæftiget ved karantæneforanstaltningernes gennemførelse — med det formål at hindre, at smitte spredes;

»Lokalområde« det mindste område indenfor et land — f. eks. en havn eller en lufthavn, der har en bestemt afgrænsning, og hvori der findes en sådan organisation af sundhedsvæsenet, at dettes organer er i stand til på fyldestgørende måde at træffe de karantæneforanstaltninger, der er tilladt eller foreskrevet i de af verdenssundhedsforsamlingen vedtagne internationale karantæneregler;

»Luftfartøj« et luftfartøj, der foretager en international rejse;

»Lufthavn« en lufthavn med international lufttrafik;

»Lægeundersøgelse« karantænelægens besøg på og besigtigelse af et skib eller luftfartøj og dennes foreløbige undersøgelse af personer ombord, men ikke den juridiske undersøgelse af et skib for at konstatere, hvorvidt rotteudryddelse er nødvendig;

»Mistænkt« en person, som må anses for at have været udsat for smitte med en smitsom sygdom og for at kunne sprede smitte;

»Skib« et skib, der foretager en international rejse;

»Smitsom sygdom« en sygdom, mod hvilken de i denne anordning omhandlede foranstaltninger i henhold til § 1 bringes til anvendelse;

»Smittet« en person, som lider af en smitsom sygdom, eller som anses for smittet med en sådan sygdom;

»Tilsyn« sundhedsmyndighedernes kontrol med en persons helbredstilstand indenfor inkubationstiden for en smitsom sygdom.

Stk. 2. Udtrykket »international rejse«, anvendt om et skib eller luftfartøj, omfatter i denne anordning også en rejse mellem havne eller lufthavne på Færøerne, dersom skibet eller luftfartøjet på rejsen har forbindelse med et andet lands område.

Kapitel 3.

Karantænemyndighederne.

§ 3.

Stk. 1. De foranstaltninger, der sigter til at hindre, at smitsomme sygdomme føres ind i landet eller herfra føres til andre lande, forestås af en karantænekommission.

Stk. 2. Karantænekommissionerne består af landfogden (politimesteren) som formand og ekspederende medlem, chefen for Føroya gjaldstovu (Færøernes oppebørselskontor) og landslægen.

§ 4.

Kommunelægerne er karantænelæger.

§ 5.

Stk. 1. Toldvæsenet, politiet og havnevæsenet er forpligtet til at bistå karantænekommissionen i udøvelsen af dens pligter ifølge denne anordning.

Stk. 2. Karantænekommissionen kan bestemme, at visse foranstaltninger under nærmere fastsatte betingelser kan iværksættes af kommissionens enkelte medlemmer eller karantænelægerne.

Kapitel 4.

Den karantænemæssige organisation iøvrigt.

§ 6.

Stk. 1. Det påhviler hjemmestyret efter forhandling med karantænekommissionen at drage omsorg for, at der til enhver tid er mulighed for på fuldt betryggende måde — som regel på sygehus — at underkaste personer, som ankommer her til landet, isolation i henhold til denne anordnings bestemmelser, og for, at sådanne personer kan underkastes en hensigtsmæssig behandling.

Stk. 2. Indenrigs- og boligministeren kan fastsætte nærmere regler for de i stk. 1 omhandlede forholdsregler.

§ 7.

Stk. 1. Karantænekommissionen skal i det omfang, de anser det for fornødent, ved forhandling med vedkommende myndighed og på anden måde virke for, at antallet af rotter i havne- og lufthavnsområder holdes nede på det mindst mulige, og at bygninger m. v. i havneområderne sikres mod rotter.

Stk. 2. Indenrigs- og boligministeren kan efter forhandling med vedkommende myndighed bestemme, at der i landets havne skal foretages nærmere angivne foranstaltninger mod indvandring af rotter fra ankommende fartøjer og til udryddelse af rotter på havneområdet og i havnen henliggende fartøjer. På samme måde kan indenrigs- og boligministeren træffe bestemelse om foranstaltninger til udryddelse af rotter i lufthavne.

§ 8.

Stk. 1. Indenrigs- og boligministeren kan bestemme, at skibe med regelmæssige mellemrum skal underkastes rotteudryddelse eller til stadighed

holdes i en sådan stand, at rotternes antal ombord er ubetydeligt. Ministeren bestemmer, i hvilke havne undersøgelse for og udryddelse af rotter kan finde sted. Undersøgelserne og udryddelserne foretages ved karantænekommissionens foranstaltning efter regler fastsat af ministeren. Karantænekommissionen udsteder vederlagsfrit bevis for, at undersøgelse er foretaget med det resultat, at udryddelse ikke skal finde sted (fritagelsescertifikat), eller for at rotteudryddelse er foretaget (rotteudryddelsescertifikat).

Stk. 2. Regler om certifikaternes indhold, gyldighedsperiode m. v. fastsættes af ministeren.

Indenrigs- og boligministeren kan i det omfang, det skønnes fornødent, bestemme, at luftfartøjer skal underkastes rotteudryddelse, og fastsætte nærmere regler herfor.

§ 9.

De i §§ 7 og 8 iøvrigt i denne lov fastsatte bestemmelser vedrørende rotter kan i påkommende tilfælde også bringes til anvendelse overfor andre gnavere og i det hele overfor dyr, der er kendt som spredere af smitsomme sygdomme.

§ 10.

Indenrigs- og boligministeren kan bestemme, at lufthavne med betydelig international trafik skal være sundhedslufthavne. For at en lufthavn kan være sundhedslufthavn, skal der være truffet ordning med hensyn til en lægetjeneste, der har undersøgelseslokaler og fornødent udstyr til rådighed. Indenrigs- og boligministeren kan iøvrigt give forskrifter om det karantænemæssige udstyr m. v. i sundhedslufthavne.

§ 11.

Stk. 1. Når der foreligger meddelelse om, at der på et lokalområde i udlandet er forekommet tilfælde af en smitsom sygdom, kan indenrigs- og boligministeren bestemme, at området anses som smittet med den pågældende sygdom.

Stk. 2. Hvis der ikke for vedkommende lokalområde er truffet foranstaltninger til at bekæmpe sygdommens udbredelse, kan også tilstødende lokalområder erklæres for smittet.

Stk. 3. Indenrigs- og boligministeren bekendtgør, når pågældende lokalområde ikke længere betragtes som smittet.

Kapitel 5.

Almindelige forskrifter.

§ 12.

Alle karantæneforanstaltninger skal påbegyndes hurtigst muligt og tilendebringes uden unødig forsinkelse.

§ 13.

Stk. 1. Desinfektion, desinsektation, udryddelse af rotter og andre karantæneforanstaltninger skal udføres således, at de ikke

a) medfører unødig ulempe for nogen person eller fare for nogens helbred,
b) forvolder skade på skibet eller luftfartøjet eller
c) medfører brandfare.

Stk. 2. Ved iværksættelse af karantæneforanstaltninger overfor gods, bagage m. v. skal der udvises størst mulig forsigtighed for at undgå beskadigelse.

Stk. 3. Indenrigs- og boligministeren kan fastsætte nærmere regler for desinfektion og desinsektation af skibe og luftfartøjer, samt for desinfektion og eventuel destruktion af dyr, gods, snavset linned m. v., som frembyder fare for udbredelsen af smitsomme sygdomme.

Stk. 4. På forlangende af karantænekommissionen er den, der er ansvarlig for befordringsmidlet, forpligtet til i det omfang, det er muligt, at lade besætningen yde bistand ved iværksættelsen af karantæneforanstaltninger i henhold til denne anordning.

§ 14.

Stk. 1. Karantænekommissionen udsteder efter derom fremsat begæring til fragtføreren vederlagsfrit attest (karantænebevis) om, hvilke foranstaltninger skibe og luftfartøjer har været underkastet i henhold til denne anordning, hvilke dele af befordringsmidlet foranstaltningerne er truffet overfor, den anvendte fremgangsmåde og grunden til, at foranstaltningerne er iværksat. For luftfartøjers vedkommende skal attesten efter begæring påføres den for luftfartøjet udfærdigede almindelige deklaration (»General Declaration«).

Stk. 2. Karantænekommissionen udsteder efter derom fremsat begæring vederlagsfrit attest

a) til enhver rejsende om datoen for hans ankomst og afrejse samt om de foranstaltninger, han og hans bagage har været underkastet;
b) til afsenderen, modtageren og fragtføreren eller disses agenter om de foranstaltninger, gods har været underkastet.

§ 15.

Stk. 1. En person, der er underkastet tilsyn, må ikke isoleres, men har tilladelse til at færdes frit. Det kan dog forlanges, at han skal melde sig til sundhedsmyndighederne til bestemte tidspunkter i den periode, hvori han er underkastet tilsyn. Sundhedsmyndighederne kan derhos lade den pågældende undersøge af læge og forlange yderligere oplysninger, der måtte være nødvendige for at konstatere hans helbredstilstand.

Stk. 2. Dersom en person, der er underkastet tilsyn, ønsker at rejse til et andet sted i eller udenfor landet, skal han give underretning herom til vedkommende sundhedsmyndigheder, som straks giver sundhedsmyndighederne på ankomststedet meddelelse om hans komme. Ved ankomsten skal den pågældende melde sig til sundhedsmyndighederne, der kan træffe de i stk. 1 omhandlede forholdsregler.
Stk. 3. Indenrigs- og boligministeren kan fastsætte nærmere regler om det i nærværende paragraf omhandlede tilsyn.

§ 16.

Karantænekommissionen kan tage alle praktisk gennemførlige forholdsregler for at hindre, at der fra skibe foretages udtømning af latrin og affald, som kan gøre vandet i havne o. lign. smitteførende.

§ 17.

Fra luftfartøjer under flyvning over territoriet må ikke nedkastes eller udtømmes noget, der kan forårsage smitsomme sygdomme.

§ 18.

Indenrigs- og boligministeren fastsætter nærmere regler for karantæneforanstaltningerne mod de enkelte smitsomme sygdomme. Ministeren kan herunder fastsætte, under hvilke betingelser skibe og luftfartøjer skal anses for henholdsvis smittet, mistænkt for at være smittet og smittefri.

Kapitel 6.

Karantæneforanstaltninger ved afrejse.

§ 19.

Stk. 1. Indenrigs- og boligministeren kan, når det skønnes påkrævet for at hindre, at smitsomme sygdomme føres herfra til andre lande, bestemme, at personer på rejse til udlandet skal undersøges af læge før deres afrejse. Tid og sted for undersøgelsen skal fastsættes under hensyntagen til toldundersøgelse m. v., således at forsinkelse af afrejsen såvidt muligt undgås.
Stk. 2. Karantænekommissionen skal tage alle praktisk gennemførlige forholdsregler for at hindre,

a) at en person, som er smittet eller mistænkt, rejser ud af landet, og
b) at smitstof, som kan forårsage en smitsom sygdom, overføres til skibe eller luftfartøjer, på vej til udlandet.

Stk. 3. Uanset bestemmelsen i stk. 2 a) må karantænekommissionen dog ikke hindre, at en person, der er på international rejse, og som ved ankomsten her til landet er blevet underkastet tilsyn, fortsætter sin rejse, Dersom han fortsætter rejsen ad luftvejen, skal karantænkommissionen i den for luftfartøjet udfærdigede almindelige deklaration (»General Declaration«) anføre, at han har været underkastet tilsyn.

Kapitel 7.

Gennemrejse.

§ 20.

Skibe, der passerer søterritoriet uden at anløbe eller sætte sig i forbindelse med havne eller kyster, er ikke underkastet karantæneforanstaltninger.

§ 21.

Karantænekommissionen må ikke iværksætte anden karantæneforanstaltning end lægeundersøgelse overfor

a) et smittefrit skibs passagerer og besætning, som forbliver ombord,
b) et smittefrit luftfartøjs passagerer og besætning, som forbliver i et af karantænekommissionen anvist særligt lokale i lufthavnen.

Kapitel 8.

Karantæneforanstaltninger ved ankomst.

§ 22.

Stk. 1. Et skib eller luftfartøj, som ankommer her til landet, må udenfor nødstilfælde ikke have samkvem med land, før der af karantænekommissionen eller den, som karantænekommissionen bemyndiger dertil, er meddelt tilladelse til frit samkvem.

Stk. 2. Før tilladelse til frit samkvem er meddelt, må uden karantænekommissionens tilladelse ingen ombordværende gå eller sættes i land på territoriet og ingen person på territoriet gå ombord; personer, som uberet tiget er gået ombord, er underkastet de samme forholdsregler som skibets eller luftfartøjets besætning og passagerer. Endvidere må skibet eller luftfartøjet ikke losse oller laste gods eller forråd eller indtage brændstof eller vand uden tilladelse fra karantænekommissionen; indenrigs- og boligministeren kan give nærmere forskrifter for meddelelsen af sådan tilladelse.

Stk. 3. Toldvæsenet påser, at tilladelse til frit samkvem er meddelt.

§ 23.

Stk. 1. Ved ankomsten af et skib skal føreren og, dersom der er skibslæge ombord, tillige denne meddele karantænekommissionen eller den, som optræder på kommissionens vegne, oplysning om sundhedstilstanden ombord under rejsen og på ankomsttidspunktet. Ved ankomsten af et luftfartøj skal føreren eller hans befuldmægtigede meddele tilsvarende oplysninger. Indenrigs- og boligministeren kan fastsætte nærmere regler for, hvilke oplysninger der skal meddeles, samt på hvilken måde oplysningerne skal meddeles; ministeren kan efter forhandling med landsstyret give særlige forskrifter om, under hvilke former skibe og luftfartøjer skal give underretning om, at de kommer fra eller har haft forbindelse med et smittet lokalområde eller ombord har eller har haft sygdomstilfælde, der kan formodes at være en smitsom sygdom.

Stk. 2. Dersom skibet eller luftfartøjet må anses for smittefrit, skal der straks meddeles tilladelse til frit samkvem, dog at der altid forinden kan foretages lægeundersøgelse. Når det er muligt, skal tilladlse til frit samkvem gives pr. radio, dersom karantænekommissionen på grundlag af meddelelser, modtaget fra skibet eller luftfartøjet før dets ankomst, skønner, at ankomsten ikke vil medføri risiko for indførelse af smitsomme sygdomme her til landet.

Stk. 3. Må skibet eller luftfartøjet anses for smittet eller mistænkt for at være smittet, må illadelse til frit samkvem ikke meddeles, før der har været foretaget lægeundrøgelse, og de karantæneforanstaltninger, der forlanges af karantænekommissionen med hjemmel i denne anordning eller i bestemmelser,fastsat af indenrigs- og boligministeren i henhold til anordningen, er tilfredsstillende gennemført.

§ 24.

Stk. 1. For de i regelmæssig fart gående skibe og luftfartøjer kan der af indenrigs- og boligministeren tilstås lempelser i de i §§ 22 og 23 indeholdte bestemmelser. Det samme gælder for lodsbåde, bugserskibe, fiskerbåde og andre mindre fartøjer.

Stk. 2. Ligledes bestemmer indenrigs- og boligministeren, hvilke lempelser, der kan tilstås krigsskibe og militære luftfartøjer.

§ 25.

Stk. 1. Karantænekommissionen kan foranledige ethvert skib eller luftfartøj samt enhver person, der ankommer fra Danmark eller udlandet, underkastet lægeundersøgelse. Indenrigs- og boligministeren kan bestemme, at sådan undersøgelse skal foretages.

Stk. 2. Bestemmelse om andre karantæneforanstaltninger skal tages under hensyn til de under rejsen og på tidspunktet for lægeundersøgelsen herskende forhhold.

§ 26.

Karantænekommissionen kan bestemme, at en person, der ankommer her til landet med et skib eller luftfartøj og som af kommissionen anses for smittet, skal underkastes isolation. Forlanges det af den, der er ansvarlig for befordringsmidlet, skal en sådan person fjernes fra dette.

§ 27.

Stk. 1. Karantænekommissionen kan foranledige enhver mistænkt, der ankommer her til landet fra et smittet lokalområde, underkastet tilsyn. Sådant tilsyn kan vedvare til udløbet af inkubationstiden for vedkommende smitsomme sygdom.

Stk. 2. Hvor andet ikke følger af særlige bestemmelser, udfærdiget i henhold til denne anordning, må tilsyn ikke erstattes af isolation, medmindre karantænekommissionen skønner, at der foreligger ganske særlig fare for overførelse af smitte.

§ 28.

Indenrigs- og boligministeren kan, når det skønnes påkrævet for at hindre en smitsom sygdoms indførelse og udbredelse her i landet, bestemme, at der skal tilbydes personer, som ankommer her til landet, vaccination, således at de, såfremt de nægter at lade sig vaccinere, kan underkastes tilsyn eller isolation.

§ 29.

Bortset fra lægeundersøgelse må ingen karantæneforanstaltning, som er blevet anvendt i en tidligere anløbet havn eller lufthavn, gentages her i landet, medmindre

a) der efter skibets eller luftfartøjets afrejse fra vedkommende havn eller lufthavn i denne eller ombord på skibet eller luftfartøjet er indtruffet hændelser af epidemiologisk betydning, der berettiger til yderligere anvendelse af den pågældende foranstaltning, eller
b) karantænekommissionen anser det for ganske øjensynligt, at den anvendte foranstaltning ikke har været virksom.

§ 30.

Et skib eller et luftfartøj må ikke af karantænemæssige grunde hindres i at søge forbindelse med nogen havn eller lufthavn. Dersom havnen eller lufthavnen ikke er udstyret således, at de karantæneforanstaltninger, som karantænekommissionen anser for nødvendige, kan iværksættes, kan skibet — eller luftfartøjet, såfremt de operationelle forhold tillader det — dog beordres til at fortsætte for egen regning og risiko til en havn eller lufthavn, hvor de nødvendige foranstaltninger kan iværksættes, og som er hensigtsmæssigt beliggendi for skibet eller luftfartøjet.

§ 31.

Et luftfartøj skal ikke betragtes som værende kommet fra et smittet lokalområde, blot fordi det på rejse over smittet territorium er landet i en sundhedslufthavn, som ikke selv er et smittet lokalområde.

§ 32.

En person ombord i et luftfartøj, som har overfløjet et smittet lokalområde, må ikke betragtes som værende kommet fra et sådant lokalområde, såfremt luftfartøjet ikke har foretaget landing dér, eller han, dersom landing er foretaget, har underkastet sig de foranstaltninger, der har været truffet af karantænemyndighederne på stedet for at hindre, at han udsættes for smitte.

§ 33.

Et skib eller luftfartøj, som ikke vil underkaste sig de af karantænekommissionen i henhold til nærværende lov givne forskrifter, skal have ret til omgående at fortsætte rejsen, men det må ikke på den videre rejse have forbindelse med nogen anden havn eller lufthavn her i landet; det skal dog have ret til under iagttagelse af de forsigtighedsforanstaltninger, som karantænekommissionen måtte finde det nødvendigt at påbyde, at indtage brændstof, vand og forråd.

§ 34.

Dersom et skib strander, eller et luftfartøj nødlander, kan karantænekommissionen tage enhver rimelig forholdsregel, men i intet tilfælde videregående forholdsregler end sådanne, der har hjemmel i denne anordning eller i de i henhold til denne anordning udfærdigede bestemmelser.

Kapitel 9.

Karantæneforanstaltninger overfor gods, bagage og post.

§ 35.

Stk. 1. Gods må kun underkastes karantæneforanstaltninger, når karantænekommissionen har grund til at antage, at det kan være forurenet med smitstof, der kan forårsage en smitsom sygdom, eller at det kan være egnet til at sprede sådan sygdom.

Stk. 2. Transitgods — bortset fra levende dyr —, der ikke omlades, må ikke underkastes karantæneforanstaltninger eller tilbageholdes i nogen havn eller lufthavn, medmindre indenrigs- og boligministeren har fastsat særlige regler om foranstaltninger overfor sådant gods.

§ 36.

Bagage må kun underkastes desinfektion og udryddelse af insekter, når den tilhører en rejsende, der er smittet eller mistænkt, eller der i bagagen findes effekter, der er smitteførende for en smitsom sygdom, eller insekter, der er eller kan være smittebærere for en sådan sygdom.

§ 37.

Post, aviser, bøger og andre tryksager må ikke underkastes nogen karantæneforanstaltning; dog kan indenrigs- og boligministeren træffe bestemmelse om karantæneforanstaltninger overfor postpakker, hvis indhold kan antages at være forurenet med smitstof, der kan forårsage en smitsom sygdom, eller kan antages at være egnet til at sprede sådan sygdom.

Kapitel 10.

Forskellige bestemmelser.

§ 38.

Under forudsætning af gensidighed kan indenrigs- og boligministeren indgå særlige aftaler med et eller flere lande om lempelse i de i nærværende anordning omhandlede foranstaltninger.

§ 39.

Indenrigs- og boligministeren kan fastsætte nærmere regler for ind- og udførsel af lig og transport her i landet af sådanne lig.

§ 40.

For bistand ved foranstaltninger i henhold til denne lov tilkommer der lægen, forsåvidt han ikke er særskilt lønnet som karantænelæge, en af indenrigs- og boligministeren fastsat godtgørelse. Lægen er derhos berettiget til befordringsgodtgørelse beregnet efter de for embedslæger fastsatte takster. Der kan endvidere efter indenrigs- og boligministerens bestemmelse tillægges lægen time- og dagpenge efter de for embedslæger gældende regler.

§ 41.

Udgifterne ved tilvejebringelse og opretholdelse af de i § 6 omhandlede isolationsmuligheder påhviler landskassen. På samme måde udredes forskudsvis, men mod refusion fra statskassen, udgifterne til behandling og pleje af personer, der underkastes isolation i henhold til denne lovs bestemmelser, og til de dødes begravelse eller ligbrænding, forsåvidt disse udgifter ikke efter det følgende skal afholdes af skibet eller luftfartøjet; udgifterne til behandling og pleje af isolerede refunderes efter en af inden-

rigs- og boligministren fastsat takst. Indenrigs- og boligministeren fastsætter efter forhandling med vedkommende myndigheder, hvorledes udgifterne til de i § 7, stk. 2, omhandlede foranstaltninger vil være at udrede. Alle andre udgifter til karantænevæsenet — herunder til foransaltninger påbudt med hjemmel i denne anordning — afholdes af statskassen efter regler fastsat af indenrigs- og boligministeren, dog med følgende undtagelser:

a) Skibet eller luftfartøjet afholder udgifterne til undersøgelse for og udryddelse af rotter efter regler, fastsat af indenrigs- og boligministeren;
b) skibet eller luftfartøjet afholder udgifterne til de i § 33 omhandlede foranstaltninger;
c) et skib eller luftfartøj, der efter karantænekommissionens skøn kun anløber eller foretager landing for at landsætte syge eller lig, afholder selv udgifterne til eventuelle karantæneforanstaltninger; statskassen afholder dog udgifter til lægeundersøgelse og til andre supplerende undersøgelser, der er nødvendige for at konstatere en undersøgt persons helbredstilstand;
d) i de under c) omhandlede tilfælde afholder skibet eller luftfartøjet udgifterne til de syges behandling og pleje og til de dødes begravelse eller ligbrænding;
e) de udgifter, som bestemmelserne i denne lov medfører i strandingstilfælde, afholdes af strandingsmassen, såvidt den tilstrækker;
f) de udgifter, som fremkommer ved, at personer i strid med anordningen er gået ombord i et skib eller luftfartøj, afholdes af pågældende selv og kan inddrives ved udpantning;;
g) udgifter, som, efter at de i henhold til reglerne i denne anordning isolerede patienter er udskrevne eller døde, måtte medgå til isolation af personalet på vedkommende sygehus eller af andre, der har været i berøring med vedkommende patient, afholdes efter reglerne i den til enhver tid gældende anordning om foranstaltninger mod udbredelse af smitsomme sygdomme.

§ 42.

Statskassen udreder ikke erstatning for skade og tab som følge af de i denne anordning omhandlede foranstaltninger.

§ 43.

Stk. 1. Overtrædelse af de i denne anordning indeholdte forskrifter eller de i medfør af samme givne påbud anses med bøde, hæfte eller med fængsel indtil 6 måneder. Sagerne behandles som politisager. Når det skønnes, at straffen ikki vil overstige bøde, er karantænekommissionen berettiget til at modtage den skyldiges tilbud om på stedet at erlægge en bøde for at undgå tiltale.

Stk. 2. Det gods, som i strid med de i medfør af denne anordning givne forbud forsøges indført eller er blevet indført, skal, forsåvidt det ikke bliver at tilintetgøre, konfiskeres til fordel for statskassen. De i henhold til denne paragrafs stk. 1 idømte eller modtagne bøder tilfalder statskassen.

§ 44.

Denne anordning træder i kraft den 1. oktober 1955. Fra samme tidspunkt ophæves lov nr. 4 af 8. januar 1872 om foranstaltninger til at forhindre den asiatiske koleras indbringelse til Færøerne m. m, anordning nr. 20 af 15. april 1872, anordning nr. 31 af 26. marts 1878, bekendtgørelse nr. 115 af 16. oktober 1879, anordning nr. 20 af 27. februar 1882, bekendtgørelse nr. 26 af 25. februar 1897, instruks nr. 27 af 25. februar 1897, anordning nr. 71 af 9. april 1907, lov nr. 177 af 1. april 1921 og lov nr. 58 af 14. marts 1931.

Viðmerkingar:

Caldandi lóg um fyriskipanir at byrgja fyri at smittandi sjúkur koma til landið er lóg nr. 4 av 8. januar 1872 »om foranstaltninger mod den asiatiske koleras indbringelse til Færøerne m. m.« Við heimild í § 7 í hesi lóg eru aðrar epidemiskar sjúkur komnar undir reglur hennara, barnakoppar við fyriskipan av 15. apríl 1872, eksantematisk tyfus við fyriskipan av 26. marts 1878, messlingar og skarlagensfebur við fyriskipan av 27. februar 1882 og meningitis cerebrospinalis við fyriskipan av 9. apríl 1907. Henda lóggáva gevur løgreglu og heilsuvaldi myndugleika til at taka ymisk tiltøk at byrgja fyri, at skip, sum koma frá londum, har hesar epidemisku sjúkur ganga, skulu ikki føra sjúkuna til Føroyar.

Tey ymsu londini hava haft ógvuliga ymiska lóggávu hesum viðvíkjandi til stóran ampa fyri millumlanda skipaferðsluna. Deils út frá tí at fremja eina reglur og deils fyri at gera reglurnar meira tíðarhóskandi hevur millumlanda heilsunevndin (World Health Organisation) har Danmark eisini er limur, jbr. kunngerð nr. 32, 15. juni 1948, 25. mai 1951 gjørt millumlanda karantenureglugerð, sum m. a. Danmark við lóg nr. 67, 31. marts 1953 »om karantæneforanstaltninger mod smitsomme sygdomme« hevur tikið við.

Málsøkið, ið hoyrir undir heilsumál, listi A 4 á heimastýrislógini, er ikki yvirtikið sum sermál. Í § 45 í donsku karantenulógini stendur, at lógin við kongiligari fyriskipan kann setast í gildi í Føroyum.

Málið um nýggja karantenulóg fyri Føroyar, soleiðis at hon verður samsvarandi tí donsku, hevur verið til ummælis hjá landfúta og landslækna, sum báðir mæla til, at reglurnar í Føroyum verða tær somu sum í Danmark.

Fyriliggjandi uppskot til kongiliga fyriskipan er í innihaldinum sum danska karantenulógn, broytingarnar eru formellar.

1. viðgerð 11. februar og 18. mars 1955 legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til »kgl. anordning, hvorved lov nr. 67 af 31. marts 1953 om karantæneforanstaltninger mod smitsomme sygdomme sættes i kraft på Færøerne«.

Fyri at tryggja millumlanda skipaferðsluna, hevur World Health Organisation gjørt millumlanda karantenureglur, ið ger hesa lóggávu meira einsartaða og tíðarhóskandi, og fleiri lond, harímillum Danmark, ið eru limir av hesum felag, hava nú ta somu lóggávu á hesum øki.

Í § 45 í lóg nr. 67 frá 31. marts 1953 »om karantæneforanstaltninger mod smitsomme sygdomme« stendur, at lógin við kongiligari fyriskipan kann setast í gildi fyri Føroyar.

Í Føroyum er galdandi lóg nr. 4 frá 8. januar 1872 við seinri lógum, men sjálvandi eru reglurnar í hesi gomlu lóg ikki tíðarhóskandi.

Landfútin og landslæknin, ið hava haft málið til ummælis, mæla báðir til at seta uppskotið í gildi fyri Føroyar.

Lógarnevndin hevur haft málið til viðgerðar og er samd um at mæla til, at uppskotið verður sett í gildi fyri Føroyar.

Sambart § 3 í lógaruppskotinum verður at seta ein karantenukommissión, ið fyriskipar at byrgja fyri, at smittandi sjúkur koma til landið ella førast út av landinum. Henda kommissión fær sæti í Havn av tí, at í henni koma at sita landfútin, gjaldstovustjórin og landslæknin. Eftir § 4 eru kommunulæknarnir karantenulæknar. Tað verður ivaleyst neyðugt hjá karantenukommissiónini at hava stedligar myndugleikar ella persónar til hjálpar við umsitingini, og heldur nevndin, at tað var rímiligt um brúk varð gjørt av teim karantenubetjentum, ið sitið hava á ymsum plássum eftir tí gomlu karantenuskipanini.

Við hesum viðmerkingum mælir nevndin tinginum til at samtykkja fylgjandi

Uppskot

Løgtingið samtykkir at mæla til, at uppskot landsstýrisins til »kgl. anordning, hvorved lov nr. 67 af 31. marts 1953 om karantæneforanstaltninger mod smitsomme sygdomme sættes i kraft på Færøerne« verður at seta í gildi fyri Føroyar.

2. viðgerð 21. mars 1955.
Uppskot landsstýrisins samtykt 25 -0.

14. Keyp av royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi.

Ár 1955, 10. februar legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg
um lán til keyp av royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at lana upp til kr. 95.000,00 at rinda fyri bygningar, amboð og innistøðu royndarstøðanna í Hoyvík og á Sandi.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov
om lån til køb af forsøgsstationerne i Hoyvík og Sand.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at låne indtil kr. 95.000,00 til betaling af de til forsøgsstationerne i Hoyvík og Sand hørende bygninger, redskaber og besætning.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í eykatingsetuni 1950 (smbr. tingmál nr. 10/1950, tingtíðindi 1950 bls. 22) setti landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um heimild til keyp av bygningum v. m. sum hoyra royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi til. Sýnið sum liggur til grund fyri keypið d. 2. marts 1950 er prentað sum skjal til nevnda tingmál.

Eftir hesum sýni er prísurin settur til kr. 154.455,00. Meirilutin á tingi vildi tá ikki samtykkja eina lógarheimild til landsstýrið, eftirsum eisini teir bygningar v. m. sum hoyrdu royndarstøðini til skuldu fylgja við í yvirtøkuni og fyri onki. Í sonni brævaskifti við ríkisvaldið er prísurin settur niður í um kr. 93.000,00 og í skrivi frá landbúnaðarráðharranum d. 6. marts 1953 verður víst til tekstviðmerking í »lov om tillægsbevilling« fyri fíggjarárið 1951/52 ad § 13, III. U. 13, hareftir landbúnaðarráðharrin, hóast regluna í lóg fyri Føroyar nr. 174 frá 24. mai 1937 »om jordbrugets fremme«, sum tað eitur, kann »delegere sine beføjelser i henhold til sidst-

nævnte lov til de færøske myndigheder, således at den færøske jordfond og statens fæstegods på Færøerne for fremtiden bliver færøsk særanliggende.«

Í sama skrivi biður landbúnaðarráðharrin statsráðharradeildina siga landsstýrinum frá hesum og at landbúnaðarráðharrin fyri sítt viðkomandi »må anse det for et vilkår for den endelige overførelse af fæstegodset og den færøske jordfond, at der opnås enighed om vilkårene for overtagelse af forsøgsvirksomhedens aktiver.«

Sum tað eisini framgongur av løgtingsmáli nr. 10/1950 er landsstýrisins støða tann, at endaligt keypslag er gjørt um tey aktiv sum hoyra royndarstøðunum til, men eftir stendur bert at rinda tey.

So statt loyvir landsstýrið sær at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, so hesin spurningur kann verða endaliga avgreiddur nú.

1. viðgerð 16. februar og 5. apríl 1955 legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um lán til keyp av royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi, soleiðis at landsstýrið fær heimild til at læna upp til kr. 95.000,00 at rinda fyri byggningar, amboð og innistøðu.

Fíggjarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og hevur býtt seg sundur í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (A. Djurhuus, Djóni í Geil, Richard Long og Trygve Samuelsen) ger vart við, at í viðmerkingunum til uppskotið eru tvey mál samankomin, sum eiga at viðgerast hvørt sær:

1) Gjald fyri húsogn, amboð og innstøðn á royndarstøðunum í Hoyvík og Traðardali, sum eru gingnar yvir til føroysk sermál 1. apríl 1950 og
2) yvirtøka av jarðargrunninum og kongsjørðini.

Meirilutin er av tí áskoðan, a thesi mál eiga at verða viðgjørd hvørt sær og mælir tinginum til at samtykkja lógaruppskot landsstýrisins um at rinda gjald fyri húsaogn, amboð og innistøðu á royndarstøðunum í Hoyvík og Traðardali.

Andreas Djurhuus og Trygve Samuelsen ynskja at útlala, at sambandsflokkurin er ímóti yvirtøku av jarðagrunninum og kongsjørðini.

Ein minniluti (Frederik Hansen og Erlendur Patursson) ekjýtur upp, at allar føroyskar jarðaognir, sum nú ern á donskum hondum, verða at yvirtaka beinanvegin.

Ein annar minniluti (J. P. Davidsen) setur fram uppskot um at biðja landsstýrið taka upp samráðingar við ríkisstýrið um framhald av royndarbrúkinum í Føroyum.

I.

Uppskot

frá meirilutanum (A. Djurhuus, Djóna í Geil, R. Long og Trygva Samuelsen):

Lögtingið samtykkir uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um lán til keyp av royndarstøðunum í Hoyvík og á Sandi.

II.

Uppskot

frá minnilutanum (Frederik Hansen og Erlendi Paturssyni):

Løgtingið samtykkir beinan vegin at yvirtaka allar føroyskar jarðaognir, sum nú eru á donskum hondum.

III.

Uppskot

frá minnilutanum (J. P. Davidsen).

Løgtingið samtykkir at biðja landsstýrið taka upp samráðingar við ríkisstýrið um framhald av royndarbrúkunum í Føroyum.

2. og 3. viðgerð 6. apríl 1955.

Uppskot minnilutans (Davidsen) fall 7—0.

Uppskot minnilutans (E. Paturson) fall 6—0.

Uppskot meirilutans samtykt 15—0.

15. Bátalán.

Ár 1955, 10. februar legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg
um lán til útróðrarbátar og minni før.

§ 1.

Landsstýrið fær heimild til landskassans vegna at læna upp í kr. 50.000,00 til vinnulánsgrunnin at nýta til lán til útróðrarbátar og minni før.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov
om lån til åbne både og mindre fartøjer.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage et lån indtil kr. 50.000,00 til vinnulånsgrunnin at anvende som lån til åbne både og mindre fartøjer.

§ 2.

Denne lagtingslov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1953 (Lgt. 1953 s. 110) varð samtykt at biðja landsstýrið kanna møguleikarnar viðvíkjandi finansiering av bátalánum og bygging av skúrum.

Eftirsum landsstýrið helt, at tyngdin í hesum máli var at útvega lán til útróðrarbátar til útróðurs í Grønlandi, varð samráðst við Grønlandsfelagið, um at hetta felag finansieraði lán til hesar bátar. Hetta felag gjørdi útvegir fyri, at 32 bátar komu at rógva út frá Føroyingahavnini við um leið 125 monnum. Herumframt stílaði annað útgerðarfelag við skonnartini »Tinganes« fyri útróðri frá Ravns Stóroyggj eisini við 32 bátum og sama tali av monnum, soleiðis at í 1954 vóru alt o. u. 250 manns til útróðurs í Grønlandi við 64 bátum. Eftir avtalu við figgjarnevndina veðhelt landskassin fyri 50.000 kr. av útgerðarláni til felagið »Tinganes«, meðan tilsvarandi veðhald til Grønlandsfelagið ikki varð nýtt.

Meðan landsstýrið soleiðis hevur haft høvi til at stuðla undir útróðurin í Grønlandi við landskassans vegna at veðhalda fyri útgerðalánum, hevur landsstýrið ikki haft møguleikar til at gingið teimum á møti, sum søkt hava um lán til bygging av útróðrarbátum ella lán til motorkeyp. Landsstýrið hevur ikki haft heimild til úr landskassanum at veita tørvandi

lán, og vinnulánsgrunnurin er ikki so fyri, at hann er førur fyri at veita nýggj lán.

Eftirsum tað óivað er tørvur á at kunna veita smábátalán, og eftirsum hesi lán í nógvum førum illa kunnu útvegast frá bankum, legði landsstýrið málið fyri fíggjarnevndina við tilmæli um, at landsstýrið fekk heimild til landskassans vegna at læna upp í kr. 50.000,00 at læna út aftur til smábátar. 13. oktober 1954 samtykti nevndin hesum, tó soleiðis at umsitingin av hesum lánum varð løgd undir realkredittstovnin.

Síðani tað dregur út við nevnda stovni, og tíðin nærkast til útróðurin í Grønlandi, verður mælt til, at vinnulánsgrunnurin í hvussu er fyri fyrst situr fyri hesum lánum.

1. viðgerð 15. februar og 28. februar legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Fíggjarnevndin hevur haft málið til umhugsunar og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot við teirri viðmerking, at lænt kann verða til bátabygging yvirhøvur og ikki bert til útróðrarbátar til Grønlands.

2. viðgerð 28. februar og 3. viðgerð 1. mars 1955.

Uppskot landsstýrisins samtykt 19—0.

---

16. Vegir og lendingar.

Ár 1955, 10. februar legði J. P. Davidsen løgtingsmaður fram soljóðandi framløguskriv:

Sandur t. 25/11 1954.

Til Føroya løgting,
Tórshavn.

Søknarstýrið vil her loyva sær at søkja til tingið um studning til framhald av at gera vegin Sand—Skopun breiðari.

Henda breiðkan er farin fram í nøkur ár og vísir tað seg, at hesin vegur hevur nógvar fyrimunir fram um tann gamla vegin; til dømis er hann

nógv ódýrari at halda viðlíka, er betri at halda seg á vegnum í kava hjá bilum og bilar kunnu ótarnaðir møtast.

Sum tað er tinginum kunnugt, verður ógvuliga nógv koyrt eftir hesum vegi, so tað er avgjørt neyðugt, at allur vegurin einaferð verður gjørdur breiðari.

Vegurin Traðir—royndarbrúkið fer nú ikki at vanta nógvar hundrað metrar í til hann er liðugur, tá arbeitt er fyri tann seinasta studningin uppá 5.000 kr.

Eftir hvat vit kunnu ætla vera tá ca. 200 m eftir at gera og vilja vit søkja tingið um studning til hetta.

Tað skal viðmerkjast, at tað hevur hent, at vegurin vestanfyri frá bygdini og til Skopunar hevur verið ófarbarur av kava samtíðis sum bilar hava kunnað koyrt frá Trøðum um royndarbrúkið til Skopunar.

Sóknarstýrið fyri Sands sóknar kommunu.

1. viðgerð 14. februar og 4. apríl legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

Álit

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt umsóknir, sum innkomnar eru viðvíkjandi vega- og lendingamálum.

Talið á umsóknum, sum viðgjørdar eru, er um 55.

I. Vegir.

Á uppskotinum til fíggjarløgtingslóg vóru bert avsettar 185.000 kr. til nýggjar vegir. Av hesum peningi helt nevndin ikki verða gjørligt at játta til aðrar vegir enn samferðsluvegirnar; men við tað at fíggjarnevndin hevði játtað at taka til umhugsunar at seta meir av á fíggjarlógini til vegabygging, hevur havna- og veganevndin bíðað við at geva sítt álit, til avgerð fyrilá viðvíkjandi støddini á játtanini til vegir.

Fíggjarlógin er nú lýst, og eru har settar av til nýggjar vegir og brýr 385.000 kr. Tá soleiðis er, heldur nevndin rættast verða eisini at veita nakað av studningi til dyrkingarvegir o. aðr.

Samferðsluvegir.

Higartil hevur verið játtað í smáum til allar samferðsluvegir, sum eru í gerð; men nevndin er sinnað til at broyta hesa mannagongd, og, sum skotið upp í hjáløgdu »Frágreiðing og tilmæli viðvíkjandi vegabyggingini« frá landsverkfrøðinginum, nýta peningin til at gera ávísar vegir lidnar burturav.

Í áðurnevndu »Frágreiðing og tilmæli viðvíkjandi vegabyggingini«

verður tilmælt at seta av o. u. 300.000 kr. um árið í 6 ár til at gera hesar vegir lidnar fyri:

Hósvík—Hvalvík,
Hvalvík—Haldórsvík,
Eiði—Gjógv—Funning,
Skála—Skálabotn,
Strendur—Morskranes,
Vegin oman á Hulk,
Kollafjørð—Hósvík,
Skipanes—Skálabotn.

Annars verður í frágreiðingini sagt:

»Ivaleyst eru flest allir á einum máli um, at teir vegirnir, sum flest fólk fáa gleði av, eru Oyggjarvegurin, og vegurin Hov—Ørðavík, og at vit tí átlu at roynt at framt byggingina av teim skjótast gjørligt.

Men søðan er tann, at landsstýrið í samsvari við samtykt í løgtingsmáli 31/1953: Peningaílegging til samferðsluvegir, hevur sett seg í samband við ríkisstýrið viðvíkjandi møguleikanum fyri, at ríkiskassin letur ein part av byggipeninginum tl Oyggjarvegin, vegin Hov—Ørðavík, vegin Tvøroyri—Hvalba og møguligt Fjarðavegin.

Spurningurin um nær farið skal verða undir hesar vegir, sum eru mettir at kosta tilsamans o. u. 4,5 mill. krónur, eigur tí at støðga, til úrslit er komið burtur úr samráðingum við ríkisstýrið og má í øllum førum bíða, til grundarlag er funnið fyri eini financieringsskipan.«

Nevndin er samd í hesum sjónarmiði, tí sjálvt um møguleikin fyri at fáa ríkisstudning til hesar vegir í bræði kanska ikki er tann størsti, mugu útvegir gerast fyri eini serligari financieringsskipan; peningaíleggingin í hesar vegir er so stór, at skulu teir takast undir sama byggiplan sum hinir vegirnir við eini árligari peningaílegging uppá 300.000 kr., verða teir samferðsluvegir, sum eru í gerð, ikki lidnir fyrr enn um 25—30 ár.

Við tað at á fíggjarløgtingslógini, sum nú er samtykt, eru, sum áður nevnt, avsettar 385.000 kr., t. e. 200.000 kr. meir enn á uppskotinum, er nevndin tó sinnað til í ár at veita smærri studningar eisini til teir vegir, sum ikki eru ætlaðir at koma við í fyrsta byggiplani.

Sambært tí í álitinum framførda skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

A. Tingið samtykkir at nýta 260.000 kr. av játtanini til nýggjar vegir og brýr á fíggjarløgtingslógini 1955/56, og fylgjandi 5 ár at seta av á fíggjarløgtingslógunum 300.000 kr. hvørt árið til at gera hesar vegir lidnar fyri:

Hósvík—Hvalvík,
Hvalvík—Haldórsvík,
Eiði—Gjógv—Funning,
Skála—Skálabotn,
Strendur—Morskranes,
Vegin oman á Hulk,
Kollafjørð—Hósvík,
Skipanes—Skálabotn.

B. Tilí niðanfyri nevndu vegir verða veittir hesir studningar:

Kommuna:	Studningurin er til:	studningur ¾ av kr.
Hvannasunds	Samferðsluvegir	10.000
Haldórsvíkar	Vegin Tjørnuvík—Vík	10.000
Kvívíkar	Vegin Leynar—Skæling	10.000
Húsavíkar	Dal—Húsavík	25.000
Sands	Breiðkan av vegnum Sand—Skopun	10.000
Hvalbiar	Sandvík—Hvalbø	10.000
	tilsamans ¾ av kr.	75.000

C. *Nýjáttanir til dyrkingarvegir.*

Kommuna:	Studningurin er til:	studningur ¾ av kr.
Oyndarfjarðar	Framhald av Prestbøvegnum	8.000
Nes	Vegur inn eftir bakkanum í Søldarfirði	5.000
—	Ovara veg á Glyvrum	5.000
Eiðis	Vegur »út á Bø«	5.000
Kaldbaks	Brúgv um Krossá	3.000
Kirkjubøar	Framhald av vegi gjøgnum høin á Velbastað	5.000
Miðvágs	Dyrkingarveg	5.000
Sandavágs	Dyrkingarveg	5.000
Froðbiar	Kolveg í Rangahotni	20.000
Hóvs	Dyrkingarvegir	10.000
Vágs	Veg til Fámará	10.000
—	Dyrkingarveg á Nesi	5.000
Sumbiar	Veg á Øgrum	2.000
	Tilsamans ¾ av kr.	88.000

II. *Lendingar.*

Eldri játtanir, sum framvegis eru galdandi:

¾ av kr. 80.000 — kr. 60.000

Studningar, sum játtaðir eru áður, men komnir í gildi 1. apríl í ár:

¾ av kr. 84.000 — kr. 63.000

Tilsamans kr. 123.000

Til lendingar er enggin peningur tøkur uttan tær 200.000 kr., ið játtaðar eru á fíggjarløgtingslógini 1955/56.

Til nýjáttanir eru soleiðis bert 77.000 kr. tøkar; men við tað at helst ikki øll arbeiðini verða framd komandi ár, verður neyvan peningatrot, um nýjáttanirnar fara eitt sindur upp um hesa peningahædd. Nevndin hevur tí loyvt sær at skjóta upp nýjáttanir, sum tilsamans verða 128.250 kr.

Áðurnevndu studningar fyri 1955/56, sum játtaðir eru áður, eru hesir:

Kommuna	Studningurin er til	Studningur ¾ av kr.
Mikladals	Rennistrong í Mikladali (3 ára játtan í tingsetuni 1952/53)	9.000
Skála	Lendingarbrúgv á Skála (3 ára játtan í tingsetuni 1952/53)	25.000
Miðvágs og Sandavágs	Bryggja í Miðvági (¾ av kr. 50.000 um árið í 2 ár, játtað í tingsetuni 1953/54)	50.000
	Tilsamans ¾ av kr.	84.000

Til tær játtanir, sum tilmældar eru í uppskotinum niðanfyri skal nevndin gera hesar viðmerkingar:

1. Játtanin til Leirvíkar kommunu verður at rokna sum uppískoyti til játtanina uppá 50 % av 275.000 kr. undir 10 ára havnaætlanini, soleiðis at henda játtan verður ein 75 % játtan.
2. Tann studningur, sum er og nú verður játtaður til atleggingarpier á Skála, svarar til helvtina av byggipeninginum. Nevndin hevur hugsað sær, at henda játtan verður økt seinri til 75 % av byggipeninginum, antin við eykajáttan á eini havnaætlan ella sum framhald av játtanum undir lendingum, tá ið tann studningur, sum játtaður er, er goldin.

Nevndin skal loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

Kommuna	Studningurin er til	Studningur ¾ av kr.
Fugloyar	Afturat til rennistrong á Kirkju og til brimverjugarð í Hattarvík (¾ av 8.000 kr. um árið í 2 ár)	8.000
Svínoyar	Motorspæl til bátadrátt	8.000
Kunoyar	Elektrisk spæl til lendingina í Kunoy	8.000
	Leingjan av lendibrúnni í Haraldsundi (fyribilsjáttan ¾ av 12.000 kr. fyri 1955/56 og ¾ av 18.000 kr. fyri 1956/57)	12.000
Húsa	Lending og bátadrátt á Syðradali; gjørt er fyri 18.000 kr. (¾ av 8.000 um árið í 5 ár) ...	8.000
Leirvíkar	Piorur í Leirvík (¾ av 23.000 kr. um árið í 4 ár)	23.000
Gøtu	Afturat til brimgarðin (bátahylin) í Syðrugøtu (¾ av 15.000 kr. um árið í 4 ár)	15.000
Nes	Ábøtur á lending og drátt í Æðuvík	6.000
Skála	Atleggingarpier á Skála (¾ av 40.000 kr. um árið í 5 ár)	40.000
Haldórsvíkar	Ábøtur á dráttrinum	1.000
Vestmanna	Til part av strandveg uttanfyri bryggjuna (¾ av 10.000 kr. um árið í 2 ár)	10.000
Sandavágs	Lendingarábøtur á Slættanesi	2.000
Skálavíkar	Brimgarð í Skálavík	10.000
Sunnbiar	Bryggja í Lopra (¾ av 20.000 kr. um árið í 2 ár)	20.000
	Tilsamans ¾ av kr.	171.000

Frágreiðing og tilmæli viðvíkjandi vegabyggingini.

Longdin á gjørdum samferðsluvegum í Føroyum er nú tilsamans o. u. 335 km; av hesum eru o. u. 235 km lidnir vegir, t. e. teir knýta saman tvær ella fleiri bygdir; meðan restin o. u. 100 km eru stubbar, sum lítlan ella ongan týdning hava fyri samferðsluna. Tað eru út móti 30 stubbar í 20 kommunum.

Málið er sjálvandi eittans: at binda hesar stubbar saman, so skjótt tann fíggjarliga orkan loyvir tað og helst skjótast gjørligt; men leiðirnar eru tvinnar:

antin verður skipað soleiðis, at hvør kommuna fær høvi til at leingja sín stubba (ella sínar stubbar) á hvørjum ári

ella soleiðis, at stubbarnir verða bundnir saman frá einum enda av og byrjað verður har minst frestar og har vegasambandið hevur størstan týdning.

Fyrra skipanin er hon, sum nýtt hevur verið seinastu 20 árini; men umstøðurnar hava ígjøgnum árini verið fyri so miklari broyting, at spurningur er, um ikki løtan er komin til at skifta leið í vegabyggingini.

Fyrimunirnir fyri galdandi skipan eru:

at so nógvar kommunur sum gjørligt í so nógv ár sum møguligt hava vegarbeiði at vísa fólki til sum ítriv um várarnar og heystarnar, tá tíðan lítið er at vinna á annan hátt,

at kommunan fær lættligari skatt inn frá teim, sum lítið hava fingið í aðrari vinnu,

at finansieringin av parti kommununnar ikki er nakað problem, tí lántøka verður óneyðug,

og *bágirnir* hesir:

at vegastrekki fyri milliónir av krónum hava ligið nyttuleys ella til lítla nyttu í áravís og verða tey flest øll, um henda skipan heldur fram, at liggja nyttuleys í mong ár afturat,

at hesi vegastrekki falla í órøkt og tí verða at kosta nógvan pening at seta í stand, tá vegurin eina ferð er komin ígjøgnum,

at úrslitið verður í allar mátar vánaligt, tá kommunurnar bert gera eitt petti av veg sum ítriv, tí

a. høvi verður ikki til at fáa arbeiðsvant fólk,

b. ógjørligt verður at seta kvalificeraða leiðslu í øllum støðum samstundis.

c. ógjørligt er og alt ov dýrt vildi verið at útvega nóg mikið av teknisk kvalificeraðum fólki til gjølla projektering og eftirlit av øllum hesum spjaddu byggingum.

Samferðslan er nú eisini vorðin so týðandi táttur í samfelagslívinum, at tað hevur stóran fíggjarliga ntýdning, at vegirnir, í hvussu er stórur partur av teim, eru so væl bygdir og umsitnir, sum gjørligt innan fyri tað mark, fíggjarorkan setur, t. e. at tann byggingarskipan, sum gevur besta arbeiðsúrslit, eigur at verða tann, sum skal fremjast.

Harafturat kemur, at kommunur og landið í felag í seinastu árunum hava útvegað stórt tal av vegabyggingartólum: traktorum, trumlum, kompressarum o. øðr.; um ikki eisini hesi keyp skulu verða peningaspell, er neyðugt, at tólini verða nýtt mest møguligt og flest møguligar vegabygingar fáa gagn úr teim. At flyta við teimum stað úr stað fyri at gera eitt vegapetti her og eitt har er sera trupult og dýrt og tíðan ógjørligt; eisini hetta talar fyri at gera vegirnar lidnar burtur av so hvørt.

Úr verkligum sjónarmiði talar soleiðis nú alt fyri at broyta vegabyggingarskipanina, og úr fíggjarligum sjónarmiði eru eisini størstu fyrimunirnir við eini broyttari skipan.

Økonomiin hjá flestu kommunum, talan er um, er nú toluliga stabiliserað aftaná tær stóru havna-, lendingar- og aðrar byggingar, ið farnar eru fram seinastu árini, so financieringin av kommununnar pørtum við

lántøku skuldi ikki nerva økonomiina hjá kommununum, eins og tað heldur ikki skuldi verið trupult at útvega tey heldur smáu lán, hvør kommuna hevur fyri neyðini.

Spurningur verður so í hvørju raðfylgju vegirnir skulu verða gjørdir liðnir; her verður fyrst og fremst at miða seg eftir tí týdningi, vegurin hevur, (t. e. hvussu nógv, ið fáa gagn av honum) og hvussu langt áleiðis hann er komin, eisini kunnu umstøðurnar verða avgerandi fyri raðfylgjuna, t. d. nær kommunan kann fáa lán, nær arbeiðistólini, sum skulu nýtast, verða tøk o. s. fr.

Tvaleyst eru flest allir á einum máli um, at teir vegirnir, sum flest fólk fáa gleði av, eru Oggjarvegurin, og vegurin Hov—Øravík, og at vit tí áttu at royna at framt byggingina av teim skjótast gjørligt.

Men støðan er tann, at landsstýrið í samsvari við samtykt í løgtingsmáli 31/1953: Peningaílegging til samferðsluvegir, hevur sett seg í samband við ríkisstýrið viðvíkjandi møgulcikanum fyri, at ríkiskassin letur ein part av byggipeninginum til Oyggjarvegin, vegin Hov—Øröavík, vegin Tvøroyri—Hvalba og møguligt Fjarðavegin.

Spurningurin um nær farið skal verða undir hesar vegir, sum eru mettir at kosta tilsamans o. u. 4,5 mill. krónur, eigur tí at støðga, til úrslit er komið burtur úr samráðingum við ríkisstýrið og má í øllum førum bíða, til grundarlag er funnið fyri eini financieringsskipan.

Síðan eru tað vegirnir, sum eru komnir langt áleiðis, og sum synd og skomm og stórt peningaspell er í at lata liggja fyri ongum út í óvissa framtíð. (Vegurin oman á Hulk er tikin við, sjálvt um nústani verður farið undir bann, tí bryggjan har krevur veg fyri at verða rættiliga til gagns).

Hesir vegir eru:

á Streymoynni:

Hósvík—Hvalvík
Hvalvík—Haldórsvík,

í Eysturoynni, norðara parti:

Eiði—Gjógv—Funning

sunnara parti:

Skála—Skálabotn
Strendir—Morskranes
Vegur oman á Hulk.

At gera hesar vegir liðnar, íroknað umvæling ((tó ikki breiðking) av teim higartil gjørdu strekkjum, er leysliga mett at kosta kr. 1.900.000.

Tá hesir vegir eru lidnir, eru tað tvinni vegastrekki, sum troðka á:

Vegurin Kollafjørð—Hósvík og
vegurin Skipanes—Skálabotn

fyri at fáa vegasamband í Norðurstreymoy og rundan um Skálafjørðin.

Hesir báðir vegir eru leysliga mettir at kosta kr. 700.000.

Kostnaður fyri allar hesar vegir, sum frammanundan eru nevndir, verður soleiðis 2.600.000 kr. t. e. løgtingsstudningur verður 1.950.000 kr., herav er tøkt í løtuni o. u. 200.000 kr.

Seta vit ávíst áramál fyri gerð av hesum vegum, t. d. 5 ár, verður neyðugt á fíggjarløgtingslógini í komandi 5 árum at seta o. u. 350.000 kr. á hvørjum ári; verður áramálið 6 ár, verður á fíggjarlógini at seta o. u. 290.000 kr., og verður tað 7 ár, verða 250.000 kr. at seta av.

Eitt av hesum áramálum hevði verið hóskandi tíðarskeið at áseta; fíggjarorkan verður so avgerandi, tí longdin av veg at gera er ikki meir enn ca. 22 km, og sjálvt um harafturat koma long strekkir av gjørdum veg at umvæla, eru 5 ár ikki ov stutt tíð.

Herafturat er tó at siga, at vónandi verður farið undir Oyggjarvegin og vegin Hov—Ørðavík, áðrenn hesin 5, 6 ella 7 ára planur er lokin, so ein má rokna við, at neyðugt verður innanfyri hetta tíðarskeið eisini at avseta pening til studning til hesar báðar vegir. Kanska verður tað eisini neyðugt, um hesir báðir vegirnir koma í gerð innanfyri tey fyrstu árini, toyggja áðurnevnda plan út um tey 5—7 árini, fyri ikki at fáa ov nógv arbeiðisplóss í senn; peningaavsetingin minkar so nakað samstundis.

Grundað í tí, sum her er framført, skal eg tilmæla, at vegastudningurin, sum komandi fíggjarár verður settur av til vegir, ikki verður býttur millum 20—30 kommunur, men allur verður at nýta, so langt hann rekkur, til at gera ein ella fleiri av hesum vegum lidnar við:

Hósvík—Hvalvík,
Hvalvík—Haldórsvík,
Eiði—Gjógv—Funning,
Skála—Skálabotn,
Strendur—Morskranes,
Vegin oman á Hulk,
Kollafjørð—Hósvík,
Skipanes—Skálabotn,

og at samtykt verður, at minst 310.000 kr. skulu setast av á hvørji fíggjarløgtingslóg í fylgjandi 5 árum til omanfyri nevndu vegir, soleiðis at teir kunnu verða lidnir seinast í 1961.

Kemur byggingin av Oyggjarvegnum og vegnum Hov—Ørðavík upp í millum og ger tað neyðugt at seta av pening á fíggjarlógunum til hesi arbeiði, kunnu áður nevndu 5 ár verða broytt til 7 ár, og kann peningaíleggingin hvørt árið verða minkað hareftir.

(sign.) *M. Helmsdal.*

Alit:

Sum tinginum kunnugt eru allar kommunurnar sinnaðar fyri, at gerð av høvuðs- og samferðsluvegunum verður framd skjótast møguligt. Ein umboðsnevnd frá kommununum í Vágoy, Streymoy og Eysturoy hevur havt fund við vega- og bavnanevndina, har teir hava borið hesi ynski fram og samstundis sagt frá, at kommunurnar eru sinnaðar til at taka ábyrgd fyri einum láni við tí endamáli at seta vegagerðina í verk beinan vegin.

Teir vegir, sum talan er um, eru vegirnir

Hovi—Ørðavík
Tvøroyri—Hvalba
Oyggjavegurin
Fútaklett—Oyragjógv
Fjarðavegurin
Kollafjørð—Hvalvík—Haldórsvík
Eiði—Gjógv—Funning
Skála—Skálabotn
Skipanes—Skálaboln
Strendur—Morskranes

Henda vegagerð er av landsverkfrøðinginum mett til 7,1 milj. kr.

Nevndin er samd um, at tað er neyðugt at hesir vegir, ið hava stóran týdning fyri samferðsluna, verða gjørdir skjótast møguligt. Málið eigur at verða kannað og loyst í samarbeiði við kommunurnar. Og nevndin setur tí fram soljóðandi

Uppskot

Landsstýrið verður biðið taka upp samráðingar við kommunurnar um

1. fyrireikingar til upptøku av neyðturvuligum láni, ætlandi ¾ av umleið 7,1 milj. kr.,
2. fyrireikingar av tí í álitinum nevndu vegagerð.

Úrslitið av hesum samráðingum verður at leggja fyri Ólavsøkutingið 1955.

2. viðgerð 4. apríl 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

1) Poul Petersen:

Til punkt A.

Aftrat Skála—Skálabotn verður sett: og Fjarðavegurin.

Til punkt C.

Gjáar kommuna: Framhald av dyrkingarvegi niðan í Omanrættargerði kr. 10.000.

Eiðis kommuna: Framhald av dyrkingarvegi við Ljósá kr. 2.000.

Funnings kommuna: Framhald av dyrkingarvegi fram á gerði kr. 5.000.

2) Jens Chr. Olsen:

Undir II. Lendingar, verður aftaná Æðuvík kr. 6.000 sett:
Til el-spæl í Rituvík kr. 8.000.

3) J. P. Davidsen og E. Patursson:

Undir punkt C verður aftaná Sumbiar
Til Skopun til dyrkingar kr. 10.000.

Broytingaruppskot 1 fall 4—0.

Broytingaruppskot 2 fall 3—0.

Broytingaruppskot 3 fall 4—0.

Uppskot nevndinnar samtykt 17—0.

---

17. Nýtsla av landsskattaeftirstøðu p.f Skipafelagsins til keyp av farmaskipi.

Ár 1955, 10. februar legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi skriv:

P/f Skipafelagið Føroyar fekk í samband við løgtingsmál nr. 59/1948: Løgtingsábyrgd til Skipafelagið Føroyar, lyfti frá løgtinginum

um, at tann skattur, sum varð álíknaður fyri árini 1948, 1949 og 1950 skuldi standa rentufríur til 1. januar 1955, og skuldi tingið so taka støðu til, um hann skuldi verða goldin ella ikki, men skuldi felagið lata skuldabræv fyri hæddina, jbr. løgtingstíðindi 1948, bls. 217.

Felagið hevur latið gjaldstovuni nevnda skuldabræv, dagf. 20/12 1952, stórt kr. 255.834,75.

Gjaldstovan upplýsir, at tann skattur, sum felagið nú skyldar landskassanum, er kr. 222.529,50; aftaná at skuldabrævið varð givið, er broyting gjørd eftir avgerð yvirlíkningarnevndarinnar.

Skipafelagið stendur so statt nú fyri at rinda peningin, men stendir til løgtingið at avgera, um hann skal verða goldin og hvussu, ella um hann kann verða eftirgivin.

Í samband við hesum hevur felagið tann 21. december 1954 sent landsstýrinum soljóðandi skriv:

»Farmasigling.

Tað hevur verið nógv tosað og skrivað um, at fáa Føroyum ein »trampflota«, og nevnd Skipafelagsins er samd um at fara undir hetta so skjótt, vit peningaliga orka tað.

Av tí, at vit hava sostór lán í »Tjaldrinum«, tekur hetta tíð, men vit halda, at líkindi eru til at gera eina byrjan longu nú, og er uppskot okkara hetta: Løgtingið, Skipafelagið Føroyar og aðrir stovna partafelag og fara undir at keypa ella byggja 1 helst 2 bóskandi farmaskip.

Vit halda, at tað vil vera beint av løgtinginum, nú farmagjøldini eru høg og skipaprísirnir tessvegna hækkandi, at selja »Oyrnafjall«, ið er óhóskandi til føroysk viðurskifti, og seta peningin í tílíkt felag saman við tí peningi — stívar 200.000 kr. ið Løgtingið eigur hjá Skipafelagnum.

Felag okkara heldur seg vera fært fyri at seta aðrar 200.000 kr., og so kundi verið teknað nakað av partapeningi aðrastaðni.

Vit rokna við, at danski ríkiskassin vil lána nýggja felagnum tann pening, hann eigur eftir í »Oyrnafjalli« móti veðhaldi í øðrum báti.

Vit biðja háttvirda Landsstýri leggja spurningin fyri Løgtingið, og eru vit til reiðar at koma til munnligar tingingar.«

1. viðgerð 15. februar og 30. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Í samband við løgtingsmál nr. 59/1948: Løgtingsábyrgd til Skipafelagið Føroyuar, hevur felagið fingið lyfti frá løgtinginum um, at tann skatturin, sum var álíknaður felagnum, skuldi standa rentufríur til 1. januar 1955.

Gjaldstovan hevur fingið skuldabræv dagfest 20. december 1952, stórt kr. 255.834,75.

Gjaldstovan upplýsir, at tann veruliga skuldin nú er kr. 222.529,50 aftaná at broyting er gjørd av yvirlíkningarvaldinum.

Landsstýrið hevur nú lagt málið aftur fyri tingið og skjýtur Skipafelagið upp, at »Oyrnafjall« verður selt, og at tingið, skipafelagið og aðrir stovna nýtt felag við tí endamáli at røkja farmasigling. Hildið verður fram, at avlopspeningurin av søluni saman við tí peningi løgtingið eigur hjá skipafelagnum verður settur í hetta nýggja felag.

Skipafelagið heldur seg sjálvt kunna seta kr. 200.000 í hetta felag.

Málið var beint í fíggjarnevndina, sum hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í cin meiriluta og tveir minnilutar.

Nevndin hevur stóran áhuga fyri teimum, sum vilja fremja keyp av farmaskipum til landið, men er ikki sinnað til at mæla tinginum til at lata henda pening fara í eina slíka fyritøku.

Meirilutin (A. Djurhuus, Djóni í Geil, Richard Long og Trygve Samuelsen) kann mæla tinginum til at geva skipafelagnum lagalig kor til at gjalda peningin aftur , so at felagið lættari kann fara undir at fáa skip til farmasigling.

Meirilutin kann so statt mæla tinginum til at samtykkja, at skuldin verður goldin yvir 5 ár við 5 % í rentu, og soleiðis at landsstýrið ger nærri semju við felagið samsvarandi hesum.

Minnilutin (E. Patursson og Hanus við Høgadalsá) heldur, at skatturin eigur at verða goldin beinan vegin.

Minnilutin (J. P. Davidsen) setur onki uppskot fram.

Uppskot

frá meirilutanum (A. Djurhuus, Djóni í Geil, Richard Long og Trygve Samuelsen):

Løgtingið samtykkir, at skuld p/f Skipafelagið Føroyars kr. 222.529,50 verður at gjalda yvir 5 ár við fimtaparti árliga og renta við 5 % frá 1. apríl 1955.

Landsstýrið ger sáttmála við p/f Skipafelagið Føroyar samsvarandi hesum.

Uppskot

frá minnilutanum (E. Patursson og Hanus við Høgadalsá):

Løgtingið samtykkir, at skuld p/f Skipafelagið Føroyars kr. 222.529,50 verður at gjalda beinan vegin.

2. viðgerð 1. apríl 1955.

Uppskot minnilutans fall 6—0.

Uppskot meirilutans samtykt 15—0.

---

18. Broyting í hundaskattinum.

Á 1955, 18. februar legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

til

broyting í kgl. anordning nr. 88 — 31. marts 1928 om hundeafgift m. v.

§ 1.

§ 4, stk. 1, verður orðað soleiðis:

Í kommununum uttanfyri Tórshavn kann sóknarstýri við landsstýrisins góðkenning seta reglurnar í §§ 2 og 3 í gildi. Gjaldið verður fyrisett samsvarandi § 2.

§ 2.

Í § 7 verður »lagtinget« broytt til »landsstyret«.

§ 3.

Hendan løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

ændring i kgl. anordning nr. 88 — 31. marts 1928 om hundeafgift m. v.

§ 1.

§ 4, stk. 1, affattes således:

I kommuner udenfor Tórshavn kan forstanderskabet med landsstyrets samtykke lade bestemmelserne i §§ 2 og 3 træde i kraft. Afgiften fastsættes i overensstemmelse med § 2.

§ 2.

I § 7 ændres »lagtinget« til »landsstyret«.

§ 3.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Vestmanna sóknarstýri hevur í skrivi 27. juli 1954 sent áheitan um, at hundaskatturin úti um bygdirnar verður tann sami ella kann verða tann sami sum í Tórshavn.

Eftir §§ 2 og 3 íkgl.fyriskipan nr. 88, 31. marts 1928 er hunda-

skatturin í Tórshavn kr. 10,00 árliga, býráðið kann tó seta skattin upp í kr. 20,00 árliga. Er meira enn ein hundur í sama húsi, verður fyri hesar goldið dupultur skattur.

Uttanfyri Tórihavn kann søknarstýri eftir § 4 við góðkenning landsstýrisins gera av, at skattur av hundum skal rindast í kommununi, tó kann skatturin ikki vera hægri enn ávikavist 5 og 10 kr.

Málið, um hundaskattur skal vera, og um so er, hvussn nógv innanfyri markið í fyriskipanini, er fyrisitingarmál, tí er uppskot sett fram um, at tað er landsstýrið og ikki løgtingið, sum góðkennir skattin.

Lagt verður afturat, at fyri seyðahundar skal skattur ikki rindast.

1. viðgerð 22. februar og 7. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Vegna áheitan frá Vestmanna søknarstýri um at somu reglur um gjøld fyri hundahald verða settar í gildi fyri bygdirnar sum galda fyri Tórshavn, hevur landsstýrið sett fram uppskot til broyting í kgl. anordning nr. 88 — 31. marts 1928 om hundeafgift v. m., ið gongur søknarstýrinum á møti, soleiðis at søknarstýrir í kommunum uttanfyri Tórshavn við landsstýrisins góðkenning kunna seta reglurnar í §§ 2 og 3 í frammanfyrinevnda anordning í gildi.

Eisini verður skotið upp, at tað skal vera fyrisitingin (landsstýrið) og ikki løgtingið, ið sambart § 7 skal gera tær nærmaru reglur viðvíkjandi hundagjaldinum.

Lógarnevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 9. og 3. viðgerð 14. mars 1955.

Uppskot landsstýrisins samtykt 22—0.

---

19. Fólkatingsvallóg fyri Føroyar.

Ár 1955, 18. februar legði løgmaður fram »forslag til lov om folketingsvalg på Færøerne.

1. viðgerð 22. februar og 15. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til nýggja ríkislóg um fólkatingsval í Føroyum. Í viðmerkingunum til uppskotið hevur landsstýrið mælt til, at tað verða gjørdar tær broytingar í tí deild, ið viðvíkjur vallistum, at tað er landsstýrið, sum skal ansa eftir, at kommunurnar gera sína skyldu, síðan kommunal mál eru yvirtikin sermál, og at fyrisitingin (landsstýrið) og ikki lóggávuvaldið (løgtingið) viðger broytingar í valdømum og valstøðum, og val av valnevnd.

Samsvarandi hesum hevur landsstýrið mælt til at samtykkja uppskotið við teimum av landsstýrinum nevndu broytingum í §§ 13, 14, 17 og 18.

Lógarnevndin hevur haft málið til viðgerðar og hevur býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Minnilutin ((D. P. Danielsen) setur onki uppskot fram og viðmerkir, at tjóðveldisflokkurin sum kunnugt í sínari stevnuskrá hevur fulla loysing frá Danmark, og er tað onki í uppskoti landsstýrisins, sum miðar ímóti hesum endamáli.

Meirilutin (J. P. Davidsen, Knud Nygaard, Poul Petersen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum til at samtykkja fylgjandi

Uppskot

Løgtingið samtykkir at mæla til, at uppskot landsstýrisins til »Lov om folketingsvalg på Færøerne« verður at seta í gildi fyri Føroyar við hesum broytingum:

1. Í § 13, 2. stk. verða í staðin fyri »Rigsombudsmanden drager da« sett »Efter anmodning fra rigsombudsmanden drager landsstyret da,«
2. Í § 14 verður aftaná »hvorhos« sett »landsstyret efter anmodning fra«.
3. Í §15 verður í staðin fyri »Suderø syssel« sett »Suderø nordre eller søndre syssel«.
4. Í § 17, 1. stk. verður í staðin fyri »Lagtingets« sett »landsstyrets«.
5. Í § 18 verður í staðin fyri »Lagtinget« sett »landsstyret« 3 ferðir.
6. Í § 64, 2. stk. verður í staðin fyri »1954« sett »1955« og í staðin fyri »28. februar 1955« »29. februar 1956«.

2. viðgerð 18. og 3. viðgerð 19. mars 1955.

Uppskot landsstýrisins við broytingum lógarnevndinnar samtykt 15—0.

20. Landshandil.

Ár 1955, 23. februar legði J. P. Davidsen løgtingsmaður fram soljóðandi skriv:

Tá landsbandilin seinast var til viðgerðar á tingi, var frá javnaðarflokks síðu hildið fram, at avtøka av honum vildi koma at hækka vøruprísirnar munandi. Okkara støða — at halda fram við landshandlinum — vann tá ongar sømdir, og landshandilin varð avtikin.

Nú gongur sjón fyri søgn, vøruprísirnir hækka dag um dag, hóast prísirnir í framleiðslulondunum eru nærum teir somu sum áður. Henda ræðuliga príshækking kemur sostatt einamest av at øll innkeyp nú eru í kilo ella í tonsavís, meðan landshandilin keypti fleiri hundrað tons í senn. Hvat henda vørudýrkan hevur at týða fyri samfelagið, skuldi verið hvørjum manni greitt, men mest nervandi og trykkjandi sjálvandi fyri tann minni menta, øll tey við lítlum inntøkum.

Bíligari útgerð til fiskivinnuna er eitt mál, sum tingið ikki kann skjóta frá sær, navnliga nú tá hvørt húski, hvør maður og kvinna skal gjalda tilskot bæði við tolli og skatti, bæði til skipakeyp og til sjálvan raksturin. At landshandilin var førur fyri at selja skipsútgerð nógv bíligari enn aðrir uppá sera lagaligar gjaldstreytir eru nógv dømi um. Tað er tí ein sjálvfylgja, at skal tað almenna viðvirka við tilskoti til skipakeyp og raksturin av fiskivinnuni, so egur tað almenna fyrst og fremst at skipa fyri, at skip fáa bíliga útgerð, so tann peningur, sum nú verður innkravdur frá fátækum og ríkum ikki verður nýttur til at ríka útlendskar spekulantar. Javnaðarflokkurin skjýtur tí upp, at tingið tekur til viðgerðar spurningin um at seta landshandilin aftur á stovn beinan vegin.

1. viðgerð 25. februar og 22. mars legði vørunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Í skrivi dagfest 18. februar 1955 hevur javnaðarflokkurin skotið upp, at tingið tekur til viðgerðar spurningin um at seta landshandilin aftur á stovn beinan vegin. Teir føra fram í skrivinum, at avtøkan av landshandlinum vil koma at hækka vøruprísirnar munandi, serstakliga á útgerð til fiskivinnuna.

Sum løgtinginum kunnugt bleiv í tingsetuni 1954 avgjørt, at landshandilin skuldi missa sín einkarrætt 1. oktober 1954 og at tann endiliga avtøkan skuldi fara fram 1. januar 1955, og givið varð landsstýrinum upp í hendi at fyrireika avtøkuna. Hetta er nú gjørt, og landshandilin er seldur.

Nevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (H. Iversen, L. Joensen, Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, Hanus við Høgadalsá og Fr. Hansen) setur onki uppskot fram, um at seta landshandilin aftur á stovn, men skjýtur uppá, at løgtingsviðtøkan stendur við makt.

Minnilutin (J. Fr. Øregaard) heldur, at um allan heimin er tað so, at størsti dentur verður lagdur á, at tær vørur, sum innflytast skulu, verða keyptar til so lágan prís sum møguligt. Tá vit skulu selja okkara eksportvørur er tað so, at annaðhvørt koma keyparar higar fyri at samráðast um prís, ella megu vit fara til teirra, tí tann keypandi vil vissa sær, at hann fær vørurnar til lægsta prís.

Her hjá okkum, har nærum alt, ið nýtast skal uppi á landi og umborð á okkara skipum, er vøra, sum er keypt úr útlondum, hevur tað tí allarstørsta týdning at rætt verður atborið og væl verður fyristaðið.

Taka vit til dømis skipaflotan, er støðan jú tann, at illa gongst at fáa endarnar at røkka saman. Nógv verður fiskað, og prísirnir eru høgir, men úrtøkan er lítil og stundum eingin. Hví? Útreiðslurnar ov stórar. Og uppi á landi er ikki stórt annarleiðis. Ein av høvuðsatvoldunum til hetta ringa úrslit eru tey alt ov dýru vørukeyp í útlandinum. At tað ikki kann vera annarleiðis har einir 5—600 keypmenn skulu flyta vørur inn til 30.000 menniskjur er eyðsæð. Okkara land er so lítið, so skulu vit kunna flyta bíliga inn, megu vit gera ein handil føran fyri at keypa í so stórum nøgdum, sum tað nú einaferð er møguligt. Minnilutin heldur tí, at landshandilin eigur at verða settur aftur á stovn og skal átaka sær at keypa inn skipsútgerð og møguligt aðrar vørur. Minnilutin setur tí fram fylgjandi

uppskot.

Landshandilin verður settur á stovn aftur.

2. viðgerð 24. mars 1955.

Uppskot minnilutans var sett undir atkvøðu við navnakalli:

Ja atkvøddu: P. M. Dam, S. P. Zachariasen, J. F. Øregaard, J. P. Davidsen, R. Jacobsen.

Nei atkvøddu: E. Patursson, Hanus við Høgadalsá.

Atkvøddu ikki: Jens Chr. Olsen, Fr. Bláhamar, P. Petersen, D. í Geil, K. Nygaard, O. Ellingsgaard, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, R. Long, Johan Simonsen, Hans Iversen, C. L. Samuelsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, S. Ellefsen, H. Djurhuus, A. Nielsen og D. P. Danielsen.

Uppskot minnilutans fall 6—0.

21. Broyting í stýri lønjavningargrunsins.

Ár. 1955, 22. februar legði E. Patursson tingmaður fram soljóðandi lógaruppskot:

Uppskot

til

broytingar í løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951 sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 29. marts 1952.	*ændring i lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 som ændret ved lagtingslov nr. 18 af 29. marts 1952.*
§ 6, 2. petti verður orðað soleiðis:	§ 6, stk. 2 affattes således:
At stýra grunninum verður sett 3-manna nevnd, har løgtingið velur ein, Føroya útgerðarmannafelag (Føroya reiðarafelag og felag føroyskra trolaraeigara) og Føroya skipara- og navigatør ein og Føroya Fiskimannafelag, Suðuroyar fiskimannafelag og Føroya motorpassarafelag ein. Á sama hátt verða tiltaksmenn valdir. Valini galda fyri 3 ár.	For fonden vælges en bestyrelse på 3 medlemmer, hvoraf lagtinget udpeger et medlem, Føroya útgerðarmannafelag (Færøernes rederiforening og felag føroyskra trolaraeigara) samt Føroya skipara- og navigatørfelag et medlem og Føroya fiskimannafelag, Suðuroyar fiskimannafelag og Føroya motorpassarafelag et medlem. På samme måde vælges tilsvarende antal stedfortrædere. Valgene gælder for 3 år.

1. viðgerð 2. februar og 9. mars legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit:

Erlendur Patursson, Johan H. Danbjørg og Leon Joensen hava 22. februar 1955 borið fram á tingbord uppskot til broytingar í løgtingslóg nr. 72 frá 22. december 1951, hareftir § 6, 2. petti verður orðað soleiðis:

»At stýra grunninum verður sett 3-mannanevnd, har løgtingið velur ein, Føroya útgerðamannafelag (Føroya reiðarafelag og felag føroyskra trolaraeigara) og Føroya skipara- og navigatørfelag ein og Føroya fiskimnnafelag, Suðuroyar fiskimannafelag og Føroya motorpassarafelag ein. Á sama hátt verða tiltaksmenn valdir. Valini galda fyri 3 ár.«

Málið er 24. februar 1955 beint í fiskivinnunevndina, sum undir viðgerðini av málinum hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Fr. Bláhamar, Richard Jacobsen, S. P. Zachariasen og Jens Chr. Olsen) heldur, at ongin broyting eigur at verða gjørd í núverandi

skipan, soleiðis at skiparar og navigatørar, sum saman við fiskimanninum er tann njótandi parturin, eiga at vera saman um val av tí eina nevndarliminum í stýrinum. Val av tiltaksmonnum má væl vera ein internur spurningur, ið ikki krevur lógarbroyting. Viðvíkjandi avmarkingini í valtíðini til 3 ár, so heldur meirilutin hetta vera til onki gagn, annars er hettta eisini óvanlig mannagongd í slíkum føri.

Sostatt setur meirilutin onki uppskot fram.

Minnilutin (Johan Simonsen) mælir tinginum til at viðtaka uppskotið óbroytt, soleiðis sum tað fyrliggur.

2. viðgerð 12. og 15. mars.

Formaðurin legði fram broytingaruppskot frá H. Djurhuus, sum er soljóðandi:

Í kunngerð nr. 16 frá 25. juni 1954 um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna verður § 6, 2. stk. orðað:

At stýra grunninum verður sett 5-mannanevnd, har Føroya Løgting velur 1, ið er formaður. Føroya Fiskimannafelag og Suðuroyar Fiskimannafelag velja 1, Føroya skipara- og navigatørfelag, Føroya maskinistfelag og Føroya motorpassarafelag velja 1 og Føroya reiðarafelag 2. Samstundis verða valdir 5 tiltaksmenn.

Valið fer fram nú og verður roknað at galda frá 1. apríl í ár, og ein gongur út um árið.

I bekendtgørelse nr. 16 af 25. juni 1954 om fiskernes afregning og lønregulering affattes § 6, 2. stk. således:

Til at bestyre fonden nedsættes et nævn på 5 medlemmer, hvoraf Færøernes lagting vælger 1, der er udvalgets formand. Føroya Fiskimannafelag og Suðuroyar Fiskimannafelag vælger 1, Føroya skipara- og navigatørfelag, Føroya maskinistfelag og Føroya motorpassarafelag vælger 1 og Føroya reiðarafelag 2. Samtidig vælges 5 suppleanter.

Valget afholdes straks og regnes at gælde fra 1. april d. å., således at 1 medlem går ud hvert år.

3. viðgerð 15. mars 1955.

Lógaruppskotið varð sett undir atkvøðu við navnakalli 24/3:

Ja atkvøddu: Fr. Hansen, P. M. Dam, J. F. Øregaard, O. Ellingsgaard, Leon Joensen, Johan Simonsen, J. P. Davidsen, J. H. Danbjørg, Kj. Mohr, E. Patursson, Hanus við Høgadalsá og D. P. Danielsen.

Atkvøddu ikki: Jens Chr. Olsen, P. Petersen, S. P. Zachariasen, Djóni í Geil, K. Nygaard, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, R. Long,

H. Iversen, G. L. Samuelsen, R. Jacobsen, Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, H. Djurhuus og A. Nielsen.

Uppskotið fall 12—0.

Broytingaruppskotið fall 5—0.

---

22. Landsstýrismál.

Ár 1955, 23.mars legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

Álit.

Sambart tingskipan løgtingsins § 10 hevur nevndin viðvíkjandi kannan av landsstýrismálum kannað avrit av landsstýrisins gerðabók fyri tíðarskeiðið 5. august 1953 til 27. juli 1954.

Tað hava verið hildnir umleið 50 fundar, nógv mál hava verið viðgjørd og ymist kann vera at finnast at. Nevndin hevur serstakliga heft seg við teir nógvu, ið hava fingið teirra landsskatt heilt ella partvís strikaðan. At tað í summum førum hevur verið beint at strika, er ikki at ivast um, men neyvan hjá so nógvum, og heldur nevndin, at um innkrevjing hevði farið meiri rættstundi fram, vildi nógv av tí nú strikaða skattinum verið goldin.

Avgerð 24. september 1953 — tollskilda hjá Skipafelagnum — heldur nevndin, at tollur átti at verið goldin eftir tí hægra talinum. Avgerð 14. oktober 1953 — apotekaratakstir — var ynskiligt, um teir kundu lækkast,, serliga skal viðmerkjast til nr. 4, at eitt tillegg uppá 7 % ljóðar nakað høgt.

Hvat viðvíkir samsýning 24. september 1953 og lønhækking 30. juni 1954 heldur nevndin, at ongin grund hevur verið fyri í hesum føri at veita nakra samsýning. Viðvíkjandi lønhækking eigur at vera víst størst varsemi, okkara administratión er ivaleysa tung, sum er.

Hóast hesar atfinningar loyvir meirilutin (K. Nygaard og H. Iversen) sær at mæla til, at avgerðir landsstýrisins verða góðkendar.

Minnilutin (Erlendur Patursson) er samdur í atfinningum meirilutans, men skoytir hesar viðmerkingar upp í:

Eftir § 6 í lóg nr. 1 frá 13. mai 1948 skulu øll løgtingsuppskot og týdningarmiklar fyriskipanir viðgerast í landsstýrinum. Sama lógargrein sigur, at hvør landsstýrismaður gevur sína atkvøðu til gerðabókina.

Eftir tingskipan Føroya løgtings velur tingið 3-manna nevnd til at viðgera frágreiðslu frá landsstýrinum

Henda nevnd — landsstýrismálanevndin — hevur frá landsstýrinum fingið í hendi »Útskriftir úr gerðabók landsstýrisins viðvíkjandi fundum í tíðarskeiðinum 5. august 1953 til 27. juli 1954.«

Eftir hesi útskrift hevur landsstýrið hildið 48 fundir í hesum tíðarskeiði. Til umrøðu vóru 361 mál.

Av hesum 361 málum vóru 113 umsóknir um at fáa landsskatt eftirgivnan, 48 mál snúðu seg um viðurskifti embætismanna, har í serstakliga lønar- og eftirlønarviðurskifti, meðan 200 snúðu seg um onnur viðurskifti.

Eftir fyrrnevndu § 6 í lóg nr. 1 frá 13. mai 1948 skulu øll løgtingsuppskot viðgerast í landsstýrinum, t. e. á landsstýrisfundum. Eftir tí, sum minnilutin dugir at siggja, hava øll samtykt lógaruppskot frá tinginum verið til viðgerðar á landsstýrisfundum. Aftur í móti hevur fjøldin av øðrum samtyktum uppskotum løgtingsins ikki verið viðgjørd. Sum dømi kunna nevnast hesi samtyktu løgtingsmál frá ólavsøkutinginum 1953:

1. Figgjarætlan kirkjugrunnsins, samtykt 11/2 1954.
2. Dýping av Streyminum og lykt norður við Streym, samtykt 26/2 1954.
3. Loyvi at nýta hummartrol, samtykt 25/1 1954.
4. Royndarstøðin í Hoyvík, samtykt 31/10 1953.
5. Búnaðarskúli, samtykt 9/3 1954.
6. Vegir og leiðingar, samtykt 2/3 1954.
7. Setan av landsskúlaráðgevara, samtykt 22/2 1954.

O. s. fr.

Í tí tíðarskeiði, sum gerðabók landsstýrisins røkkur, hava trý stórmál verið til viðgerðar í landsstýrinum: Læknamálið í Norðuroyum, sjómarksmálið og vinnustøðgurin á fiskiveiðiflotanum várið 1954.

Læknamálið í Norðuroyum er viðgjørt á 4 fundum — og ført í gerðabók soleiðis:

Ár 1953, 19. november, kl. 16^{30}, var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður og R. Long. Hákun Djurhuus var burturstaddur á tænastuferð í Danmark. C. A. Vagn-Hansen, ríkisumboðsmaður og Landau, landfúti, vóru eisini á fundi. Til viðgerðar: Ófriðurin í Klaksvík.

Ár 1953, 27. november, kl. 11, var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður, og R. Long. Hákun Djurhuus var burturstaddur á tænastuferð í Danmark. Til viðgerðar: Ófriðurin í Klakksvík.

Ríkisumboðsmaðurin, landfútin og politifulltrúi Nørager vóru á fundi og greiddu frá málinum.

Ár 1953, 17. december, kl. 16, var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður, Hákun Djurhuus og R. Long. Til viðgerðar ... . 5) Framlagt skriv, dagfest 10. december 1953, frá statsministeriet við ummæli frá danska læknafelagnum um læknastríðið í Klakksvík.

Ár 1954, 11. marts kl. 11 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður og R. Long. Hákun Djurhuus var burtursteddur á tænastuferð. Til viðgerðar ..... 12) Ríkisumboðsmaðurin kom á fund til samráðing um læknastríðið í Klakksvík. Fundurin lagdur niður kl. 13. Framhald kl. 16. Ríkisumboðsmaðurin var aftur á fundi og samráddist um læknastríðið í Klakksvík.

Sjómarksmálið var viðgjørt á 4 landsstýrisfundum — og ført í gerðabókina soleiðis:

Ár 1953, 20. november kl. 10^{30} var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður og R. Long. Hákun Djurhuus var burtursteddur á tænastuferð í Danmark. Til viðgerðar ..... 10) Landsstýrið samtykti, at J. Djurhuus, skrivstovustjóri og Óla Jákup Jensen, skipari, umboða landsstýrið í samráðingunum í London í december milluni danskar og bretskar myndugleikar um føroyska sjómarksmálið.

Ár 1953, 26. november kl. 11, var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður og R. Long. Hákun Djurhuus var burtursteddur á tænastuferð í Danmark. Til viðgerðar: 1) Víðkan av føroyska sjóøkinum. Samtykt varð at biðja Skarðhamar, sendifulltrúa, vera í London teir dagarnar, samráðingarnar við bretsku myndugleikarnar fara fram.

Ár 1953, 26. november kl. 16 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður og R. Long. Hákun Djurhuus var burtursteddur á tænastuferð í Danmark. Til viðgerðar: Víðkan av føroyska sjóøkinum. Ole J. Jensen var eisini á fundi.

Ár 1954, 8. apríl kl.^{00} var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru K. Djurhuus, løgmaður og R. Long. Hákun Djurhuus var burtursteddur á tænastuferð. Til viðgerðar ..... 8) Fiskimarkið um Føroyar. Óla Jákup Jensen var nú komin á fundin og varð hetta mál umrøtt saman við honum, uttan at avgerð varð tikin á hesum fundi.

Triðja málið — verkfallið á fiskiveiðiflotanum — er ikki umrøtt í gerðabók landsstýrisins.

Tað kann vera ivasamt hvørji mál — onnur enn løgtingsuppskot — skulu viðgerast á landsstýrisfundi og hvussu nógv, ið førast skal í gerðabókina. Her eru tikin dømi um 3 stórmál. Eitt av teimum er als ikki nevnt og viðvíkjandi hinum báðum er einki utttan upplýsingar um hvørjir hava verið á fundi og lítið annað enn heilt stuttir upplýsingar um, at málið hevur verið umrøtt.

Viðvíkjandi sjómarksmálinum serstakliga skal verða bent á orðini í gerðabókini 8. apríl 1954: »varð hetta mál umrøtt saman við honum (t. e. O. J. J.), uttan at avgerð varð tikin á hesum fundi«.

Í útskriftini av gerðabókini finst tó einki um, at málið hevur verið avgjørt ella viðgjørt á seinni fundi, men avgerð hevur tó verið tikin, smbr. uppskot landsstýrisins á ólavsøkutinginum 1954.

Sum dømi um hvussu onnur mál verða førd í gerðabókina, kann minnilutin nevna málið um samráðingar við Ísland um fiskirættindi Føroyinga.

Fundur 20. januar 1954: Aftaná málið av nýgjum hevur verið til ummælis hjá Føroya skipara- og navigatørfelag, sum heldur, at tað er ein fyrimunur fyri føroyska fiskivinnu undir Íslandi, um Føroyingar í staðin fyri tey núverandi fiskirættindini fáa loyvi at fiska við snøri innan fyri íslendska sjómarkið, móti at Føroyingar eftir íslendskum ynski frásiga sær rættin at fiska við snurruváð og troli á økjum við Vestmannaoyggjarnar og Reykjanes, varð samtykt at avgreiða málið til ríkisstýrið við ynski um, at samráðingar verða tiknar upp við Íslendingar, soleiðis sum felagið nú heldur.

Fundur 12. mai 1954: Framlagt skriv dagfest 26. apríl 1954 frá statsministeriet viðvíkjandi samráðingum millum Føroyar og Ísland um føroysk fiskirættindi í Íslandi. Íslendska stjórnin ynskir ikki samráðingar um hetda spurning. Tikið til eftirtektar.

Tað sæst at her er nógv gjøllgari sagt frá innihaldinum enn í fundarfrásøgnunum um tey mál, sum frammanfyri eru nevnd.

Triðja dømi um, hvussu gerðabókin verður førd, er hetta:

Fundur 8. apríl 1954: Starvsmannafelagið hevur heitt á landsstýrið um at seta í gildi fyri tænastumenn og starvsfólk landsins tær frítíðarreglur, sum galdandi eru fyri tænastumenn og starvsfólk í tænastu statsins, herundir eisini tænastumenn og starvsfólk statsins í Føroyum. Tær nýggju frítíðarreglur, sum settar eru í gildi fyri statin frá árinum 1953, veita yvirhøvur tænastumonnum og starvsfólki eina viku longri frí enn tær eldri frítíðarreglurnar. Samtykt varð at svara starvsmannafelagnum aftur, at landsstýrið ikki í løtuni heldur seg kunna broyta tær frítíðarreglur, sum galdandi eru ella verða praktiseraðar fyri tænastumenn og starvsfólk landsins. Tó varð samtykt tann broyting, at tænastumenn og starvsfólk, sum bert hava rætt til 2 vikur frítíð, kunna goyma sær frídagar ella undir serligum umsøðum fáa játtað 3 vikur frítíð eitt ár av trimum fylgjandi, um ætlað er í frítíðini at ferðast uttanlands. Í fylgjandi málum frá starvsmannafelagnum: a) revisión av normeringslógini, b) seta í gildi »funktionærloven« í Føroyum, c) víðkan av løgtingslóg um eftirløn og eftirsituløn, varð samtykt at mæla løgtinginum til at lata 5-mannanevnd viðgera. Í nevndini eigur at vera umboð fyri løgtingið, landsstýrið og starvsmannafelagið.

Eisini í hesum máli verður nógv gjølligari sagt frá innihaldinum enn í teim málum, sum nevnd vóru.

Eftir gerðabókini hava ymsar gamlar »syndir« sum menn kalla tað, verið til umrøðu og viðgerðar. Dømi: Fundur 17. september 1953: P/f Trolkol í likvidatión var umrøtt. Fundur 7. januar 1954 viðger sama mál. Aftan fyri hesi fáu og spakligu orð liggur peningaligt tap fyri landskassan uppá um leið kr. 170.000.

Umframt málini, sum higartil eru nevnd — og tey sum nevnd eru í áliti meirilutans skulu nøkur verða tikin fram afturat:

Fundur 23. september 1953: Samtykt var at veita kr. 10.000 í byggistudningi til Klaksvíkar tekniska skúla.

Hesin peningur er veittur við heimild í fíggjarlógini § 21, 6. petti: Ymist eftir landsstýrisins avgerð, kr. 25.000.

Tað má haldast vera beinast, at landsstýrið í slíkum málum samráðist við fíggjarmálanevndina, tá slíkt er gjørligt, ella í hvussu er letur hana vita av slíkum uppá seg stórum peningaveitingum. Tað hevur ikki verið gjørt í hesum ella øðrum tílíkum tilfellum.

Fundur 12. november 1953: Framlagt tilmæli, dagfest 22. oktober 1953 frá Føroya gjaldstovu um at avskriva innflutningsgjald fyri 6.900 cigarettir sum skuldu ligið á goymslu hjá Arbejdernes Trawlerdrift undir rekonstruktiónini av felagnum, men sum nú ikki finnast. Samtykt varð at avskriva.

Fundur 20. juli 1954: Útflutningsloyvi verður givið fyri fiskiskip við teirri treyt m. a. at møguligur avlopspeningur verður nýttur til keyp av øðrum skipi til landið. Seinni hevur útflutningsloyvi verið givið við somu treyt, men aftaná at fiskiskipið var selt og farið av landinum hevur landsstýrið loyst viðkomandi undan treytini.

Fundur 25. marts 1954: Ríkisumboðsmaðurin hevur sagt frá, at danskir tænastumenn í Føroyum aftaná 1. apríl 1954 og til 1. juni 1954 fáa somu fyribils lønarviðbót og eykaviðbót, sum veitt varð teimum í fíggjarárinum 1953/54. Samhart § 13 í føroysku tænastumannalógini varð samtykt at heimila gjaldstovuni at veita tænastumonnum og starvsfólki í tænastu landsins somu viðbøtur til 30. mai 1954.

Lóg um løn tænastumanna § 13, sigur m. a.: Teir tænastumenn, fyri hvørjar grundløn er ásett, fáa almenna lønviðbót, reguleringsviðbót og staðarviðbót svarandi til ta viðbót, sum ríkisins tænastumenn fáa.

Fundur 27. juli 1954: Framlagt var uppskot frá landfútanum við skjølum um at broyta tíðarskeiðið viðvíkjandi fongsulsstraffi, ið kann sitast av í varðhaldshúsinum í Tórshavn, soleiðis at straffitíðin verður broytt frá 5 mánaðum til 3 mánaðir, soleiðis at um straffurin verður yvir 3 mánaðir, skal viðkomandi sita í statsfongsli í Danmark.

Samtykt varð at fylgja uppskotinum frá landfútanum og at siga justitsministeriinum frá, at landskassin skal bera tær útreiðslur, ið standast av hesum.

Varðhaldshúsið í Tórshavn er í herviligum standi og er skammarblettur á teim myndugleikum, sum hava ábyrgdina av tí. Heldur enn at bøta um hesi viðurskifti, hevur landsstýrið — eftir tilmæli frá danska landfútanum — tikið omman fyri nevndu avgerð. Skammarbletturin verður tó ikki avmáaður við hesum og ei heldur verða viðurskifti fangavoktara og fanga, sum sita skulu teir 3 mánaðirnar, bøtt.

Uppskot

frá meirilutanum (K. Nygaard og H. Iversen):

Løgtingið góðkennir tær avgerðir landsstýrið hevur tikið í tíðarskeiðinum 5. august 1953 til 27. juli 1954.

Uppskot

frá minnilutanum (Erlendur Patursson):

Løgtingið tekur undir við teim atfinningum, sum bornar eru fram í áliti meirilutans og minnilutans, og átalar, at fjøldin av løgtingsuppskotum verða ikki viðgjørd á landsstýrisfundum, so sum lóg fyriskipar, og at gerðabók landsstýrsins í mongum týdningarmiklum málum als ikki ella alt ov ógjølla sigur frá tí, sum fer fram á fundunum.

2. viðgerð 26. mars 1955.

Uppskot meiralutans fall 13—0.

---

23. Rakstrarlán til Føroya Búnaðarfelag.

Ár 1955, 24. februar legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum og fylgiskjali:

Uppskot

til

løgtingslóg um rakstrarlán til Føroya búnaðarfelag.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað úr landskassanum at veita Føroya búnaðarfelag í rakstrarláni kr. 100.000. Hetta lánið verður at renta við 5 % p. a. og at rinda aftur yvir 5 ár.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om driftslån til Føroya bánaðarfelag.

§ 1.

Landsstyret hemyndiges til på landskassens vegne at yde Føroya búnaðarfelag et driftslån stort kr. 100.000. Lånet forrentes med 5 % p. a. og afbetales over 5 år.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Í viðlagda skrivi dagfest 27. januar 1955 søkir Føroya búnaðarfelag landsstýrið um at gera útvegir fyri, at felagið fær til láns ein rakstrarpening kr. 100.000, soleiðis at felagið verður ført fyri at keypa limunum kraftfóður. Felagið mælir til, at hetta lánið verður veitt av avlopspeningi landshandilsins.

Landskassin hevur í sini tíð veitt landshandlinum 1 mill. kr. í láni. Hetta lánið verður nú afturgoldið, tá ið landshandilin heldur uppat. Landsstýrið heldur tað vera rímuligt, at ein partur av hesum láninum, sum framvanundan eisini nýttist til at finansiera landshandilsins keyp av kraftfóðri framvegis skal nýtast til hetta endamál og mælr tí til, at gingið verður búnaðarfelagnum á møti, soleiðis at felagsð av hesum láni fær kr. 100.000 til láns í rakstrarpeningi. Rentan verður sett til 5 % p. a. og avdráttartíðin til 5 ár.

FØROYA BÚNAÐARFELAG
Tórshavn, 27. januar 1955.

Nú landshandilin er avtikin og skjótt fer at gevast við at selja kraftfóður, kemur tann spurningur fram hjá neytahaldarunum her á landi, líkindini koma at verða at fáa kraftfóður til keyps. Og tað er sjálvandi av stórum týdningi fyri mjólkaframleiðsluna, at kraftfóður fæst til keyps so bíliga sum gjørligt. Her halda nógvir limir í okkara felag, at best varð, um felagið fekk líkindi at taka upp hesa sølu, nú landshandilin gevst. Men tað krevst væl av peningi fyri at kunna fremja henda handil til fulnar; og hóast okkara felag stendur seg væl fíggjariga til at kunna fremja tær uppgávur, vit í løtuni hava í hendi, so kann felagið ikki átaka sær ein kraftfóðurhandil av týdningi, uttan við peningailøgu uttanífrá, inntil hesin handil er komin í fasta legu. Og her halda nógvir av okkara limum, sum nýta kraftfóður, at rímiligt er at heita á landsstýrið um at fáa til láns tann neyðuga pening, burtur av avlopspeningunum hjá landshandlinum, nú hesin peningur verður tøkur.

Vit vita væl, at allur hesin peningur er ætlaður til fiskivinnuna; men tað vildi ikki verið órímiligt, at ein heilt lítil partur kom landbúnaðinum til góðar, við tað at kraftfóðurkeypið hjá landbúnaðinum hevur verið við til at skapa henda avlopspening.

Vit vilja halda, eftir samráð við R. Rasmussen í landshandlinum, at tað verður brúk fyri o. u. 100.000 kr. til rakstrarpening fyri at kunna røkja eina kraftfóðursølu av týdningi, og vilja vit heita á landsstýrið um at útvega okkum henda pening til somu lánstreytir, sum landskassin veitti landshandlinum.

Við hávirðing
FØROYA BÚNAÐARFELAG
L. Vang.

Til Landsstýri Føroya,
her.

1. viðgerð 1. mars og 4. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Føroya búnaðarfelag hevur vent sær til landsstýrið um at fáa eitt lán uppá kr. 100.000 til rakstrarlán fyri at kunna røkja eina kraftfóðursølu.

Landsstýrið hevur sett fram uppskot til løgtingslóg, ið gevur landsstýrinum heimild til landskassans vegna at veita hetta lán.

Í viðmerkingunum verður mælt til, at hesin peningur skal takast av avlopspeninginum hjá landshandlinum.

Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum hevur viðgjørt málið, og kann nevndin ikki mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins av tí, at avlopspeningur landshandilsins við løgtingssamtykt skal nýtast til endurnýggjan av skipaflotanum.

Samsvarandi hesum setur nevndin tí fram fylgjandi

uppskot.

Fíggjarnevndin kann ikki mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 5. apríl 1955. Málið afturtikið.

---

24. Dr. phil. Jakob Jakobsens legat.

Ár 1955, 1. mars legði E. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Føroya landsstýri verður legatstjórn fyri dr. phil. Jakob Jakobsens legati.

Viðmerkingar:

Eftir fundatsi dagfestur 24. juni 1921, konguliga konfirmeraður og staðfestur 29. oktober 1921, fyri dr. phil. Jakob Jakobsens legat er Føroya løgting legatstjórn.

Síðani tað er heldur óhent, at samlaða løgting situr fyri legatinum

verður mælt til, at fundatsurin verður soleiðis broyttur, at tað verður landsstýrið, sum fær legatið um hendi.

Lagt verður afturat, at stovnsfæið er 14.125,29 kr.

1. viðgerð 3. mars 1955 og málið beint til fíggjarnevndina.

---

25. Álikning á kommunurnar 1955.

Ár 1955, 31. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi uppskot:

Fyri árið 1955 verða kr. 30.000 at líkna á kommunurnar eftir viðlagda skjali.

Viðmerkingar:

Peningahæddin kr. 30.000 er hin sama sum álíknað varð fyri árið 1954.

Smbr. skjal 3.

2. viðgerð 2. apríl 1955.

Uppskot nevndinnar samtykt 22—0.

---

26. Lántøka til trolarakeyp.

Ár 1955, 3. mars legði E. Patursson tingmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

lóg um lántøku til trolarakeyp.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán uttan lands fyri fyrst upp í 20 milj. kr., sum skulu nýtast til keyp og bygging av nýggjum stórum trolarum.

§ 2.

Landsstýrið setur nevnd við skipa-, maskin- og veiðikønum monnum til at fyrireika og góðtaka hesi skipasmíð- og keyp.

§ 3.

Lánssáttmálar og smíði- og keypssáttmálar skulu góðtakast av løgtingi-num, áður enn landsstýrið undirritar teir.

§ 4.

Teir trolarar, sum landsstýrið keypir eftir hesi lóg, skulu verða bodnir feløgum og samtøkum til keyps. Eftir uppskoti nevndarinnar sum nevnd er í § 2, og við samtykki fíggjarmálanevndarinnar, setir landsstýrið tær keyps- og aðrar treytir, sum slík feløg og samtøk skulu lúka, og annars nærri reglur um umsitingina í sambandi við hesa lóg.

§ 5.

Henda lóg gongur í gildi beinan vegin.

lov om optagelse af lån til trawlerkøb.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån i udlandet foreløbig op til 20 mill. kr. som skal anvendes til køb og bygning af nye store trawlere.

§ 2.

Landsstyret nedsætter et udvalg bestående af skibs- maskin- og fiskerikyndige mænd at forberede og godkende skibsbyggeri og skibskøb.

§ 3.

Lånedokumenter og bygge- og købekontrakter skal godkendes af lagtinget, forinden de underskrives af landsstyret.

§ 4.

De trawlere, som landsstyret køber ifølge denne lov, skal tilbydes selskaber og foreninger til købs. Efter forslag fra udvalget i § 2 og med finansudvalgets godkendelse, fastsætter landsstyret salgsvilkårene og øvrige vilkår, som sådanne selskaber og foreninger skal opfylde og i øvrigt fastsætte de nærmere regler for administrationen i forbindelse med denne lov.

§ 5.

Denne lov træder ikraft straks.

Viðmerkingar:

Nevndin, sum landsstýrið setti 22. december 1951 til at kanna spurningin um endurreising fiskiveiðiflotans, mælti til at keypa ella lata smíða stór línuskip og stórar trolarar.

Tann lánsskipan, sum nú er í umbúnaði — realkreditstovnurin — kann vissuliga, rætt umsitin, verða til stuðuls tá nýggj línuskip skulu fáast, men røkkur onga leið til trolarasmíð og trolarakeyp.

Tað verður tí her mælt til at ganga aðra leið til at loysa henda spurning — trolarakeyp og trolarasmíð — og hon er tann, at tikið verður lán uttan lands, fyri fyrst 20 milj. kr. Tað verður roknað við, at lánið verður tikið í tí landi, har vit keypa ella lata byggja trolararnar.

Tað verður álagt landsstýrinum at taka upp samráðingar um slík lán samtíðis sum nevnd við skipa-, maskin- og veiðikønum monnum fyrireika keypini.

Tað verður hildið sjálvsagt at tbæði lánssáttmálar og keypssáttmálar verða góðtiknir av løgtinginum, áður enn teir verða undirritaðir.

Trolararnir, sum keyptir ella bygdir verða, skulu verða bodnir feløgum og samtøkum til keyps. Hetta kunna vera vanlig partafeløg, lutafeløg, kommunur ella onnur samtøk. Landsstýrið setir keyps- og aðrar treytir og annars nærri reglur um umsitingina — eftir uppskoti frá teirri serkønu nevndini og við samtykki fíggjarmálanevndarinnar.

Tað eru prógv og royndir fyri, at stórir trolarar veita stórar inntøkur, bæði eigara, teim siglandi monnunum og eisini, men ikki minst, verkafólknum á landi. Rakstur teirra skapa so stór útflutningsvirði, at tað stendst ikki á at renta og rinda aftur hesi lán uttan lands sum neyðugt verður at taka. Her verður annars víst á álit nevndarinnar sum kannaði og gjørdi tilmæli um endurnýgging fiskiveiðiflotans.

1. viðgerð 7. mars og 30. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt fyri løgtingið uppskot til lóg um lántøku til trolarakeyp.

Uppskotið gongur út uppá at geva landsstýrinum heimild til landskassans vegna at taka lán uttanlands fyri fyrst upp í 20 mill. kr. til keyp og bygging av nýggjum stórum trolarum.

Tað er nevndini kunnugt, at landsstýrið fæst við at royna slíka lánupptøku til endurnýgging av fiskiskipaflotanum, og er nevndin tí samd um at lata landsstýrið fáa hetta mál til kanningar.

Samsvarandi hesum framflutta setur nevndin fram fylgjandi

Uppskot

Fíggjarnevndin mælir tinginum til at samtykkja, at landsstýrið kannar málið og leggur úrslitið fyri tingið í næstu tingsetu.

2. viðgerð 1. apríl 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá E. Patursson:

Broytingaruppskot

Figgjarnevndin mælir tinginum til at samtykkja, at landsstýrið í samráð við figgjarnevndina kannar málið og leggur úrslitið fyri tingið í næstu tingsetu.

Lógaruppskotið fall 10—0.

Broytingaruppskotið samtykt 19—0.

Uppskot nevndinnar so statt burturdottið.

---

27. Figgjarætlan fyri kirkjugrunnin 1955-56.

Ár 1955, 9. mars legði E. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum:

Landsstýrið loyvir sær hervið viðvíkjandi kirkjugrunninum at leggja fyri háttvirda løgting fylgjandi

Uppskot

Inntøkur:	Roknskapur 1953/54	Figgjarætlan 1955/56
1. Endurgjald fyri figgjund	kr. 7.800,00	7.800,00
2. Studningur sbr. figgjarlóg	kr. 70.000,00	42.000,00
3. Skuld til landskassan 1/4-53 -:-	kr. 7.873,49	
4. Í grunninum ætlast at vera pr. 1/4 1955	kr.	25.000,00
	kr. 69.926,51	74.800,00

Útreiðslur:

A. Vanligar umvælingar	kr. 31.151,89	40.000,00
B. Kirkjugarðar	kr. 10.115,00	6.000,00
C. Prestaflutningur	kr. 8.184,50	8.500,00
D. Brunatrygging o. a.	kr. 0,00	5.000,00
E. Studningur til nýggjar kirkjur	kr. 4.000,00	9.000,00
	kr. 53.451,39	68.500,00
F. Ogn pr. 31/3 1954	kr. 16.475,12	6.300,00
	kr. 69.926,51	74.800,00

Viðmerkingar:

ad A. Vanligar umvælingar.

Eftir miðaltølunum fyri seinastu 5 árini og upplýsingum frá kirkjustjórnini og próstinum kunnu hesar útreiðslur ætlast ikki at koma upp um kr. 40.000 fyri komandi fíggjarár.

ad B. Studningur til kirkjugarðar.

Landsverkfrøðingurin upplýsir, at arbeiðið við kirkjugørðunum í Kirkubø og á Skála er liðugt og studningurin goldin. Arbeiðið við kirkjugarðinum í Tjørnuvík er um at vera liðugt, og studningurin kemur skjótt til gjaldingar. Í Hovi, Kollafirði og Elduvík er arbeiðið ikki byrjað. Í Lorvík og í Dali er arbeiðið byrjað, men ikki komið langt áleiðis. Eftir hesum upplýsingunum og miðalútreiðslunum tey seinastu 5 árini verða útreiðslurnar til komandi fíggjarár ætlaðar til kr. 6.000.

ad D. Brunatrygging.

Eftir tilboð frá Føroya Brunatrygging kunnu allar Føroya kirkjur, mettar til kr. 7.460.000,00, brunatryggjast fyri árligt gjald kr.9.402,50 harav ætlanin er, at kirkjugrunnurin ber helvtina og kirkjunar sjálvar helvtina.

ad E. Studningur til nýggjar kirkjur.

Í 1952 samtykti løgtingið at veita eykastudning til Miðvágs kirkju kr. 12.000 við kr. 4.000 árliga í 1953/54, 1954/55, 1955/56. Í marts 1953 varð játtaður studningur til kirkju í Rituvík kr. 20.000 við kr. 5.000 árliga í 4 ár, fyrstu ferð í 1954/55. So statt er roknað við studninginum kr. 9.000.

ad F. Ogn grunsins.

Pr. 31. marts 1955 kann ognin ætlast at verða um kr. 29.000, men møguliga koma nakrar útreiðslur í marts, og er tí í fíggjarætlanini roknað við kr. 25.000.

1. viðgerð 12. mars og 4. apríl legði kirkjunevndin fram soljóðandi

Álit.

Landsstýrið hevur framlagt uppskot, og nevndin mælir til at samtykkja hetta uppskot.

Síðani uppskotið varð framlagt er komin umsókn frá Sunnbiar kommunu um studning til útreiðslur til kirkjukór, sum er bygt aftrat skúlastovuni millum bygdirnar Lopra og Akrar. Útreiðslurnar eru mettar til 20.000 kr. Nevndin skal mæla til at játta úr kirkjugrunninum 5.000 kr., treytað av at kirkjukórið verður sýnað og góðkent av próstinum.

Uppskot

Uppskot landsstýrisins verður samtykt við tí broyting, at játtaðar verða 5.000 kr. til kirkjukór, sum er bygt aftrat skúlanum millum Lopra og Akrar. Peningurin verður at gjalda, tá ið kirkjukórið er sýnað og góðkent av próstinum.

2. viðgerð 4. og 3. viðgerð 5. apríl 1955.

Uppskot landsstýrisins við broyting nevndinnar samtykt 23—0.

---

28. Ríkislán til endurnýgging av skipaflotanum.

Ár 1955, 12. mars legði løgmaður fram soljóðandi skriv:

Í samband við lógina um tann føroyska realkredittstovnin til finansiering til endurnýggjan av skipaflotanum hevur fiskeriministeriet sett uppskot fram til ríkislóg um lán frá ríkiskassanum til sama endamál. Áðrenn lógaruppskotið verður framlagt á fólkatingi, biður fiskeriministeriet um, at uppskotið verður fyrilagt løgtinginum.

So statt verður uppskotið framlagt við landsstýrisins viðmæli.

1. viðgerð 14. mars og 18. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot frá fiskeriministeriet til ríkislóg um lán frá ríkiskassanum til financiering til endurnýgging av

skipaflotanum. Ministeriet biðjur um ummæli løgtingsins, áðrenn uppskotið verður framlagt á fólkatingi.

Eftir uppskotinum verða kr. 800.000 fyri hvørt av figgjarárunum 1955/56 og 1956/57 at kunna lænast út til endurnýgging av fiskiflotanum.

Málið er beint í figgjarnevndina, ið hevur viðgjørt tað. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (P. M. Dam, A. Djurhuus, Djóni í Geil, R. Long og Trygve Samuelsen) mælir løgtinginum til at samtykkja, at uppskotið frá fiskeriministeriet verður sett í gildi óbroytt. P. M. Dam loyvir sær tó at viðmerkja, at hann tekur undir við, at statur og løgting veita uppískoytislán og studning, ið talan er um í fyriliggjandi lógaruppskotum.

Viðvíkjandi lán- og studningsveitanini og umsitingini av umrøddu lánstovnum heldur hann, at tað vildi verið sakligast og greiðast, at tær lógu hjá einum stovni (stýri) og ikki sum skotið er upp hjá trimum.

Tað, at tríggir sjálvstøðugir stovnar hvør sær skulu avgera fyri ávísar partar av lán- og studningspeninginum, hvør ið skal fáa og hvussu nógv og til hvørjar treytir, kann lættliga bera ólag við sær og tarna einari samrímandi støðu til ta samlaðu lán- og studningsveitanina til teir einstøku lánsøkjararnar.

Og uttan mun til, hvønn politiskan lit okkara landsstýri verður at hava, verður tann subjektivi vandin at liggja fyri fótum í tess avgerðum.

Eisini er at siga, at tað er hægsti tørvur á at centralisera umsitingina, ið er við at vaksa seg ov stóra og ov dýra at bera hjá okkara fólki.

Tá ið semja er vorðin um, at stýrið fyri tí størsta av teimum trimum í sambandi við endurnýging av skipaflotanum nevndu lánsikeldum, Færøernes realkreditinstitut, skal verða sett við 3 serkønum monnum, ið verða at velja av landsstýrinum, ríkisstýrinum og nationalbankanum við hvør sínum manni, heldur hann tað vera rímiligt, at lán- og studningsveitanin, ið er talan um í hesum lógum, eisini verður løgd undir hetta stýri.

Men tá ið eingin meiriluti er fingin fyri hesum í nevndini, og hann ásannar, at tað liggur nógv á at fáa fyriliggjandi uppískoytislániskipan til realkredittstovnin framda uttan dvøl, verður í aðru syftu mælt til at greiða atkvøðu fyri landsstýrisuppskotinum.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Erlendur Patursson) mælir til, at tær lánsskipanir endurnýgging fiskiveiðsflotans til frama, sum nú eru í gerð — nevniliga eftir uppskoti um realkredittstovn við 1. veðhalds lánum, uppskoti um danskt ríkislán við 2. veðhaldslánum og uppskoti um føroyskt landslán við 3. veðhaldslánum — allar verða fingnar undir eina og somu umsiting. Føroya løgting yvirtekur realkredittstovnin og tekur annars lán at nýta til endurnýggingina sum fyri fyrst í minsta lagi samsvara teim peninganøgdum, sum nevndar eru í lógaruppskotinum um realkredittstovnin og í lógaruppskotinum um donsk ríkislán — ávikavist 2 milj. kr. og 1,6 milj. kr. — afturat tí at løgtingið í figgjarárinum 1955/56 fyri fyrst í minsta lagi veitir 2 milj. kr. til sama endamál.

Uppskot

frá meirilutanum (P. M. Dam, A. Djurhuus, Djóna í Geil, R. Long og Trygva Samuelsen):

Løgtingið samtykkir, at uppskot frá fiskeriministeriet til Lov om støtte til nybygning af færøske fiskerfartøjer m. v. verður at seta í gildi óbroytt.

Uppskot

frá minnilutanum (Hanus við Høgadalsá og Erlendi Patursson):

1. Føroya løgting yvirtekur realkredittstovnin. Stjórn hans verður útnevnd av landsstýrinum, og stendur stjórnin landsstýrinum til svars fyri umsiting stovnsins. Nevnd við 2 limum valdum av løgtingi, 2 av útgerðamannafeløgum, 2 av fiskimannafeløgum og 2 av skuldarum stovnsins verða stjórnini til leiðbeiningar.
2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán — fyri fyrst upp í 3,6 milj. kr. Av hesum verða 2 milj. kr. settar í stovnsgrunn realkredittstovnsins, sum nýtast skal til at veita 15 % ella hægri lán móti 2. veðrætti.
3. Í fíggjarárinum 1955/56 veitir landskassin realkredittstovninum upp í 2 milj. kr. avdráttar- og rentuleyst lán sum skal nýtast til at veita 15 % ella hægri avdráttar- og rentuleyst lán móti 3. veðrætti.
4. Løgtingið velur 7-mannanevnd til at fyrireika lógaruppskot um hesa skipan, og skal nevndin leggja uppskot síni fyri tingið ikki seinni enn 1. apríl 1955.

2. viðgerð 23. og 3. viðgerð 25. mars 1955.

Uppskot minnilutans fall 6—0.

Uppskot meiralutans samtykt 21—0.

29. Hækking í skaðabótum Vanlukkutrygginginnar.

Ár 1955, 14. mars legði E. Patursson tingmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

lóg um broytingar í kgl. anordning for Færøerne om forsikring mod følger *af ulykkestilfælde frá 29. marts 1939.*

lov om ændringer i kgl. anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde af 29. marts 1939.

§ 1.

Sum nýtt 3. pkt. til 1. stk. í 3. § verður sett:

»Loksins røkkur tryggingin skaðatilburð, sum hinum trygda berst á til vinnuplass ella frá vinnuplássi, tá ferð hans er avleiðing av vinnu hans og hevur beinleiðis samband við hana.«

§ 1.

Som nyt pkt. 3 til stk. 1 i § 3 sættes:

»Endelig omfatter forsikringen ulykkestilfælde, som rammer den forsikrede til eller fra arbejdsplads, når hans færden er en følge af arbejdet eller står i direkte forbindelse med dette.«

§ 2.

I 32. §, 2. stk., verður »3/5« broytt til »2/3«.

§ 2.

I § 32, stk. 2, ændres »3/5« til »2/3«.

§ 3.

I 39. §, 1. stk.,
1) verður 5400 kr. broytt til 10800 kr.
2) verður2025 kr. broytt til 4050 kr.
3) verður 4050 kr. broytt til 8100 kr.
5) verður 9450 kr. broytt til 18900 kr.
6) verður 9450 kr. broytt til 18900 kr.

I 39. §, 4. stk.,
verður 675 kr. broytt til 1350 kr.

I 39. §, 5. stk.,
verður 270 kr. broytt til 540 kr.

§ 3.

I § 39, stk. 1,
1) ændres 5400 kr. til 10800 kr.
2) ændres 2025 kr. kr. 4050 kr.
3) ændres 4050 kr. til 8100 kr.
5) ændres 9450 kr. til 18900 kr.
6) ændres 9450 kr. til 18900 kr.

I § 39, stk. 4,
ændres 675 kr. til 1350 kr.

I § 39, stk. 5,
ændres 270 kr. til 540 kr.

§ 4.

I 41. § verður »200 kr.« broytt til »400 kr.«.

§ 4.

I § 41 ændres »200 kr.« til »400 kr.«

§ 5.

I 44. § verður »1500 kr.« broytt til »3000 kr.«.

§ 5.

I § 44 ændres »1500 kr.« til »3000 kr.«

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1955 og fær gildi fyri skaðatilburðir henda dag ella seinni.

§ 6.

Denne lov træder i kraft den 1. april 1955 og får gyldighed for ulykkestilfælde, der indtræffer denne dag eller senere.

Viðmerkingar:

Við hesum lógaruppskoti verður roynt at bøta um størstu brekini í vanlukkutryggingarlóggávuni.

Árið 1944 vórðu hækkingar samtyktar í teim skaðabótum, sum nevndar eru í 39., 41. og 44. §.

39. § snýr seg um skaðabøtur til eftirsitandi einkjur og børn, og hækkingin í 1944 var yvirhøvur 50 % í teimum.

41. § snýr seg um jarðarferðarhjálp, og varð hon í 1944 hækkað 100 %.

Talið í 44 § viðvíkir ársløninni, sum skaðabøtur til avlamisfólk verða roknaðar eftir. Í 1944 varð hetta tal hækkað $66^2/_3$ %.

Í hesum uppskoti verður skotið upp, at núgaldandi skaðabøtur til eftirsitandi einkjur og børn verða hækkaðar 100 %. Somuleiðis verður mælt til, at jarðarferðarhjálpin eftir 41 § verður hækkað 100 % og somuleiðis ársløniu, sum nevnd er í 44. §, og sum skaðabøtur verða roknaðar eftir.

Í núgildandi lóg veður skaðabótin fyri fullkomið avlamið roknað sum 3/5 av ársløninni. Í uppskotinum verður hetta tal hækkað upp í 2/3 (32. §, 2. stk.).

Broytingarnar í 32. §, 2. stk. og í 44. § týða, at hesar skaðabøtur hækka um leið 120 %. Sum dømi kann takast, at 57 ára gamalur 30 % avlamismaður, sum eftir núgildandi takstum fær 2430 kr. kemur at fáa 5400 kr. í skaðabøtur.

Í uppskotinum verður loksins mælt til, at tryggingin verður latin røkka skaða, sum hinum trygda berst á til vinnuplass ella frá vinnuplássi, tá ferð hans er avleiðing av vinnu hans og hevur beinleiðis samband við hana, smb. 1. §

Hin vegin mælir hetta lógaruppskot ikki til at hækka støddd dagpeningsins, sum við árligari lóg hevur verið sett til 6 kr. um dagin. Ei heldur er her mælt til at stytta bíðitíðina, sum nú gildir, nevniliga 14 vikur.

Útreiðslurnar av hesum broytingum kunna leysliga setast til o. u. 80.000 kr., sum er o. u. 50—60 % hækking í samanlagda skaðabótarútreiðslutali tryggingarinnar. Tryggingargjøldini verða tá at hækka o. u. 50—60 %.

I. viðgerð 17. mars og legði tryggingarmálanevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Í tingsetuni 1951 (smbr. tingmál nr. 39/1951 (tingtíðindi 1951, bls. 161 f.f.) setti landsstýrið fram uppskot til ríkislóg um broytingar í kgl. fyriskipan frá 29. marts 1939 um fylgir av skaðatilburðum.

Eftir hesum uppskoti eru m. a. tær broytingar tilætlaðar, at dagpeningur og onnur skaðaendurgjøld verða fyrisett eftir verunligum árslønum og haraftrat at víðka øki tryggingarinnar til eisini at umfata skaðatilburðir til og frá arbeiði og at stytta um ta dagpeningaleysu (karens) tíðina.

Tingið helt tá ikki vera líkindi til at fremja lógaruppskotið orsakað av vánaligum peningatíðum.

Fyriliggjandi lógaruppskot tilætlar at seta øll endurgjøld upp eftir somu reglum sum higartil og bert víðka øki tryggingarinnar til at umfata skaðatilburð til og frá arbeiði.

Nevndin hevur kannað málið og mett bæði uppskotini saman, og hon er samd um skjótast tilber at fáa eina umfatandi broyting framda, men sum er tørvar ríkislóggáva til tess, og tað verður tí hildið rættari at fáa broytingarnar framdar undir einum. Ein stytting av karenstíðini, sum hevur serligan týdning fyri fiskimenn, sum sleppa ikki at mynstra vegna smittuna, kann ikki leggjast burturúr. Men hvussu langt tað fer at bera til at fremja hækkingar í endurgjøldum og víðking av øki lógarinnar stendur í, hvussu langt tað fer at bera til at fara upp við tryggingargjøldunum. Føroya vanlukkutrygging er skipað sum sínamillumfelag, og tessvegna verður tað neyðugt at fáa nýtt ummæli frá tryggingini og møguligt eisini frá viðkomandi vinnufeløgum. Í hesum viðfangi hevur nevndin havt spurningin frammi um møguleika at gera allar egintryggingar lógbundnar og hartil møguleika fyri at fyriseta minstu tryggingargjøld í hjálpartryggingini, harundir innkrevjingarháttin. Haraftrat hevur nevndin umrøtt spurningin um limaskap tryggingarinnar í Tryggingarsambandinum Føroyum tessvegna, at tryggingin sum deild hevur skyldu at rinda 5 % av tryggingargjøldunum í tiltaksgrunni Trygingarsamhandsins (smbr. samtyktir frá 22/11-1940).

Eisini ynskir nevndin at skila til, at tað ivaleyst liggur illa fyri at fremja eina broyting sum tilætlað 1. apríl, eftirsum grundpremiurnar longu eru fyrisettar fyri árið frá 1. januar.

Út frá hesum mælir nevndin til, at landsstýrið útvegar ummæli sum tilskilað og helst eisini, hvussu mikið premiuinntøkan má upp sum miðal eftir uppskoti landsstýrisins, og eftir her fyriliggjandi uppskoti til at leggja fyri tingið komand ólavsøku.

Uppskot

Málð verður sent landsstýrinum til víðari fyrireikingar so sum tilskilað í álitinum.

2. viðgerð 2. apríl 1955.

Uppskot nevndinnar samtykt 24—0.

---

30. Studningur til endurnýgging av skipaflotanum.

Ár 1955, 14. mars legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um studning til endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt í fíggjarárinum 1954/55 innanfyri 2 mill. kr. at veita lán úr landskassanum til nýbyggingar og keyp til landið av fiskiskipum, sum eru ikki eldri enn 5 ár og eisini til útskiftingar av motori og tekniskar innleggingar í fiskiskip.

§ 2.

Lánini útvegast við játtan á fíggjarløgtingslógunum 1954/55 og 1955/56 og við avlopi landshandilsins.

§ 3.

Til tey í § 1 nevndu endamál kunnu tað veitast uppí 15 % av viðkomandi skipsvirði við maskinu ella motori, sum settur verður eftir útskifting av gomlum ella virði av tekniskum innlegigngum.

Virðið verður sett eftir virðismeting, so sum fyrisett í § 7.

lagtingslov om støtte til fornyelse af fiskerflåden.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til i finansåret 1955/56 indenfor et beløb af indtil 2 mill. kr. at yde lån af landskassen til nybygning og køb af til landet af fiskefartøjer, der ikke må være over 5 år gamle samt til udskiftning af motoranlæg og installation af nye tekniske anlæg i fiskefartøjer.

§ 2.

Lånene tilvejebringes ved bevilling på lagtingsfinanslovene for 1954/55 og 1955/56 samt af landshandelens overskud.

§ 3.

Som lån til de i § 1 nævnte formål kan der ydes indtil 15 % af værdien af det pågældende fartøj med maskine eller motoranlæg eller værdien af motoranlæg anskaffet i anledning af udskiftning af ældre motoranlæg eller værdien af tekniske anlæg. Værdien fastsættes ved en af det i § 7 omhand-

Lánini, sum rindaði verða kontant, eru rentu- og avdráttarfrí og verða avskrivað um landskassans fíggjarstand upp til 20 ár.

Um so er, at skip skiftir eigara, tekur landsstýrið avgerð, um lánið skal verða rentu- og avdráttarfrítt ella um tað sum eftirstendur skal vera fallið til gjaldingar ella um tað framvegis skal vera standandi í skipinum, harundir rentu- og avdráttarfrítt.

Lánini verða at tryggja við pantibrævi við pantrætti innanfyri 80 % eftir virðismeting eftir stk. 1 í hesi lógargrein.

§ 4.

Lánsveitingar eftir hesi lóg eru treytaðar av, at viðkomandi skipseigari sjálvur útvegar tann pening, sum tørvar til rinding av muninum millum fulla keypi- ella byggipeningin og tey veðlán, sum fingin eru eftir lógini um Føroya realkredittstovn, lóg um ríkisstudning til nýbygging av føroyskum fiskiskipum v. m. og hesari lóg til tílíkar treytir, at lántakarin eftir landsstýrisins ætlan ætlast førur at dríva skipið við rímiligum forvinningi.

§ 5.

Lán eftir hesi lóg verða fyrst og fremst veitt fiskimonnum og skipseigarum, sum røkja fiskiskap sum høvuðsvinnu.

Til avgerð í spurninginum um støddina av láninum verða inntøku- og ognarviðurskifti umsøkjarans havd í huga.

§ 6.

Til lániumsóknir vera serlig umlede nævn foretagen vurderingsforretning.

Lånene, der udbetales kontant, er rente- og afdragsfri og afskrives over landskassens statusregnskab i indtil 20 år.

Skulle fartøjet skifte ejer, afgør landsstyret, hvorvidt lånet eller det beløb af dette, der ikke måtte være afskrevet er forfaldent til betaling eller om det fortsat skal blive stående i fartøjet, herunder som rente- og afdragsfrit.

Lånene sikres ved pantebrev med pantesikkerhed indenfor 80 % af en i henhold til denne paragrafs første stk. foretagen vurderingsforretning.

§ 4.

Ydelse af lån efter denne lov er betinget af, at vedkommende fartøjsejer selv fremskaffer de midler, som er nødvendige til finansiering af forskellen mellem den fulde anskaffelsessum og de i henhold til lov om Færøernes realkreditinstitut, lov om statsstøtte til nybygning af færøske fiskefartøjer m. v. samt nærværende lagtingslov optagne prioritetslån på sådanne vilkår, at låntageren efter landsstyrets skøn må antages at kunne drive fartøjet med rimeligt økonomisk udbytte.

§ 5.

Lån efter denne lov ydes fortrinsvis til fiskere og fartøjsejere, der driver fiskeri som hovederhverv.

Ved afgørelse af spørgsmålet om størrelse af lån vil der være at tage hensyn til ansøgerens indkomst- og formueforhold.

§ 6.

Ansøgninger om lån udfærdiges på

sóknarbløð nýtt og við skulu fylgja tær í umsóknarblaðnum kravdu upplýsingar.

§ 7.

Ein nevnd, sum hevur 3 limir, sum vald verður ávikavist av fiskimannafeløgunum, Føroya reiðarafelag og Føroya skipara- og navigatørfelag, verður landsstýrinum til handa til útinning lóginnar. Nevndin skipar seg sjálv við formanni.

§ 8.

Tær útreiðslur, sum standast av starvi nevndinnar, verða rindaðar av teim í §§ 1 og 2 nevndu játtanum.

§ 9.

Einhvør, sum luttekur í viðgerð av umsóknum um lán, er undir andsvari eftir reglunum um brot í almennari tænastu ella starvi undir strangari tagnarskyldu úteftir um viðurskifti umsøkjaranna, sum komin eru til hansara kunnleika.

§ 10.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1955 og samstundis fer løgtingslóg nr. 6 frá 19. marts 1954 úr gildi.

særlige ansøgningsblanketter bilagt de i ansøgningsskemaet forlangte oplysninger.

§ 7.

Et nævn bestående af 3 medlemmer valgt henholdsvis af fiskeriforeningerne, Færøernes rederiforening og Færøernes skipper- og navigatørforening bistår landsstyret med lovens praktiske gennemførelse. Nævnet vælger selv sin formand.

§ 8.

Udgifterne ved nævnets virksomhed afholdes af de i §§ 1 og 2 omhandlede bevillinger.

§ 9.

Enhver, der deltager i behandlingen af ansøgninger om lån, er under ansvar efter bestemmelserne om forbrydelse i offentlig tjeneste eller hverv forpligtet til at bevare fuldstændig tavshed udadtil om de forhold ansøgerne vedrørende, der er kommet til hans kundskab.

§ 10.

Denne lov træder i kraft 1. april 1955 og samtidig ophæves lagtingslov nr. 6, 19. marts 1954.

Viðmerkingar:

Undir tingviðgerðini av málinum um endurnýgging av skipaflotanum og málinum um realkredittstovnin fyri Føroyar kom fram, at neyðugt er, at løgtingið eisini ger peningaílegging saman við kredittstovninum og ríkiskassanum við 15 % av lánivirðinum, soleiðis at kredittstovnurin lænir 50 %, ríkiskassin 15 % og landskassin 15 %, meðan tey resterandi 20 % bliva eginpeningur.

Um landskassans ílegging tyktist løgtingið at vera av tí áskoðan, at landskassans ílegging skal latast sum studningur.

Við hesum lógaruppskoti hevur landsstýrið hildið hesa leið, tó

so, at landskassans peningur skal tryggjast við veðrætti, um eigaraskifti kemur at fara fram innan 20 ár aftaná lántøkuna.

Viðvíkjandi teim einstøku greinunum skal viðmerkjast:

ad §§ 1 og 2:

Í fíggjarárinum 1955/56 ætlast 2 mill. kr. at fara at vera til nýtslu.

Hesin peningur ætlast útvegaður soleiðis:

Á fíggjarløgtingslóg 1954/55 eru játtaðar kr. 400.000.

Á fíggjarløgtingslóg 1955/56 ætlast játtaðar kr. 400.000.

Tøkt avlop av landshandlinum um kr. 1.200.000.

Lógin er ætlað fyri eitt ár fyri at vinna sær royndir, áðrenn hon verður longd at galda fyri fleiri fíggjarár.

ad § 3:

Lánini eru ætlaði at hava hæddarmark uppí 15 % av lánsvirðinum og tryggjaði við veð aftaná 1. prioritet til realkredittstovnin og 2. prioritet til ríkiskassan.

Lánini eru rentu- og avdráttarfrí og avskrivast um landskassans ognarroknskap upp til 20 ár.

Verður eigaraskifti innanfyri 20 ár frá tí lánið er fingið, tekur landsstýrið avgerð um restlánið kann fara yvir til nýggja eigarin og fyrisetur treytirnar.

ad § 4:

Her eru fyrisettar reglur um skyldu lántakara at útvega tann partin av keypinum, sum verður ikki latin í almennum lánum.

Tað er ikki gjølligari fyrisett, at eginpeningurin skal vera 20 %. Hetta verður skotið til landsstýrið nærri at fyriseta í førum, har eigari skuldi fingið størri peningaíløgu, sum ætlast ikki at nerva rentabilitetin.

ad § 5:

Tað verður hildið at vera náttúrligt, at lán eftir hesi lóg fyrst og fremst verða veitt fiskimonnum og reiðarum, sum røkja fiskivinnu sum høvuðsvinnu.

ad § 6:

Tað fer at lætta um viðgerðina, tá umsóknirnar eru gjørdar á serliga tilgjørdum útfyllingarbløðum.

ad § 7:

Fyri luttøku starvskunnleikans í viðgerðini verður tað hildið neyðugt at seta niður nevnd, so sum skotið upp.

ad § 9:

Tagnarskylda verður hildin at vera neyðug fyri at tryggja sakliga og óheftа viðgerð.

ad § 10:

Lógin er ætlað at koma í gildi samstundis sum lógin um Føroya realkredittstovn og lógin »om støtte til nybygning af færøske fiskerfartøjer m. v.«.

1. viðgerð 14. mars og 18. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur fyrilagt tinginum uppskot til løgtingslóg um studning til endurnýging av fiskiskipaflotanum. Eftir uppskotinum verður landsstýrið heimilt í fíggjarárinum 1955/56 innanfyri 2 mill. kr. at veita lán úr landskassanum til nýbyggingar og keyp til landið av fiskiskipum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (P. M. Dam, A. Djurhuus, Djóni í Geil, R. Long og Trygve Samuelsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við tí broyting í § 1, 2. reglu í føroysku tekstini, at 1955/56 verður sett í staðin fyri 1954/55.

P. M. Dam loyvir sær at viðmerkja, at hann tekur undir við, at statur og løgting veita uppískoytislán og studning, ið talan er um í fyriliggjandi lógaruppskotum.

Viðvíkjandi lán- og studningsveitanini og umsitingini av umrøddu lánstovnum heldur minnilutin, at tað vildi verið sakligast og greiðast, at tær lógu hjá einum stovni (stýri) og ikki sum skotið er upp hjá trimum.

Tað, at tríggir sjálvstøðugir stovnar hvør sær skulu avgera fyri ávísar partar av láni- og studningspeninginum, hvør ið skal fáa og hvussu nógv og til hvørjar treytir, kann lættliga bera ólag við sær og tarna einari samrímandi støðu til ta samlaðu lán- og studningsveitanina til teir einstøku lánsøkjararnar.

Og uttan mun til, hvønn politiskan lit, okkara landsstýri verður at hava, verður tann subjektivi vandin at liggja fyri fótum í tess avgerðum.

Eisini er at siga, at tað er hægsti tørvur á at centralisera umsitingina, ið er við at vaksa seg ov stóra og ov dýra at bera hjá okkara fólki.

Tá ið semja er vorðin um, at stýrið fyri tí største av teimum trimum í sambandi við endurnýgging av skipaflotanum nevndu lánikeldum, Færøernes realkreditinstitut, skal verða sett við 3 serkønum monnum, ið verða at velja av landsstýrinum, ríkisstýrinum og nationalbankanum við hvør sínum manni, heldur minnilutin tað vera rímiligt, at lán- og studningsveitanin, ið er talan um í hesum lógum, eisini verður løgd undir hetta stýri.

Men tá ið eingin meiriluti er gingin fyri hesum í nevndini, og minnilutin ásannar, at tað liggur nógv á at fáa fyriliggjandi uppískoytis-

lániskipan til realkredittstovnin framda uttan dvøl, verður í aðru syftu mælt til at greiða atkvøðu fyri landsstýrisins uppskotunum.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Erlend Patursson) mælir til, at tær lánsskipanir endurnýgging fiskiveiðiflotans til frama, sum nú eru í gerð — nevniliga eftir uppskoti um realkredittstovn við 1. veðhalds lánum, uppskoti um danskt ríkislán við 2. veðhaldslánum og uppskoti um føroyskt landslán við 3. veðhaldslánum — allar verða fingnar undir eina og somu umsiting. Føroya løgting yvirtekur realkredittstovnin og tekur annars lán at nýta til endurnýggingina sumfyri fyrst í minsta lagi samsvara teim peninganøgdum, sum nevndar eru í lógaruppskotinum um realkredittstovnin og í lógaruppskotinum um donsk ríkislán — ávikavist 2 milj. kr. og 1,6 milj. kr. — afturat tí at løgtingið í fíggjarárinum 1955/56 fyri fyrst í minsta lagi veitir 2 milj. kr. til sama endamál.

Uppskot

I. frá meirilutanum (P. M. Dam, A. Djurhuus, Djóni í Geil, R. Long og Trygva Samuelsen).

Løgtingið samtykkir uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um studning til endurnýgging av fiskiskipaflotanum, tó við tí broyting í § 1, 2. reglu, at 1955/56 verður sett í staðin fyri 1954/55.

Uppskot

II. frá minnilutanum (Hanus við Høgadalsá og Erlend Patursson).

1. Føroya løgting yvirtekur realkredittstovnin. Stjórn hans verður útnevnd av landsstýrinum, og stendur stjórnin landsstýrinum til svars fyri umsiting stovnsins. Nevnd við 2 limum valdum av løgtingi, 2 av útgerðarmannafeløgum, 2 av fiskimannafeløgum og 2 av skuldarum stovnsins verða stjórnini til leiðbeiningar.

2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán — fyri fyrst upp í 3,6 milj. kr. Av hesum verða 2 milj. kr. settar í stovnsgrunn realkredittstovnsins, sum nýtast skal til at veita 50 % lán móti 1. veðrætti, meðan 1,6 milj. kr. skulu nýtast til at veita 15 % ella hægri lán móti 2. veðrætti.

3. Í fíggjarárinum 1955/56 veitir landskassin realkredittstovninum upp í 2 milj. kr. avdráttar- og rentuleyst lán sum skal nýtast til at veita 15 % ella hægri avdráttar- og rentuleyst lán móti 3. veðrætti.

4. Løgtingið velur 7-mannanevnd til at fyrireika lógaruppskot um hesa skipan, og skal nevndin leggja uppskot sítt fyri tingið ikki seinni enn 1. apríl 1955.

2. viðgerð 22. og 3. viðgerð 25. mars 1955.

Uppskot minnilutans fall 6—0.

Uppskot landsstýrisins við broyting nevndinnar samtykt 23—0.

---

31. Kirkja í Dali.

Ár 1955, 17. mars legði kirkjunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Dalbingar hava valt 5 av íbúgvarunum til nevnd at arbeiða fyri, at kirkja verður bygd í Dali. Málið var til viðgerðar á løgtingi í tingsetuni 1953, smbr. løgtingstíðindi, 1953 bls. 85. Kirkjunevndin, sum tá hevði málið til viðgerðar, úttalaði, at nevndin hevði áhuga fyri málinum og vildi fegin styðja Dalbingar, men soleiðis sum málið tá lá fyri, var eingi figgjarligt grundarlag fyri bygging av nýggjari kirkju. Nevndin mælti tí umsøkjarunum til komandi ólavsøku at endurnýggja umsóknina við frágreiðing um

a. hvat innsavnaður peningur hevur givið,
b. hvat burturluting hevur givið,
c. skrivlig váttan um, hvussu nógvar arbeiðstímar menn í Dali vilja arbeiða uttan løn,
d. eina detailprojektering, ið gjølliga lýsur tann veruliga kostnaðin av kirkjuni.

Við umsóknini í 1953 fylgdi tekning gjørd av S. J. Hofgaard, arkitekti, og summarisk kostnaðarætlan, hareftir kostnaðurin var roknaður til kr. 75.523,00.

Byggjinevndin hevur sent tinginum nýggja umsókn, dagfest 24. august 1954 við nýgjari tekning, gjørd av harra Sverra Dahl, fornfrøðingi og K. Kristoffersen, verkfrøðingi, og mælir til smærri broytingar. Teir siga, at henda kirkjan er roknuð at kosta um kr. 50.000,00. Føroya próstur mælir

til at góðkenna tekningina sum høvuðsgrundarlag við smærri broytingum og upplýsir, at ætlanin er at gera kirkjuna av timburi og tekja hana við skifursteini.

Kirkjunevndin vísir til løgtingsálit í tingsetuni 1953 og uppskotið, sum samtykt varð tá, hareftir eintak av álitinum varð sent umsøkjaranum. Av tí, at tað ikki av málinum er upplýst, so sum kirkjunevndin ynskti,

a. hvat innsavnað er av peningi,
b. hvat burturlutingin hevur givið,
c. skrivlig váttan um arbeiðstímar uttan løn,
d. detailprojektering,

skal kirkjunevndin mæla til, at málið verður sent landsstýrinum, fyri at landsstýrið kann fáa hesar nærri upplýsingar til vega, og tá ið teir eru komnir, verður so málið aftur at leggja fyri tingið.

Uppskot

Vísandi til álitið verður málið sent landsstýrinum.

2. viðgerð 21. mars 1955.

Uppskot nevndinnar samtykt 24—0.

---

32. Sunnudagshvíld í føroyskum skipum.

Ár 1955, 21. mars legði E. Patursson tingmaður fram soljóðandi skriv:

FØROYA FISKIMANNAFELAG
Tórshavn, 15. marts 1955.

Til Føroya løgting.

Føroya Fiskimannafelag heitir hervið á háttvirda Føroya løgting um at skipa fyri lóggávu um sunnudagshvíld á øllum føroyskum fiskiskipum.

Føroya Fiskimannafelag
Erlendur Patursson.

1. viðgerð 23. mars og 31. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Føroya Fiskimannafelag hevur í brævi frá 15. marts 1955 sent áheitan til løgtingið um at skipa fyri lóggávu um sunnudagshvíld á øllum føroyskum fiskiskipum.

Løgtingið hevur beint málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og skal vísa á, at tað við lóg eru fyrisettar reglur viðvíkjandi sunnudags- og heiligdagsarbeiði umborð á skipum. Lóg nr. 181 frá 1. mai 1923 (Sømandsloven) fyrisetur í § 56 fylgjandi:

»På søndage og andre her i riget anordnede helligdage, må der ikke pålægges mandskabet arbejde, som kan opsættes.

På d nævnte dage bør der såvidt muligt gives mandskabet lejlighed til at holde gudstjeneste om bord.«

Í viðmerkingunum til hesar lógarreglur verður m. a. sagt:

»Som eksempler på arbejde, som ikke kan opsættes, kan nævnes: Arbejde, som fordres til skibets sikerhed og manøvrering, maskinens betjening, nødvendig daglig rengøring, kosttilberedning og fornøden bådtjeneste og sejltørring.«

Annars skal verða vist á kunngerð nr. 3 frá 17. marts 1947 um tvungna hvíld á føroyskum fiskiskipum, ið fyrisetur í § 1, at manningin á føroyskum fiskiskipum hevur rætt til 6 tímar óbrotna hvíld í samdøgrinum, tá ið viðurskiftini ikki gera tað ómøguligt.

Skiparin hevur ábyrgd av, at løgreglan verður hildin, og tann, ið ikki heldur reglurnar kemur undir sekt ella heftan.

Uppskot

Eitt eintak av álitinum verður sent Føroya Fiskimannafelag.

2. viðgerð 2. apríl 1955.

Uppskot nevndinnar samtykt 20—0.

---

33. Einarættur til innflattnings av eplum.

Ár 1955, 22. mars legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

Løgtingslóg um einarætt til innflutning av eplum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at geva Føroya Búnaðarfelag einarætt at flyta inn eplir tilskilaða tíð av árinum.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om eneret til indførsel af kartofler.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at give Føroya Búnaðarfelag (Den færøske landboforening) eneret til indførsel af kartofler en begrænset tid af året.

§ 2.

Denne lagtingslov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Føroya Búnaðarfelag hevur fleiri ferðir heitt á landsstýrið um, at skipað verður so fyri, at eplaframleiðarum verður tryggjað, at teir sleppa av við sína úrtøku. Sum nú er, er tað heldur torført at fáa føroysk eplir seld. Hetta førir við sær fyri tann einstaka framleiðaran, at hann ikki fær nýtt til fulnar ein vinnumøguleika, landið hýður honum, og fyri landið sum heild ein meirinnflutning til skaða fyri okkara møguleikar at flyta inn aðrar vørur, sum tað ikki er gjørligt at framleiða í Føroyum.

Umhugsað er, hvørjar gøtur eru farandi í royndunum at ganga eplaframleiðarunum á møti. Úrslitið er at geva Føroya Búnaðarfelag einarætt at flyta inn eplir tilskilaða tíð av árinum um heystið, tá ið eplini verða tikin upp og verða boðis fram til sølu. Síðani føroysk eplir uloftast ikki goymast væl í mun til t. d. donsk eplir, kanska serliga tí at goymslumøguleikarnir her heima eru vánaligir, eiga tey at verða seld skjótast møguligt, aftaná tey eru tikin upp.

1. viðgerð 29. mars og 31. mars legði lógaruevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg, ið gevur landsstýrinum heimild til at geva Føroya Búnaðarfelag einarætt til at flyta inn eplir tilskilaða tíð av árinum. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at tað helst verður um heystið, tá eplini eru nýggj.

Lógarnevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, hevur býtt seg sundur í 3 minnilutar.

Minnilutin (Knút Nygaard og Poul Petersen) mælir tinginum til at samtykja lógaruppskot landsstýrisins óbroytt.

Minnilutin (J. H. Danbjørg og Trygve Samuelsen) setur onki uppskot fram.

Minnilutin (D. P. Danielsen) mælir til at seta eplainnflutningin á »bundnan« lista frá 1. september 1955 og setur uppskot fram samsvarandi hesum.

Uppskot

1. (frá Knút Nygaard og PoulPetersen):

Løgtingið samtykir uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um einurætt til innflutning av eplum.

Uppskot

2. (frá D. P. Danielsen):

Landsstýrinum verður álagt at seta eplainnflutningin á bundnan lista frá 1. september 1955.

2. viðgerð 2. apríl 1955.

Uppskot 1. (K. Nygaard og P. Petersen) fall 8—0.

Uppskot 2. (D. P. Danielsen) fall 6—0.

---

34. Lán til Arbejdernes Trawlerdrift.

Ár 1955, 23. mars legði løgmaður fram soljóðandi skriv við skjølum:

Til viðgerðar í løgtinginum verður send viðlagda áheitan dagfest 4. august 1954 frá Froðbiar søknar komunu um, at renta og avdráttur av teimum lánum, tilsamans kr. 606.360,00, sum í síni tíð vórðu veitt kommununi til endurrinding av Arbejdernes Trawlerdrift, Tvøroyri, og sum landskassin eftir løgtingslóg nr. 14, 18. marts 1952 veðheldur fyri, verða býttir í helvt millum landskassa og kommunu.

Viðløgd er eisini frágreiðing frá landsskrivstovuni dagfest 2. september 1954 sama máli viðvíkjandi.

Landsstýrið skal leggja afturat, at síðani nevnda frágreiðing varð skrivað, hevur landskassin lagt út terminsgjaldið pr. 1. september 1954 o. u. kr. 27. 000,00, og er nú uppkrav komið til landskassan fyri terminsgjaldið pr. 1. marts 1955 o. u. kr. 26.600,00.

FROÐBIAR SÓKNAR KOMMUNA

Tvøroyri, hin 4. august 1954.

Vátta móttøkuna av landsstýrisins skrivum av 5. mai 1954, j. 1952, nr. IV—81[1], (fyribils svarað í riti av 13. mai 1954) og skrivi dagsett hin 11. juni, j. 1952, nr. IV 81[1].

Á fyrsta sinni, tá ið Arbejdernes Trawlerdrift søkti um endurreisingarlán frá landsstýrinum, varð svarað felaginum, at tað kundi fáa lánið, um peningur varð tøkur — løgtingið hevði samtykt at læna upp til 2 miliónir til skilabøtur — men tess verri hevði løgtingið tá einans fingið tu einu milliónina til láns, og hon var tá øll útlánt. Felagið kundi tí ikki fáa lánið beinleiðis frá løgtinginum, men fekk at vita, at um tað sjálvt kundi fáa lánið ímóti løgtingsins veðhaldi, vildi landsstýrið løgtingsins vegna veðhalda. Sum kunnugt kundi felagið einans fáa tað umsøkta skilabótarlánið frá Statsanstalten for Livsforsikring og Arbejdernes Landsbank, men treytað av at lánið bleiv givið ígjøgnum Froðbiar sóknar kommunu við veðhaldi frá løgtinginum. Lángevararnir komu soleiðis at hava bæði kommununa og løgtingið sum tryggjan fyri endurrindingina.

Sóknarstýrið vildi sjálvandi ganga langt fyri at halda størstu driftir í sóknini gangandi, og var at byrja við á sóknarstýrisfundi hugur fyri at geva ábyrgd javnbjóðis við løgtingið fyri tørvandi endurreisingarláni til felagið. Støðan var soleiðis tá, at menn rokнaðu við, at kommunan hægst skuldi koma at rinda helvtina av rentum og avdrátti, um so kom at bera á, at felagið sjálvt ikki kundi gjalda.

Men tá ið lánið kom frá nevndu lángevarum, mátti tað tekniskt hava tað orðalag, at Froðbiar sóknar kommuna kom at standa fyri láninum, meðan løgtingið einans varð sett sum veðhaldari. Ein ið ikki kemur viðurskiftini og sum bert hevur skuldnarskjalið at ganga út frá, kann nú siga, at kommunan juridiskt hongur uppá lánið, tá A. T. ikki kann rinda. Men tann, sum á fyrsta sinni, eins og sítandi landsstýri og sóknarstýri, varð við viðgerðini av endurreisingarláninum til A. T., kann ikki annað enn viðganga, at løgtingið játtaði lánið og vildi verið komið einsamalt at borið tapið, um tað tá hevði haft tøkan pening at lænt. Men hóast hetta av sonnum kann sigast, og at komunan av tekniskum lánigrundum kom uppí, vil sóknarstýrið einans halda seg til tær framan fyri nevndu forútsetningar um javnbjóðis ábyrgd hjá kommunu og løgtingi og søkir — ávísandi fram-

anfyri umrødda — heiðraða landsstýrið um at ganga við til ta skipan, at landskassin tekur helvtina og kommunan hina helvtina av rentum og avdráttum, ið felagið A. T. sjálvt ikki kann rinda av skilabótarláninum, tað hevur fingið ígjøgnum kommununa. Hetta er langt gingið av kommununi, tá ið haft verður í huga, at í øðrum tilfellum, har skilabótarlán vórðu givin, hevur landskassin noyðst at borið alt tapið, tá ið endurresingin miseydnaðist.

Kommunan verður ætlandi før at endurrinda løgtinginum sín part av rentum og avdráttum av skilabótarláninum við árs enda, tí rokuað verður við, at tá er stórur partur av skattaeftirsøðunum goldin. Tað er at siga, at sóknarstýrið hevur sett Jesper Holm sum panifúta, sum vónandi so ger nakað munandi fyri at fáa skattin inn.

Froðbiar sóknarstýri
s. v.
P. M. Dam.

Til Føroya Landsstýri,
Tórshavn.

Frágreiðing viðvíkjandi umsókn frá Froðbiar sóknar kommunu um at rentur og avdráttir av lánum til A. T. við landskassaveðhaldi verða býttir í helvt millum landskassan og kommununa.

Í skrivi 4. august 1954 søkir Froðbiar sóknarstýri um, at landsstýrið gongur við til eina skipan, hareftir renta og avdráttir av teimum lánum, sum lænt eru kommununi til endurreising av A. T. av Arbejdernes Landsbank og Statsanstalten for Livsforsikring, upprunaliga nominelt kr. 500.000, verða goldnir av landskassanum og kommununi við helvt til hvønn, um A. T. sjálvt ikki er ført fyri at rinda hesi gjøld. Komunan motiverar hesa áheitan við, at tá ið A. T. á fyrsta sinni í 1951 søkti landskassan um saneringslán, varð svarað felagnum, at tað kundi fáa lán, um peningur var tøkur. Peningur var tá ikki tøkur, eftirsum tað bert eydnaðist landsstýrinum at læna 1 mill. kr. til saneringshjálp, hóast landsstýrið hevði heimild at læna 2 mill. kr. Felagið fekk tí ikki lán beinleiðis frá landskassanum, men fekk at vita, at um tað á annan hátt kundi fáa lán, vildi landskassin veðhalda. Av tekniskum grundum varð hetta lán skipað soleiðis, at tað varð lænt kommununi, sum so skuldi lata tað víðari til A. T. og treytað varð, at landskassin garanteraði. Sóknarstýrið viðgongur, at juridisk er kommunan bundin at rinda alt lánið aftur.

Juridiskt er einki at ivast í, at landskassin, sum veðhaldari kann krevja aftur frá kommununi alt tað, hann rindar aftur í rentum og avdráttum av nevndu láunm. Landskassin hevur higartil lagt út um leið kr. 54.800. Spurningurin er tó, um tað kann gevast kommununi viðhald í tí

ajónarmiði, at tað bert er av tekniskum grundum, at lánið varð veitt henni, og at landskassin, um hann hevði pening tøkan í síni tíð, hevði latið A. T. fingið lán, ella um hann ikki hevði pening tøkan, so tó garanteraði fyri lánið beinleiðis til A. T.

Av tí sum fyrliggur á landsskrivstovuni sæst ikki, at A. T. hevur fingið nakra beinleiðis lántilsøgn, men í skrivi frá 10. august 1951 frá landsstýrinum til A. T., kunngjørt fíggjarnevndini og vinnulánsgrunninum, verður m. a. sagt:

»Um fíggjarnevndin og vinnulánsgrunnurin viðmæla, vil landsstýrið geva ábyrgd fyri láni, sum verður givið undir treytum, sum landsstýrið og fíggjarnevndin góðtaka.«

Í lögtingsmáli nr. 59/1951: Lán til Froðbiar komunu, løgtingstíðindi 1951, bls. 236, verður í álitinum m. a. sagt:

»Principielt má tað eisini sigast at vera skeivt, at kommunan verður skotin inn sum eitt millumlið í eina slíkari lántøku (til A. T.), sum løgtingið, um illa skuldi gingist kemur at hava seinastu ábyrgd fyri. Kommunan, ið er ógvuliga skuldbundin frammanundan, eigur at verða hildin uttanfyri eitt slíkt lán.«

»Eisini tað kann takast uppaftur, sum fyrr sagt, at kommunan í hesum máli eigur at verða hildin uttanfyri.«

»Sum tað sæst í skjali til hetta mál, hevur tað almenna í nøkrum førum hjálpt har fiskivinnan er komin í trupulleikar, og fyri tí parti av hesum felagsins rakstri, ið nemur við fiskiskap, trolgerð, fiskaturking o. a. er tað nátúrligt, at tað almenna roynir at hjálpa.«

Og í uppskotinum stendur:

»Tingið er sinnað til fiskivinnurakstur og til allan arbeiðskapandi rakstur A. T.s a tátaka sær ta ábyrgd, ið neyðug er, undir álítandi umskiping av felagnum og eftiransan.«

Úrslitið av hesi tingviðgerð varð, at landsstýrið varð biðið um at kanna fíggjarligu støðu felagsins gjølla, og síðani roknaði tingið við, at málið kom fyri aftur. Sum kunnugt kom málið fyri aftur, soleiðis at viðtikið er at veðhalda fyri láni til kommununa, og at hetta lán síðani verður latið til A. T.

Av tí sum fyriliggur frammanundan seinastu tingviðgerð framgongur, at løgtingið, um fíggjarligu viðurskifti felagsins vóru gjølla upplýst, ikki var óvilligt til at taka ábyrgd fyri láni beinleiðis til A. T. Tað kann tí sigast at vera beint, tað sum sóknarstýrð førir fram, at kommunan var ikki komin upp í sum debitor, um ikki lángevararnir høvdu treytað sær hendа formin.

Út frá tí, sum her er flutt fram — ikki út frá juridiskum grundum —

og út frá fíggjarligu umstøðum kommununar verður mælt til, at landsstýrið tekur til umhugsan at leggja fyri løgtingið tilmæli um, at landskassin og Froðbiar sóknar komuna rinda helvtina hvør av rentu og avdrátti av teimum umtalaðu lánum, sum A. T. ikki sjálvt er ført fyri at rinda.

1. viðgerð 25. mars og málið beint til fíggjarnevndina.

---

35. Toskaroynd í Eysturdýpinum.

Ár 1955, 24. mars legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Thomas Thomassen, skipari, Tórshavn, hevur vent sær til fiskivinnunevnd løgtingsins og biðið um, at løgtingið saman við øðrum áhugaðum stovnum og felagum fer undir eina roynd eftir toski í Eysturdýpinum í sildatíðini 1955.

Thomassen roknar við, at roynt skal verða í 3 máuaðir við flótitroli, toskagørnum, snøri, sildagørnum og flótilínum. Trolari av meðal stødd er ætlaður at vera hóskandi far. Útreiðslurnar eru mettar soleiðis:

		kr.
50	nylon toskagørn	32.000
1500	favnar trossi	6.000
100	boyur	2.500
	slertar	5.800
1500	glaskúlir	2.200
12	sildagørn	3.360
1	sildatrol	6.000
1	toskatrol	5.000
100	sildatunnur	2.500
20	tons salt	2.000
400	tons kol	35.000
200	stk. línu við húkum	2.600
	snøri og lodd	1.200
Matur, 18 manns 90 dagar		10.000

Lønir:

Skipari		4.500
1. stýrimaður		3.000

1. meistari	4.500
2. meistari	3.000
1 kokkur	3.000
13 menn	10.400
tilsamans kr.	144.560

Her er ikki íroknað leiga av bátinum, heldur ikki er innøka av veiðuni tikin við.

Thomassen meinar, at hesi feløg og stovnar kundu tikið lut í útreiðsluni saman við løgtinginum:

1. Føroya Fiskasøla
2. Sjóvinnubankin
3. Færø Amts Sparekasse
4. Føroya Banki
5. Tryggingarsambandið Føroyar
6. Føroya skipara- og navigatørfelag
7. Føroya fiskimannafelag
8. Suðuroyar fiskimannafelag
9. Skipafelagið Føroyar
10. Reiðarafelagið
11. Shell
12. Esso
13. Maskinistfelagið
14. Motorpassarafelagið

Nevndin er vitandi um, at føroyingar, ið veitt hava síld í Eysturdýpinum hesi seinastu árini, tíðum hava verið varnir við stóran tosk í sildagarninum, eisini hava menn borið við fisk við snøri á hesum leiðum. Sagt er nevndini, at enn vestari ein er staddur á leiðini, tess meira tykist at vera av fiski. Ein má tí ganga út frá, at hetta fiskaslagið er tað sama, sum føroyingar veiddu í stórari nögd við snøri út av grunninum á Eysturlandinum fyri 20—30 árum síðani. Hesin toskur er stórur og feitur og soleiðis væl hóskandi sum klippfiskur til Spaniu. At hesin fiskur gongur millum breiðusíldina er eingin ivi um, spurningurin er bara, um nøgdirnar eru so stórar og torvurnar so tiltar, at tað kann løna seg at veiða á hesum havøki. Nevndin meinar at hetta eigur at verða kannað í summar.

Hvør veiðiháttur er tann besti er kanska torført at meta um, men hugsast kann, at toskagørn og lína eru tey bestu amboðini.

Sum omanfyri ávíst er ein trolari dýrur í bróki, og torført verður kanska at útvega tann neyðturviliga pening til henda rakstur.

Nevndin er tí meira sinnað at mæla til, at eitt minni og bíligari far verður fingið til vega til nevnda endamál.

Nevndin mælir tinginum til at lata landsstýrinum málið í hendi at fyrireika og um gjørligt føra út í lívi og setur fram fylgjandi

Uppskot

Vísandi til tað í álitinum framførda verður landsstýrið biðið um at fáa í lag royna eftir toski í Eystnrdýpinum í summar.

2. viðgerð 30. mars og 3. viðgerð 2. apríl 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá H. Djurhuus:

§ 1

Landsstýrinum verður heimilað úr landskassanum at nýta upp til kr. 50.000,00 til toskaroynd í Eysturdýpinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 1

Landsstyret bemyndiges til af landskassens midler at anvende op til kr. 50.000,00 til forsøgsfiskeri efter torsk i havområdet nord for Færøerne.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Broytingaruppskotið samtykt 21—0.

Uppskot nevndinnar so stalt burturdottið.

---

36. Val av álitismonnum og nevndum.

Ár 1955, 4. apríl stóð val av álitismonnum og nevndum:

1. *FÓLKATINGSVALNEVND:*

A. *Suðurstreymoyar prestagjald:*

a. *Fastir limir:* Arnold Egholm, kassameistari, Tórshavn, H. O. Hansen, direktørur, Tórshavn, Th J. Jacobsen, telegrafistur, Tórshavn, Carter Niclasen, kassameistari, Tórshavn, J. P. Henriksen, bók-

haldari, Tórshavn, Trygvi Árting, arbeiðsmaður, Tórshavn, Kjartan Mohr, stjóri, Tórshavn.

b. *Tiltaksmenn:* Oluf Nielsen, prentari, Tórshavn, Clement Clementsen, keypmaður, Tórshavn, Louis Højgaard, kassameistari, Tórshavn, Andor Eirikstoft, timburmaður, Tórshavn, Sigrid av Skarði Joensen, Tórshavn.

B. *Norðstreymoyar prestagjald:*

a. *Fastur limur:* Aksel Hansen, prokuristur, Vestmanna.

b. *Tiltaksmaður:* Hans Iversen, keypmaður, Kvívík.

C. *Eysturoyar sýsla:*

a. *Fastur limur:* Sigurd Petersen, Fuglafirði.

b. *Tiltaksmaður:* Joh M. Fr. Poulsen, lærari, Strendur.

D. *Norðoya sýsla:*

a. *Fastur limur:* Sofus Larsen, bakari, Klaksvík.

b. *Tiltaksmaður:* Einar Waag, bryggjari, Klaksvík.

E. *Vága sýsla:*

a. *Fastur limur:* Poul Joensen, lærari, Sandavági.

b. *Tiltaksmaður:* Eli Lauritsen, Sørvági.

F. *Sandoyar sýsla:*

a. *Fastur limur:* Gunnar Winther, revisor, Sandi

b. *Tiltaksmaður:* Hákun Dam, lærari, Sandi.

G. *Suðuroyar sýsla:*

a. *Fastur limur:* Jaspur Holm, Tvøroyri.

b. *Tiltaksmaður:* Johan Hansen, bankastjóri, Tvøroyri.

2. *LØGTINGSVALNEVND:*

A. *Suðurstreymoyar prestagjald:*

a. *Fastir limir:* Thomas Jacob Jacobsen, telegrafistur, Tórshavn, H. O. Hansen, direktørur, Tórshavn, Andor Eirikstoft, timburmaður, Tórshavn

b. *Tiltaksmenn:* Aage Mikkelsen, bókahaldari, Tórshavn, Kristian Cuttesen, málari, Tórshavn.

B. *Norðstreymoyar prestagjald:*

a. *Fastir limir:* Andreas Andreasen, lærari, Vestmanna, Haldor Olsen, Vestmanna, Jacob Samuelsen, fiskimaður, Haldórsvík.

b. *Tiltaksmenn:* Samuel J. Egholm, kongsbóndi, Streymnesi, Eyðálvur á Heygum, Vestmanna.

C. *Eysturoyar sýsla:*
   a. *Fastir limir:* Poul E. Hansen, lærari, Gøtu, Johan M. Fr. Poulsen, lærari, Strendur, Herluf Bertelsen, lærari, Fuglafirði.
   b *Tiltaksmenn:* Johannes Petersen, træsmiðjur, Saltnesi, Samuel P. Hansen, fiskavrakari, Norðagøtu.

D. *Norðoya sýsla:*
   a. *Fastir limir:* Olaf Olsen, keypmaður, Klaksvík, Guttorm Matras, Klaksvík, Hans Biskupsstøð, kongsbóndi, Klaksvík.
   b. *Tiltaksmenn:* Karl Joensen, kongsbóndi, Klaksvík, Debes Kristiansen, keypmaður, Norðdepli.

E. *Vága Sýsla:*
   a. *Fastir limir:* D. Danielsen, lærari, Sørvági, D. P. Niclasen, keypmaður, Miðvági, J. H. Samuelsen, lærari, Miðvági.
   b. *Tiltaksmenn:* Søren Danielsen, brævsamlari, Miðvági, Th. J. Thomsen, fiskimaður, Sørvági.

F. *Sanduroyar sýsla:*
   a. *Fastir limir:* Gunnar Winther, revisor, Sandi, Antonius Sørensen, keypmaður, Húsavík, Kristen Joensen, keypmaður, Sandi.
   b. *Tiltaksmenn:* Kjartan Hentze, lærari, Sandi, Johannes Dalsgaard, óðalsmaður, Skálavík.

G. *Suðuroyar sýsla:*
   a. *Fastir limir:* Johan Djurhuus, lærari, Vági, Jasper Holm, Tvøroyri, Hemming Jespersen, Tvøroyri.
   b. *Tiltaksmenn:* Niels Petur Holm, Hvalba, Samuel Johannesen, lærari, Vági.

3. *SKATTANEVNDIN:*
   a. *Fastir limir:* Frederik Hansen,, S. Ellefsen, Hans Iversen, Richard Jacobsen.
   b. *Tiltaksmenn:* Hanus við Høgadalsá, Djóni í Geil, Leon Joensen og Kjartan Mohr.

4. *KIRKJUSTJÓRNIN:*
   S. Ellefsen, Johan Poulsen, Kjartan Mohr.

5. *SKÚLASTJÓRNIN:*
   P. M. Dam, Richard Long, Johan Poulsen.

6. *GRANNSKÓÐARAR TIL FÆRØ AMTS SPAREKASSE:*
   Ankjær Jensen, København, Robert Joensen, Klaksvík.
   Tiltaksmaður: Knud Nygaard, Tvøroyri.

7. *NEVNDIN FYRI FØROYA REALSKÓLA:*
Kjartan Mohr.

8. *NEVNDIN FYRI P.F SKIPAFELAGIÐ FØROYAR:*
O. J. Jensen, Tórshavn, Hans Iversen, Kvívík.

9. *UMBOÐSMAÐUR TINGSINS Á AÐALFUNDI SKIPAFELAGSINS FØROYAR:*
Fastur limur: Trygve Samuelsen, Tórshavn.
Tiltaksmaður: Leivur Lützen, Tórshavn.

10. *UMBOÐSMAÐUR TINGSINS Á AÐALFUNDI SJÓVINNUBANKANS:*
Fastur limur: Djóni í Geil, Tórshavn.
Tiltaksmaður: M. Holm, Tórshavn.

11. *STÝRI FYRI MENTUNARGRUNN FØROYA LØGTINGS:*
Richard Long, Tórshavn, Joh. M. Fr. Poulsen, Strendur.
Tiltaksmaður: C. L. Samuelsen, Tórshavn.

12. *OYRNAFJALLSNEVNDIN:*
Poul Petersen, Tórshavn, Hanus við Høgadalsá, Tórshavn.

13. *NEVND VIÐVÍKJANDI GRØNLANDSFELAGNUM:*
Fastir limir: J. Fr. Øregaard, Fr. Bláhamar, P. H. Weihe.
Tiltaksmenn: P. M. Dam, Samuel Ellefsen, Jens Chr. Olsen.

14. *BÚNAÐARNEVNDIR:*
II. deild: Hans Lützen, Klaksvík.
Tiltaksmaður: Joen K. Høgnesen, Norðoyri.

15. *VANLUKKUTRYGGINGARRÁÐI:*
Fastir limir: C. L. Samuelsen, A. Sørensen, Frederik Hansen.
Tiltaksmenn: Poul Hansen, Debes Christiansen, Johan Simonsen.

16. *FØROYA BRUNATRYGGING:*
Fastir limir: Joh. M. Fr. Poulsen, Poul Petersen, Olaf Ellingsgaard.
Tiltaksmenn: Eiden Müller, Martin Holm, Frederik Hansen.

17. *FØROYA LISTASAVN:*
Hans Niclasen, Janus Kamban, Trygve Samuelsen.

18. *YVIRPOLITIRÆTTURIN:*
Fastir limir: Johan Djurhuus, Trygve Samuelsen.
Tiltaksmenn: Hans J. Guttesen, Jacob Jacobsen.

um javnbjóðis ábyrgd hjá kommunu og løgtingi og søkir — ávísandi framm-

19. *FÆRØSK DANSK ORDBOGSFOND:*
Richard Long.

20. *NEVNDIN VIÐV. NEVNINGAÁRSLISTUM:*
Trygve Samuelsen, Evald Arge.

21. *YVIRHEILSUNEVNDIN:*
Leif Dahl, Eiði.

---

37. Lán frá Kreditforeningen af Kommuner i Danmark til føroyskar kommunur.

Ár 1955, 25. mars legði løgmaður fram soljóðandi skriv:

Nevndin, statsministeriið setti 21. august 1953, hevur givið frá sær viðlagda álit frá 11. januar 1955 viðvíkjandi láni frá Kreditforeningen af kommuner i Danmark til føroyskar kommunur við uppskoti til lóg um veðhald ríkisins fyri hesi lán.

Landsstýrið skal serliga vísa á, at eftir lógaruppskotinum er veðhald ríkisins treytað av, at heimastýrið, t. e. í hesum føri løgtingið, jbr. § 19 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948, um stýrisskipan Føroya í sermálum, veðheldur ríkiskassanum, at hann fær tað aftur, hann vegna sítt veðhald hevur lagt út.

Landsstýrið leggur lógaruppskotið við hesum fyri løgtingið við tilmæli og við fylgjandi

uppskoti:

Løgtingið viðmælir uppskot til lóg »om statsgaranti for lån fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner« í áliti frá 11. januar 1955 frá nevnd, statsministeriið hevur sett 21. august 1953.

1. viðgerð 30. mars og 2. viðgerð 1. apríl 1955.

Uppskotið til lóg »om statsgaranti for lån fra kreditforeningen af kommuner i Danmark« samtykt 22—0.

---

38. Nevnd til viðgerðar av málinum um fiskimarkið.

Ár 1955, 25. mars legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

Løgtingslóg um nevnd til viðgerðar av fiskimarkinum

lagtingslov om udvalg til behandling af fiskerigrænsen.

§ 1.

1. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta niður 3-mannanevnd at kanna allar spurningar í samband við málið at skapa Føroyum so rúmligt fiskimark, sum tað eftir millumlanda viðurskiftum er gjørligt.

2. stk. Nevndin gevur frá sær álit til landsstýrið. Landsstýrið leggur síðani málið fyri løgtingið.

§ 1.

Stk. 1. Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et udvalg på 3 medlemmer til at undersøge alle spørgsmål i forbindelse med sagen at give Færøerne en så vidtgående fiskerigrænse, som det efter internationale forhold er muligt.

Stk. 2. Udvalget afgiver betænkning til landsstyret. Landsstyret forelægger herefter sagen for lagtinget.

§ 2.

Tær útreiðslur, ið standast av nevndararbeiðinum, m. a. samsýning til nevndarlimir og serliga køna hjálp, verða at gjalda úr landskassanum.

§ 2.

Udgifter i forbindelse med udvalgsarbejdet, bl. a. vederlag til udvalgsmedlemmer og særlig skyndig hjælp afholdes af landskassen.

Viðmerkingar:

Í álitinum til løgtingsmál nr. 15/1954 (Ólavsøkutingið): Broyting í reglunum um sjómarkið undir Føroyum, verður av meirilutanum m. a. sagt:

> Í hesum máli eru tveir vegir at fara. Annar er at siga upp sáttmálan frá 1901, og so saman við Danmark seta tað sjómark, sum vit halda okkum kunna prógva at eiga rætt til og kunna verja yvir fyri øðrum tjóðum. Hesin vegurin er ikki farandi sum er, bert tí vit halda okkum hava eitt nóg so væl grundað ynski, men krevur hann gjølligar kanningar av øllum, sum kann tala fyri eini broyting. Til hesar kanningar krevjast løgfrøðingar við serkunnleika til fólkarættslig viðurskifti, og vil tað óivað hjá teimum taka rúma tíð, áðrenn

teir kunnu siga, hvat fiskimark teir halda okkum eiga rætt til. Fyrr enn hesar kanningar eru lidnar, kann ikki dømast, um hesin vegurin er hann, sum gevur best úrslit. Ísland hevur valt at ganga uppsagnarvegin. Einki vist kann tó sigast í dag, um tað fiskimark, Ísland hevur sett, verður fólkarættsliga viðurkent.«

Nú uppískoyti til 1901-sáttmálan verður gjørt við Bretland at galda í 10 ár, eigur spurningurin um møguleikarnar fyri einum enn rúmari fiskimarki at verða gjølla kannaður, so hetta mál verður greitt upplýst.

1. viðgerð 30. mars og 5. apríl legði sjómarksmálanevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið til viðgerðar uppskot til løgtingslóg um nevnd til viðgerðar av fiskimarkinum. Skotið verður upp at seta 3-mannanevnd at kanna allar spurningar í sambandi við málið at vinna Føroyum so rúmligt fiskimark, sum eftir millumlanda viðurskiftum verður gjørligt. Málið er viðgjørt í sjónarksnevndini, sum hevur býtt seg í meiriluta og minniluta. Meirilutin (Djóni í Geil, Johan Danbjørg, Leon Joensen, R. Long og Jens Chr. Olsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, meðan minnilutin (Olaf Ellingsgaard og Erlendur Patursson) mælir til, at tingið velur nevndarmenninar, sum skulu lata umhugsan sína til tingið.

Uppskot

frá meirilutanum (Djóni í Geil, Johan Danbjørg, Leon Joensen, R. Long og Jens Chr. Olsen):

Tingið samtykir uppskot landsstýrisins.

Uppskot

frá minnilutanum (Olaf Ellingsgaard og Erlendur Patursson):

§ 1.

1. stk. Løgtingið velur 3-mannanevnd til at kanna allar spurningar í sambandi við málið at skapa Føroyum so

Stk. 1. Lagtinget nedsætter et udvalg på 3 medlemmer til at undersøge alle spørgsmål i forbindelse med sagen at

rúmligt fiskimark sum tað eftir millumlanda viðurskiftum er gjørligt.
2. stk. Nevndin gevur frá sær álit til løgtingið.

give Færøerne en så vidtgående fiskerigrænse, som et efter internationale forhold er muligt.
Stk. 2. Udvalget afgiver betænkning til lagtinget.

2. viðgerð 5. apríl og 3. viðgerð 6. apríl 1955.

Uppskot meiralutans fall 11—0.

Uppskot meiralutans fall 6—0.

---

39. Avtøka av Fátækragrunni Løgtingsins.

Ár 1955, 30. mars legði E. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av fátækagrunni løgtingsins.

§ 1.

Frá 1. apríl 1955 verður fátækagrunnur løgtingsins avtikin. Ognir grunsins falla til socialgrunn løgtingsins.

§ 2.

Allar inntøkur, ið fátækagrunnur løgtingsins hevur samsvarandi galdandi lóg, falla til landskassan, ið tekur við teimum skyldum, ið hvíla á fátækagrunni løgtingsins.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ophævelse af lagtingets fattigkasse.

§ 1.

Fra 1. april 1955 at regne ophæves lagtingets fattigkasse. Fondets aktiver indgår i lagtingets socialfond.

§ 2.

Alle indtægter, som tilfalder lagtingets fattigkasse efter gældende lov, tilfalder fremtidig landskassen, som overtager de forpligtelser, som påhviler fattigkassen.

§ 3.

Denne lagtingslov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Fátækragrunnurin átti 1. apríl 1954 kr. 424.668,30 og eigur ætlandi 1. apríl 1955 um kr. 450.000,00. Peningurin stendur á konto í landskassanum.

Inntøkur grunsins vóru í 1953/54:

Arvagjøld	kr.	10.550,25
Gjøld fyri handilsloyvi	kr.	6.915,00
Sektir	kr.	6.090,00
Afturgoldin alimentatiónsgjøld	kr	424,63
	kr.	**23.979,88**

Útreiðslur (til sjúk fólk)	kr.	2.221,00

Fátækagrunnurin varð stovnaður við kgl. konfirmatión 28. august 1767 på en fattiges kasses oprettelse på Færø. Lóg 10. apríl 1895 om fattigvæsenet på Færøerne §§ 4, 5 og 7—9 umtala fátækagrunnin. Inntøkurnar eru rentur, arvagjøld, ein partur av gjøldum fyri handilsloyvi og sektir, og inntøkurnar skulu nýtast til »dels til årlige bidrag til de forskellige fattigdistrikter, dels til ekstraordinære understøttelser til disse i særlige tilfælde efter lagtinges nærmere bestemmelse«. Í mong ár hevur tingið ikki hildið tað neyðugt at játta studning úr grunninum til kommununar. Mælt verður tí til at flyta ognirnar hjá grunninum til socialgrunnin, sum, um tað er neyðugt, vil kunna veita kommununum tann studning, sum lógin umtalar.

Socialgrunnur løgtingsins varð stovnaður í 1941, tá samtykt varð, at 25 % av rakstraravlopinum hjá amtsgrunninum skuldi leggjast í ein socialgrunn. So statt vórðu í 1941 lagdar 250.000 kr. í grunnin og í 1942 500.000 kr., og 31. december 1943 var grunnurin vaksin til kr. 1.113.440,70 Pr. 1. apríl 1954 var hann kr. 1.236.130,42. Av grunninum eru lænt Vágs ravmagnsverki ca. 250.000 kr., sum verða rentaðar. Hin parturin stendur á konto hjá landskassanum.

Mælt verður til, at peningurin verður so við og við læntur út til rentu, t. d. 5 %. Verður ognin hjá fátækagrunninum flutt til socialgrunnin, verður hesin grunnur tilsamans um 1,7 mill kr., og 5 % renta herav vil geva 85.000 kr. árliga, harav studningur kann verða veittur til social endamál.

1. viðgerð 31. mars, 2. viðgerð 1. og 3. viðgerð 2. apríl 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá J. P. Davidsen:

1) Í grein 2 verður orðið »landskassin« broytt til »socialgrunnin« og orðið »landskassen« til »socialfonden«.

2) Sum nýtt petti í § 2 verður sett:
Peningur socialgrunsins verður frá 1. apríl 1956 at renta við í minsta lagi 5 % p. a.

Som nyt stykke føjes til § 2:
Socialfondens beholdning bliver fra 1. april 1956 at forrente med mindst 5 % p. a.

Broytingaruppskot 1) fal 1 10—0.

Broytingaruppskot 2) fall 0—0.

Uppskot landsstýrisins samtykt 17—3.

---

40. Skattur til landskassan.

Ár 1955, 30. mars legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um skatt til landskassan.

§ 1.
Reglurnar í § 3 í løgtingslóg nr. 17 frá 28. marts 1952 um eykaskatt til landskassan verða óbroyttar galdandi fyri skattaárið 1955/56.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om skat til landskassen.

§ 1.
Bestemelserne i § 3 i lagtingslov nr. 17 af 28. marts 1952 om ekstraskat til landskassen forbliver uændret i kraft for skatteåret 1955/56.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Beinleiðis inntøkuskattur er á fíggjarlógini 1955/56 settur til 3.300.000 kr.

Fyri at fáa henda skatt verður neyðugt at halda somu stig sum

seinasta fíggjarár og eisini eykaskattin uppá 30 % av øllum skattum, ið roknaðir eru eftir inntøkum uppá kr. 5000 ella meira.

Reglan um eykaskattin hevur bert haft gildi fyri 1 ár í senn og setur landsstýrið tí her fram uppskot um endurnýggjan fyri skattaárið 1955/56.

2. og 3. viðgerð 1. apríl 1955.

Uppskot landsstýrisins samtykt 17—0.

---

41. Lán til uppbygging av vinnulívinum.

Ár 1955, 30. mars legði Kj. Mohr tingmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um lántøku til uppbygging av vinnulívi Føroya.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán uttanlanda upp í 50 mill. krónur, sum skulu nýtast til uppbygging av føroyskum vinulívi, havna- og vegabygging og húsabygging eftir fylgjandi reglum:

1. Upp til 20 mill. kr. til keyp og byging av stórum trolarum.
2. Upp til 15 mill. kr. til keyp og bygging av fiskiskipum (102—250 br. reg. tons).
3. Upp til 5 mill. kr. til keyp og bygging av farmaskipum.
4. Upp til 1 mill. kr. til peningaílegging í landbúnaðin ((bygging av seyðahúsum, vaskibrunnum og til keyp av maskinamboðum).

Lagtingslov om lån til opbygning af det færøske erhvervsliv.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån uden for Færøerne indtil 50 mill. kr., der skal anvendes til opbygning af det færøske erhvervsliv, havne- og vejbygning og boligbygning efter følgende regler:

1. Indtil 20 mill. kr. til køb og bygning af store trawlere.
2. Indtil 15 mill. kr. til køb og bygning af fiskeskibe (120—250 br. reg. tons).
3. Indtil 5 mil. kr. til køb og bygning af fragtskibe.
4. Indtil 1 mill. kr. til financiering af landbruget (opførelse af fårehuse, indretninger til fårevask og til køb af maskinredskaber).

5. Upp til 6 mill. kr. til havna- og vegagerð.
6. Upp til 3 mill kr. til lán til húsabygging.

§ 2.

Landsstýrið hevur umsitingina av teim í § 1 nevndu peningahæddum á henda hátt:

Burtur av tí í § 1, 1. petti, nevnda peningi skulu upp til 15 mill. kr. verða nýttar til keyp av lánsbrøvum í Føroya Realkredittstovni, meðan hinar 5 mill. kr. skulu verða nýttar eftir einum áramáli uppá 3 ár eftir reglunum í løgtingslóg nr. ... frá .....um studning til endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Burtur av tí í § 1, 2. petti, nevnda peningi skulu upp til 12 mill. kr. verða nýttar til keyp av lánsbrøvum í Føroya Realkredittstovni, meðan hinar 3 mill. kr. verða nýttar eftir einum áramáli uppá 3 ár eftir reglunum í løgtingslóg nr. ... frá ..... um studning til endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Burtur av tí í § 1, 3. petti, nevnda peningi skulu upp til 3¾ mill. kr. verða nýttar til keyp av lánsbrøvum í Føroya Realkredittstovni, meðan hin $1^1/_4$ mill. kr. verður nýtt eftir reglunum í løgtingslóg nr ... frá ... ... um studning til endurnýgging av fiskiskipaflotanum við teirri broyting, at hesin studningur verður givin til farmaskip í staðin fyri til fiskiskip, sambart § 1, 1. og 2. petti í hesi løgtingslóg.

Tann í § 1, 4. petti, nevndi peningur verður lagdur undir fyrisæti av Føroya Jarðaráð, soleiðis at upp til ½ mill. kr. verður nýtt til lán til bygging av seyðahúsum og seyðabrunnum, meðan upp til ½ mil. kr. verður latin sum lán til keyp av veltingaramboð-

5. Indtil 6 mill. kr. til havne- og vejbygning.
6. Indtil 3 mill. kr. til lån til opførelse af boliger.

§ 2.

Landsstyret administrerer de i § 1 omhandlede pengebeløb således:

Af det i § 1, punkt1, omhandlede beløb skal indtil 15 mil. kr, anvendes til køb af obligationer i Færøernes Realkreditinstitut, medens de resterende 5 mill. kr, anvendes over en årrække på indtil 3 år efter reglerne i lagtingslov nr. ...af .....om støtte til fornyelse af fiskerflåden.

Af det i § 1, punkt 2, omhandlede beløb skal indtil 12 mill. kr, anvendes til køb af obligationer i Færøernes Realkreditinstitut, medens de resterende 3 mill. kr, anvendes over en årrække på indtil 3 år efter reglerne i lagtingslov nr. ... af ... ... om støtte til fornyelse af fiskerflåden.

Af det i § 1, punkt 3, omhandlede beløb skal indtil 3¾ mill. kr. anvendes til køb af obligationer i Færøernes Realkreditinstitut, medens de resterende $1^1/_4$ mill. kr, anvendes efter reglerne i lagtingslov nr. ... af ... ... om støtte til fornyelse af fiskerflåden, med den ændring, at dette tilskud gives til fragtskibe i stedet for til fiskeskibe, jfr. § 1, punkt 1 og 2 i nærværende lagtingslov.

Det i § 1, punkt 4 omhandlede beløb henlægges under bestyrelse af Færøernes landbrugsråd, således at indtil ½ mill kr. anvendes til lån til opførelse af fårehuse og ind retninger til fårevask, medens indtil ½ mill. kr. ydes til lån til køb af dyrkningsredskaber. — Disse lån ydes efter

um. Hesi lán verða givin eftir nærri reglum, ið gjørdar verða av Føroya landsstýri.

Tann í § 1, 5. petti, nevndi peningur verður nýttur eftir lógarreglum, ið verða at seta í gildi eftir tilmæli frá løgtingsins vega- og havnanevnd.

Tann í § 1, 6. petti, nevndi peningur verður latin sum uppískoyti til sparikassalán til húsabygging við upp til 15 % av húsavirðinum. Føroya landsstýri skal fyribils hava fyrisæti fyri húsalánunum. Tá realkredittstovnur fyri húsalán verður settur á stovn, verður hesin stovnur at taka yvir ella konvertera hesi lán, móti at landskassin keypir tilsvarandi lánsbrøv úr stovninum.

§ 3.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

regler udarbejdet af Færøernes landsstyre.

Det i § 1, punkt 5, omhandlede beløb anvendes efter lagtingslov, der der sættes i kraft efter indstilling fra lagtingets vej. og havneudvalg.

Det i § 1, punkt 6, omhandlede beløb ydes som tillæg til sparekasselån til opførelse af boliger med indtil 15 % af værdien. Færøernes landsstyre skal foreløbig administrere boliglånene. Når realkreditinstitutet for boliglån etableres, skal dette institut overtage eller konvertere disse lån, mod at landskassen køber obligationer fra institutet for et tilsvarende beløb.

§ 3.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Vinnulív Føroya trongir til at fáa eina dygiliga útbyggjan, soleiðis at landsins framleiðsla kann verða økt hæði á sjógvi og á landi.

Tann nýstovnaði realkredittstovnurin verður óivað í longdini førur fyri at veita munandi stuðul til sjóvinnuna. Tá fyrstu tíðina fer hesin grunnur tó óivað at virka eitt sindur seint. Lánsbrøv grunsins verða seld uttan fyri Føroyar, helst í Danmark. Hetta fer ivaleyst í fyrstani at ganga heldur stirlti. Lánimarknaðurin í Danmark er strammur í løtuni, og lánirentan er herav heldur høg, tí verður neyðugt at taka lán eisini í øðrum londum, soleiðis at vit kunnu fáa bílig langfreistaði lán. Tessvegna verður hetta lógaruppskot sett fram, hvar landið sjálvt fyrst roynir at fáa lán uttanlanda, sum so verður nýtt til keyp av lánibrøvum í realkreditstovninum til tess at fáa skjótari gongd í virki grunsins.

Farmaskip eru í Føroyum eins neyðug og fiskiskip, tessvegna verða vit eisini at bróta slóð fyri peningaílegging í tílík før, ið hóska til nýtslu í Føroyum. Iler verður serstakliga hugsað um skip av støddini 800—1000 br. reg. ts. Tílík skip kosta í dag umleið 1,8 mill krónur. Neyðugt verður, at realkredittstovnurin eisini fer at lata lán til tílík skip.

Landbúnaðurin verður, tó at hann er elsta vinna landsins, støðugt við sviðið soð. Neyðugt verður at stuðla henda okkara gamla vinnuveg við at økja um framleiðsluna av búnaðarvørum og á henda hált at nøra um fólkaheilsuna í Føroyum. Ivaleyst er, at úrtøkan úr seyðabrúkinum bæði í

nøgd og í góðsku, kann verða økt, um seyðahús og vaskibrunnar verða bygd allastaðni í landinum, har líkindi eru til tess. Dyrkingin av innangarðsjørðini eigur í fyrstu syftu at verða stuðlað á tann hátt, at teir menn, ið har starvast fáa nýmótans arbeiðsamboð. Somuleiðis eigur innangarðsjørðin at verða økt við tílíkum arbeiðsamboðum til uppdyrking av nýggjum.

Havna- og vegagerðin í Føroyum hevur í mong ár fingið góðar ábøtur, tó er mangar staðir ov lítið gjørt enn. Í longdini verður tað ivaleyst skeivt at støðga ov nógv við hesi útbygging. Eisini krevur eitt útbygt vinnuliv meira útbygt vegasamband, og betur útbygdar havnir; tessvegna er sett uppskot fram um at veita stuðul til eina víðari útbyging av vegum og havnum.

Húsabyggingin var kanska heldur í meira lagi, tá ið hon aftur tók dik á seg aftaná stríðslok. Støddin á sethúsunum var ivaleyst í mongum førum ov ríkilig, samanborið við hvat ið samfelagið tolir. Á hin hógvin er tað hjá mongum heldur ólagaligt at byggja sær hús í dag við teim lánum, ið kunnu fáast. Við góðum skili, so at avmarkað verður, hvussu stór hús ið verða bygd, er tað tó rætt at stuðla húsabygging, so hon kann verða meira jøvn og ikki støðga.

Ætlanin er at stovna deild í realkredittstovninum, ið skal geva lán til húsabygging. Henda skipan fer ivaleyst at hjálpa í longdini. Fyri at hjálpa uppá viðurskiftini beinan vegin verður neyðugt at útvega lánipening, longu áðrenn stovnurin er komin í lag. Hesi lán kann so realkredittstovnurin yvirtaka, tá ið hann kemur at virka.

Ilesi lógaruppskot, ið her verða sett fram, gera tað neyðugt, at lógin fyri realkredittstovnin verður nakað broytt.

1. viðgerð 31. mars og 4. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Løgtingsmaður Kjartan Mohr hevur lagt fyri tingið uppskot til lóg um lántøku til uppbygging av vinnulívinum.

Uppskotið gongur út uppá at geva landsstýrinum heimild til landskassans vegna at taka lán uttanlanda upp í 50 mill. krónur, sum skulu nýtast til uppbygging av føroyskum vinulívi — havna- og vegabygging og húsabygging.

Málið er beint í fíggjarnevndina, sum hevur viðgjørt málið og er samd um at lata landsstýrið fáa tað til víðari kanningar.

Samsvarandi hesum framflytta setur nevndin fram fylgjandi

Uppskot

Fíggjarnevndin mælir tinginum til at samtykkja, at landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina kannar málið og leggur úrslitið fyri tingið í næstu tingsetu.

2. viðgerð 5. apríl 1955.

Uppskot nevndinnar samtykt 16—0.

---

42. *Afturlatingartíð fyri krambúðir.*

Ár 1955, 30. mars legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

I.

Uppskot

til

broytingar í anordning nr. 442, 21. november 1923, um afturlatingartíð fyri krambúðir.

§ 1.

Í anordning nr. 442, 21. november 1923, harvið lóg nr. 289, 30. juni 1922 om lukketid for butikker og lagre m. v. verður sett í gildi fyri Føroyar, verða orðini »fra kl. 7 aften til kl. 6 den påfølgende morgen« broytt til »fra kl. 17.30, dog fredag fra kl. 19 og lørdag fra kl. 14 i månederne april—september og og kl. 16 i månederne oktober—marts, til kl. 6 den påfølgende morgen«.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi beinan vegin.

ændring i anordning nr. 442, 21. november 1923, om lukketid for butikker.

§ 1.

I anordning nr. 442 af 21. november 1923, hvorved lov nr. 289, 30. juni 1922 om lukketid for butikker og lagre m. v. sættes i kraft på Færøerne, ændres ordene »fra kl. 7 aften til kl. 6 den påfølgende morgen« til »fra kl. 17,30, dog fredag fra kl. 19 og lørdag fra kl. 14 i månederne april—september og kl. 16 i månederne oktober—marts, til kl. 6 den påfølgende morgen«.

§ 2.

Denne lagtingslov træder straks i kraft.

II.

Heitt verður á landsstýrið um at taka málið um revisión av fyriskipanini frá 21. november 1923 um afturlatingartíð fyri krambúðir upp til viðgerðar

Viðmerkingar:

Havnar Detailhandlarafelag hevur í skrivi 19. marts 1955 m. a. sent landsstýrinum uppskot um løgtingslóg viðvíkjandi afturlatingartíð hjá handl. um, útsølum o. t. Um uppskotið verður í skrivi felgsins sagt:

1. Uppskotið er skipað á tann hátt, at tað verður bygt á hina donsku afturlatingarlógina frá 22. mai 1950, men verður viðlagt uppskot til broytingar, soleiðis at viðmerkingar okkara fylgja hini donsku lógini grein fyri grein og stykki fyri stykki.
2. Tað hevur verið roynt at fingið leygardagssteinging kl. 14, men samanhaldið hevur ikki verið fullfiggjað, og tá ið bert ein svíkir, dettur ein slík sjálvkravd skipan sundur.
3. Felag okkara hevur haft fyrispurning hjá: Havnar arbeiðsmannafelag, Havnar arbeiðskvinnufelag og kvinnufelagnum, og skjóta hesi feløg, sum umboða eitt ógviliga stórt límatal tilsamans, upp viðviðvíkjandi afturlatingartíðum soleiðis:
Havnar arbeiðsmannaclag: mánadag til hósdag kl. 17,30, fríggjadag kl. 19 og leygardag kl. 14.
Havnar arbeiðskvinnufelag ávikavist kl. 16,30, 19 og 14, og
Kvinnufelagið ávikavist kl. 17, 19 og 14.
4. Afturlatingartíðirnar í Havn eru í løtuni mánadag til hósdag kl. 17, fríggjadag kl. 18, og leygardag kl. 17. Broytingin av afturlatingartíðini styttir ikki um tímatalið, handlarnir hava opið, við tað, at teir 3 tímarnar, fyrr verður latið aftur leygardag, verða vunnir aftur hinar dagarnar.«

Síðani málið er komið so seint til landsstýrið verða ikki stundir til til hesa tingsetu at seta fram fullfíggjað lógaruppskot. Hetta uppskotið gongur tí bert felagnum á møti viðvíkjandi sjálvari afturlatingartíðini.

1. viðgerð 31. mars og 4. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Eftir áheitan frá Havnar Detailhandlarafelag um at broyta afturlatingartíðina hjá handlum, útsølum o. t., hevur landsstýrið sett fram uppskot til broytingar í anordning nr. 442 frá 21. november 1923 um afturlatingartíð fyri kramhúðir.

Havnar Detailhandlarafelag førir fram, at Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag og Kvinnufelagið viðmæla uppskotið til broyting í ufturlatingartíðini.

Lógarnevndin, ið hevur viðgjørt málið, heldur, at broytingarnar í hvørt fall fyribils bert eiga at setast í gildi fyri Føroyar. Tað eru eisini feløg

í Tórshavn, ið reisa málið og viðmæla, meðan tað ikki sæst at hava verið fyrilagt feløgum ella stovnum á bygd.

Nevndin mælir tí løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við tí broyting, at § 2 verður orðað soleiðis:

»Henda løgtingslóg, ið hert verður galdandi fyri Tórshavn, fær gildi bein- atvegin.	Denne lagtingslov, der alene gælder for Thorshavn, træder i kraft straks.«

2. og 3. viðgerð 5. apríl 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá H. Djurhuus og fleiri:

Sum nýggj § 3 verður sett:

Reglurnar í hesi lóg kunnu av landsstýrinum setast í gildi fyri aðrar bygdir eftir áheitan av avvarandi sóknarstýri.	Bestemmelserne i denne lov kan af landsstyret sættes i kraft for andre bygder efter begæring af vedkommende forstanderskab.

Broytingaruppskotið samtykt 16—0.

Uppskot landsstýrisins við broyting nevndinnar samtykt 17—0.

---

43. *Benzinavgjald.*

Ár 1955, 29. mars legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v. m.	*Lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgift m. v.*
§ 1.	§ 1.
Í § 1 í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.	I § 1 i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgift m. v.,

m., soleiðis sum henda er broytt, seinast við løgtingslóg nr. 3 frá 18. februar 1955 verður sett sum nýtt lb. nr.:

72. Benzin og benzinblandingar
1 litur 20 oyru.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi fyri tað benzin o. t., sum verður innflutt aftaná ella er á goymslu (í tanga) 29. marts 1955 kl. 24. Undantikið er benzin o. t., sum er á goymslu í tunnum ella gøtupumpum o. t.

Viðmerkingar:

Undir viðgerðini av fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins 1955/56 eru ymsir útreiðslupostar hækkaðir munandi, t. d. játtanir til vegir og sjúkahús.

Fyri at fáa javnvá millum inntøkur og útreiðslur verður hetta uppskot sett fram.

Broytingaruppskot

til

uppskot.

Sum uppískoyti til § 1 verður sett aftaná »20 oyru«: »við undantak av benzin til útróðrarbátar og allan fiskiskap.«

1. viðgerð 29. mars og 2. og 3. viðgerð sama dag.

Uppskot landsstýrisins samtykt 16—0.

---

således som denne er ændret, sidst ved lagtingslov nr. 3 af 18. februar 1955, indsættes som nyt lb. nr.:

72. Benzin og benzinblandinger
1 liter 20 øre.

§ 2.

Denne lagtingslov kommer til anvendelse på benzin o. lign., som indføres efter eller er på lager (i tank) den 29. marts 1955 kl. 24. Undtaget er benzin o. lign. i tønder eller gadepumper o. lign.

44. Áheitan frá vinnufeløgum um kanning av lóggávuni um innflutningsgjøld

Ár 1955, 31. mars legði H. Djurhuus landsstýrismaður fram soijóðandi skriv:

Undirritaðu loyva okkum við hesum at venda okkum til hitt háttvirda løgting í fylgjandi máli.

Soleiðis er, at kringum Føroya land hava menn og feløg sett á stovn virki við tí endamáli at framleiða matvøru, búnyttur, máling, sápu, ymiska útgerð til skip og til fiskivinnuna o. s. fr.

Tað er kunnugt, at tað gongur striggið at fáa gongd á hesar íðnaðargreinir og mest av tí, at slíkar royndir verða kvaldar av tollfríum ella at kalla tollfrium innflutningi.

Øll lond rundan um okkum verja íðnaðin hjá sær við tolli ella bann, sjálvt lond sum hava gamlan íðnað, sum skuldi staðið væl á vigi mótvegis íðnaðinum í øðrum londum.

So mikið meira neyðugt er tað hjá okkum at skapa slíkan møguleika fyri okkara unga íðnaða, at hann verður ikki tikin av fótum, áðrenn hann er fyri seg komin.

Vit sum arbeiða við fiðnað og handverki krevja ikki sømdir fyri nakra framleiðslu, sum ikki stendur mát við vøru, sum inn verður flutt, men vit halda tað ikki vera ov mikið kravt, at táið føroysk framleiðsla stendur mát við útlendska, so eigur hon at hava fyrimun.

Soleiðis, sum til stendur í Føroyum nú, at stórur partur av ungdóminum flytur út av landinum vegna arbeiðsloysi, halda vit tað hava alstóran týdning fyri landið at lívga ta føroysku framleiðsluna uppi á landi, sum eigur at kunna geva arbeiði til nógvar hendur.

Vit heita tí á løgtingið at taka innflutnings- og toll-lóggávuna til kanningar og broyta hana soleiðis, at innflutningur verður bannaður av slíkari vøru og vørusløgum, sum framleidd verða í Føroyum ella tað í hvussu er verður lagdur ein munagóður tollur á slíkan innflutning.

Málingavirkið Litfagra
G. Ísfeld.

Tunnuvirkið Norskt føroyskt
Handilsfelag Kortegaard
William Holm Jacobsen.

Stoypivirkið
A. Eysturoy.

P.f Føroya mekaniski Grótíðnaður
Tórshavn
Lars Larsen.

Z. Bech, snikkarameistari
Tórshavn.

Vilhelm Nielsen,
Tórshavn.

Landsprentsmiðjan
Einar Joensen
Karl Johan undir Varða
Willy Juul

Bethuel Z. Jensen
Tórshavn
B. Z. Jensen

Thorshavns Mælkeforsyning
& Margarinefabrik
Johannes Weihe

Bommvirkið, Tórshavn
Jens Simonsen

Restorffs bryggjarí, Tórshavn
A. W. Restorff

Dagprent v. Knút Wang

Cementstoypivirkið
Sigfried Persson

Tórshavnar Træsmiðja
Jacob C. Joensen.

Føroya Bjór
Einar Waag

Hartvig Hansens Maskinsnedkeri
Thorshavn

Hans P. Poulsen Møbilverkstað og
Maskinsnikkaraverkstað
B. Wardum

Jacob Veyhe

Wenzel Petersen
Hj. Hentze

Johan Ziska

Marius Ziska

Arnold Østers Prentsmiðja
A. M. Øster

Edw. Samuelson

H. Aruason

P.f H. N. Jacobsens bókahandil
H. Niclasen

Erik Lützen

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
Poul K. Mouritsen.

Helgi Øster
Form. Havnar Handverkarafelag

Føroya búnaðarfelag
Hans Jac Jacobsen

A. Árting
Fyri Havnar Arbeiðskvinnufelag

Partafelagið Havnar Fiskacentral
J. P. av Reyni

P.f Maria Poulsen & Co.
Tórshavn
Grímur á Dul

Smæran, Tórshavn
M. Rubeksen

Marmulátuvirkið Frukta
E. Restorff

P.f Frants Restorff
sjokolátuvirkið
E. Restorff

P.f Askhams smiðja
Th. Askham

Fraser L. Eysturoy modelsnikkari

P.f Snikkaravirkið
J. Ø. Vágsheygg

Jens Næss
Møbilpolstrari

Sementstoypivirkið
H. Eriksen

Joen A. Rasmussen
Fm. Havnar Handverksmeistarafelag

Føroya Fiskimannafelag
J. Jákupsstovu skr.

Magnus Tórsheim
Form. Føroya arbeiðarafelags

Trygvi Arting
Form. bildeild H. a.felags

P.f Tórshavnar Skipasmiðja,
Tórshavn
Kj. Mohr

Føroya ullvirkið
M. Poulsen

1. viðgerð 1. apríl 1955.

Málið beint til fíggjarnevndina.

---

45. *Studningur til heimaútróður.*

Ár 1955, 1. apríl legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot

til

løgtingslóg um studning til fiskimenn, ið røkja heimaútróður.

§ 1

Fiskimenn, sum røkja útróður úr føroyskari havn ella plássi, kunnu í fíggjarárinum 1955/56 fáa so mikið í studningi, sum svarar til 2 oyru pr. kg í ráfiski av tí bátafiski, sum fluttur verður til útflutningshavn til útflutnings, tó so at studningurin kann

lagtingslov om tilskud til fiskere, der driver hjemmefiskeri.

§ 1.

Som tilskud til de fiskere, der driver bådfiskeri fra færøsk havn eller plads, vil der for finansåret 1955/56 kunne ydes et beløb svarende til 2 øre pr. kg råfisk af den til eksporthavnen transporterede og til eksport bestemte bådfisk, dog at beløbet kan

setast upp í 5 oyru pr. kg í ráfiski til teir fiskimenn, hvørs støð liggur longri burtur frá næstu útflutningshavn enn 10 km. Umroknað til saltfisk verður studningurin 3 oyru ella 8 oyru pr. kg.

§ 2.

Vektin av tí fiski, sum studningur kann verða veittur til eftir § 1, skal prógvførast við útskrift av innkeypsbók hjá viðkomandi keypara, váttað av viðkomandi vrakaraeftirlitsmanni.

Útskriftin verður send landsstýrisins fiskivinnustovu við møguligum viðmerkingum vrakaraeftirlitsmannsins.

§ 3.

Studningurin eftir hesi lóg verður av landsstýrinum ávístur rætta viðkomandi til gjaldingar, tá ið landsstýrið hevur fingið sær prógv fyri beinleika uppgerðinnar.

§ 4.

Sum útflutningshavn eftir hesi lóg er at skilja føroysk havn, har skip, sum eru ikki undir 100 tons brutto, við bryggju kunnu lossa og ferma frá 2 lúkum.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

forhøjes til 5 øre pr. kg råfisk for de bådfiskere, hvis landingsplads ligger over 10 km fra nærmeste eksporthavn. Omregnet til saltfisk bliver tilskudet henholdsvis 3 øre og 8 øre pr. kg.

§ 2.

Vægten af den fisk, hvortil der i henhold til § 1 kan ydes tilskud, skal dokumenteres gennem en af vedkommende vragerkontrollør attesteret udskrift af vedkommende købers indhandlingsprotokol.

Denne udskrift indsendes med fornøden opgørelse til landsstyrets fiskerikontor med vragerkontrollørens eventuelle bemærkninger.

§ 3.

Tilskudet i henhold til denne lov vil af landsstyret blive anvist til rette vedkomende til udbetaling, når landsstyret har forvisset sig om opgørelsens rigtighed.

§ 4.

Som eksporthavn forstås i denne lov en færøsk havn, hvor fartøjer af ikke under 100 tons brutto ved kaj kan losse og lade fra 2 luger.

§ 5.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Fyri at lætta um útreiðslurnar hjá teimum, ið dríva heimaútróður, verður hetta uppskot sett fram. Tó er ætlað at geva teim bátafiskarum, ið búgva á teimum smærru plássunum, hægri studning av tí, at teirra umstøður eru nógv ringari enn hjá teimum, sum búgva á teimum góðu havnaplássunum.

Sum kunnugt er tað ikki gjørligt at útbyggja størri havnaverkir á hesum plássum, og tað má tí ásannast, at hesir fiskimenn eru nógv verri

fyri, enn teir, ið búgva, har ið havnaverkir eru, tí teir fáa ein væl lægri fiskapris enn hinir. Fyri at bøta um hetta og fyri at hjálpa tí fólki ið býr á útplássum, verður sett uppskot um at veita hesum fiskimonnum ein størri studning, soleiðis sum tilskilað í lógaruppskotinum.

1. 2. og 3. viðgerð 1. apríl 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá P. Petersen og fleiri:

1. Sum nýggj § 4 í uppskoti landsstýrisins til løgtingslóg um studning til fiskimenn, ið røkja heimaútróður verður sett:

Til fiskimenn, sum frá opnum báti veiða sild á føroyskum firðum, verður veitt í studningi eftir reglunum í §§ 2 og 3 5 oyru pr. kg av tí sild, sum avreidd verður til saltingar ella frystingar.

Til fiskere, der fra åbne både fisker sild på de færøske fjorde, ydes der i tilskud efter reglerne i §§ 2 og 3 5 øre pr. kg af den sild, der afsættes til saltning eller frysning.

2. §§ 4 og 5 í uppskoti landsstýrisins verða broyttar til § 5 og §6.

Broytingaruppskot 1. samtykt 22—0.

Broytingarupskot 2. samtykt 17—0.

Lógaruppskotið so broytt samtykt 23—0.

---

46. Normeringsløgtingslóg.

Ár 1955, 2. apríl legði løgmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í normering tænastumanna.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 16 frá 28. marts 1949 um løn tænastumanna landsins, soleiðis sum hon seinni er broytt, verða gjørdar hesar broytingar:

Landbúnaður. Útskiftingar- og matrikulskrivstova:

1. »Landinspektørar (2)« verður broytt til »Landmálarar (2)«.
2. »Hjálparmaður (1)« verður broytt til Hjálparmenn (2)«.

Eftirløuarrættur verður veittur Hans Jørgen Thomsen, hjálparmanni á útskiftingar- og matrikulskrivstovuni, við eftirlønaraldri frá 1. juni 1957, jbr. §§ 2 og 3 í løgtingslóg nr. 3 frá 9. marts 1954.

lagtingslov om ændringer i tjenestemændenes normering.

§ 1

I lagtingslov nr. 16 af 28. marts 1949 om løuregulering for landets tjenestemænd, således som denne senere er ændret, foretages følgende ændringrr:

Landbruget. Udskiftnings- og matrikulkontor:

1. Landinspektører (2)« ændres til »Landmålere (2)«.
2. »Assistent (1)« ændres til »Assistenter (2)«.

Der ydes assistent ved udskiftnings- og matrikulkontoret Hans Jørgen Thomsen pensionsret med pensionsanciennitet fra 1. juni 1957, jfr. §§ 2 og 3 i lagtingslov nr. 3 af 9. marts 1954.

Viðmerkingar:

ad 1. Tað hevur víst seg torført at fáa landinspektørar til Føroya, so hesi bæði embætini hava verið ósett í fleiri ár. Hin vegin eru eisini aðrir enn landinspektørar, ið kunnu taka uppá seg arbeiði við útskifting og matrikul; ætlanin er tí at hroyta embætisnavnið soleiðis at aðrir við tørvandi kunnleika kunnu setast í hesi embæti. Orðið landmálari skuldi umfata allar teir, sum ikki hava minni teoretiskan kunnleika til her umrøddu støv enn landinspektørar, civilingeniørar, norskir útskiftingarkandidatar og geodetar.

ad 2. Við útskiftingina v. m. hava síðani 1948 verið tveir hjálparmenn, teir verða ikki færri, annar av hjálparmonnunum er tilnevndur tænastumaður. Tað er av týdningi, at normering eisini verður fyri hinum.

ad 3. Hans Jørgen Thomsen varð settur sum hjálparmaður við útskiftingina í Hovi 20. apríl 1945 og hevur, síðani henda útskiftingin var liðug, arbeitt

við útskiftingina í Vági og Sumbø. Frá 1. juni 1952 varð hann løntur eftir vanligu lønarreglunum fyri starvsfólk í tænastu landsins. Tilnevndur tænastumaður varð hann frá 1. juli 1954. H. J. Thomsen er føddur 8. apríl 1914 og var tí nakrar mánaðar yvir 40 ár við tilnevningina; eftir § 2, 2. stk., í eftirlønarløgtingslógini hevur hann ikki eftirlønarrætt.

1. og 2. viðgerð 4. og 3. viðgerð 5. apríl 1955.

Uppskot landsstýrisins samtykt 17—0.

---

47. Flaggdagurin sum skúlafrídagur í Føroyum.

Ár 1955, 5. apríl legði Kj. Mohr tingmaður fram soljóðandi skriv:

Føroya løgting lýsir, at flaggdagurin verður almennur frídagur í øllum landsins skúlum.

Flaggdagur Føroya er vorðin ein dagur, ið allir Føroyingar standa saman um at halda fyri virðing av flaggi okkara, og eisini til áminningar um allar okkara sjómenn, ið fórust undir veraldarbardaganum við skipum, ið høvdu tað føroyska flaggið á stong.

Í øllum teim størru bygdunum í Føroyum verður flaggdagurin hátíðarhildin, soleiðis sum hann hevur verið tað í fleiri ár í Havn. Tað er tí ikki meira enn rímiligt, at dagurn verður hildin við at skúlabørnini fáa frí.

Vegna skúlamálið er felagsmál, verður heitt á landsstýrið um at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um at gera flaggdagin til skúlafrídag.

Uppskot

Løgtingið heitir á landsstýrið um at taka upp samráðingar við ávarandi myndugleikar um at gera flaggdagin til skúlafrídag í Føroyum.

1. viðgerð 5. og 2. viðgerð 6. apríl 1955.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá E. Patursson:

Uppskot til samtyktar.

Føroya lögting lýsir, at flaggdagurin verður almennur frídagur í öllum landsins skúlum.

Broytingaruppskotið fall 8—0.

Uppskot Kj. Mohr samtykt 16—0.

---

48. Broyting í rúsdrekkalógini.

Ár 1955, 6. apríl legði H. Djurhuus fram soljóðandi lógaruppskot:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í lov nr. 115 af 4. april 1928 om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m. m.

§ 1.

Lóginnar § 5 verður orðað soleiðis:

Rúsdrekka eftir hesi lóg er at skilja allur drykkur, sum inniheldur 23 rúmprocent alkohol ella meira.

Landsstýrinum er heimilt í kunngerð at fyriseta, hvat eftir hesi lóg er at skilja sum rúsdrekka.

§ 2.

Handilsmaður, sum ætlar at selja øl sum hevur meira enn $2^1/_4$ vektprocent alkohol kann fáa serligt loyvisbræv frá landfútanum til tess. — Loyvisbræv kostar kr. 2000,00 og fer í landskassan.

Innan tílíkt loyvi verður givið skal

lagtingslov om ændring i lov nr. 115 af 4. april 1928 om forbud mod at driva erhverv med berusende drikke m. m.

§ 1.

Lovens § 5 affattes således:

Ved berusende drikke forstås i denne lov alle drikke, som indeholder 23 rumprocent alkohol eller derover.

Landsstyret bemyndiges til ved kundgørelse at fastsætte, hvad der i denne lov forstås ved berusende drikke.

§ 2.

Den handlende, der ønsker at forhandle øl og vin af over $2^1/_4$ vægtprocent alkohol, vil hos landfogden have at løse særlig bevilling dertil. Gebyret herfor udgør kr. 2000,00 og tilfalder landskassen.

Forinden sådan bevilling meddeles,

fútin fáa sær avgerð landsstýrisins um, og í so fall, hvussu mong loyvi kunnu veitast persónum í viðkomandi kommunu og eftir hvørjum gjølligari reglum loyvi kann verða veitt.

Restauratiónir, sum í sambandi við hotelvirki ynskja undir matveiting at skonkja øl og vín, sum hava yvir $2^1/_4$ vektprocent alkohol, kunnu eisini fáa serligt loyvisbræv hjá landfútanum. Gjaldið kostar kr. 1000,00 og fer í landskassan.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1955.

vil landfogden have at indhente landsstyrets afgørelse af, hvorvidt og i bekræftende fald, hvor mange bevillinger, der kan udstedes til personer i omhandlede kommune, og på hvilke nærmere regler bevilling kan gives.

Restaurationer, der i forbindelse med hotelvirksomhed ønsker under servering af mad at udskænke øl og vin af over $2^1/_4$ vægtprocent alkohol, vil ligeledes hos landfogden have at løse særlig bevilling. Gebyret herfor udgør kr. 1000,00 og tilfalder landskassen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1955.

Viðmerkingar:

Frá bryggjarunum Ejnar Waag, Klaksvík og A. Restorff, Tórshavn, er innkomin umsókn um loyvi til at bryggja øl av kl. I (sí hjálagda skjal og bræv frá A. Restorff til allar tingmenninar).

Landsstýrið vil meina, at tað eigur at komast hesum umsóknum á møti, men heldur, at tað samstundis eigur at verða loyvt sølu av øllum øli og vanligum víni undir 23 rúmprocent.

Fyrj at byrgja fyri, at einhvør handlandi kemur at handla við øli og víni verður í § 2 fyriskrivað reglur um eina skipan, hareftir landsstýrið fær heimild at avgera hvør, ið kann handla við øli og hvussu nógvir handlar á hvørjum plássi skulu fáa serloyvi.

Fyri hotellir verður tað hildið neyðugt vegna frammant ferðafólk at geva loyvi at útskonkja øl og vín í samband við máltíð, ið nýtt verður á ávarandi hotelli.

Undirritaði Einar Waag sendi í seinastu tingsetu umsókn til Føroya løgting um loyvi til at framleiða øl við hægri alkoholprocent enn 2,25.

Henda umsókn kom ikki til viðgerðar á tingi.

Eg loyvi mær tí at vísa til hesa umsókn, og aftur at venda mær til Føroya løgting, um at loyvi verður givið til at framleiða øl við somu styrki, sum danskt øl, ið innflutt verður til Føroyar.

Tað kann upplýsast, at meira enn $^1/_3$ av innfluttum øli hevur meira enn 2,25 % alkohol.

Tað vil sjálvandi verða av størsta týdningi fyri tey tvey bryggjaríini í Føroyum, um tað fæst loyvi til at framleiða og selja øl við somu styrki, sum danskt øl. Eftir mínj hugsan kann hetta ikki vera nakað, sum stríðir ímóti galdandi rúsdrekkalóggávu, tí søla kann bindast á sama hátt, sum fyri innflutt øl. Eisini loyvi eg mær at søkja nm, at tollur og avgift, ið goldið er fyri framleiðslu av øli og sodavatni, verður aftur goldið, tá øl og sodavatn verður latið til fremmand skip og skip, ið sigla til útlondini.

Um Føroya løgting ynskir fleiri upplýsingar í hesum máli, vilja eg og brygjarin hjá mær altíð vera til reiðar við øllum upplýsingum, ið ynskjast.

p. t. Tórshavn, tann 19. februar 1955.

Einar Waag.

Føroya løgting,
her.

Telefonverk Föroya Lögtings

Tórshavn

Roknskapur 1. apríl 1953 — 31. mars 1954

ÚTREIÐSLUR		
Rakstur stöðvanna:		
Lønir	178.306,13	
Onnur samsýning fyri passing	208.559,85	
Kostnaður av radiostöðum	11.765,81	
Ymiskir kostnaðir	2.017,26	100.679,35
Umvæling og umsiting:		
Stöðir	60.971,35	
Linjur	142.780,71	
Feilretting	26.299,78	
Inventar	303,50	230.355,37
Ymiskir linjukostnaðir:		
Rakstur vörubitsins	10.669,88	
Útreiðslur viðv. eyklum	771,51	
Ymiskir kostnaðir	1.117,60	12.891,99
Útreiðslur verkstaðsins:		
Tilfarskeyp	8.223,47	
Lønir	18.639,87	
Ymiskir kostnaðir	1.237,45	28.100,79
Útreiðslur viðv. húsum:		
Umsiting	6.502,86	
Tryggingar	2.055,00	8.557,86
Telefonbókin:		
Útreiðslur av útgávuni	12.073,05	
+ inntøkur av lýsingum	10.620,50	1.452,55
Avskrivingar:		
Teknisk antegg	208.760,50	
Hús	21.870,57	
Bil	2.100,00	
Inventar	1.311,33	
Avskrivaði tap	9.182,96	
Øking av delkrederekonto	1.151,76	10.334,72
Niðurskriving av húsaleigukrøvum eftir avgerð landsstýrisins	11.257,53	261.961,65
	At flyta	943.972,56

1. apríl 1953 — 31. mars 1954.

INNTÖKUR

Ymisk gjöld:			
Haldaraggjöld		122.504,54	
Samtalur og telefontelegramm		713.183,31	
Telegram (Store nordiske)		28.285,90	
Innleggingar, flyting og niðurleggingar av telefon		52.323,36	
Skipasamtalur, telegramadr. og boð		37.824,20	
Húsaleiga		26.224,96	1.280.346,30
Goymslan:			
Vörumýtsla (útflýgging og söla)		1.008.169,46	
÷ vörumýtsla			
Á goymslu 1/4—53	619.791,86		
Vörukeyp	929.544,68		
	1.549.336,51		
÷ Vörugoymsla 31/3 1954	602.223,10	947.113,11	
Bruttovinningur		61.356,02	
÷ fargjald av sendum tilfari	13.414,17		
Goymslulönir	21.271,90		
Ymiskir koslnaðir	1.560,13	36.246,20	25.109,82
Ymiskar inntökur:			
Rentutímtökur		151,65	
Rindaði deposita		512,88	664,53
Hall			68.027,50
		At flyta	1.391.178,15

	Flutt	943.972,56
Fyrisitingarúfreiðslur:		
Lön til stjóra og skrivstofufólk	199.887,87	
Ferðaúfreiðslur og dagpeningar	1.521,33	
Hiti (skrivstofa og stöð)	5.669,12	
Ljós (skrivstofa og stöð)	6.813,13	
Reingerð av skrivstofu	5.201,02	
Reingerð av stöð	1.238,57	
Prentlutir, pappír og skrivstofulutir	26.972,94	
Porto	3.919,05	
Fjarrit	1.259,46	
Renlur og provisión	160.173,59	
Tryggingar	2.676,10	
Ymist	28.570,11	450.205,59
	Kr.	1391.178,15

Flutt 1.391.178,15

Kr. 1.391.178,15

Status pr.

OGNIR

Kassapeningur:			
Tórshavn. høvuðskassin		15.120,80	
Tórshavn. avgreiðslukassin		50.00	
Klakksvík		3.239,07	18.709,93
Debitorar:			
Felagar og stöðir	327.587,10		
÷ skuld til vmiskar stöðir v. m.	6.066,94	321.520,16	
Onnur tilgóðahavandi		43.725,61	
Ivasamir debitorar		5.480,25	
		370.726,35	
÷ Delkredorekonto		50.000,00	320.726,35
Vörur á goymslu			602.223,10
Virði verksins:			
Saldo pr. 1/1-1953 á gamlari anleggskonto			1.686.591,43
÷ Flutt til yvirstar anleggskonti og goymslukonto		1386.591,43	
Avskrivað pr. 31/3—1953		300.000,00	1.686.591,43
			0,00
Stöð í Tórshavn:			
Saldo pr. 1/1 1953		728.077,09	
Anleggsarbeiðir 1953/54		10.389,93	
		738.467,02	
÷ Avskrivað 1953/54		29.538,02	708.929,00
Stöð í Klakksvík:			
Saldo pr. 1/4 1953		699,43	
Anleggsarbeiðir 1953/54		108,26	
		1.107,69	
÷ avskrivað í 1953/54		110,69	997,00
Aðrar stöðir:			
Saldo pr. 1/1 1953		11.326,28	
Flutt frá gomlu anleggskonto		25.000,00	
Anleggsarbeiði 1953/54		37.354,05	
		73.680,33	
÷ Avskrivað í 1953/54		7.368,33	66.312,00
At-flyta		776.238,00	911.659,38

1. APRÍL 1954.

SKULD

Kassakrediftur:		
Føroya Banki	119.736,07	
Sjóvinnubankin	20.880,52	170.616,59
Lán:		
Færø Amts Sparekasse	817.608,67	
Føroya Banki	458.171,15	
Store Nordiske Telegraf-Selskab	815.616,27	
L. M. Ericsson, Stockholm	280.517,73	2.131.916,82
Ymiskir kreditorar:	298.545,18	
÷ kreditorar við debetsaldo	2.111,40	296.403,78
Onnur persónlig konto:		
Landskassin	334.091,67	
Deposita	2.978,45	337.070,12
Versurkonto:		
Frammanundan goldin felagsgjøld v. m.	118.759,78	
Gjøld til góðar fyri mars v. m.	93.343,62	55.416,16
Kapitalkonto:		
Saldo 1/1 1953	1.690.698,66	
Tilskot á fíggjarlógtingslógini	621.470,17	
	2.312.168,83	
÷ Regulering av eldri árs bókførslufeilum og munum á konto Klakksvíkar telefonstöð	8.401,42	
Hall sambart rakstrarroknskap	88.027,50	96.131,92 2.215.736,91

At flyta 5.507.190,38

	Flutt	776.238,00	911.659,38
Radiostöðin (Byggingar og anlegg):			
Saldo pr. 1/1 1953	295.128,09		
Flutt frá gomlu anleggskonto	153.000,00		
Anleggsarbeiðir í 1953/51..	17.039,81		
	465.167,90		
÷ Avskrivað í 1953/51	23.258,90	441.909,00	
Linjur:			
Sjókaðalir:			
Saldo 1/1 1953.....	3.917,89		
Flutt frá "gamlari anleggskonto"	100.000,00		
Anleggsarbeiði í 1953/51 ..	2.359,13		
	106.277,32		
÷ avskrivað í 1953/51	8.502,32	97.775,00	
Jarðkaðalir:			
Saldo 1/1 1953	514.672,52		
Flutt frá "gamlari anleggskonto"	308.000,00		
Anleggsarbeiðir í 1953/51 ..	289.119,88		
	1.103.792,40		
÷ avskrivað í 1953/54	44.151,40	1.059.641,00	
Loftlinjur:			
Saldo 1/1 — 1953	138.033,44		
Flutt frá" gamlari anleggskonto"	328.696,43		
Anleggsarbeiðir í 1953/54 ..	243.931,97		
	710.661,84		
÷ avskrivað í 1953/51	35.533,84	675.131,00	
Húsinnleggingar:			
Saldo 1/1 1953	27.182,61		
Anleggsarbeiðir í 1953/54 ..	23.797,23		
	50.979,84		
÷ avskrivað í 1953/51	5.097,84	45.882,00	
	At flyta	3.096.576,00	911.659,38

Flutt 5.507.190,38

At flytu 5.507.190,38

		Flutt	3.096.576,00	911.659,38
Apparat:				
Saldo 1/1 1953	2134660,49		
Flutt frá "gamlari anleggskonto"	100000,00		
Anleggsarbeiðir í 1953/54	238.329,67		
	551.990,16		
÷ avskrivað í 1953/54	55.199,16	496.791,00	3.593.367,38
Innbúgv:			
Tórshavn (Telefonhúsið):			
Saldo 1/1 1953	33.602,80		
Keyp í 1953/54	6.771,99		
	10.461,79		
÷ avskrivað í 1953/54	1046,79	36.118,00	
Innbúgv limjudeildirnar:			
Saldo 1/1 1953	590,21		
Keyp í 1953/54	2.026,30		
	2.616,51		
÷ avskrivað í 1953/54	261,51	2.182,00	
Automobil:			
Uppruniavirði	9.400,00		
÷ avskrivað í alt	7.200,00	2.200,00	1.136,00
Eigindómur:			
Nýtt telefonhús í Tórshavn:			
Saldo 1/1 1953	882.102,13		
Arbeiðir í 1953/54	13.932,14		
	896.034,57		
÷ avskrivað 1953/54	17.920,57	878.114,00	
Gamla telefonhúsið í Tórshavn:			
Saldo 1/1 1953	7.316,96		
Flutt frá "gamlari anleggskonto"	14.653,01		
	22.000,00		
÷ avskrivað í 1953/54	2.200,00	19.800,00	
		At flyta	897.914,00	1.576.026,38

	Flutt	897.914,00	1.576.026,38
Telefonhúsið í Klakksvík:			
Saldo 1/1 1953	143,63		
Flutt frá "gamlari anleggskonto"	8.556,37		
	9.000,00		
÷ avskrivað í 1953/54	450,00	8.550,00	
Húsini á Bryggjubakka 12:			
Saldo 1/1 1953	640,25		
Flutt frá "gamlari anleggskonto"	25.389,75		
	26.000,00		
÷ avskrivað í 1953/54	1.300,00	21.700,00	931.164,00
			Kr. 5.507.190,38

Fluid 5.597.19038

Kr. 5.597.19.038

Roknskapur fyri bróstsjúkrahúsið í Hoydølum

fyri

fíggjarárið 1953/54.

	Roknskapur.	Fíggjarætlan.
INNTØKUR:		
Sjúklingagjald	8.420,00	9.725,00
Ambulaut röntgen	1385,00	500,00
Gjald til líktoy	180,00	0,00
Rikisstudningur	25.260,00	29.175,00
Inntøkur av tetagarði og fenaði	0,00	100,00
Pleigudeildin	21.323,61	96.360,00
*) Landskassastudningur (sí rakstrarhall)		
Aðrar inntøkur	2.123,80	0,00
	58.692,41	135.860,00
ÚTREIÐSLUR:		
Lønir	136.108,63	136.000,00
Kosturhald	71.311,44	92.500,00
Brenni og ljós	31.982,10	10.000,00
Tetagarður og fenaður	635,00	2.000,00
Medicin o. t.	22.230,15	30.000,00
Viðlikahald av bygningum	16.172,01	38.500,00
Viðlikahald av búnyttum	12.081,01	11.000,00
Röntgen	2.701,16	3.000,00
Vask, reingerð o. t.	6.000,00	6.000,00
Skattur og gjøld	1.611,50	1.600,00
Skrivstovuhald	2.975,69	2.500,00
Koyring	2.012,00	2.000,00
Aðrar útreiðslur	617,36	1.000,00
Revisjón	410,00	225,00
	310.307,65	369.325,00
*) Rakstrarhall (landskassastudningur)	281.615,24	233.175,00

Föroyskur Happadráttur.

Rakstrarroknskapur 1954.

INNTØKUR:			
Virðið av lutaseðlum í útboði			210.000,00
Virði av óseldum lutaseðlum			111.280,00
Inntøka av sølu			95.720,00
Drignir vinningar	173.000,00		
+ landskassavinningur uppá óseldar lutaseðlar	88.600,00		84.400,00
Inntøka av happadráttinum			11.320,00
+ avskrivaðir ikki heimlaðir vinningar frá árunum frammanundan			157,50
			11.477,50
ÚTREIÐSLUR:			
Samsýning seljara		6.700,40	
Rakstrarkostnaður:			
Samsýning nevndarlimanna ..	1.500,--		
Løn til roknskaparføraran	2.400,--		
Grannskoðan	1.940,--		
Porto og telefon.....	558,83		
Prentlutir	1.311,50		
Lýsingar	1.035,99		
Skrivstovuútreiðslur	9,75		
Aðrar útreiðslur	61,40	8.817,79	15.518,19
			4.040,69

Figgjarstøða pr. 1. januar 1955.

OGN:			
Tilgóðar millumrokning við seljarar		1.228,00	
SKULD:			
Skuld í millumrokning við seljarar.....			36,30
Skyldigir vinningar frá 1954	1.080,00		1.080,00
Millumrokning við landskassan:			
ágóði happadráttarins við árslok 1954	4.152,39		
+ undirskot samb. rakstrarroku.	4.040,69		111,70
		1.228,00	1.228,00

Landshandilin

Tórshavn.

Rakstrarrokniskapur 1. apríl 1953 —
31. mars 1954.

og

Fíggjarstandur 1. apríl 1954.

ÚTREIÐSLUR

Goymslukostnaðir:		
Leiga	22.832,40	
Arbeiðslön	80.304,79	
Trygging	3.025,60	
Flyting av vörum	7.171,01	
Ymist	6.717,93	120.051,13
Skrivstovukostnaðir:		
Leiga	8.100,00	
Lönir	106.247,50	
Telefon og fjarrit	8.321,16	
Porto	6.661,16	
Lýsingar	176,57	
Skrivstovuhlutir	5.930,12	
Reingerð, varmi og ljós	5.712,87	
Ferðapeningur	700,00	
Granskoðing	9.739,32	
Innkrevjingar	69,90	
Ymist (tryggingar v. m.)	2.145,88	154.104,78
Rentuútreiðslur:		
Bankarentur v. m.	1.270,15	
"Obligationslán"	30.000,00	31.270,15
Avskrivingar:		
Debitorar	62.701,98	
Lagt niður at standa ímóti tapi av debitorum	100.000,00	
Innbúgv	1.533,00	
Bilar	4.500,00	168.734,98
Vinningur		299.936,32
		774.097,36

1. apríl 1953—31. mars 1954

INNTØKUR

Vørusøla			7.385.707,86
Rugmjølastuðningur (Statens kornkontor)			260.146,75
Løgtingsstuðningur (Sukur, mjøl og handilsfóður)			168.673,00
÷ sett av til endurrindingar			
			7.814.527,61
÷ Vørunýtsla:			
Vørur á goymslu 1.4.1953		1.237.981,89	
+ Vørukeyp (haruppi í farmagjald og flutningur av seldum vørum		6.516.857,86	
		7.754.839,75	
÷ Vørur á goymslu 31.3.1951		645.498,31	7.109.341,44
			705.186,17
Rakstur bilanna:			
Inntøkur av flutningi (roknað)		45.955,85	
÷ Bensin	4.994,36		
Arbeiðsløn	20.400,45		
Skattir og trygging	1.704,68		
Umvæling og umsiting	3.111,78	30.211,27	15.744,58
Rentuinntøka			51.962,27
Innkomið av fyrr avskrivaðum fordringum			1.201,34
			771.097,36

Fíggjarstandur

OGNIR

Kassapeningur		498,69
Í bankum:		
Föroya Banki	98.713,63	
Sjóvinnubankin	170.562,38	269.276,01
Ymiskir debitorar	1.591.781,45	
÷ Lagt niður av stauda mót lapi	300.000,00	1.291.781,45
Vörur á goymslu		615.498,31
Inventarkonto:		
Saldo 1/4—1953	5.000,00	
÷ Nýkeyp	2.665,00	
	7.665,00	
÷ Avskriving smbr. rakstrarroknskap	1.533,00	6.132,00
Bilkonto:		
Saldo 1/1 -- 1953	9.000,00	
÷ Avskriving smbr. rakstrarroknskap	1.500,00	1.500,00
		2.520.686,16

1. apríl 1954.

SKULD

Ymiskir kreditorar		80,502,11
Landskassin, "Obligatiónslán"		1.000.000.00
Kapitalkonto:		
Saldo 1/4—1953	1.140.248,00	
+ Vinningur smbr. rakstrarreikningi	299.936,32	1.140.184,32
		2.520.686,16

Diskonteraður veksil pr. 1/4 1951 kr. 3.752,53.

TJALDURS APOTEKIÐ

TÓRSHAVN

Roknskapur fyri Meginapotekið og útapotekini

1. ápríl 1953 — 31. marts 1954

Rakstrarrokuskapur Meginapoteksins

ÚTREIÐSLUR

Lønir:		
J. D. Magnussen apotekara harmppi í samsýning fyri náttartænastu	17.591,30	
Starvsfólkið	121.938,80	
Lønargrunnurin (Danmarks apotekerforforening) 1/1 1953 – 31/3 -1951	20.593,00	
Eftirlønargjald fyri apotekarin og kandidatar 1/1 1953 — 31/12—1953	5.740,00	165.866,10
Rakstur av fastognini	2.701,58	
-: partur J. D. Magnussens apotekara	1.012,50	1.650,08
Ljós og varmi	6.837,60	
-: partur J. D. Magnussens apotekara (20%)	1.367,52	5.470,08
Ymiskir kostnaðir:		
Skrivstovuvalutir, prentfatir v. m.	2.028,34	
Telefon og fjarrit	2.052,72	
Vask av kitlum, songjarverum v. m. og reingerðarlutum	2.521,31	
Farmagjald, lossing og flutningur	5.830,55	
Leiga, skrivstova	1.225,00	
Umsiting av innbúgvi og nýkeyp	2.453,92	
Ferðafriðsla hjá apotekaranum og starvsfólki	3.851,25	
Flot	3.192,08	
Brunatrygging av vørtum á goymslu og vanlukkutrygging	622,00	
Kol til dampketil	1.595,50	
Rest grannskoðarusamsýning fyri 1952/53	606,49	
á konto 1953/54	2.000,00	
Saksførarakostnaður	500,00	
Blaðhald, bøkur, lýsingar v. m.	1.273,02	
Borðfæ	881,52	
Vísitatskostnaður	1.210,00	
Ymist	701,65	32.581,05
Rentur:		
Apotekaragrunnurin og socialgrunnurin		16.537,30
Avskrivingar:		
Innbúgv, 10 % av kr. 69.650,16	6.956,02	
Fastognin 2 % av kr. 280.000,00	5.600,00	12.565,02
Vinningur		117.620,00
		Kr. 352.299,53

1. apríl 1953 — 31. Marts 1954.

INNTOKUR

Vörusøla (netto)		739.075,14
− vörumýtsla:		
Vörur á goymslu 1/4 1953	234.972,11	
Vörukeyp	370.821,28	
....	605.793,39	
− vörur á goymslu 31/3 --1954	218.200,05	387.593,34
Bruttovinningur (47,56 %)		351.181,80
Kontantrabatt		564,73
Sparikassarentur		253,00
		Kr. 352.299,53

Status pr. 1. apríl 1954

OGNIR

Kassapeningur		1.556,03
Banka- og sparikassapeningur		123.023,18
Ymiskir debitorar		80.021,61
Vörur á goymslu		218.200,05
Millumrokning við útapotekini:		
Apotekið í Klakksvík	61.442,26	
Apotekið á Tvöroyri	57.956,59	119.398,85
Innbúgv:		
Saldo 1/1 1953	51.026,25	
Keypt í 1953/54 (National kassaapparat)	7.235,00	
	58.261,25	
Selt í 1953/54 (brúkt kassaapparat)	200,00	
	58.061,25	
÷ Avskrivað 31/3 1954, 10% av kr. 69.650,16	6.965,02	51.096,23
Fastognin matr. nr. 89b av Tórshavn:		
Saldo 1/4 1953	273.000,00	
÷ Avskrivað 31/3 1954, 2% av kr. 280.000,00	5.600,00	267.400,00
kr.		860.696,28

fyri meginapotekið í Tórshavn.

SKULD

Ymiskir kreditorar			35.318,69
Apotekari J. D. Magnussen:			
Saldo 1/4 1953		22.459,11	
Løn fyri tíðina 1/4 1953 — 31/3 1951		17.373,30	
Tantieme fyri tíðina 1/4 1953 — 31/3 1951..		26.019,75	
		65.852,16	
÷ Tikið út á konto	38.243,91		
Partur í húsaleigu, ljós og hita ..	2.410,02	40.653,93	25.198,23
Millumrokning við landskassan:			
Lán í apotekerfonden incl. Renter		409.308,78	
Grunnur fyri avlop apoteksins			
Saldo 1/4 1953	256.716,17		
Flutt frá taps- og vinningskonto	134.091,41	390.840,58	800.149,36
kr.			360.696,28

Rakstrarroknskapur fyri apotekið í Klakksvík

ÚTREIÐSLUR

Lönir:		
Fyristöðumaður	18.552,33	
Starvsfólk	15.252,50	
Lönargrunnur (Danmarks Apotekerforening)	3.081,00	36.885,83
Ymiskir kostnaðir:		
Húsaleiga (1/1—31/3—1954	2.875,00	
Elektricitet (Varmi og ljós)	1.431,03	
Umvælingar og smærri nýkeyp	1.369,89	
Telefon og fjarrit	910,06	
Vask og reingerð	831,78	
Farmagjald, lossing og flutningur v. m.	654,35	
Skrivstovuútreiðslur v. m.	181,65	
Ferðapeningur	344,00	
Granskoðarasamsýning 1953/54 á konto	500,00	
Ymist	615,71	13.019,59
Avskriving av innbúgvi:		
10 % av kr. 8.597,23		859,72
Vinningur		19.197,38
	Kr.	69.992,52

1. apríl 1953 — 31. mars 1954.

INNTØKA

Vørusøla (netto)		181.747,40
÷ Vørunýtsla:		
Vørugoymsla 1/4 1953	50.378,95	
Vørukeyp ÷ rabat	103.255,07	
	153,634,02	
÷ Vørugoymsla 31/3 1954	41.802,75	111.831,27
Brutto vinningur	(30,47%)	69.916,13
Sparikassarentur		76,39
		Kr. 69.992,52

Figgjarstandur pr. 1. apríl 1954

OGN

Kassapeningur		2.156,26
Sparikassapeningur		3.458,31
Ymiskir debitorar		19.233,76
Vörugoymsla		41.802,75
Inventar:		
Saldo 1/4 1953	6.505,17	
÷ avskrivað 31/3 1954, 10 % av kr. 8.597,23	859,72	5.645,45
Kr.		72.296,56

fyri apotekið í Klakksvík.

SKULD

Ymiskir kreditorar		10.851,30
Aleginapotekið, Tórshavn:		
Saldo 1/4 1953	53.241,88	
+ Goldið	11.000,00	
	12.211,88	
+ Vinningur smbr. rakstrarroknskapin	19.197,38	61.412,26
Kr.		72.296,56

Rakstrarroknskapur Tvöroyris apotek

ÚTREIÐSLUR

Lönir:		
Fyristöðukvinna frú A. Jensen	20.443,10	
Starvsfólkið	11.852,85	32.296,25
Ymiskir kostnaðir:		
Húsaleiga (1/4 -1953 31/3 1954	2.400,00	
Brenni og ljós	1.545,00	
Umvælingar og smærri nýkeyp	1.463,30	
Telefon og fjarrit	661,43	
Vask og reingerð	707,14	
Farmagjald. lossing, flutningur v. m.	1.328,00	
Granskoðaratsamsýning á konto 1952/53	500,00	
Ymist	261,95	8.866,82
Avskriving av innbúgvi:		
19 % av kr. 5.000,00		500,00
Vinningur		23.296,78
	Kr.	64.959,85

1. apríl 1953 — 31. marts 1954.

INNTØKA

Vørusøla (netto)		158.115,32
÷ Vørunýtsla:		
Vørugoymsla 1/4 1953	25.037,95	
Vørukeyp ÷ Rabatt	100.242,34	
	125.280,29	
÷ Vørugoymsla 31/3 1954	31.448,14	93.832,15
Bruttovinningur (40,66 %)		64.283,17
Bankrentur		218,35
Innkomið av fyrr avskr. fordringum		458,33
Kr.		61.959,85

Fíggjarstandur pr. 1. apríl 1954

OGN

Kassapeningur		968,63
Bankpeningur		2.260,65
Ymiskir debitorar		21.221,91
Vörugoymsla		31.148,14
Inventar:		
Saldo 1/4 1953	3.500,00	
Keypt í 1953/54 (brúkt kassaapparat)	2000,00	
	3.700,00	
+ Avskrivað 31/3 1954, 10 % av kr. 5.000,00	500,00	3.200,00
Kr.		62.108,33

fyri apotekið á Tvöroyri.

SKULD

Ymiskir kreditorar		4.151,74
Meginapotekið í Tórshavn		
Saldo 1/1 1953	49.659,81	
+ Goldið	15.000,00	
	34.659,81	
+ Vinning samb. rekstrarroknskap	23.296,78	57.956,59
Kr.		62.108,33

Samlað taps- og vinnings konto

ÚTREIÐSLUR

Tantieme til apotekara J. D. Magnussen samkv. serliga uppgerð		26.019,75
Nettovinningur		134.094,41
	Kr.	160.114,16

ÚTROKNING

Av umsetningi:			
Tórshavn	netto	739.075,11	
Klaksvík	-	181.747,40	
Tvøroyri		158.115,32	
		1.078.937,86	
÷ Umsetning deildanna millum	-	56.638,57	
	Umsetningur tils.	1.022.299,29	
2 % herav			20.445,99
Av nettovinningi:			
Vinningur inan tantiemefrádráttur		160.114,16	
÷ 2 % umsetningstantieme sambr. omanfyri		20.445,99	
		139.668,17	
10 % herav			13.966,82
			31.412,81
÷ Regulering roknað soleiðis:			
Fóst lön		17.373,30	
Tantieme av umsetningi		20.445,99	
Tantieme av vinningi		13.966,82	
		51.786,11	
÷ Hæddarmark		35.000,00	
Av avlopinum		16.786,11	
ber apotekarin 50 %			8.393,06
	Nettotantieme kr.		26.019,75

1. apríl 1953 — 31. mars 1954.

INNTØKUR

Vinningur saldr. rikstrarroknskapin	
Meginapotekið, Tórshavn	117.620,00
Apotekið, Klakksvík	19.197,38
Apotekið, Tvøroyri	23.296,78
Kr.	160.114,16

Samlaður fíggjarstandur

OGNIR:

Kassapeningur:		
Tórshavn	1.556,03	
Klakksvík	2.156,26	
Tvøroyri	968,63	1.680,92
Bankapeningur:		
Tórshavn	123.23,18	
Klakksvík	3.158,31	
Tvøroyri	2.266,65	128.748,17
Ymiskir debitorar:		
Tórshavn	80.021,61	
Klakksvík	19.263,76	
Tvøroyri	21.224,91	123.180,33
Vørur á goymslu:		
Tórshavn	218.200,05	
Klakksvík	41.802,75	
Tvøroyri	31.118,11	291.150,91
Inubúgv:		
Tórshavn	51.090,23	
Klakksvík	5.615,15	
Tvøroyri	3.200,00	59.911,68
Faslogniu matv. nr. 89 b Tórshavn		267.100,00
	Kr.	875.702,32

1. apríl 1954.

SKULD:

Ymiskir kreditorar:			
Tórshavn		35.348,69	
Klakksvík		10.851,30	
Tvøroyri		1.151,74	50.351,73
Apotekari J. D. Magnussen			25.198,23
Millumrokning við landskassan:			
Lán í apotekaragrunninum incl. rentir		109.308,78	
....Grunnurin fyri vinnitugi apoteksins:			
Saldo 1/1 1953	256.746,17		
Flutt frá tapss- og vinningskonto	134.094,41	390.840,58	800.149,36
		Kr.	875.702,32

Roknskapur fyri Kirkjugrunnin

fyri

fíggjarárið 1953/54.

		Roknskapur.	Fíggjarætlan.
Negativ ogn (skuld til landskassan) pr. 1/4—1953		÷ 7.873,49	
INNTØKUR í 1953/54:			
Endurgjald fyri fíggjund	7.800,00		7.800,00
Flutt frá landskassanum:			
Partur í innflutningsgjaldi ..	20.000,00		20.000,00
Eykastudningur	50.000,00		68.000,00
		77.800,00	(95.800,00)
		69.926,51	
ÚTREIÐSLUR í 1953/54:			
Vanligar umvølingar av kirkjum	31.151,89		57.500,00
Kirkjugarðar	10.115,00		5.000,00
Partur í prestafluttningi	8.184,50		8.800,00
Ymist	0,00		1.000,00
Studningur til nýggjar kirkjur ..	4.000,00		4.000,00
		53.451,39	(76.300,00)
Ogn pr. 31/3—1954		16.475,12	